FRÁGREIÐING

latin

LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

FEBRUAR 2002

1. INNGANGUR 5

2. FÍGGJARMÁL 7

2.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL 7
2.1.1 § 3 FÍGGJARMÁL 7
2.1.2 § 20 INNTØKUR 7
2.2 FÍGGJARLÓGARMANNAGONGD (GL 1996/1 01-1) 9
2.2.1 TILKNÝTI TIL FÍGGJARLÓGINA O.A. 9
2.2.2 JÁTTANARSKIPANIN 11
2.3 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI (GL 2000/1 01-9) 12
2.3.1 FRAMLØGA AV LANDSROKNSKAPINUM 12
2.3.2 LØNARUMSITING Á GJALDSTOVUNI (GL 1998/2 03 1-10) 12
2.3.3 EDV- TRYGD (GL 1997/2 03 1-6) 12
2.3.4 GÓÐKENNING AV "EGNUM" BÚSKAPARSKIPANUM O. L. 13
2.3.5 ROKNSKAPARREGLUGERÐIR (GL 1997/1 01-5) 14
2.3.6 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 14
2.3.7 SAMSKIPAN AV ROKNSKAPARREGLUM 15
2.3.8 OGNARYVIRLIT 15
2.3.9 TRYGGINGARVIÐURSKIFTI 15
2.3.10 SKIPANIN VIÐ FERÐAKARMI TIL UTTANLANDSFERÐIR 16
2.4 FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ (GL 2001/2 03 1-12) 16
2.5 FÍGGJARSTØÐAN 2000 18
2.5.1 AVSTEMMAN AV FÍGGJARSTØÐUNI 18
2.5.2 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (GL 2001/3 01 2-3) 19
2.5.3 ÁOGN (GL 2001/ 3 01 3-6) 21
2.5.4 TØKUR PENINGUR (GL 2001/ 3 01 4-3) 23
2.5.5 SKULD (GL 2000/ 3 02 2-2) 24
2.6 UMSITING AV SKATTI, AVGJØLDUM O.A. 25
2.6.1 ROKNSKAPAR- OG TRYGDARREGLUR (GL 1996/2 04 0-2) 25
2.6.2 SYSTEMGRANNSKOÐAN O.A. (GL 1996/2 04 0-2) 27
2.6.3 STOVNSRAKSTUR (GL 2000/2 04 1-2) 28
2.6.4 KASSAEFTIRLIT (GL 2000/2 04 0-8) 29
2.6.5 EDV-SKRÁIR (GL 2000/2 04 1-2) 30
2.6.6 INNKREVJING (GL 2001/2 04 9-1) 31
2.6.7 INNFLUTNINGSGJØLD (GL 2001/2 04 5-7) 34
2.6.8 TOLLKREDITTUR (GL 1996/2 04 5-6) 34
2.6.9 RENTUSKATTUR (GL. 2000 / 2 04 4-2) 35
2.6.10 FRAMLEIÐSLUAVGJALD (GL 1999/2 04 6-6) 38

3. LØGMANSFYRISITINGIN OG SJÁLVSTÝRISMÁL 40

3.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL 40
3.1.1 §2 LØGMANSFYRISITINGIN O.A. 40
3.1.2 §10 SJÁLVSTÝRISMÁL O.A. 40

3.2 LØGMANSSKRIVSTOVAN **41**
3.3 SAMSÝNING O.A. TIL LANDSSTÝRISMENN **42**
3.4 SJÁLVSTÝRISFYRISITINGIN (GL 2001/2 02 1-1) **43**
3.4.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI O.A. 44
3.4.2 LØNARGRANNSKOÐAN 44
3.4.3 FUNDAR- OG FERÐASAMSÝNING 46
3.4.4 VIÐMERKINGAR 48
3.5 VIÐSKIFTASTOVAN (GL 1998/2 02 2-4) **48**
3.6 EFTIRKANNAN AV LÓGARUPPSKOTUM OG KUNNGERÐUM **49**
3.7 STUÐULSLÓGGÁVA **50**

4. FISKIVINNA **51**

4.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL **51**
4.2 ALMENNAR VIÐMERKINGAR **53**
4.3 FISKIMÁLASTÝRIÐ (GL 2000/2 14 1-3) **54**
4.4 TRYGDARMIÐSTØÐIN (GL 2000/2 14 1-4) **54**
4.5 FISKIVEIÐIEFTIRLIT/TYRLUTÆNASTA (GL 2000/2 14 2-2) **54**
4.5.1 JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL 2000 55
4.5.2 LØGTINGSLÓG UM TYRLUTÆNASTU 55
4.5.3 SÁTTMÁLIN UM TYRLUTÆNASTU 56
4.5.4 RAKSTRARÆTLAN 58
4.5.5 VIÐMERKINGAR 60
4.6 NÝTT VAKTARSKIP (GL 2000/2 14 2-2) **60**
4.7 MAGNUS HEINASON (GL 2000/2 14 3-8) **62**
4.8 LØNJAVNINGARSTOVAN (GL 2000/2 14 4-5) **62**
4.8.1 SJÚKRATRYGD 63
4.8.2 MÁNAÐARLIGUR MINSTAFORVINNINGUR 65
4.9 FISKIVINNUROYNDIR **65**
4.10 STUÐULSLÓGGÁVA OG STUÐULSUMSITING **66**

5. VINNUMÁL O.A. **67**

5.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL **67**
5.2 ALMENNAR VIÐMERKINGAR **68**
5.3 VINNUMÁLASTÝRIÐ (GL 2000/2 15 1-1) **69**
5.3.1 VANTANDI GÓÐKENNING AV GREINAROKNSKAPINUM 69
5.3.2 VANTANDI STJÓRNAN AV KUNNINGARTRYGD (GL 2001/1 02 0-2) 70
5.4 BILEFTIRLIT FØROYA (GL 2000/2 16 9-5) **71**
5.5 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (GL 1997/2 08 2-1) **71**
5.6 ARBEIÐSEFTIRLITIÐ (GL 1997 / 2 09 2-1) **76**
5.7 FERÐARÁÐ FØROYA (GL 1997/2 15 2-1) **77**
5.8 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (GL 1997 / 2 03 9 - 6) **77**
5.9 ENDURGJALDSGRUNNUR ALIVINNUNNAR (GL 1998/2 15 3-2) **77**
5.10 HAVBÚNAÐARROYNDIR (GL 1998/2 15 3-2) **78**
5.11 TYRLUTÆNASTAN (GL 1998/2 15 3-2) **79**
5.12 ENDURGJALD TIL SKIPASMÍÐ (GL 1998/2 15 3-2) **80**
5.13 VINNUFREMJANDI GRUNNAR O.A. **82**

6. ÚTBÚGVING OG GRANSKING O.A. 83

6.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL 83
6.2 ALMENNAR VIÐMERKINGAR 86
6.3 MENTAMÁLASTÝRIÐ (GL 2000/2 10 1-2) 88
6.4 YRKISÚTBÚGVINGARSKRIVSTOVAN OG STUÐULSJÁTTANIR (GL 2000/2 10 1-2) 88
6.4.1 YRKISÚTBÚGVINGARSKRIVSTOVAN 88
6.4.2 STUÐULSJÁTTANIR 89
6.5 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (GL 2001/2 10 9-5) 90
6.6 FÓLKASKÚLIN (GL 1996/2 10 2-1) 91
6.7 KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLI (GL 2000/2 10 4-5) 91
6.8 FØROYA SJÓMANSSKÚLI (GL 2000/2 10 4-5) 92
6.9 FØROYA LÆRARASKÚLI (GL 2000/2 10 4-5) 93
6.10 UNDIRVÍSINGARSKYLDA HJÁ SKÚLASTJÓRUM (GL 2000/2 10 4-5) 95
6.11 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (GL 1996/2 10 4-1) 96
6.12 GRANSKINGARÆTLANIR (GL 1998/2 10 9-2) 97
6.13 YRKISSKÚLAR OG AÐRIR SKÚLAR 97
6.14 SKÚLABÓKAGRUNNURIN (GL 1997/2 10 6-2) 97
6.15 BÓKAMIÐSØLAN 98
6.16 ÚTBÚGVINGARSTUÐUL (GL 2000/2 10 9-6) 98
6.17 FØROYA LANDSBÓKASAVN (GL 1998/2 11 2-7) 101
6.17.1 FÓLKABÓKASØVN 102
6.17.2 INNTØKUFÍGGJAÐ VIRKSEMI 102
6.18 FØROYA LANDSSKJALASAVN (GL 1998/2 11 2-7) 103
6.19 FØROYA FORNMINNISSAVN (GL 1998/2 11 2-7) 104
6.20 FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN (GL 1998/2 11 2-7) 105
6.21 "GRASLÍKISVØLLIR OG GRASVØLLIR" 105
6.22 "POLITISKT VIRKSEMI OG UPPLÝSING" 107
6.23 MENTANARGRUNNUR LANDSINS (GL 2000/2 11 9-3) 107
6.24 SAMSKIPAN AV STUDNINGI TIL MENTANARMÁL O.A. 110
6.25 ALMENT UM STUÐULSLÓGGÁVU OG STUÐULSUMSITING 112

7. ALMANNA- OG HEILSUMÁL 114

7.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL 114
7.2 ALMANNA- OG HEILSUMÁLASTÝRIÐ (GL 2000/2 08 1-1) 118
7.3 ALMANNASTOVAN (GL 1996/2 07 1-1) 120
7.4 ALMANNAPENSJÓNIR (GL 2000/2 07 2 –3) 123
7.5 FORSORGARÚTREIÐSLUR (GL 2000/ 2 07 3-4) 126
7.5.1 ÚTROKNING OG ÚTGJALD AV VEITINGUM 126
7.5.2 VEITING SAMBÆRT § 9 128
7.5.3 TREYTIR FYRI HJÁLP SAMBÆRT § 10 128
7.5.4 RÁÐGEVING/ENDURMETING SAMBÆRT § 12 129
7.5.5 VEITINGAR SAMBÆRT § 13 129
7.5.6 VEITINGAR SAMBÆRT § 17 130
7.5.7 VEITINGAR SAMBÆRT § 18 – ENDURBÚGVING 133
7.6 BARNAFORSORGARÚTREIÐSLUR (GL 2000/ 2 07 3-3) 136
7.6.1 ÚTREIÐSLUR HILDNAR AV KOMMUNUM 136
7.6.2 AÐRAR ÚTREIÐSLUR 137

7.7 DAGPENINGAÚTREIÐSLUR (GL 2000/2 07 3-6) 140
7.7.1 LÓGARGRUNDARLAG 141
7.7.2 MÁLSVIÐGERÐ O.A. 141
7.7.3 LØNTAKARAR 143
7.7.4 SJÁLVBOÐIN TRYGGJAÐ 144
7.7.5 ONNUR VIÐURSKIFTI 145
7.8 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (GL 2000/ 2 07 2-5) 146
7.9 STUÐUL TIL UPPIHALDSPENING (GL 2001/2 07 5-2) 149
7.10 HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐIN (GL 2000/2 07 4-8) 150
7.11 HEIMARØKTIN (GL 1998/2 07 4 – 5) 151
7.12 SERFORSORGIN (GL 1998/2 07 4 – 6) 153
7.13 SERFORSORGARSTOVNAR OG STUÐLAR, LØNARGRANNSKOÐAN (GL 1998/2 07 4-7) 155
7.14 ELLIS- OG RØKTARHEIM, DAGSTOVNAR O.A. (GL 2001/2 07 4 - 10) 156
7.15 BLÁKROSSHEIMIÐ (GL 1996/2 08 4 - 1) 157
7.16 HEILBRIGDIÐ (GL 1996/2 08 4-1) 158
7.17 KOMMUNULÆKNA- OG SKÚLALÆKNASKIPANIN (GL 2001/2 08 4-2) 160
7.18 SJÚKRAKASSAR (GL 2001/2 08 3-1) 161
7.19 SJÚKRAHÚSVERK FØROYA 163
7.20 SJÚKLINGAHOTELLIÐ TÓRSHAVN 165

8. OLJUMÁL O.A. 166

8.1 FRÁVIK ÍMILLUM JÁTTANARTØL OG ROKNSKAPARTØL 166
8.2 OLJUMÁLASTÝRIÐ (GL 1997/12 1-1) 167
8.3 JARÐFRØÐISAVNIÐ (GL 2000/12 3-1) 167
8.4 UMHVØRVI (GL 1997/2 8 2-1) 167
8.4.1 UMHVØRVISVERNDARLÓGIN 167
8.4.2 HAVUMHVØRVISVERNDARLÓGIN 168

1. INNGANGUR

Henda frágreiðing verður latin løgtingsgrannskoðarunum vísandi til § 12 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.". Í lógini er ásett, at áðrenn frágreiðingin verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri landsstýrismannin til viðmerkingar, uttan so at brævaskifti áður hevur verið um tey mál, sum umrødd eru í frágreiðingini. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu verða tiknar við í frágreiðingina.

Sambært lógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- *at* allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- *at* eingin útreiðsla er goldin uttan heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- *at* roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum verandi avtalum og vanligum siði,
- *at* hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um,
- *at* roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Fyri hvørt málsøki verður í frágreiðingini víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um frávik/meirnýtslu, og vit hava víst á, har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava eisini tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

Í frágreiðingini verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini á stovnum og skipanum innan tey einstøku málsøkini. Seinasta frágreiðing, ið latin varð løgtingsgrannskoðarunum, er frá mars 2001. Í frágreiðingini verður eisini víst á, í hvønn mun viðurskifti, ið tá vórðu umrødd, síðani eru komin í rættlag.

Tórshavn, 22. februar 2002

Leivur Harryson

2. FÍGGJARMÁL

2.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.," letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

2.1.1 § 3 Fíggjarmál

3.15.1.02. Kommunalar skattakærunevndir (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini var játtanin -40 t.kr. Meirnýtslan er 40 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan um eina játtanarliga villu.

3.18.2.04. Danskar eftirlønir (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 700 t.kr. Meirnýtslan er 99 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er eitt fólk kom inn í skipanina, sum skuldi hava endurgjald 4 ár aftureftir. Fíggjarmálastýrið arbeiðir við at betra um framskrivingarnar.

3.18.3.01. Burðarfarloyvi (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 9.800 t.kr. Meirnýtslan er 809 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er nýtslan torfør at meta um, tí hon er tengd at, hvussu nógvar kvinnur fara í barnsburðarfarloyvi, og tað er sjálvandi skiftandi.

3.22.4.01. Stuðul til rentuútreiðslur (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 82,5 mió.kr. Meirnýtslan er 1,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin hægri rentustig og økt útlán.

Lønarkarmur

Á høvuðskontum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin:

Konta	Navn (t.kr.)	Lønarkarmur	Roknskapur	Munur
3.15.1.04.	Toll- og Skattstova Føroya (rakstrarjáttan)	38.395	38.536	141
3.15.1.13.	Búskaparráðið	180	189	9

2.1.2 § 20 Inntøkur

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2000.

	20.52.1. Skattainntøkur (mió.kr.)	Játtan	Roknskapur	Frávik
01	Vanligur landsskattur	1.018,8	1.090,2	71,4
07	Felagsskattur	130,0	121,3	-8,7
10	Vinningsbýtisskattur	40,0	47,4	7,4
13	Avgjald av kapitaleftirlønum	7,0	6,3	-0,7
19	Rentuskattur	30,0	41,8	11,8
22	Fíggjarognaravgjald	0	0,1	0,1
25	Arvaavgjøld	2,5	2,9	0,4
	Tilsamans	**1.228,3**	**1.310,0**	**81,7**

Størstu frávikini eru “vanligur landsskattur” og “rentuskattur”, sum eru ávikavist 71,4 og 11,8 mió.kr. hægri, enn mett varð.

	20.52.2. Avgjøld og tollur (mió.kr.)	Játtan	Roknskapur	Frávik
01	Meirvirðisgjald	715,0	796,6	81,6
04	Tollavgjøld	27,0	24,9	-2,1
07	Punktgjøld	163,0	163,7	0,7
10	Lønhæddargjald	11,5	9,9	-1,6
13	Brennioljugjald	63,0	62,3	-0,7
16	Framleiðsluavgjald	16,0	14,9	-1,1
19	Skrásetingargjald	65,0	63,4	-1,6
22	Vegskattur (vektgjald)	36,5	38,5	2,0
25	Ferðaavgjald	8,0	9,1	1,1
28	Umhvørvisavgjald á smyrjiolju	2,0	2,6	0,6
	Tilsamans	**1.107,0**	**1.185,9**	**78,9**

Størsta frávikið er “meirvirðisgjald”, sum er 81,6 mió.kr. hægri, enn mett varð.

	20.52.3. Ymsar inntøkur (mió.kr.)	Játtan	Roknskapur	Frávik
01	Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992	48,5	64,6	16,1
10	Aðrar inntøkur	3,8	23,9	20,1
	Tilsamans	**52,3**	**88,5**	**36,2**

Á fíggjarlógini var inntøkan frá útluting úr Fíggingargrunninum mett til 48,5 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina hevði Føroya Banki seinastu árini inntøkuført stórar upphæddir, ið áður høvdu verið settar av móti tapi av skuldarum, og tí kundi ikki framhaldandi verða roknað við líka stórum inntøkuføringum. Av hesi orsøk varð roknað við einari lægri útluting úr Fíggingargrunninum. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 16,1 mió.kr. hægri enn mett á fíggjarlógini.

	20.52.3.10. Aðrar inntøkur (t.kr.)	Játtan	Roknskapur	Frávik
01	Loyvisgjøld	50	50	0
02	Skeinkiloyvi, avgjøld	100	55	-45
04	Navnaprógv	20	5	-15
05	Bøtur	500	770	270
06	Happadrátturin, avgjøld	400	-	-400
07	Burturlutingargjøld	1.200	1.115	-85
09	Løggilding av el-innleggjarum, avgjøld	70	82	12
10	Avgj. av vinningi v/sølu av virðisbrøvum	1.500	20.047	18.547
11	Víddargjøld	-	2.107	2.107
60	Óvanligar inntøkur	-	-341	-341
	Tilsamans	**3.840**	**23.890**	**20.050**

Eingin játtan var á fíggjarlógini viðvíkjandi víddargjøldum. Inntøkurnar eru 2,1 mió.kr., sum eru inngjøld frá oljufeløgunum. Sambært § 9 Ll. nr. 31/1998 “um kolvetnisvirksemi” kann oljufeløgunum verða álagt at rinda eitt víddargjald fyri øki, teimum verður tillutað. Í § 7 í leitingar- og framleiðsluloyvunum eru gjøldini fyrstu 6 árini sett til kr. 500 árliga fyri ferkilometurin. Seinni hækka gjøldini fyri ferkilometurin stigvíst.

- - - - -

Samanumtikið eru inntøkurnar uml. 197 mió.kr. hægri, enn mett á fíggjarlógini. Í seinastu frágreiðing varð hildið vera rættast, um inntøkumetingarnar vórðu dagførdar í fíggjarárinum á eykajáttanarlóg, so Løgtingið varð kunnað um og fekk innlit í gongdina. Í frágreiðingini 21. mars 2001 hildu løgtingsgrannskoðararnir, at inntøkur eiga játtanarliga at verða viðgjørdar á sama hátt sum "lógarbundnar játtanir", soleiðis at munandi frávik í inntøkumetingunum í fíggjarárinum verða løgd fyri Løgtingið við eykajáttanarlóg. Í eykajáttanarløgtingslóg fyri september 2001 varð henda mannagongd nýtt.

2.2 Fíggjarlógarmannagongd (GL 1996/1 01-1)

2.2.1 Tilknýti til fíggjarlógina o.a.

Síðani fyrst í nítiárunum er ofta umrødd tann misjavna fíggjarlógarviðgerð, almennir stovnar fáa, herímillum hvørjir stovnar skulu verða tiknir við á fíggjarlógina og/ella í landsroknskapin. Víst kann verða á Lm. nr. 162/1992 og nr. 85/1993.

Løgtingsgrannskoðararnir og Landsgrannskoðanin hava í áravís víst á hesi viðurskifti, og í grannskoðanarfrágreiðingunum frá desember 1997 og frá mars 2000 fingu tey drúgva umrøðu. Flest øll aðalstýri hava víst á, at tað er av alstórum týdningi at fáa fulla greiði á ognarrætti og á tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap, bæði viðvíkjandi umsitingarútreiðslum og fíggjarligum virksemi hjá fleiri stovnum/grunnum.

Umsitingarútreiðslurnar hjá fleiri av hesum stovnum, t.d. Landsbankanum og Húsalánsgrunninum, verða fíggjaðar við einum rentumarginali, og tílíkir stovnar hava tí "óavmarkaðar" møguleikar at økja um sínar umsitingarútreiðslur.

Í 1998 tók eisini løgmaður málið upp fyri at fáa staðfest, hvørjir roknskapir koma undir § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini. Í sambandi við, at løgmaður í november 1998 fekk uppskot til løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum til ummælis, har nógv grundleggjandi ógreið viðurskifti vórðu umrødd í almennu viðmerkingunum, boðaði løgmaður frá, at hann fór at taka stig til at seta ein arbeiðsbólk at gjøgnumganga viðurskiftini hjá stovnum og grunnum, sum ikki eru við á fíggjarlóg/í landsroknskapinum, fyri at meta um:

- hvør eigur stovnin/grunnin, herímillum hvør eigur ognirnar, um stovnurin/grunnurin verður tikin av,
- tilknýtið til fíggjarlógina, hvat skal við og á hvønn hátt,
- tilknýtið til landsroknskapin, landsbókhald og landsgjaldføri.

Í mars 1999 heitti løgmaður á landsstýrismannin í fíggjarmálum um at seta ein arbeiðsbólk, sum innan árslok 1999 skuldi greiða ivaspurningarnar.

Í februar 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tað hevði ikki eydnast honum at manna ein arbeiðsbólk. Í samráð við løgmann hevði landsstýrismaðurin tí gjørt av at biðja fólk í umsitingini gera arbeiðið.

Í februar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið var ikki liðugt. Ein arbeiðs- og tíðarætlan varð gjørd, og skuldi arbeiðið verða liðugt fyri summarfrítíðina 2001. Teir grunnar/stovnar, ið eiga at standa á fíggjarlógini, skuldu verða settir á fíggjarlógina í 2002.

Í november 2001 var Fíggjarmálastýrið liðugt við arbeiðið og lat úr hondum eitt álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðaraviðurskifti".

Álitið viðger eina rød av landsstovnum og –grunnum umframt aðrar sjálvsognarstovnar. Nakrir grunnar verða ikki viðgjørdir, antin tí at teir hava einki tilknýti til landskassan, ella tí, at játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftini fylgja galdandi lógum. Aðrir grunnar verða tiknir við, fyri at vísa skilnaðin millum landsgrunnar og privatar grunnar.

Niðurstøðan í álitinum er, at fleiri landsstovnar og –grunnar, í stríð við galdandi lóg, verða ikki tiknir við á fíggjarlóg og í landsroknskapin. Harafturat verða roknskapirnir hjá fleiri av hesum grunnum/stovnum ikki lagdir fyri Løgtingið, eisini í stríð við galdandi lóg. Álitið vísir á, hvussu trupulleikarnir kunnu verða loystir. Fyri flestu landsstovnar og –grunnar merkir tað, at alt virksemið verður at taka við á fíggjarlógina og í landsroknskapin. Tað er tó møguligt í heilt serligum førum, at hava landsvirksemi uttanfyri fíggjarlóg. Í slíkum førum skal roknskapurin tó altíð verða lagdur fyri Løgtingið.

Fíggjarmálastýrið vísir á, at við atliti at niðurstøðunum í álitinum verður tað uppgávan hjá einstøku aðalstýrunum at finna eina loysn fyri teir landsstovnar og -grunnar, sum hvørt aðalstýri varðar av. Talan er um hesar landsstovnar og –grunnar:

<u>§ 3 Fíggjarmál</u>

- Føroya Realkreditstovnur
- Landsbanki Føroya

<u>§ 5 Fiskivinna</u>

- Forskotsgrunnur fiskiflotans

<u>§ 6 Vinnumál</u>

- Endurgjaldsgrunnur Alivinnunnar
- Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
- Frítíðargrunnurin
- Arbeiðsloysistryggingin
- Vinnuframagrunnurin
- Jarðargrunnurin
- Grunnurin fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu
- Jólamerkjagrunnurin

<u>§ 7 Útbúgving og gransking</u>

- Mentanargrunnur Landsins
- Fróðskaparsetur Føroya, Sjálveigandi Stovnur
- Granskingargrunnurin

<u>§ 8 Almanna- og Heilsumál o.a.</u>

- Húsalánsgrunnurin
- Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin
- Íbúðagrunnurin
- Apoteksgrunnurin
- Sjálvsognarstovnurin Sambýlir

<u>§ 10 Sjálvstýrismál</u>

- Grunnurin ætlaður brekaðum

Sambært álitinum hava hesir landsstovnar og –grunnar ikki tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsroknskapin:

- Fíggingargrunnurin frá 1992 (tó ogn landskassans)
- Íleggingargrunnurin
- Føroyagrunnurin frá 1971
- Búagrunnurin
- Kommunali láni- og veðhaldsgrunnurin
- Orðabókagrunnurin
- Grunnurin Kirkjubømúrurin
- Framtaksgrunnurin

2.2.2 Játtanarskipanin

Á heysti 1999 var nógv samskifti millum Landsgrannskoðanina, umsitingina hjá Løgtinginum og Fíggjarmálastýrið um fleiri grundleggjandi ivamál við verandi játtanarskipan. Semja var um, at tað var bráðneyðugt at broyta játtanarskipanina á ávísum økjum, soleiðis at endurskoðaðar reglur kundu koma í gildi frá ársbyrjan 2000. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum handaði síðani Fíggjarnevndini bráðfeingis endurskoðaðu reglurnar til viðgerðar. Fíggjarnevndin tók undir við reglunum, og tók tær við í álitið, og tær vórðu eisini tiknar við í "dagførdu" løgtingsfíggjarlógina.

Í januar 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, at við broytingunum í desember 1999 vórðu nakrir ivaspurningar í játtanarskipanini loystir, og í 2000 ætlaði Fíggjarmálastýrið aftur at fara ígjøgnum skipanina, og gera sítt til at fáa eina loysn á ivaspurningunum, sum Landsgrannskoðanin og umsiting Løgtingsins høvdu sett.

Í februar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Fíggjarmálastýrið hevði ikki í 2000 gjøgnumgingið játtanarskipanina úr enda í annan, men hevði á fundi við løgfrøðingarnar hjá Løgtinginum viðgjørt, um rættari hevði verið at gera játtanarskipanina til lóg. Á fundinum varð ikki komið til nakra greiða niðurstøðu, og løgfrøðingarnir vóru heldur ikki á einum máli um spurningin, men vístu á, at tað var upp til landsumsitingina at gera av.

Í játtanarskipanini í fíggjarlógaruppskotinum 2002 eru smærri broytingar gjørdar:

- Lønarkarmur: Eru góðar grundgevingar fyri tí, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva landsstýrismanninum at fara upp um ásetta lønarkarmin.
- Lógarbundin játtan: Lønarútreiðslur kunnu ikki verða játtaðar undir hesum játtanarslagi.
- Hugtakið "fíggjarlig langtíðarleiga" er neyvari útgreinað.

Í samráð við fleiri aðalstýri átók Landsgrannskoðanin sær í september 2001 at skipa fyri einum skeiði í "umsiting av stuðulsjáttanum o.a.". Luttakarar á skeiðnum vóru frá umsitingini hjá Løgtinginum og landsumsitingini. Høvi var eisini at umrøða og viðgera teir játtanarligu ivaspurningar, sum eru í stýrisskipanarlógini og í játtanarskipanini. Endamálið við skeiðnum var at lýsa verandi trupulleikar og vísa á, hvussu teir kunnu verða loystir.

Fíggjarmálastýrið hevur í januar 2002 boðað frá, at arbeitt verður í 2002 við at dagføra játtanarskipanina, og loysa ivamálini, ið eru eftir.

2.3 Roknskaparviðurskifti (GL 2000/1 01-9)

2.3.1 Framløga av landsroknskapinum

Sambært stýrisskipanarlógini og sambært Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan juni mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár. Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2000 varð lagdur fyri Løgtingið 19. apríl 2001.

2.3.2 Lønarumsiting á Gjaldstovuni (GL 1998/2 03 1-10)

Gjaldstovan hevur seinnu árini sent út rundskriv um ávísing av lønum, samsýningum, veitingum o.ø., og at bert góðkend oyðubløð eiga at verða nýtt. Gjaldstovan sendir á hvørjum ári stovnunum, ið avgreiða lønir um lønarskipanina á Gjaldstovuni, til góðkenningar lønargrundarkort fyri øll starvsfólk í føstum starvi. Flest allir stovnar hava góðkent kortini, og sent tey aftur við møguligum rættingum. Hesi tiltøk hava styrkt um umsitingina, og lønargrannskoðanin á ymisku stovnunum hevur eisini givið ábending um, at útgoldnu lønirnar eru rættar og eru samsvarandi galdandi sáttmála, flokking, stig o.a.

Í skrivi í juni 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein felags lønarskipan eftir ætlan verður tikin í nýtslu um ársskiftið 2001/2002. So við og við verður nýtslan av skipanini í einum 2-3 ára skeiði miðfirrað. Á vári 2004 skulu allar almennar lønir, og aðrar gjaldingar, ið verða handfarnar sum løn, uttan undantak, verða avgreiddar um hesa skipan. Í ávísum førum kunnu egnar forskipanir verða nýttar í sambandi við t.d. útbúgvingarstuðul o.l. Uppgávan hjá Gjaldstovuni í framtíðini verður sostatt ikki at skráseta lønir. Hetta arbeiði skulu aðalstýrini/stovnarnir skipa fyri.

Lønarskipanin er tó seinkað. Sambært nýggjastu tíðarætlanini skal hon verða tikin í nýtslu fyrsta ársfjórðing 2002.

2.3.3 Edv-trygd (GL 1997/2 03 1-6)

Edv-trygd er ein týðandi partur í fíggjarstýringarskipanini, og í 1997 fóru Landsgrannskoðanin og Gjaldstovan, saman við serkønari grannskoðarahjálp, undir at gjøgnumganga edv-trygdina, við støði í krøvum og grannskoðanarvegleiðingum.

Í eini frágreiðing frá juli 1998 varð víst á, at edv-trygdin á fleiri týðandi økjum var ikki nøktandi. Mælt varð til at seta í verk tiltøk fyri at bøta um trygdina, og at seta í verk ein skjalprógvaðan trygdarpolitikk, sum skuldi verða útgreinaður og skipaður við nágreiniligum trygdarreglugerðum.

Á fíggjarlógini 1999 fekk Gjaldstovan eina játtan 250 t.kr. markaða til arbeiðið við edv-trygdarspurninginum. Gjaldstovan hevur síðani loyst teir mest átrokandi vandarnar, sum vórðu nevndir í frágreiðingini. Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 vístu vit á, at komið er ikki á mál við at seta í verk ein skjalprógvaðan trygdarpolitikk í tann mun, frágreiðingin hevði mælt til. Leiðslan á Gjaldstovuni helt tá, at trygdin á telduøkinum var á høgum støði, og kunnaði um, at uppgávan varð raðfest høgt innan teir fíggjarligu karmar, stovnurin hevði.

Í 2001 hava vit aftur saman við serkønari grannskoðarahjálp gjøgnumgingið edv-trygdina m.a. við støði í frágreiðingini frá 1998, og í september 2001 varð ein fyribils frágreiðing latin Gjaldstovuni. Niðurstøðan er, at hóast ábøtur, er edv-trygdin samanumtikið ikki nóg góð. Henda niðurstøða er serliga grundað á ta hóttan, sum kemur frá tí opna alnetinum.

Gjaldstovan vísir á, at broytingar í uppsetingini av telduskipanini í januar 2002 hava bøtt munandi um trygdina. Eisini hevur Gjaldstovan biðið eitt telduvirki um at gera innrás (penetration test) frá útheiminum á teldukervið hjá Føroya Gjaldstovu. Í frágreiðingini frá hesum

telduvirki verður mett, at teir veikleikar komið er fram á, kunnu ikki beinleiðis brúkast til at gera skaða á teldukervið hjá Føroya Gjaldstovu frá alnótini.

Gjaldstovan hevur í januar 2002 gjørt vart við, at skal Gjaldstovan upp á tað støði, lagt verður upp til í fyribils grannskoðanarfrágreiðingini frá september 2001, er neyðugt at skipa tilgongdina, soleiðis at arbeitt verður samanhangandi, og at edv-trygd verður ein partur av dagligu leiðsluni. Tað er eisini ein spurningur um pening og um vitan. Gjaldstovan hevur viðgjørt spurningin við Fíggjarmálastýrið, og báðir partar eru samdir um, at tilgongdin skal verða løgd í eina fasta legu, og at spurningurin um trygd skal ikki verða nakað ivamál. Hildið verður tí, at rættasta mannagongdin er:

at gjørd verður ein tørvsuppgerð á trygdarøkinum

at evnaður verður ein trygdarpolitikkur

at politikkurin verður settur í verk.

Í apríl 2002 er ætlanin, at umboð frá Landsgrannskoðanini, edv-grannskoðanini, Gjaldstovuni og uttanhýsis veitaranum skulu viðgera frágreiðingina og tiltøk um ábøtur.

2.3.4 Góðkenning av "egnum" búskaparskipanum o.l.

Sambært roknskaparkunngerðini hava allir stovnar skyldu at nýta búskaparskipan landsins. Sambært § 4, stk. 5, kann fíggjar- og búskapardeildin, eftir umsókn, loyva stovnum við serligum tørvi at nýta sína egnu búskaparskipan heilt ella lutvíst. Loyvið er tó treytað av, at skipanin lýkur tey:

1. kunningar-
2. trygdar-
3. eftirlits-
4. og tíðarkrøv

sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri búskaparskipan landsins, og harafturat skal ein skrivlig rakstraravtala verða gjørd millum Føroya Gjaldstovu og stovnin, sum útgreinar neyvari treytirnar fyri dátasamskifti o.ø.

Í fleiri førum verður ásetingin ikki hildin, hóast talan er um stórar og umfatandi skipanir, t.d. nýggja edv-skipanin á Almannastovuni og nýggja innkrevjingarskipanin.

Í skrivi til løgmann august 2001, sum eisini varð sent landsstýrismonnunum til kunningar, vístu vit m.a. á:

at arbeiðið innan landsumsitingina, at tryggja tann elektroniska partin av kunningarkervinum, fer fram óskipað og uttan viðurkendar standardar,

at tað lættliga kann fáa sera óhepnar fylgir,

at vandi er fyri, at peningur og starvsfólkaorka verða ikki nýtt á skynsaman hátt,

at KT-Forum so at siga ikki er til longur,

at DNL-stýrið ikki hevur ásett nakrar felags trygdarreglur,

at tað er ógreitt, hvørja ábyrgd og hvønn myndugleika, KT-forum, DNL-stýrið, onnur stýri og stovnar hava, og hvørjar avleiðingarnar eru, verða boð ikki fylgd.

Í svarskrivi 22. oktober 2001 ásannar løgmaður, at eingin felags kunningar- og trygdarpolitikkur er ásettur enn, og hann vísir á, at síðani landsumsitingin varð umskipað í 1996/97, hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum havt ábyrgdina av málsøkinum kunningartøkni. Landsstýrismaðurin hevur sostatt ábyrgdina av, at tað almenna hevur ein yvirskipaðan kunningartøkni- og trygdarpolitikk.

Stovnar og landsstýrismenn skulu sostatt ikki hvør í sínum lagi seta yvirskipað krøv til KT-trygd, men taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri karmarnar. Løgmaður leggur dent á, at hvør landsstýrismaður hevur ábyrgdina av KT-trygd og –tøkni á sínum øki. Sum dømi vísir løgmaður á, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, ið varðar av búskaparskipan landsins, ábyrgist fyri, at skipanin lýkur tey kunningar- og trygdarkrøv, sum til eina og hvørja tíð eru hóskandi.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal boða stýrum og stovnum, sum knýta seg til skipanina, frá, hvørji krøvini eru, og hann skal hava eftirlit við, at tey verða hildin. Lúka brúkarar ikki krøvini, antin tí teir ikki gera neyðugar íløgur í útgerð/forrit, ella tí teir ikki fylgja ásettum mannagongdum, eigur Fíggjarmálastýrið at nokta teimum atgongd til skipanina.

Vit hava í januar 2002 heitt á landsstýrismannin um at greiða frá, hvørji tiltøk hann hevur sett í verk, hvørji kunningar- og trygdarkrøv verða hildin vera hóskandi, hvørji krøv eru sett stýrum og stovnum, og hvussu landsstýrismaðurin hevur skipað eftirlitið við, at krøvini verða hildin.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 boðað frá, at hann arbeiðir við hesum spurninginum og vil taka spurningin upp við hini aðalstýrini.

2.3.5 Roknskaparreglugerðir (GL 1997/1 01-5)

Við heimild í § 3 í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." ásetti Landsstýrið neyvari reglur fyri roknskaparhaldi landsins í K. nr. 114/1996. Kunngerðin kom í gildi 1. januar 1997.

Í roknskaparkunngerðini eru ásett roknskaparkrøv til almennar stovnar o.a. Harafturat stendur í kunngerðini, hvørjar uppgávur, skyldur og heimildir landsstýrisdeildir, Gjaldstovan og stovnsleiðarar hava, tá ið skipað verður fyri roknskaparhaldinum, roknskaparframløguni, roknskapargóðkenning o.ø. Í grannskoðanarfrágreiðingini frá desember 1997 varð víst á, at nú umsitingin í Landsstýrinum var umskipað, varð neyðugt at dagføra/broyta kunngerðina, og í tí sambandinum áttu ávísar ásetingar at verið endurskoðaðar. Kunngerðin er ikki broytt.

Í § 5, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994 og í § 4, stk. 2, í K. nr. 114/1996 er álagt landsumsitingini og landsstovnum at hava eina reglugerð fyri roknskaparhaldi sínum, herímillum ábyrgdar- og heimildarreglur.

Sambært § 5, stk. 2, skal reglugerðin verða gjørd eftir reglum frá Fíggjarmálastýrinum. Fíggjarmálastýrið hevur nú gjørt reglurnar, og sendi 6. februar 2001 út rundskriv við vegleiðing um roknskaparreglugerðir. Sambært rundskrivinum skulu roknskaparreglugerðirnar á øllum stovnum verða góðkendar í seinasta lagi 31. desember 2001. Ikki allir stovnar hava fingið hesi viðurskifti í rættlag.

2.3.6 Góðkenningarmannagongdir

Sambært § 9 í roknskaparkunngerðini er álagt stovnsleiðarum mánaðarliga at góðkenna játtanarroknskapin mótvegis aðalstýrinum, og álagt er aðalstýrunum at góðkenna egnan og undirliggjandi játtanarroknskapir mótvegis Fíggjarmálastýrinum.

Í punkt 2.1 í rundskrivi frá Fíggjarmálastýrinum 6. februar 2001 er neyvari greinað út, hvat tað merkir, at ein mánaðarroknskapur er góðkendur.

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálastýrinum. Greinaroknskapurin er ein samandráttur av øllum roknskapum undir eini grein, og góðkenningin skal verða skrivað á eitt serligt góðkenningarskjal. Aðalstjórin skal vegna landsstýrismannin m.a. vátta, at játtanarroknskapirnir, ið liggja undir greinaroknskapinum, allir eru góðkendir sambært galdandi reglum. Á góðkenningarskjalinum

skal aðalstjórin kunna Fíggjarmálastýrið um viðurskifti, sum ikki eru í lagi. Greinaroknskapurin skal verða góðkendur í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir mánaðarlok.

Vinnumálastýrið, Mentamálastýrið og Almanna- og Heilsumálastýrið hava ikki sent Fíggjarmálastýrinum nakað góðkenningarskjal í 2001.

2.3.7 Samskipan av roknskaparreglum

Sambært § 3, stk. 2, í K. nr. 114/1996 "um roknskaparverk landsins o.a." skulu øll uppskot til lógir, kunngerðir og rundskriv, sum viðvíkja landsins roknskaparverki, verða løgd fyri Fíggjar- og búskapardeildina, Føroya Gjaldstovu, at góðkenna.

Endamálið er, at landið skal hava ein ovasta myndugleika, sum skal tryggja, at allar broytingar og nýskipanir verða gjørdar innan nakrar yvirskipaðar karmar. Ásetingin verður ofta ikki fylgd, og Gjaldstovan hevur vístá, at tað førir til óskil á roknskaparøkinum, og at tað er við til at bróta niður tað, sum er bygt upp.

Sum áður umrøtt, hevur løgmaður í desember 2001 boðað frá, at eins og at eftirkanna lógaruppskot, er ábyrgdin hjá hvørjum landsstýrismanni sær at tryggja, at reglurnar smb. § 3, stk. 2, í roknskaparkunngerðini verða hildnar. Eisini má tað vera ábyrgdin hjá tí myndugleika, ið varðar av kunngerðini, í hesum føri Gjaldstovan vegna landsstýrismannin, at gera vart við seg, verða reglurnar ikki hildnar. Hinvegin eiga hesar reglur eisini at verða lýstar í mannagongdini "um lógaruppskot o.a., ið verða at leggja fyri Løgtingið", ið júst lýsir, hvussu lógaruppskot o.l. "ferðast" í skipanini.

Løgmaður vil tryggja, at tað kemur við í mannagongdina. Tó ætlar løgmaður ikki at tengja hesar reglur í roknskaparkunngerðini at eftirkanningini í løgdeildini. Í broyttu mannagongdini verður tikið við, at ávís lógaruppskot og kunngerðir eisini skulu verða løgd fyri Gjaldstovuna at góðkenna. Eftir ætlan verður nýggja mannagongdin klár at seta í verk í februar 2002.

2.3.8 Ognaryvirlit

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal á stovnunum vera eitt yvirlit yvir ognir og útbúnað. Bert fáir av landsins stovnum hava dagførd yvirlit. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at tað hevði verið ein fyrimunur, varð ein vegleiðing gjørd um, hvat skal verða skrásett, og hvussu skal verða skrásett. Í rundskrivinum frá Fíggjarmálastýrinum 6. februar 2001 um roknskaparreglugerðir eru nakrar ásetingar.

2.3.9 Tryggingarviðurskifti

Í 1992 heittu vit á Landsstýrið um at greiða frá, hvørjar tryggingarreglur vóru ásettar fyri landsins stovnar, tað verið seg viðvíkjandi føstum ognum, innbúgvi, maskinum, akførum, starvsfólki o.ø. Vit vístu á, at tryggingarviðurskiftini hjá almennum stovnum eru ógreið, og at tað er sera ymiskt, hvat verður tryggjað, hvat tryggjað verður ímóti, tryggingarupphæddir o.t. Landið kundi óivað spart pening á hesum øki.

Ongar reglur eru ásettar, og fyri at kunna seg um støðuna sendi Landsstýrið øllum almennum stovnum spurnarbløð um tryggingarviðurskiftini, við freist at svara 1. desember 1992. Vit hava fleiri ferðir spurt Landsstýrið, hvat er hent í málinum. Vísandi til vantandi reglur, mæla vit tí vanliga stovnum til, at tryggingarviðurskiftini regluliga verða gjøgnumgingin saman við serkønum.

Í juli 1999 boðaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá, at hann var samdur í, at tryggingarviðurskiftini hjá almennum stovnum eru ógreið og møguliga ov kostnaðarmikil. Ítøkiligar ætlanir vóru um at loysa henda trupulleika.

Landsstýrismaðurin boðaði í mars 2001 frá, at málið hevði ligið stilt, tí aðrar uppgávur høvdu trokað á, men at málið fór at verða tikið upp aftur á heysti 2001.

Landsstýrismaðurin hevur í desember 2001 boðað frá, at øll aðalstýrini eru biðin um senda Fíggjarmálastýrinum yvirlit yvir tryggingarútreiðslur seinastu árini. Næstan øll aðalstýrini hava svarað, og Fíggjarmálastýrið fer í næstum at viðgera tølini, og gera eina samlaða útgreining av tryggingarútreiðslunum hjá landinum.

Við støðu í útgreiningini fer Fíggjarmálastýrið, vónandi í fyrru helvt av 2002, at finna fram til eina loysn, hvussu tryggingarviðurskiftini skulu verða skipað í framtíðini.

2.3.10 Skipanin við ferðakarmi til uttanlandsferðir

Viðvíkjandi ásetan av ferðakarmi kann "søguliga" verða greitt frá, at í álitinum til fíggjarlógaruppskotið 1997 vísti Fíggjarnevndin m.a. á, at løgmaður og landsstýrismenn fingu á Ólavsøku 1996 fulla ábyrgd av sínum málsøkjum. Greinarnar á fíggjarlógaruppskotinum vóru settar upp eftir, hvørji málsøki teir umsótu. Landsumsitingin varð nú býtt upp í sjey deildir, og rakstrarútreiðslurnar til fyrisiting, sum á undanfarnum fíggjarlógum allar vóru undir meginfyrisitingini, vóru nú fluttar út á hvørja deild sær.

Hesar broytingar høvdu m.a. við sær, at útreiðslur til ferðapening, sum høvdu verið á eini felagskontu undir meginfyrisitingini, nú vóru býttar út á rakstrarstøðini á standardkontu 14. Fíggjarnevndin roknaði við, at landsstýrismaðurin, sum hevði ábyrgd á farloyvisskipanini, sá til, at ferðapeningurin varð innanfyri givna játtan. Fíggjarnevndin mælti til, at ferðaútreiðslurnar skuldu verða útgreinaðar á yvirlitinum yvir virksemið hjá stovnunum.

Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálastýrinum skulu øll aðalstýri seinast í januar mánað áseta ein karm fyri ferðing. Er eingin tílíkur karmur ásettur fyri aðalstýri ella stovn, er ikki loyvt at fara tænastuferð.

Í apríl 1999 sendi Gjaldstovan oyðubløð til øll aðalstýri at fylla út, og senda aftur. Gjaldstovan skrásetti síðani ein ferðakarm fyri hvønn stovn. Í 1999 vóru fleiri stovnar, sum ongan ferðakarm høvdu, t.d. varð eingin ferðakarmur undir fiskivinnumálum og undir almanna- og heilsumálum. Sambært einum yvirliti úr roknskaparskipanini vórðu ferðakarmar ásettir til 6,8 mió.kr., sammett við ferðaútreiðslurnar, sum vóru 17,1 mió.kr. Sama gongdin var í 2000 og 2001.

Landsstýrismaðurin hevur í januar 2002 boðað frá, at hann frá 1. januar 2002 ætlar at taka av ferðakarmarnar, og í framtíðini gera ferðaútreiðslurnar meira sjónligar. Tað verður gjørt soleiðis, at fyrst í hvørjum ári, fyrstu ferð í 2003, ger Fíggjarmálastýrið eitt yvirlit yvir ferðaútreiðslurnar í undanfarna ári, greinað út á stýri og høvuðskontur. Yvirlitið verður:

- lagt fyri landsstýrisfund, har hvør landsstýrismaður skal greiða frá ferðavirkseminum á sínum øki undanfarna ár,
- sent Løgtingsins Fíggjarnevnd til kunningar,
- lagt út á heimasíðuna hjá Føroya Gjaldstovu,
- vístí landsroknskapinum,
- vístí viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina.

2.4 Fíggjarmálastýrið (GL 2001/2 03 1-12)

Í november 2001 vitjaðu vit í Fíggjarmálastýrinum, har vit grannskoðaðu roknskaparviðurskiftini.

Reglur og mannagongdir á roknskaparøkinum

Fíggjarmálastýrið hevur eina góðkenda roknskaparreglugerð. Fíggjarmálastýrið hevur góðkent greinaroknskapirnar í 2001 fyri § 3 Fíggjarmál o.a. við hesi viðmerking: *"Fyri stovnsnummar 120349 "Toll- og Skattstova Føroya, Innkrevjing" og stovnsnummar 129601 "Stuðul til flutning og dupult húsarhald" er galdandi, at játtanarroknskapurin stemmar, men fíggjarstøðan stemmar ikki. Fyri stovnsnummar 129501 "Stuðul til rentuútreiðslur" er galdandi, at bæði játtanarroknskapur og fíggjarstøða ikki stemma. Arbeitt verður við at fáa skrásetingarnar á Toll- og Skattstovu Føroya og Gjaldstovuni fyri umrøddu stovnsnummur at stemma."*

Skjalagrannskoðan

Í 2000 vóru nøkur skjøl bókað, hóast tey ikki vóru ávíst til gjaldingar frammanundan. Mannagongdin er síðani broytt. Nøkur útreiðsluskjøl, m.a. í sambandi við umboðan, vóru ikki nóg væl greinað, 4 ferðaforskot vóru eldri enn ein mánað, neyðug skjalprógv vóru ikki í øllum starvsfólkamálum, og ognaryvirlitið var ikki dagført. Vit mæltu til at fáa viðurskiftini í rættlag.

"Viðlíkahald" og "Landsins ognir"

Umframt høvuðskontu til rakstur av Fíggjarmálastýrinum, umsitur Stýrið 2 høvuðskontur, sum hava við rakstur at gera: "Viðlíkahald" og "Landsins ognir". Høvuðskonta "Landsins ognir" fevnir um 3 undirkontur.

Størstu inntøkurnar stava frá undirkontu 20 "Oljugoymslur o.a." Talan er um eina árliga inntøku uppá 1,2 mió.kr. Inntøkan hevur verið óbroytt seinastu 25 árini. Fíggjarmálastýrið hevur kunnað um, at í fleiri umførum er avtala gjørd við oljufelag um, at tað árliga skal rinda hesa upphædd fyri leigu og viðlíkahald av oljugoymslunum. Oljugoymslurnar, sum eru frá krígsárunum, eru ikki í so góðum standi, og oljufeløgini eru ikki áhugað í at keypa. Tí varð fyrst í 2001 gjørd ein nýggj avtala, galdandi í 5 ár, har oljufelagið bindur seg at gjalda 1,2 mió.kr. um árið fyri at leiga oljugoymslurnar móti at halda tær við líka og hava tilbúgving klára.

Inntøkurnar á undirkontu 21 stava frá húsaleigu, og inntøkurnar á undirkontu 22 stava frá leigu av økjum. Fíggjarmálastýrið ásannar, at tørvur er á at endurskoða sáttmálarnar, so leiguupphæddirnar verða dagførdar.

Í grannskoðanarfrágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í apríl 1994 umrøddu vit m.a. grunnin til flogferðslu, har vit vístu á, at størsta nýtslan úr grunninum var farin til íløgur í sambandi við gerð av hangari, tilsamans knappar 60 mió.kr. Vit vístu eisini á, at hangarurin varð leigaður út, men tað tyktist ikki, sum nakað leigugjald varð kravt inn.

Í mai 1998 gjørdi Fíggjarmálastýrið nýggjan leigusáttmála við Atlantic Airways, galdandi frá 1. januar 1997. Fíggjarmálastýrið ætlar at kanna neyvari viðurskiftini fyri árini 1990 til 1996.

Í § 6 í nýggja sáttmálanum er ásett, at leigarin hevur alla ábyrgd av viðlíkahaldi av bygningum uttan og innan og av útbúnaði, og ber kostnaðin av hesum. Í § 7 er ásett, at leigarin heldur húsini og útbúnað bruna-, storm-, og vatnskaðatryggjaði. Vit hava vístá, at sambært viðmerkingunum til høvuðskontu 6.38.2.07. "Flogferðsla", er játtanin m.a. ætlað *"til hald av hangarinum í Vágum."* Játtanin er m.a. nýtt til at gjalda trygging fyri hangarin fyri árini 1997, 1998 og 1999 tilsamans kr. 437.936. Í februar 2002 hava vit biðið landsstýrismannin kanna málið.

Aðrar høvuðskontur, sum Fíggjarmálastýrið umsitur

Fíggjarmálastýrið hevur í 2000 eisini umsitið niðanfyri nevndu høvuðskontur (1.000 kr.):

Konta	Heiti	Játtan	Roknskapur	Munur
3.13.2.03	Endurgjald av skatti og avgjøldum	200	200	0
3.15.1.19	Umsiting av gjaldføri	596	596	0
20.50.2.07	Yvirskot, Landsbanki Føroya	1.000	2.260	1.260
20.50.2.10	Yvirskot, Danmarks Nationalbank	25.000	25.000	0
20.52.3.01	Útluting, Fíggingargrunnurin frá 1992	48.500	64.625	16.125
20.54.1.01	Heildarveiting	972.856	973.092	236

"Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya"

Landsbankin hevði í 2000 eitt yvirskot uppá uml. 34 mió.kr. Landskassans partur sambært landsroknskapinum er 2.260 t.kr. Vit spurdu Fíggjarmálastýrið, eftir hvørjum meginreglum avseting í trygdargrunnar, og harvið landskassans partur av yvirskotinum, er gjørd upp. Meginreglurnar fyri avseting í trygdargrunn eru ásettar í § 19 í Ll. nr. 57/1978 "um Landsbanka Føroya".

§ 19. Yvirskot bankans fer í landskassan, um tað ikki verður lagt í tiltaksgrunn ella eftir avgerð umsjónarráðsins og við góðkenning Landsstýrisins í serstakar trygdargrunnar, 20% av yvirskotinum skal fyrst leggjast av í tiltaksgrunnin.

Stk. 2. Helvtin av restini av yvirskotinum fer í landskassan, helvtin verður nýtt til avskriving av landskassans ábyrgdarskyldu. Tá ið ábyrgdarskyldan er avskrivað, fer øll restin av yvirskotinum í landskassan.

Stk. 3. Um tap í árunum frammanundan hava fört við sær, at nýtt er av stovnsfænum, fellur partur landskassans í yvirskotinum burtur, til tap stovnfæsins er afturgoldið.

Fíggjarmálastýrið hevur kunnað um, at umsjónarráðið fyri Landsbankan, við Landsstýrisins góðkenning, tey seinastu mongu árini hevur gjørt av, at helvtin av yvirskotinum, eftir 20% avsetingina í tiltaksgrunn, skal í serstakan trygdargrunn.

Vit hava biðið Fíggjarmálastýrið um grannskoðanarprotokollina fyri Landsbankan, men vit hava ikki fingið hana enn. Fíggjarmálastýrið hevur í februar 2002 boðað frá, at nevndin í Landsbankanum vil taka støðu til, um Landsbankin skal flýggja grannskoðanarprotokollina.

2.5 Fíggjarstøðan 2000

2.5.1 Avstemman av fíggjarstøðuni

Gjaldstovan hevur í 2001 ment eina skipan við kekklistum, ið verða fyltir út, í sambandi við at mánaðarroknskapirnir verða gjørdir. Ein kekklisti er fyri roknskaparhaldið og ein fyri EDV-økið. Ábyrgdarfólk á ymsu økjunum vátta, at avstemmanir/eftirlit eru gjørd. Liggja mál óavgreidd, skal verða víst á, hvat verður gjørt fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, og nær tey eftir ætlan fara at koma í rættlag.

Roknskaparstjórin fer ígjøgnum allar kekklistar og fíggjarstøðurnar hjá stovnunum, áðrenn mánaðarroknskapirnir verða sendir stovnunum. Stovnsleiðslurnar verða gjørdar varugar við viðurskifti, ið skulu verða fingin í rættlag. Við hesi mannagongd er "ruddað upp" í nógvum gomlum munum, og skipanin við kekklistum hevur fört við sær, at nógvar feilbókingar og munir verða kannaðir og rættaðir so hvørt. Avstemmanararbeiðið í dag er miðvíst og væl skipað, og leiðslan raðfestir arbeiðið høgt. Í sambandi við gjøgnumgongdina av roknskapar-postum í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum hava vit í stóran mun bygt á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Sum áður greitt frá, skulu aðalstjórarnir góðkenna greinaroknskapin (ein samandrátt av øllum roknskapum undir eini grein) mótvegis Fíggjarmálastýrinum. Aðalstjórin skal vegna landsstýrismannin m.a. vátta: at allar saldur á fíggjarstøðuni eru rætt tiknar við, herímillum at allar peningastovnskontur, sum aðalstýrið og stovnar undir Stýrinum hava ræði á, eru skrásettar á fíggjarstøðuni og stemma við kontuavrit frá peningastovnunum; at ogn, skuld og nýtsla eru gjørd rætt upp; at samsvar er millum búskaparskipan landsins og egnar búskaparskipanir, og at alt er stemmað av, sum ásett í roknskaparreglugerðunum hjá aðalstýrunum og stovnunum undir stýrunum.

Greinaroknskapurin skal verða góðkendur í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir mánaðarlok. Á góðkenningarskjalinum skal aðalstjórin kunna Fíggjarmálastýrið, eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, og Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningarskjølum og møguligum fylgiskjølum. Henda skipan er eisini við til at tryggja, at gjørt verður vart við møguligir feilir og munir, og at teir verða rættaðir so hvørt. Sum áður víst á, hava Almanna- og Heilsumálastýrið, Mentamálastýrið og Vinnumálastýrið ikki hildið hesar reglur.

2.5.2 Fíggjarligur útbúnaður (GL 2001/3 01 2-3)

Kapitalogn í landsfyritøkum

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	1.266.788.377	1.196.858.429	1.100.890.463

Roknskaparposturin fevnir um 2 grunnar; Fíggingargrunnurin frá 1992 og Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins. Kapitalognin svarar til "eginognina" hjá hesum grunnum. Bókaða virðið á Fíggingargrunninum frá 1992 er kr. 1.243.524.000 og samsvarar við ársroknskapin hjá grunninum.

Bókaða virðið á Byggi- og rakstrargrunni Postverksins er kr. 23.264.377. Til 1998 var samsvar millum ársroknskapin hjá Postverki Føroya og landsroknskapin. Í 1999 varð Postverkið tikið við á fíggjarlógina sum ein landsfyritøka. Í landsroknskapinum verða íløgur útreiðsluførdar, men í roknskapinum hjá Postverki Føroya verða tær aktiveraðar og avskrivaðar yvir nøkur ár. Tí verður ein munur í millum hesar báðar roknskapir, og orsøkin til stóra munin í 2000 er harafturat, at í roknskapinum hjá Postverkinum er játtanin á fíggjarlógini 7,6 mió.kr. inntøkuførd yvir eginognina. Vit hava mælt til at samskipa roknskaparmeginreglurnar, soleiðis at "eginogn" í roknskapinum hjá Postverkinum í framtíðini kemur at svara til bókaða virðið á støðisognunum, soleiðis sum gjørt verður í t.d. eksterna roknskapinum hjá Rúsdrekkasølu Landsins.

Vit hava áður víst á, at tað er torført at síggja, um kapitalognin hjá øllum landsfyritøkum er við í hesum roknskaparpostinum. Eingin allýsing finst av hugtakinum "landsfyritøka", og at júst hesir báðir grunnar eru við í roknskaparpostinum, er helst ein søgulig tilvild. Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins er skrásettur sum "internur grunnur", Fíggingargrunnurin frá 1992 verður roknaður sum vinnurekandi grunnur, tó so at landið eigur grunnin.

Virðisbrøv

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	221.701.133	201.201.133	181.687.009

Vøksturin frá 1998 til 1999 stavar frá partabrøvum í P/F Vágatunlinum 20 mió.kr. og P/F Føroya Dátusavn 200 t.kr. Smærri minkingar stava frá sølu av keypsskála-skrásettum virðisbrøvum og avskriving av partabrøvum. Vøksturin frá 1999 til 2000 stavar frá partabrøvum í P/F Vágatunlinum 20 mió.kr. og P/F Føroya Lívstrygging 500 t.kr.

Landið eigur allan partapeningin í 4 feløgum. P/F Atlantic Airways, P/F Føroya Tele, P/F Vágatunnilin og P/F Fiskaaling. Í landsroknskapinum er partapeningurin skrásettur til keypsvirðið, og gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á hesum feløgum.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum:

Skrásett í landsroknskapinum (kr.)	**2000** Upphædd	**1999** Upphædd	**1998** Upphædd	Til skjals á Gjaldst.	Ikki til skjals
P/F Skipafelagið Føroyar	70.000	70.000	70.000	x	
P/F Føroya Banki	433	433	433	x	
P/F Flogsamband	1.511.000	1.511.000	1.511.000	x	
P/F Fiskaaling	175.000	175.000	175.000	x	
P/F Tvøroyrar Flakavirki	820.000	820.000	820.000	x	
P/F Nykur	0	0	500.000	x	
P/F Vedding	20.000	20.000	20.000		x
L/F Skopunar Útróðrarfelag	50.000	50.000	50.000		x
P/F Føroya Dátusavn	200.000	200.000	0	x	
P/F Føroya Lívstrygging	500.000	0	0	x	
P/F Smyril Line	2.760.000	2.760.000	2.760.000	x	
P/F Elektron	2.346.700	2.346.700	2.346.700	x	
P/F Atlantic Airways	75.000.000	75.000.000	75.000.000	x	
P/F Føroya Tele	77.948.000	77.948.000	77.948.000	x	
P/F Vágatunnilin	60.300.000	40.300.000	20.300.000	x	
Partabrøv tilsamans	**221.701.133**	**201.201.133**	**181.501.133**		
Keypsskála-skrásett virðisbrøv	0	0	185.876	x	
Virðisbrøv tilsamans	**221.701.133**	**201.201.133**	**181.687.009**		

Gjaldstovan hevur ásett reglur fyri, hvussu partabrøv skulu verða goymd. Tá ið tey eru keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera tó ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Ultimo 2000 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 175 t.kr. í partabrøvum í P/F Fiskaaling. Sambært roknskapinum hjá P/F Fiskaaling er partapeningurin í felagnum 500 t.kr. Vit hava fleiri ferðir heitt á Vinnumálastýrið um at greina hesi viðurskifti.

Rentu- og avdráttarfrí lán

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	186.182.436	172.463.060	188.472.403

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, til sjálvsognarstovnar og studningslán sambært lóg nr. 34/1993, nr. 48/1964, nr. 42/1976 og lóg nr. 26/1997.

Minkingin frá 1998 til 1999 stavar frá, at studningslán til fjarfiskiflotan eru niðurskrivað/eftirgivin uml. 10 mió.kr. Økingin frá 1999 til 2000 stavar frá "ymiskum rørslum" í studningslánum smb. Ll. nr. 26/1997, sum eru fluttar frá "Effektivar veðhaldsútreiðslur, fiskivinna".

Útlán

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Áogn landskassans	471.201.897	584.406.780	1.010.081.020
Sett av	-279.271.858	-378.068.816	-763.590.325
Sambært roknskapinum	191.930.039	206.337.964	246.490.695

Talan er m.a. um veðhaldsútlegg, lestrarlán, lán til Húsalánsgrunnin, ymisk lán innan vinnumál, serlán, kurslán og stuðulslán, umframt likviditetslán, sum verða umsitin av Realinum.

Sett er av ímóti tapi, tí er virðið á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum sett til kr. 0. Í sambandi við at hesi lánini í 1999 vórðu løgd inn í eina nýggja lánsskipan, gjøgnumgekk Gjaldstovan tey umaftur, og avskrivaði uml. 400 mió.kr. Talan er um lán, har fyrr er sett av ímóti tapi, men har nú endaliga er staðfest, at ikki er gjørligt at heinta peningin inn, m.a. tí feløg eru strikað.

2.5.3 Áogn (GL 2001/ 3 01 3-6)

Goymslur

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	27.312.109	7.252.755	9.701.429

Talan er um vørugoymsluna hjá Rúsdrekkasølu Landsins og Strandfaraskipum Landsins.

Skatta-, toll- o.t. skuldarar

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Áogn landskassans	320.466.837	293.318.472	324.053.693
Sett av	155.410.059	-120.285.454	-195.819.751
Sambært roknskapinum	165.056.778	173.033.017	128.233.942

Í frágreiðing okkara í mars 2000 vístu vit enn einaferð á, at samsvar var ikki millum skattaeftirstøður sambært skattaskipanini/juraskránni og bókaðu eftirstøðurnar í landsroknskapinum, og at talan var um ein mun, sum ikki var støðugur, og sum lá um 1 mió.kr. Hóast stórt arbeiði varð gjørt, helt Gjaldstovan ikki, at hon einsamøll kundi koma longur við at finna munin, men við einum skipaðum samstarvi við Toll- og Skattstovu Føroya kundi bera til at koma á mál.

Vit vístu eisini á, at samsvar var heldur ikki millum skattaeftirstøðurnar sambært persónsskattaskránni og bókaðu eftirstøðurnar í landsroknskapinum. Talan var heldur ikki í hesum føri um støðugar munir. Gjaldstovan hevði víst á, at teir listar, ið higartil vóru nýttir at stemma bókaðu eftirstøðurnar av við, vóru ikki eitt nóg neyvt og haldgott grundarlag. Tí lá avstemmanararbeiðið stilt. Víst varð eisini á, at Toll- og Skattstova Føroya hevði sett fólk burturav at stemma persóns-partsskattaskráirnar av sínámillum. Tá ið hetta arbeiðið varð liðugt, varð hildið, at við einum væl skipaðum samstarvi millum Gjaldstovuna og Toll- og Skattstovu Føroya fór at bera til at koma á mál. Vit vístu á, at tað kravdi, at Fíggjarmálastýrið raðfesti hesa uppgávu hægri.

Í uppskoti til samtyktar frá 16. mars 2000 um at góðkenna landsroknskapin (Lm. nr. 53/1999) átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at ikki var komið á mál við arbeiðinum at stemma av á so týðandi øki, og heitt varð enn einaferð á landsstýrismannin um at raðfesta hesa uppgávu høgt, og at áseta eitt greitt ábyrgdarbýti.

Í seinastu frágreiðing okkara í mars 2001 vístu vit enn einaferð á, at samsvar var framvegis ikki millum rørslurnar í skattabókhaldinum og rørslurnar í fíggjarstýringarskipan landsins (FSL). Ein trupulleiki var, at partarnir í skattabókhaldinum ikki stemmaðu sínámillum. Toll- og Skattstova Føroya helt seg hava funnið fram til tað, sum førdi til munirnar, og møguligt var at halda skil á hesum við manuellum rættingum, men tað kravdi dagligt eftirlit við skipanini, og at eitt arbeiði varð gjørt fyri at lýsa sambandið millum skattabókhaldið og FSL, fyri at fáa samsvar millum skipanirnar.

Í uppskoti til samtyktar 27. mars 2001 um at góðkenna landsroknskapin (Lm. nr. 62/2000) átalaðu løgtingsgrannskoðararnir aftur, at ikki var komið á mál við avstemmanararbeiðinum á einum so týðandi øki, hóast eitt stórt arbeiði var gjørt, og heitt varð enn einaferð á landsstýrismannin um at raðfesta hesa uppgávu høgt, og at áseta eitt greitt ábyrgdarbýti á økinum ímillum Toll- og Skattstovu Føroya og Føroya Gjaldstovu.

Í august 2001 spurdu vit landsstýrismannin, hvørji tiltøk hann hevði sett í verk fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í oktober 2001 svaraði landsstýrismaðurin, at uppgávurnar við roknskapar- og trygdarreglum fyri Toll- og Skattstovu Føroya og at stemma av skattaeftirstøður verða raðfestar høgt, og var fast punkt á skránni á teimum fundum, sum landsstýrismaðurin aðru hvørja viku hevur við leiðsluna á Toll- og Skattstovuni. Leiðslan á Toll- og Skattstovu Føroya hevur sett fólk at stemma skattaeftirstøðurnar av, og sambært landsstýrismanninum helt leiðslan, at komið varð á mál við árslok 2001.

Landsstýrismaðurin vísti í svarskrivi sínum til frágreiðing frá Toll- og Skattstovu Føroya oktober 2001, um aktuellu støðuna viðvíkjandi avstemman av skattaeftirstøðum. Sambært frágreiðingini hevur Toll- og Skattstova Føroya síðani mars 2001 nýtt nógva orku til at greina út og lýsa sambandið millum skattabókhaldið og FSL fyri at skapa eitt munagott avstemmanargrundarlag. Ein trupulleiki er, at sakkunnleikin hevur verið avmarkaður, tá ið tað snýr seg um, hvussu edv-skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni og FSL virka saman.

Toll- og Skattstova Føroya hevur stemmað álíkningina av persónsskatti av millum skattaskipanirnar og FSL. Nakrir munir stóðust av einum forritingarfeili, men tey viðurskiftini eru fingin í rættlag. Árini 1996-99 stemma, men ein lítil feilur er í 1997. Hann verður kannaður. Fyri árini 1985 til 1995 er ein munur uml. 582 t.kr. og fyri árini 1983-84 ein munur uml. 2.276 t.kr.

Goldni persónsskatturin er ikki stemmaður av mótvegis FSL. Toll- og Skattstova Føroya valdi fyrst at kanna, hví samsvar var ikki millum strikingar og eftirgevingar í skattaskipanunum hjá Toll- og Skattstovu Føroya og FSL, tí goldni skatturin/skattadebitorarnir verður ávirkaður av hesum rørslum. Komið varð fram á fleiri enn 1100 feilbókingar, sum svaraðu til ein mun uml. 4,65 mió.kr. Orsøkin til feilbókingarnar er, at tey, ið bókaðu, ikki skiltu, hvussu skattaskipanirnar og FSL hanga saman. Elektron skuldi gera eitt forrit, ið rættar bókingarfeilirnar, og maskinelt skal verða forða fyri, at hesir bókingarfeilir koma fyri í framtíðini. Tá ið tað er komið í rættlag, verður farið undir at stemma goldna skattin av. Arbeiðið verður umfatandi, tí viðurskiftini eru rættiliga kompleks.

Endamálið við avstemmanini er fyrst og fremst at tryggja, at allar persónsskattaskipanirnar stemma innanhýsis, og so staðfesta, um "GB-skipanin", sum liggur millum skattaskipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya og FSL, tekur ímóti tí, ið skattaskipanirnar lata frá sær, og um GB-skipanin letur røttu upplýsingarnar víðari á rætt stað í FSL.

Við hesum framferðarhátti heldur Toll- og Skattstova Føroya seg fáa eitt munagott grundarlag at stemma av millum skattaskipanirnar og FSL. Samstundis fæst eitt gott yvirlit yvir ymsu skattaskipanirnar. Teir munir, komið verður fram á, verða greinaðir, og saman við Gjaldstovuni verður støða tikin til, hvat skal verða gjørt við teir.

Í frágreiðingini verður gjørt vart við, at arbeiði at stemma av millum skattaskipanirnar og FSL hevur verið darvað av, at roknskaparreglugerðin fyri Toll- og Skattstovu Føroya skuldi verða liðug fyri 1. november 2001. Miðað varð ímóti, at Innkrevjingar- og Serviceskipanirnar stemmaðu innanhýsis 31. desember 2001.

Í frágreiðing í desember 2001 frá Toll- og Skattstovu Føroya til Fíggjarmálastýrið verður kunnað um, at hóast flestu persónsskattaskipanirnar stemma innanhýsis, so er ikki komið á

mál, og at parturin, sum manglar, er rættiliga umfatandi. Fyrireikingarnar verða hildnar at taka ein mánað, m.a. tí upplýsingar fyri 1996 skulu endurskapast.

Kunnað verður um, at partafelagsskatturin stemmar ikki, og at ætlanin er at leggja partafelagsskattin í eina dátabasutabell, so lættari verður at telja upp og stemma av.

Av tí at Toll- og Skattstova Føroya ikki hevur verið við til at allýsa, hvat sjálvvirkandi verður flutt frá skattaskipanunum til FSL, vita tey ikki, um fyritreytirnar eru rættar. Ikki fyrr enn staðfest er, at skattaskipanirnar stemma innanhýsis, fæst greiða á hesum spurningum.

Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni hevur Gjaldstovan hvønn mánað í 2001 víst á, at skattaskipanirnar stemma ikki við FSL-skipanina, at munir eru øll árini frá 1984 til 2001, og at grundarlagið fyri at stemma av framvegis ikki er nóg gott.

Gjaldstovan hevur eisini víst á trupulleikan, at skipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya ikki kunnu handfara tíðaravmarkan. Trupult er at fáa ein rættan landsroknskap, tá ið inntøkurnar verða tiknar við í landsroknskapin alt eftir, hvussu "ajour" Toll- og Skattstovan er við bókingum. Fíggjarmálastýrið hevur boðað frá, at arbeitt verður við at finna eina loysn á hesum trupulleikum.

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	208.987.583	128.893.282	162.146.949

Talan er serliga um skuldarar hjá Landsverkfrøðinginum, Strandferðsluni, sjúkrahúsum og stovnum, sum veita tænastur, goldið skal vera fyri, ella skuldarar, sum skulu hava endurgjald fyri hildnar útreiðslur. "Aðrir skuldarar" er m.a. renta av inniogn í Landsbankanum, ikki avroknað yvirskot (føroyski parturin) frá danska tjóðbankanum, endalig uppgerð av ríkisstuðli umframt aðrar inntøkur ella endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað, fyri at ogn og skuld skal geva eina so rætta mynd sum gjørligt.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at eitt fólk burturav varð sett at greiða teir avstemmanartrupulleikar, sum hava verið viðvíkjandi debitorum. Tað er komið í rættlag.

Partur av roknskaparpostinum er millumrokningar á standardkontu 06. Herímillum eru millumrokningarnar á fíggjarstøðuni hjá Innkrevjingarskipanini hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni í 2001 hevur Gjaldstovan víst á, at millumrokningarnar stemma ikki.

2.5.4 Tøkur peningur (GL 2001/ 3 01 4-3)

Inniogn í Landsbankanum

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	1.789.619.137	1.489.898.950	1.103.618.740

Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við upplýsingar frá Landsbankanum. Sambært § 6 í Ll. nr. 57/1978 v.s.b. er Landsbanki Føroya bankasamband landskassans. Landsstovnar kunnu eisini nýta bankan sum bankasamband. Sambært § 2 í Ll. nr. 31/1995 "um landskassans innlán og lán í Landsbankanum" verður álagt Landsstýrinum, landskassans vegna, at hava innlán í Landsbankanum, sum í minsta lagi svarar til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni árið frammanundan.

Vit hava fleiri ferðir víst á, at hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" ikki eru nóg greitt lýst, hvørki í lógunum ella í viðmerkingunum, og eisini at nógvur peningur hjá teim størru "landsstovnunum/landsgrunnunum" stendur ikki í Landsbankanum.

Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni í 2001, hevur Gjaldstovan víst á, at landsstovnar hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum. Spurnartekin verður sett við, um hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum. Fíggjarmálastýrið hevur í februar 2002 boðað frá, at tað er samt í hesum, og vil tí lýsa hugtøkini "landskassin" og "landsstovnar" neyvari, í sambandi við uppskot til broyting í lóg um Landsbankan, sum skal leggjast fyri Løgtingið til heystar 2002.

Banka-, giro- og kassapeningur

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	286.586.989	141.148.360	135.928.485

Gjaldstovan umsitur sjálv meira enn helmingin av roknskaparpostinum. Fleiri landsstovnar hava egnar banka- og girokontur. Síðani roknskaparkunngerðin kom í gildi, er talið á banka- og girokontum, sum liggja uttanfyri bókhaldið, nógv minkað. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at nakrir smáir stovnar stemmaðu ikki sínar kassa- og peningastovnskontur regluliga av við landsbókhaldið, og at fleiri kassa- og peningastovnskontur vóru skrásettar við negativari saldu í landsroknskapinum. Í dag eru viðurskiftini so at siga komin í rættlag.

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv "landið" tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Vit hava áður víst á, at fleiri landsstovnar/-grunnar, ofta við leysum tilknýti til fíggjarlóg og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

2.5.5 Skuld (GL 2000/ 3 02 2-2)

Innanlandsskuld, langfreistað

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	412.295.219	416.928.844	704.483.727

Størstu upphæddirnar í 2000 eru brævalán tilsamans navnviði 300 mió.kr. og lán úr Íleggingargrunninum 99 mió.kr. Harafturat er talan um íløgugrunnar og bundna uppsparing.

Landsbanki Føroya umsitur lánsskuld landskassans og ger á hvørjum ári upp tíðaravmarkaðu rentuna. Broytingin frá 1999 til 2000 stavar frá, at í 2000 vórðu brævalán frá 1997 300 mió.kr. goldin aftur, og nýggj brævalán 300 mió.kr. vórðu seld.

Eins og í seinastu frágreiðing vil Landsgrannskoðanin mæla til at viðgera spurningin, um tað er skilagott í verandi støðu at skriva út brævalán.

Uttanlandsskuld, langfreistað

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	4.380.804.862	4.512.120.708	4.646.204.237

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar innanfyri komandi árið

Ár (kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Sambært roknskapinum	434.155.108	427.766.770	691.682.000

Talan er um 2 lán, sum stava frá avtaluni ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið 10. juni 1998. Annað lánið er 4.010 mió.kr. Hitt lánið er 500 mió.kr., og er sambært avtaluni rentu- og avdráttarfrítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: *"Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af råstoffer."*

Harafturat er talan um eitt stuðulslán frá Hypotekbankanum til Spesialskúlan. Lánið kr. 1.865.561 er ikki niðurskrivað ella goldið aftur seinastu nógvu árini. Sambært landsroknskapinum er eingin renta tilskrivað. Gjaldstovan hevur sett seg í samband við Hypotekbankan og spurt, hvat lán talan er um, og hvørjar treytir eru galdandi, men okkum kunnugt er framvegis einki svar komið.

"Partur av langfreistaðu skuldini, sum fellur til gjaldingar innanfyri komandi árið", er brævalánið 300 mió.kr. og árligi avdrátturin av láninum til donsku ríkisstjórnina.

Øll lánini í landsroknskapinum samsvara við lánsavtalur og onnur uttanhýsis skjøl.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

Ár (kr.)	2000	1999	1998
Sambært roknskapinum	393.336.140	366.095.787	258.673.691

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkanir og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri, og týðandi feilir eru ikki millum kreditorskipanina og landsroknskapin.

Útjavningarkonta

Ár (kr.)	2000	1999	1998
Salda 1. januar	-1.583.304.331	-2.354.158.280	-3.922.034.448
RLÚ-úrslit	601.761.663	648.160.264	1.371.499.909
Ymsar broytingar	139.271.031	127.939.628	198.342.999
Salda 31. desember	-842.271.637	-1.578.058.388	-2.352.191.540

"Ymsar broytingar" fevna um broytingar á fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingar av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøka av grunnum, úrslit hjá internum grunnum, broytingar í avsetingum, mótbókingar til útlánsroknskap og mótbókingar til kapitalinnskot. Vit hava kannað grundarlagið undir bókingunum.

Útjavningarkontan líkist ikki "Kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Aktivini í landsroknskapinum verða virðismett øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip, vegir o.t., verða ikki virðismett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

2.6 Umsiting av skatti, avgjøldum o.a.

2.6.1 Roknskapar- og trygdarreglur (GL 1996/2 04 0-2)

Í 1993 ásetti Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya nakrar yvirskipaðar trygdarreglur, herímillum krøv til, hvussu økis- og deildarstjórar skuldu leggja umsitingina á m.a. roknskaparøkinum til rættis. Ein kanning vísti, at fleiri av ásetingunum vórðu ikki fylgdar, m.a. tí reglurnar vóru ikki nóg greiðar, og á fleiri økjum var tørvur á at endurskoða reglurnar.

Økisstjórarnir gjørdu síðani uppskot til nýggja reglugerð við ábyrgdar- og heimildarreglum viðvíkjandi edv-trygd og uppskoti til roknskaparligu mannagongdina. 1. november 1998 góðkendi Stýrið trygdarreglugerðirnar fyri Norðoya-, Eysturoyar-, Vága- og Suðuroyar øki.

Í 1999 vitjaðu vit økini og tosaðu við økisleiðararnar fyri í verki at kanna, hvussu trygdarreglurnar riggaðu. Vit vístu m.a. á, at reglurnar kundu verið betur skipaðar, hugtøk

vóru ógreið, ivi var um eftirlitslistar, atgongd til og ábyrgd av edv var ikki nóg væl skipað, og fleiri arbeiðsøki vóru ikki nóg væl lýst.

Stjórarnir á Toll- og Skattstovuni vóru sum heild samdir við okkum, og settu tí í januar 2000 eitt fólk burturav at arbeiða við at bøta um trygdarreglugerðirnar. Ætlanin var at endurskoða reglugerðirnar innan árslok 2000. Vit mæltu til eisini at gera roknskapar- og trygdarreglurnar fyri Streymoyar øki, Sandoyar øki og fyri Stýrið.

Í februar 2000 kunnaðu vit landsstýrismannin, og í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000, vórðu viðurskiftini eisini umrødd. Í uppskoti til samtyktar 16. mars 2000 um at góðkenna landsroknskapin (Lm. nr. 53/1999) heittu løgtingsgrannskoðararnir á landsstýrismannin um at raðfesta arbeiðið høgt.

Í mai 2000 setti Stýrið ein arbeiðsbólk at endurskoða roknskapar- og trygdarreglurnar. Hann, sum Stýrið hevði sett burturav at bøta um reglugerðirnar, varð settur sum formaður í bólkinum.

Í bólkinum var semja um, at tørvur er á einari sentralari roknskapardeild í Stýrinum, sum mótvegis leiðsluni skal hava ábyrgdina av, at bókhaldsarbeiðið kring landið er nøktandi og einsháttað. Deildin skal ráðgeva á økinum, taka avgerðir í ivamálum og hava samskifti við Gjaldstovuna, Landsgrannskoðanina o.o. Stjórnin gjørdi síðani av at stovna eina tílíka roknskapar-/bókhaldsfunktión í Stýrinum, við beinleiðis tilvísing til stjórarnar, og setti frá 1. januar 2001 eitt fólk í starv, sum eisini skuldi hava ábyrgdina av, at roknskapar- og trygdarreglur verða gjørdar bæði í Stýrinum og á økisskrivstovunum. Hetta starvsfólkið tók yvir formanssessin í arbeiðsbólkinum, eftir at formaðurin 1. januar 2001 var farin í annað starv.

Í arbeiðsbólkinum var semja um at mæla Stýrinum til á økisskrivstovunum at savna allar bókhaldsuppgávur í eina serstaka bókhaldsdeild, og soleiðis skilja bókhaldsuppgávurnar (kassa og skráseting) frá málsviðgerðini, og soleiðis tálma vansunum við verandi skipan, har nógv ymisk fólk tykjast hava ábyrgd av bókhaldinum.

Í fyrsta umfari var ætlanin í Streymoyar øki at savna allar bókhaldsuppgávur í eina serstaka bókhaldsdeild. Ein leiðari varð settur 1. januar 2001, og sum tað fyrsta skuldi hann skipa deildina. Síðani var ætlanin at fara undir at skriva nýggju reglugerðirnar, samstundis sum reglurnar vórðu settar í verk í Streymoyar øki. Henda mannagongd varð hildin at verða frægast, tí arbeiðið er so fjøltáttað, og neyðugt er at taka eina *"bókingartypu"* í senn. Við støði í hesum arbeiði fara reglurnar fyri hini økini at verða endurskoðaðar.

Í frágreiðing okkara í mars 2001 vístu vit á, at Toll- og Skattstova Føroya er størsti umsitingarligi stovnur í landinum. Stovnurin krevur inn skatt og avgjøld, umframt aðrar eftirstøður, og stovnurin hevur soleiðis samskifti við allar borgarar í landinum. Verandi roknskapar- og eftirlitsskipanir eru ikki nóg tryggar, og hjá einum so stórum og fjølbroyttum stovni er vandin fyri mistøkum og skeivleikum stórur. Serliga átrokandi er at gera reglur fyri atgongdum til teldurnar. Vísandi til trupulleikarnar á einum so týðandi øki mælti Landsgrannskoðanin landsstýrismanninum til støðugt at kunna seg um gongdina fyri at tryggja sær, at arbeiðið verður raðfest høgt, og at ein tíðarætlan verður løgd fyri arbeiðinum.

Í august 2001 heittu vit á landsstýrismannin um at boða frá, hvat var hent í málinum, og nær viðurskiftini eftir ætlan fóru at koma í rættlag.

Í oktober 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at uppgávan fór at verða raðfest sera høgt, og var fast punkt á skránni á teimum fundum, sum landsstýrismaðurin aðru hvørja viku hevur við leiðsluna á Toll- og Skattstovuni. Landsstýrismaðurin vísti á, at leiðslan á Toll- og Skattstovuni væntaði, at komið fór at verða á mál við endan av árinum.

Í februar 2002 eru enn ongar formligar broytingar gjørdar í "Trygdarreglunum" fyri Norðoya-, Eysturoyar-, Vága- og Suðuroyar øki. Reglurnar frá 1. november 1998 eru framvegis

galdandi. Stýrið, Streymoyar øki og Sandoyar øki hava enn ikki fingið nakrar formligar roknskapar- ella trygdarreglur at arbeiða eftir.

Bókhaldsdeild, mannað við 2½ fulltíðarstørvum, er sett á stovn í Streymoyar øki. Leiðarin hevur gjørt og lýst reglur fyri ávísum mannagongdum á bókhaldsøkinum. Hesar reglur eru settar í verk á bókhaldsdeildini. Reglurnar eru ikki sendar víðari til Stýrið, og eru ikki formliga góðkendar av økisstjóranum. Leiðarin hevur sett sær fyri at gera nágreiniligar reglur fyri alt bókhaldsøkið, sum hann hevur beinleiðis ábyrgd av.

Upprunaliga var ætlanin at skriva nýggju reglugerðirnar, samstundis sum reglurnar vórðu settar í verk í Streymoyar øki, og við støði í hesum arbeiði skuldu reglurnar fyri hini økini verða endurskoðaðar.

Við støði í rundskrivinum frá Fíggjarmálastýrinum februar 2001, hevur Toll- og Skattstovan sett sær fyri at hava fyrstu útgávuna av eini roknskaparreglugerð lidna um mánaðarlok februar 2002. Leiðarin á roknskapardeildini í Stýrinum, saman við einum samskipara, stendur fyri arbeiðinum.

Í seinnu helvt av januar 2002 fingu nøkur øki hvør sín part av uppskotinum, og skuldu økisstjórarnir viðgera uppskotið á fundi 13. februar 2002. Umframt uppskotið til sjálva roknskaparreglugerðina eru gjørd 18 fylgiskjøl, har ætlanin er at nágreiniligari reglur skulu standa.

Arbeiðið hevur verið merkt av, at tey fólk, sum eru sett til at skriva reglurnar, eru sett í onnur størv innan Toll- og Skattstovuna, ella eru sett til aðrar átrokandi uppgávur, so at bert ein minni partur av teirra arbeiðsorku, hevur verið brúktur til at arbeiða við roknskaparreglum og mannagongdum.

2.6.2 Systemgrannskoðan o.a. (GL 1996/2 04 0-2)

Landsins teldukervi, sum er á P/F Elektron, er av allar størsta týdningi fyri landið, og vit hava fleiri ferðir spurt, hvussu trygdin verður grannskoðað. Toll- og Skattstova Føroya hevur víst á, at P/F Elektron skal fylgja teimum rættiliga strongu trygdarkrøvunum, sum galda fyri edv-virksemið/edv-trygdina hjá felags dátasentralum fyri peningastovnar. Teir verða grannskoðaðir eftir reglunum í "Bekendtgørelse nr. 820 fra 12.12.1991 om systemrevisionens gennemførelse i fælles datacentraler".

Vit hava í hesum sambandi víst á, at umrødda kunngerð einans fevnir um arbeiði og váttan viðvíkjandi systemgrannskoðan av "generelle edv-kontroller", "brugersystemer" og "dataudveksling", sum hevur við skipanirnar hjá peningastovnunum at gera.

Vit mæltu Toll- og Skattstovuni til at kanna, í hvønn mun systemgrannskoðanin sambært "bekendtgørelse nr. 820" fevnir um skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni, og at biðja um eina váttan fyri, í hvønn mun grannskoðanin fevnir um skipanir og tænastur, sum Toll- og Skattstova Føroya fær frá Elektron.

Á fundi í mai 1997 boðaði leiðslan á Elektron frá, at tað ikki var nakar trupulleiki, at Toll- og Skattstovan, í sambandi við systemgrannskoðan av peningastovnsskipanunum sambært "bekendtgørelse nr. 820", eisini fekk útflýggjað eina váttan frá grannskoðaranum hjá Elektron um, at teir generellu edv-kontrollarnir vóru í lagi; men hildið varð, at tá ið talan var um tann partin av systemgrannskoðanini, sum viðvíkur grannskoðan av:

- edb-baserede brugersystemer, som datacentralerne tilbyder til tilsluttede pengeinstitutter, og
- de systemer, der anvendes til udveksling av data med de til datacentralerne tilsluttede pengeinstitutter og med andre datacentraler,

máttu serligar ásetingar/avtalur verða gjørdar viðvíkjandi grannskoðanini, bæði tá ið ræður um Toll- og Skattstovu Føroya og aðrar almennar edv-skipanir, herímillum hvør skal bera kostnaðin. Elektron skuldi koma við uppskoti um eina skipan.

Ætlanin var, at viðurskiftini skuldu vera komin í rættlag í seinasta lagi 1. september 1997, men av ymsum orsøkum helt henda tíðarfreist ikki. Vit hava síðani umrøtt spurningin, men hava ikki fingið nakað greitt svar um støðuna viðvíkjandi systemgrannskoðan. Vit hava tí, m.a. vísandi til tað, sum varð avtalað á fundinum í mai 1997, í januar 2002 spurt landsstýrismannin, hvørjar avtalur um systemgrannskoðan, og møguligar váttanir, eru millum landið og Elektron.

Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at við árslok 2000 gjørdi systemgrannskoðarin hjá Elektron eina frágreiðing "Grannskoðan av almennum KT-eftirliti viðv. Almannadeildini". Frágreiðingin snýr seg um tær telduskipanir, sum landið hevur á Elektron, herímillum skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni. Frágreiðingin snýr seg um tann partin í kunngerðini, sum er nevndur "generelle edv-kontroller". Eisini boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstova Føroya fer at biðja Elektron um eina grannskoðanarfrágreiðing um hinar báðar partarnar í kunngerðini: "brugersystemer" og "dataudveksling".

Frágreiðingin nevnir hesar stóru veikleikar, sum skulu fáast í rættlag, sum skjótast:

1. Forritararnir hava atgongd til at broyta rakstrardáta
2. Skjalfestingin av skattaskipanina er ikki nøktandi.

Harafturat varð mælt til at formalisera mannagongdirnar fyri menning, broytingar og viðlíkahaldi av skipanunum innan 6 mánaðir.

Frágreiðingin nevnir eisini, at tað eru ábendingar um, at brúkarastýringin á Toll- og Skattstovu Føroya er ikki nøktandi, og at tað eru ov nógvir brúkarar, sum hava rætt til at gera týdningarmiklar broytingar í skráunum.

Ad 1) Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Toll- og Skattstova Føroya hevur givið boð um at fáa hesi viðurskifti í rættlag, og leiðslan á Elektron hevur boðað frá, at forritararnir í framtíðini bert fáa lesirættindi til dáta.

Ad 2) Um skjalfestingina av skattaskipanini verður millum annað sagt í frágreiðingini, at hon ikki er á einum slíkum støði, at hon "gevur fólki við rímiligum edv-kunnleika møguleika fyri at finna útav, hvussu skipanin er bygd upp". Víst verður eisini á, at í dag eru bert tvey eftir í starvi, sum vóru við at gera skipanina, og "um størri broytingar í framtíðini skulu verða gjørdar í skipanini, og hesir tvey ikki longri eru í starvi á Elektron, verður sera trupult at gera slíkar broytingar, tí onnur hava lítlan møguleika til at fáa neyðuga vitan til vega um skipanina við at gjøgnumganga dokumentatiónina."

Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at Toll- og Skattstovan fer at biðja Elektron um at gera alla dokumentatiónina av nýggjum, og at gera hetta í sambandi við umleggingina av skattaskipanina frá DL1 til relatiónsdátabasuna DB2, men hetta er ein stór uppgáva, sum tekur tíð.

2.6.3 Stovnsrakstur (GL 2000/2 04 1-2)

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit m.a., at Streymoyar øki og Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya síðani desember 1999 sjálvi høvdu bókað í Fíggjarstýringarskipan landsins. Í hesum sambandi varð álagt Stýrinum og Streymoyar øki, at gera eina roknskaparreglugerð. Reglugerðin var ikki liðug, men arbeitt varð við at fáa viðurskiftini í rættlag. Í januar 2001 spurdu vit landsstýrismannin, hvat síðani var hent í málinum.

Vit vístu eisini á, at í fleiri førum hava starvsfólk atgongd til økir í telduskipanini á Toll- og Skattstovu Føroya, sum tey ikki skulu hava atgongd til. Tí høvdu vit mælt til:

at Stýrið ger eina vegleiðing um, hvørjar EDV-heimildir ikki eru sambærligar, sæð frá einum trygdarsjónarmiði.

at deildarstjórarnir/økisstjórarnir altíð hava samlað yvirlit yvir, hvat hvør hevur heimild til.

at Stýrið (menningardeildin) minst einaferð um árið sendir deildunum/økjunum yvirlit yvir, hvat hvørt starvsfólk hevur heimild til í telduskipanini, og annars tá ið deildarstjórarnir/økisstjórarnir biðja um tað.

at deildarstjórarnir/økisstjórarnir kanna yvirlitið og vátta, um heimildirnar lúka ásett trygdarkrøv.

Stjórnin tók fult undir við tilmælinum og boðaði frá, at menningardeildin var biðin um at seta slíka mannagongd í verk. Vit hava spurt landsstýrismannin, hvat síðani er hent í málinum, og í februar 2002 hevur Fíggjarmálastýrið boðað frá, at einki er hent enn, men ætlanin er ikki slept.

2.6.4 Kassaeftirlit (GL 2000/2 04 0-8)

Avstemman av tøkum peningi

Eins og árini frammanundan hava vit í 2001 verið á ófráboðaðum kassaeftirliti á øllum økjunum á Toll- og Skattstovu Føroya. Eisini varð kannað, um samsvar var ímillum peningastovnskontur í bókhaldinum og kontuavrit frá peningastovnunum eftirlitsdagin. Samanumtikið var einki at finnast at.

Peningastovnskontur skulu verða stemmaðar av minst eina ferð um mánaðin, men eisini í 2001 kom fyri, at longri var ímillum, at konturnar vórðu stemmaðar av, í onkrum føri upp í 3 mánaðir. Vit hava fyrr mælt Stýrinum til at umhugsa, um reglan, at stemma av eina ferð um mánaðin, er nøktandi og nóg neyv fyri kontur, sum hava nógvar og stórar rørslur. Henda mistøk, kann ov long tíð ganga, áðrenn tey verða rættað. Vit hava eisini mælt Stýrinum til at gera eina skrivliga leiðbeining til avstemmanarforritið, fyri at tryggja, at ein bankaavstemman verður røtt og einsháttað kring landið. Í februar 2002 hevur Stýrið boðað frá, at fastar mannagongdir, fyri at stemma av peningastovnskontur, verða settar upp í roknskaparreglugerðini, ið arbeitt verður við at seta í verk, og at arbeitt verður eisini við at gera skrivligar mannagongdir til avstemmanarforritið.

Tíðaravmarkanir

Í bókhaldsskipanini á Toll- og Skattstovu Føroya (BO), er ikki møguligt at gera ein tíðaravmarkaðan roknskap. Dagurin, inntøppað verður, er avgerandi fyri í hvørjum mánaði bókingin verður skrásett. T.d. verða gjaldingar á peningastovnskontu í desember 2000, sum verða inntøppaðar í januar 2001, bókaðar í januar 2001, og harvið í fíggjarárinum 2001.

Bókingarnar í bókhaldsskipanini á Toll- og Skattstovu Føroya verða sjálvvirkandi fluttar sum bókingar til fíggjarstýringarskipan landsins (FSL) til ásetta klokkutíð hvørja nátt. Tá ið gjaldingar ikki verða tíðaravmarkaðar, vísir bókaða saldan á eini peningastovnskontu ikki røttu myndina av veruligu salduni í peningastovninum, og møguligar undirliggjandi inntøkur og útreiðslur verða heldur ikki bókaðar í røttum mánaði/fíggjarári. Er talan um nógvar og stórar upphæddir, t.d. tí komið er í afturhond við at bóka beint fyri árslok, kann tað í ein ávísan mun ávirka rættleikan av landsroknskapinum, og Gjaldstovan hevur fleiri ferðir gjørt vart við henda trupulleika. Sum áður nevnt, hevur Fíggjarmálastýrið í februar 2002 boðað frá at arbeitt verður við at finna eina loysn á hesum trupulleikum.

Bókingar á summum kontum í BO verða ”læstar” í tí løtu, eitt kontuavrit verður gjørt, og tá ber ikki til at bóka ”afturum” henda dagin. Aðrar kontur í BO verða ikki læstar á sama hátt, og vit hava heitt á Stýrið um at taka støðu til, nær tað ikki er neyðugt.

Heimagreiðslu-/heimabankaskipan (GL 2001/1 01 0-9)

Vit eru komin fram á, at Toll- og Skattstova Føroya, Suðuroyar øki og Eysturoyar øki hava stovnað heimagreiðslu-/heimabankasamband. Stýrið hevur eitt tílíkt samband at avgreiða flytingar vegna grunnarnar, sum Toll- og Skattstovan umsitur, og helst hava aðrir stovnar við tílíkt samband.

Í § 15, stk. 1, í roknskaparkunngerðini er ásett, at allar útgjaldingar skulu fara fram um búskaparskipan landsins. Eisini er ásett í stk. 1, at hevur Fíggjarmálastýrið givið loyvi til egnar peningastovnskontur, kunnu tær bert verða nýttar samsvarandi tí, ið Fíggjarmálastýrið hevur ásett sambært § 3, stk. 6.

Í tíðindaskrivi frá Gjaldstovuni 7. november 2001 varð kunnað um nýggju ”Bektflytingarskipanina”, ið kann avgreiða útgjaldingar frá FSL-útgjaldingarskipanini elektroniskt beinleiðis inn í peningastovnskervið. Endamálið við FSL-útgjaldingarskipanini var at taka av allar tær ymisku útgjaldingarskipanirnar sum vóru, so at bert ein flutningsrás varð úr landskassanum í peningastovnarnar. Hildið verður, at við Bektflytingarskipanini er tað vorðið veruleiki, so tað nú er gjørligt at avgreiða allar útgjaldingar um búskaparskipan landsins, soleiðis sum ásett í § 15 í roknskaparkunngerðini.

Vit hava vísst á nógva samskiftið um vansarnar við, at almennir stovnar nýttu heimagreiðslu-/heimabankaskipanina, og tað var ein orsøk til, at skundað varð undir at gera Bektflytingarskipanina lidna. Vit hava spurt, hvørja støðu landsstýrismannin hevur til henda spurning.

Í februar 2002 hevur landsstýrismaðurin svara, at Fíggjarmálastýrið ásannar, at tað er rættast, at bert ein flutningsrás verður úr landskassanum í peningastovnarnar. Fíggjarmálastýrið hevur viðgjørt henda spurning saman við leiðsluni á Toll- og Skattstovu Føroya. Niðurstøðan var, at farið verður burtur frá at nýta heimagreiðslu/heimabanka.

Góðkenning av mánaðarroknskapinum

Tá ið vit vóru á kassaeftirliti í Streymoyar-, Norðoya- og Suðuroyar øki, kannaðu vit eisini, hvussu góðkenning av mánaðarroknskapinum fer fram. Sambært § 9 í roknskaparkunngerðini hevur stovnsleiðarin, mótvegis aðalstýrinum, ábyrgdina av mánaðarliga at góðkenna roknskapin, og í góðkenningini er m.a. álagt honum at hava eftirlit við, at tær ásettu mannagongdirnar verða hildnar.

Tá ið økisstjórarnir vátta mánaðarroknskapin, kanna teir ikki, um ”egnar” búskaparskipanir eru stemmaðar av. Vit hava mælt Stýrinum til at kunna økisstjórarnar skrivliga um, hvat teirra váttan á mánaðarroknskapin ber í sær, og hvørjar kontur í ”egnum” búskaparskipanum innan Toll- og Skattstovu Føroya, teir hava ábyrgd av at stemma av. Í februar 2002 hevur Stýrið boðað frá, at skrivligar mannagongdir verða gjørdar, soleiðis at økisstjórarnir ikki eru í iva um, hvat teirra ábyrgd er, og hvat skal vera stemmað av, tá ið teir vátta mánaðarroknskapin. “Egnar” búskaparskipanir verða stemmaðar av í Stýrinum.

2.6.5 Edv-skráir (GL 2000/2 04 1-2)

Til fyrst í 1995 vórðu allar skráir hjá Toll- og Skattstovu Føroya góðkendar av Skrásetingareftirlitinum. Seinni hava teir sent nýggjar skráir at góðkenna. Toll- og Skattstova Føroya hevur mælt Skrásetingareftirlitinum til at gera eina samlaða góðkenning av øllum dagførdum skráum, men teir hava einki svar fingið frá Skrásetingareftirlitinum. Sostatt eru skráir tiknar í

nýtslu hesa tíðina uttan at vera formliga góðkendar. Eisini kunnaði Fíggjarmálastýrið í oktober 2000 um, at innkrevjingarskipanin ikki er ment liðug, men at so skjótt, hon er klár, verður hon send Skrásetingareftirlitinum at góðkenna.

1. januar 2002 kom Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum" í gildi, og samstundis fór Ll. nr. 62 frá 5. juni 1984 "um evnisskráir hjá almennum myndugleikum" úr gildi. Sambært § 48 í Ll. nr. 73/2001 skulu skráir, ið eru góðkendar eftir "gomlu" skrásetingarlógini, innan seks mánaðir lúka krøvini í nýggju lógini. Vit hava heitt á landsstýrismannin um at taka støðu til, hvørji tiltøk eru neyðug at seta í verk, fyri at lúka hesar treytir.

2.6.6 Innkrevjing (GL 2001/2 04 9-1)

Landsgrannskoðanin hevur havt nógv samskifti við Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna um innkrevjingina, og hevur tað í stóran mun verið tengt at avstemmanar- og bókhaldstrupulleikum. Niðanfyri hava vit í stuttum tikið samanum gongdina viðvíkjandi innkrevjingini, verandi støðu og trupulleikar, og víst verður eisini á tær ábøtur, sum eru og ætlandi verða framdar.

Inngangur

Í fylgiskjølunum til fíggjarlógaruppskotið 1995, vísti landsstýrismaðurin á aktuella tørvin á eini innkrevjingarskipan, í sambandi við at arbeitt varð við eini nýggjari fíggjarstýringarskipan við til hoyrandi debitorskipanum. Víst varð á, at:

1. innkrevjingarviðurskiftini hjá sama borgara vórðu viðgjørd í fleiri skipanum, sum ikki vóru samanbundnar,
2. markamótið millum Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna var ógreitt,
3. innkrevjingin varð ikki loyst sum ein sergrein,
4. arbeitt varð við eini lóg um innkrevjing av øllum almennum krøvum,
5. innkrevjingin má verða samskipað við høvuðsbókhaldið, so tað slepst undan óneyðugum bókingum, feilum og millumrokningum.

DEMM-innkrevjingarskipanin, sum Føroya Gjaldstovu alment tók í nýtslu í mars 1996, varð í apríl 1998, saman við starvsfólkunum, flutt til eina nýggja innkrevjingardeild á Toll- og Skattstovuni.

Í september 1999 helt Toll- og Skattstovan tað vera ov dýrt at tryggja edv-umhvørvið kring DEMM-skipanina í sambandi við ársskiftið 2000, og tí var gjørt av at fara undir at gera eina nýggja innkrevjingarskipan (IK-skipanina). Avgerðin varð sostatt ikki tikin fyrr enn tríggjar mánaðir áðrenn nýggja skipanin skuldi takast í nýtslu.

Toll- og Skattstovan kom tí í álvarsama tíðarneyð. Tað ráddi um at fáa eina skipan her og nú. Tað eydnaðist væl viðvíkjandi teim krøvum og skipanum, sum Toll- og Skattstovan frammanundan varðaði av og kendi til, men trupulleikar stungu seg upp við øðrum krøvum og skipanum, m.a. sum Almannastovan varðaði av. Eingin yvirskipað ætlan varð gjørd, sum nágreiniliga lýsti, hvussu peninga- og bókhaldsrenslið skuldi verða skipað, fyri allar teir mongu debitorbólkarnar, sum lógu uttanfyri Toll- og Skattstovuna. Samskiftið millum Fíggjarmálastýrið, Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna kundi verið væl betri skipað. Toll- og Skattstovan hevði ikki stundir at gera eina neyva kravfesting, og gáaði ikki um, hvussu umfatandi tann gamla DEMM-skipanin var, og hvørji krøv hon setti til samskiftið við aðrar telduskipanir og aðrar landsstovnar.

Hesi viðurskifti hava merkt arbeiðið við IK-skipanini síðani, og nógv og góð arbeiðsorka er nýtt til at rætta feilir, upploysa millumrokningar, fyribilsbókingar o.a.

Bygnaður

Økisstjórarnir á Toll- og Skattstovuni hava ábyrgd av at heinta inn eftirstøður frá borgarunum, sum búgva í teirra øki. Á økisskrivstovunum eru pantifútar, sum greiða øll innkrevjingarmál, sum eru í IK-skipanini. Tað eru bert torgreidd mál, ið verða send Stýrinum.

Í Stýrinum er tað eftirlits- og innheintingardeildin, sum hevur ábyrgd av innheintingini, og ein samskipari er settur at hava ábyrgd av innheintingarmálunum. Fremsta uppgáva hansara er at skipa fyri og hava eftirlit við, at innkrevjingin er á einum fakliga nøktandi støði, og at hon er eins kring alt landið. Hóast økisstjórarnir hava ábyrgd, skulu teir fylgja rættleiðingum og vegleiðingum frá samskiparanum, og samskiparin skal hava eftirlit við, at rættleiðingarnar og vegleiðingarnar verða fylgdar. Alt samskifti um innheintingarmál millum økisstjórarnar, Stýrið fyri Toll- og Skattstovuna og deildir í Stýrinum skal fara um samskiparan.

Menningardeildin í Stýrinum hevur saman við stjóranum ábyrgdina av at menna IK-skipanina.

Roknskapar- og bókhaldsleiðarin hevur saman við menningardeildini ábyrgdina av roknskapinum, og ábyrgdina av at stemma av millum skipanirnar.

Innkrevjingarskipanin

Í IK-skipanini eru fyrst og fremst krøv, sum Toll- og Skattstovan "eigur" m.a. skatta- og MVG-krøv. Afturat hesum eru barna- og konupeningur, avlamislán, sjúkrakassagjøld og vegskattur, umframt útlendsk krøv, sum vit sambært sáttmála hava bundið okkum til at heinta inn. Í løtuni verður arbeitt við at loysa innkrevjingina av lestrarlánum.

Upprunaliga var ætlanin, at IK-skipanin skuldi verða ein rein innheintingarskipan, sum bert fekk boð um krøv, sum skuldu verða heintað inn. Krøvini sjálvi skuldu framvegis verða skrásett í egnari debitorskipan.

Sambært Toll- og Skattstovuni hevur tað darvað menningina av IK-skipanini, at tað hevur verið neyðugt at teingja eina serliga debitorskipan uppí IK-skipanina, sum so er komin afturat øðrum debitorskipanum hjá landinum. Í løtuni eru hesir debitorbólkar í skipanini: barna- og konupengar, avlamislán, sjúkrakassaeftirstøður og útlendsk krøv.

Tað er einki samband millum IK-skipanina og debitorar í FSL-skipanini, og heldur einki samskifti við útgjaldingar í FSL-skipanini. Samskiftið við aðrar telduskipanir uttan fyri Toll- og Skattstovuna fer fram við listum og brøvum, við teimum feilum, hetta kann bera í sær.

Krøv í FSL-debitorskipanini á Gjaldstovuni verða ikki skrásett í IK-skipanini, og verða ikki heintað inn av Toll- og Skattstovuni. Í skrivi 8. mai 2000 til allar stovnar, sum nýta FSL-debitorskipanina, kunnaði Gjaldstovan um, at eingi krøv vórðu send til Toll- og Skattstovuna at heinta inn, tí bíðað varð, til krøvini kundu verða send til IK-skipanina. Gjaldstovan helt tað ikki vera ráðiligt at bíða longur eftir eini loysn, og helt tað vera neyðugt, at stovnarnir sjálvir fóru undir at krevja inn, við at senda krøvini til sakførara at heinta inn. Kunnað varð um, at krøvini lógu framvegis í mótrokningarskipanini hjá Gjaldstovuni, og álagt varð stovnunum at umsita alt samskiftið við egnan sakførara, boða honum frá um kravið skuldi verða broytt, t.d. tí mótroknað varð, ella tí kreditnota varð skrivað. Sostatt er innkrevjingin av øllum eftirstøðum, hjá teimum stovnum sum nýta FSL-debitorskipanina, nú litin upp í hendurnar á hvørjum einstøkum stovni og teimum sakførarum, sum stovnarnir venda sær til.

Føroya Gjaldstova mótroknar bert í sínum egnu útgjaldingum. Eingi krøv í FSL-debitor verða mótroknað í útgjaldingum frá Toll- og Skattstovuni. Toll- og Skattstovan mótroknar í teimum útgjøldum, sum Toll- og Skattstovan hevur beinleiðis ábyrgd av, men mótroknar ikki

í útgjøldum hjá Føroya Gjaldstovu. Hesin spurningur hevur fleiri ferðir verið til viðgerðar. Gjaldstovan heldur, at ein politisk avgerð skal verða tikin, um í hvønn mun mótroknað eigur at verða í "formuurættarligum" krøvum. Toll- og Skattstovan hevur boðað frá, at løgfrøðingar á Toll- og Skattstovuni í løtuni arbeiða við at greiða spurningin.

Í innganginum varð víst á 5 grundleggjandi trupulleikar við innkrevjingini, so sum hon var skipað í 1994, og sum peningur varð játtaður til at loysa. Hóast innkrevjingin á fleiri økjum virkar væl, og sum heild helst er munandi betur enn hon var í 1994, so eru á fleiri økjum somu trupulleikar:

1. Innkrevjingarviðurskiftini hjá sama borgara verða framvegis viðgjørd í fleiri skipanum, sum ikki eru samanbundnar (Dømi: mótrokningar verða gjørdar í skipanum, sum einki samband hava við hvørja aðra. Fallin krøv í skipanini á Gjaldstovuni skulu verða send beinleiðis til sakførara, uttanum innheintingina á Toll- og Skattstovuni. Krøv í skipanum á Toll- og Skattstovuni verða ikki mótroknað í útgjaldingum á Gjaldstovuni.)
2. Markamótið millum Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna er framvegis ógreitt á fleiri økjum (Dømi: í innheintingarhøpi er einki markamót, og bókhaldsliga stemma millumrokningar ikki.)
3. Innkrevjingin verður ikki til fulnar loyst, sum ein sergrein (Dømi: landsstovnar, sum hava sínar debitorar á Føroya Gjaldstovu, mega sjálvir stíla fyri innheintingini.)
4. Lóg um innkrevjing er ikki gjørd.
5. Innkrevjingin er ikki nóg væl samskipað við høvuðsbókhaldið, og er framvegis talan um óneyðugar bókingar, feilir og millumrokningar. (Dømi: samskiftið við skipanir uttanfyri Toll- og Skattstovuna fer fram við listum og brøvum, og talan er um nógvar millumrokningar millum skipanir, sum ikki stemma.)

Ábøtur

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 boðað frá, at hann hevur sett sær sum mál, at øll ógreið viðurskifti millum ímillum IK- og FSL-skipanirnar skulu verða komin í rættlag innan 1. november 2002. IK-skipanin skal tá lúka øll krøv í roknskaparkunngerðini, og landsstýrismaðurin vísir í hesum sambandi eisini á:

1. at øll útgjøld skulu fara um búskaparskipan landsins, og ikki um peningastovnskontur hjá Toll- og Skattstovuni,
2. at vantandi tíðaravmarkanarførleiki í IK-skipanini má verða loystur,
3. at sjálvvirkandi dátasamskifti skal verða skipað sambært ásetingum frá Gjaldstovuni,
4. at skrivlig rakstraravtala skal verða gjørd millum Toll- og Skattstovuna og Gjaldstovuna um viðlíkahald av kontuskipan/-brúgv, avstemmanir, eftirlit o.a.,
5. at Gjaldstovan skal hava ein samskipandi og góðkennandi leiklut, tá ið nýggj markamót verða skapað millum IK-skipanina og aðrar stovnar t.d. Almannastovuna og Stuðulsstovnin,
6. at avtalan eisini skal fevna um, hvussu verður farið kvalifiserað fram, um mótroknað verður í FSL-útgjaldingum.

Brúkaravegleiðingarnar o.t. hava ikki verið nøktandi, og brúkararnir hava ikki havt neyðugan kunnleika til teir møguleikar, sum eru í IK-skipanini. Fyri at bøta um hetta, er menningardeildin á heysti 2001 farin undir at skriva eina nágreinliga brúkaravegleiðing, umframt vegleiðing um innkrevjingarmanngongdir mótvegis brúkarum og stovnum. Eisini er menningardeildin millumlið millum brúkarar og forritarar, í sambandi við at bøtt verður um skipanina, m.a. verða gjørdar áminningarskipanir um fyrning, panting o.a. umframt aðrar ábøtur, fyri at lætta um arbeiðsgongdirnar.

Innkrevjing av vinnulánum

Í 1997 varð ábyrgdin av innkrevjingini flutt frá Fíggjar- og búskapardeildini til Gjaldstovuna, og í apríl 1998 varð innkrevjingin flutt til Toll- og Skattstovu Føroya. Í juli 1999 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Toll- og Skattstova Føroya var í ferð við gjølla at gjøgnumganga vinnulánini, við tí fyri eyga at krevja inn tað, sum bar til. Steðgur kom í, tá ið starvsfólkið, sum sat við málinum, fór úr starvi.

Í mars 2001 boðaði Toll- og Skattstovan frá, at fólk við royndum aftur skuldi verða sett at kanna vinnulánini og kanna, um vinnulánini skuldu verða løgd inn í IK-skipanina. Tað er ikki gjørt, og í løtuni er eingin skipað mótrokning. Toll- og Skattstova Føroya ansar eftir, at lánini ikki fyrnast.

Í februar 2002 boðaði Toll- og Skattstovan frá, at í samráð við Fiskimálastýrið, sum "eigur" flest øll vinnulán, vóru øll vinnulán í desember 2001 send sakførara, so hann kundi meta um, hvørt tað varð møguligt at fáa nakað aftur av lánunum. Sakførarin hevur í januar 2002 givið Toll- og Skattstovuni eina samlaða meting. Hann vísir á, at flestu partafeløgini millum skuldararnar eru strikað, og í øðrum førum vanta neyðug skjøl. Viðvíkjandi teimum málum, sum í løtuni eru til innheintingar, er niðurstøðan, "at nakað kann væntast at koma inn afturat, partvíst tí vit umsita avdráttarskipanir, og partvíst tí trygd er fingin. Viðvíkjandi teimum málum, sum ikki eru komin til innheintingar, verður nokk eisini møguligt at fáa nakað inn. Men størsti parturin fer uttan iva at enda úrslitaleyst og verður ongantíð goldin." Toll- og Skattstovan fer at mæla landsstýrismanninum til at krevja inn tað, sum á nakran hátt er møguligt.

2.6.7 Innflutningsgjøld (GL 2001/2 04 5-7)

Vit hava gjørt ávísar teldukanningar av tollskrásetingum, sum vit av royndum vita, viðhvørt eru skeivar. Staðfestir vórðu feilir, sum høvdu peningaliga týdning. Feilirnir vórðu fráboðaðir økjunum og eru rættaðir.

2.6.8 Tollkredittur (GL 1996/2 04 5-6)

Sambært § 13, stk. 2, í Ll. nr. 121/1991 "um toll" v.s.b. hevur tollvaldið heimild at geva innflytarum undantaksloyvi frá høvuðsregluni um at gjalda toll kontant, áðrenn vøran verður flýggjað út. Neyvari reglur eru ásettar í K. nr. 68/1999 fyri "undantaksloyvi at fáa toll- og avgjaldsskyldugar vørur útflýggjaðar móti veiting av peningatrygd (tollkreditt)".

Gongdin árini frammanundan hevur vístur, at tá ið staðfest verður, at innflytari ikki kann gjalda, skyldar hann sum oftast innflutningsgjøld o.a. fyri í minsta lagi 3 mánaðir. Peningatrygdin svarar bert til ein triðing av skuldini, og tí er vandi fyri, at landskassin altíð vil missa pening, koma stórir innflytarar í fíggjarligar trupulleikar.

Landsstýrismaðurin boðaði í mars 2001 frá, at hann, frá 1. januar 2002, ætlaði at stytta kredittíðina við einum mánað, og 4. oktober 2001 varð nýggj kunngerð lýst at koma í gildi 1. januar 2002. Í § 2, stk. 1, í K. nr. 131/2001 er kreditttíðin broytt frá 22. í øðrum mánaði eftir, at vørurnar eru móttiknar til 28. í mánaðinum eftir, at vørurnar eru móttiknar.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at talið á ótollaðum sendingum eldri enn 14 dagar var vaksið, uttan at vøruinnflytarar høvdu mist undantaksloyvið. Eftir okkara tykki liggur her ein stórur tapsvandi, tí í veruleikanum er talan um ein vøkstur í ikki skrásettum eftirstøðum. Hevur innflytari vaksandi innflutning, kann hann eisini seinka kravinum, um at trygdin skal hækka, við ikki at lata inn skjølini til ásetta tíð. Á henda hátt veksur tapsvandin hjá landskassanum uppaftur meira. Landsstýrismaðurin hevur í mars 2001 heitt á Toll- og Skattstovu Føroya um at "stramma mannagongdina upp" á hesum øki, og um neyðugt, at nýta § 4 í

kunngerðini um afturtøku av tollkredittinum. Ein kanning í februar 2002 vísti, at í Streymoyar øki er talið av ótollaðum sendingum eldri enn 14 dagar væl minni enn í seinastu kanning.

Hvønn mánað kannar Toll- og Skattstova Føroya, um vøruinnflytararnir hava kravdu trygdina, og teir verða bidnir at hækka hana, er hon ov lítil. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at innflutningurin veksur, veksur eisini talið á teimum, sum ikki hava nóg stóra trygd. Landsstýrismaðurin heitti í mars 2001 á Toll- og Skattstovu Føroya um at styrkja umsitingina á hesum øki. Ein kanning í februar 2002 vísti, at í Streymoyar øki er talið av vøruinnflytarum, ið ikki lúka treytirnar um trygd, lækkað.

2.6.9 Rentuskattur (GL. 2000 / 2 04 4-2)

Í november 2000 vitjaðu vit í Stýrinum á Toll- og Skattstovu Føroya og kunnaðu okkum um, hvussu rentuskattaskipanin verður umsitin. Í februar 2001 varð ein fyribilsfrágreiðing send Stýrinum til viðmerkingar. Stýrið svaraði í august 2001, og í oktober 2001 varð frágreiðing latin landsstýrismanninum, sum svaraði okkum í november 2001. Niðanfyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini, og vit hava eisini tikið við viðmerkingar frá Stýrinum og landsstýrismanninum.

Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 87 frá 5. juni 1992 "um rentuskatt" við seinni broytingum, seinast við Ll. nr. 170 frá 22. desember 1995. Heimild er í § 6 í lógini at áseta neyvari reglur um fyrisitingina av lógini, og í § 2, stk. 4, er álagt Landsstýrinum at áseta neyvari reglur um uppgerð og avrokning av rentuskatti eftir stk. 3. Tað er ongantíð gjørt.

Í stuttum kann verða sagt, at persónar, sum eru undir skattskyldu, skulu rinda 35% í skatti av rentu í føroyskum peningastovnum og av rentu av føroyskum lánsbrøvum. Peningastovnar og postgiro skulu í seinasta lagi tann 15. í mánaðinum aftaná rentutilskriving avrokna rentuskattin til landskassan.

Eisini hava Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur og Færøernes Realkreditinstitut skyldu at rinda rentuskatt av innistandandi bæði í føroyskum og í útlendskum peningastovnum umframt av virðisbrøvum.

Reglurnar um rentuskatt eru nú ásettar í Ll. nr. 164 frá 21. desember 2001 "um skatting av kapitalvinningi", og nevndu almennu stovnar/grunnar hava ikki longur skyldu at rinda rentuskatt.

Roknskaparviðurskifti

20.52.1.19. Rentuskattur (1.000 kr.)

Fíggjarár	**2000**	**1999**	**1998**	**1997**	**1996**
Fíggjarlóg	30.000	30.000	30.000	40.000	46.000
Roknskapur	41.821	31.387	37.924	34.312	43.685

Vit hava heft okkum við, at roknskapartølini í 2000 eru munandi hægri enn í 1999, sum aftur eru væl lægri enn í 1998. Fíggjarmálastýrið hevur vístá, at orsøkin fyrst og fremst er, at innlánsrentan í 1999 var serliga lág.

Vit hava vístá, at ein onnur orsøk er, at nakrir peningastovnar í desember 1999, í juni og í desember 2000, ikki afturhildu rentuskatt av tilskrivaðu rentuni hjá Íleggingargrunninum. Hesin skeivleiki varð rættaður í januar 2001, og rættingin varð bókað í landsroknskapinum 2000. Eisini kann verða nevnt, at skattur av rentu av virðisbrøvum fyri árini 1997-2000 hjá Íleggingargrunninum varð í januar 2001 bókaður í landsroknskapinum 2000, og inngjaldið frá einum peningastovni fyri seinna hálvár í 1999 er komið við í landsroknskapin fyri 2000.

Høvuðskonta 20.52.1.22. "Fíggjarognaravgjald" vísir í 1999 kr. 2.980.000, í 2000 kr. 56.077 og í 2001 kr. 24.663, hóast fíggjarognaravgjaldið varð tikið av við lóg 1. januar 1997. Skeivleikin kemst av, at ein partur av rentuskattinum, sum er goldin til Toll- og Skattstovu Føroya, er endaður á skeivari kontu í landsroknskapinum.

Vit hava biðið Toll- og Skattstovu Føroya um eina neyva útgreining av øllum bókingum av rentuskatti síðani 1995.

Vit hava víst á, at eingin tykist hava havt ábyrgdina av og eftirlit við, at rentuskattur allur verður goldin, og at innkomin rentuskattur verður bókaður á rætta kontu í landsroknskapinum. Til 26. februar 2001 stóð eingin á Toll- og Skattstovu Føroya at hava ræðisrætt á hesum øki, men síðani hevur annar stjórin á Toll- og Skattstovu Føroya havt ræðisrættin. Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya hevur ikki nakra skrivaða reglugerð ella mannagongd fyri, hvussu rentuskattur skal verða umsitin.

Rentuskattur frá peningastovnunum

Teir føroysku peningastovnarnir afturhalda og avrokna tað mesta av rentuskattinum. Vit hava víst á, at Stýrið á Toll- og Skattstovu Føroya hevur ikki havt nøktandi eftirlit við, um peningastovnarnir og postgiro:

- krevja tann rentuskatt, sum teir skulu,
- gjalda, tann rentuskatt, teir skulu
- gjalda rentuskattin rættstundis.

Stýrið hevur einki yvirlit yvir, hvat peningastovnarnir og postgiro hava goldið, hvørki samlað ella hvør sær, og einans bókingarteksturin gevur eina ábending um, hvør tað er, sum hevur goldið.

Landsstýrismaðurin hevur víst á, at í stóran mun hevur eftirlitið verið grundað á innaneftirlit og grannskoðan í peningastovnunum. Vit hava víst á, at Stýrið fær ikki nakra váttan frá peningastovnunum og postgiro ella grannskoðarum teirra um, at tað, teir avrokna, er rætt. Stýrið boðar ikki peningastovnunum og postgiro frá, hvørjir grunnar, hvørji p-tøl og hvørji v-tøl skulu rinda rentuskatt av innistandandi í føroyskum peningastovnum og postgiro.

Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at tá ið Toll- og Skattstovan, í samráð við peningastovnarnar, hevur kannað allar innlánskontur, verður støða tikin til, hvussu eftirlitið skal verða í framtíðini.

Eingin morarenta verður kravd. Einki stendur beinleiðis í rentuskattalógini um morarentu, tá ið peningastovnar og giro ikki gjalda til tíðina, men í § 7 stk. 1, er ásett, at reglurnar í skattalóggávuni eru galdandi fyri rentuskatt, har ikki annað er ásett. Landsstýrismaðurin hevur víst á, at í nýggju lógini um skatt av kapitalvinningi er áseting um morarentu, verður goldið ov seint.

Samskifti við peningastovnarnar

Í august 1994 hevði eftirlitsdeildin í Stýrinum fundir við Føroya Banka, Føroya Sparikassa og Elektron, tí eftirlitsdeildin ætlaði at grannskoða umsitingina av rentuskattalógini. Á fundunum søgdu peningastovnarnir, at sum meginregla eru allir kundar rentuskattskyldugir. Undantøkini verða skrásett eftir upplýsingum frá kundunum. Koturnar verða settar á manuelt. Verður ein kundi aftur rentuskattskyldugur, skal hann sjálvur boða bankanum frá, tí annars kemur hann ikki at rinda rentuskatt.

Eisini varð víst á tað grundleggjandi skeiva í, at peningastovnarnir sjálvir skuldu meta um skattskylduna hjá kundunum. M.a. vísti ein peningastovnur á, at postnummur hjá kundunum verða nýtt til at gera av, um kundin skal gjalda rentuskatt ella ikki, og at kundar við

postnummari < 100 og > 999 gjalda ikki rentuskatt. Hildið varð, at skrásetingartrygdin hevði verið munandi betri, avgjørdi Toll- og Skattstovan skattskylduna.

Toll- og Skattstova Føroya gjørdi ikki meira við málið. Landsstýrismaðurin vísir á, at hóast Toll- og Skattstovan helt tað vera ein trupulleika, at peningastovnarnir mettu um skattskylduna hjá fólki, so fekk Toll- og Skattstovan í 1994 ta fatan, at mannagongdin í peningastovnunum stórt sæð var nøktandi, og Toll- og Skattstovan valdi heldur at brúka arbeiðsorkuna til aðrar uppgávur, m.a. tí tað snúði seg um 145.000 kontur.

Vísandi til umrøðuna av samskiftinum við peningastovnarnar í 1994 boðaði Stýrið á Toll- og Skattstovu Føroya í august 2001 frá, at Stýrið var samt við peningastovnunum í, at tað ikki vóru teir, sum skuldu gera av skattskylduna í sambandi við rentuskattalógina, men harafturímóti Stýrið. Í august 2001 heitti Stýrið tí á allar peningastovnar um at lata teimum yvirlit yvir allar innlánskontur ultimo 2000 við frámerki, um kontan rindar rentuskatt sambært rentuskattalógini. Stýrið hevur síðani kannað hesi yvirlit, sum vísa, at tað eru kontur, sum ikki rinda eftir ásetingunum í lógini. Stýrið greiddi í februar 2002 frá, at tað hevur latið tveimum teimum størstu peningastovnunum fyribils uppskot til loysn av ivaspurningunum viðvíkjandi umsiting av rentuskattinum.

Landsstýrismaðurin heldur tað vera rætt nú at gjøgnumganga allar innlánskontur í peningastovnunum, og síðan við ávísum millumbilum endurtaka tað. Vísandi til serligu kelduskattaskipanina fyri rentuinntøkur, heldur landsstýrismaðurin tað vera skilagott, at Toll- og Skattstovan eisini í so stóran mun sum tilber, grundar sítt arbeiði á tað umfatandi innaneftirlit og ta grannskoðan, sum er í peningastovnunum.

Almennir stovnar/ grunnar

Sum sagt frá, hava Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur og Færøernes Realkreditinstitut havt skyldu at rinda rentuskatt av innistandandi bæði í føroyskum og í útlendskum peningastovnum, og eisini av virðisbrøvum. Í lógini er ásett, at Toll- og Skattstovan vegna landskassan skrivar teimum rokning við gjaldsfreist, og verður ikki goldið rættstundis, skal verða rindað 1,5% í rentu um mánaðin, frá og við forfalsdegnum at rokna.

Toll- og Skattstovan hevur ikki sent rokning, og eingin morarenta er roknað. Grunnarnir hava goldið rentuskatt til Føroya Gjaldstovu ella til Toll- og Skattstovu Føroya. Nakrar uppgerðir eru sendar Gjaldstovuni, í sambandi við at goldið verður. Toll- og Skattstova Føroya hevur einki yvirlit yvir tað, grunnarnir hava goldið, hvørki samlað ella hvør sær, og bert bókingarteksturin, kann geva eina ábending um, hvør tað er, sum hevur goldið. Vit hava víst á, at Toll- og Skattstova Føroya hevur ikki havt nøktandi eftirlit við, um grunnarnir rættstundis hava goldið tann rentuskatt, teir skulu.

Stýrið hevur í skrivi til Landsgrannskoðanina í august 2001 boðað frá, at tað fer at senda skriv til grunnarnar/stovnarnar, og biðja um uppgerð yvir samskifti við útlendskar peningastovnar, sum so verður sett upp sum krav og sammett við, nær goldið er inn.

Føroysk lánsbrøv

Sambært § 5 í rentuskattalógini skal renta av føroyskum lánsbrøvum gevast upp til skattingar á sjálvuppgávuni fyri viðkomandi ár. Toll- og Skattstova Føroya roknar 35% av rentuni, sum er givin upp, sendir rokning til eigaran, og skuldskrivar eigaran í bókhaldskipanini á Toll- og Skattstovu Føroya. Hvør skuldarin fær sína kontu. Verður ikki goldið til tíðina, verður renta automatiskt tilskrivað skuldarakontuni. Hetta arbeiðið varð gjørt í Stýrinum, men seinni er tað lagt út á økini. Vit hava víst á, at í trygdarreglunum, sum eru gjørdar fyri 4 økir á Toll- og Skattstovu Føroya, er einki nevnt um tann partin av rentuskattinum, sum økini umsita.

2.6.10 Framleiðsluavgjald (GL 1999/2 04 6-6)

Í 2001 hava vit grannskoðað "framleiðsluavgjøld", og í tí sambandi verið á eftirliti á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar- og Norðoya øki, har vit kannaðu, hvussu umsitingin av framleiðslugjøldum fer fram.

Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 111 frá 13. juni 1997 "um avgjald á framleiðslu og innflutningi". Sambært § 2 í lógini skal avgjald verða rindað til landskassan fyri ávísar vørur, sum verða framleiddar til sølu við vinnuligum endamáli. Hvørjar vørur talan er um, og hvussu stórt avgjaldið skal vera, er ásett í frumskjali 1 til Toll- og vøruskránna.

Sambært § 3 skal Toll- og Skattstova Føroya geva loyvi til at framleiða nevndu vørur, og skal í loyvinum áseta, hvørjar treytir loyvishavarin skal lúka. Toll- og Skattstovan veit ikki um nakað loyvi til at framleiða avgjaldsskyldugar vørur.

Í § 5 er ásett, at gjøldini falla til gjaldingar 22. í øðrum mánaðinum eftir, at vøran er framleidd, og um ov seint er goldið, skal 1,5% verða goldið í mánaðarligari rentu.

Nýtt lógaruppskot um avgjald á framleiðslu og innflutningi er lagt fyri tingið 15. januar 2002. Har eru reglurnar um loyvi strikaðar, og rentan er lækkað til 1% og avgjaldstíðarskeiðið stytt.

Roknskaparviðurskifti

20.52.2.16. "Framleiðsluavgjøld" (1.000 kr)

Fíggjarár	**2000**	**1999**	**1998**	**1997**
Fíggjarlóg	16.000	16.000	15.000	14.000
Roknskapur	14.933	16.094	16.144	15.599

Einans bryggjaríini og Tjaldurs Apotek rinda í dag framleiðsluavgjald. Vit hava spurt, um talan kann vera um onnur virkir, og hvussu Toll- og Skattstovan kannar, hvørji virkir møguliga framleiða avgjaldsskyldugar vørur. Stýrið heldur, at møguligt er at finna fram til hesi virkir m.a. við eftirliti og við teirri vitan, starvsfólkið hevur um tey ymisku virkini.

Áðrenn hálvan í hvørjum mánaði senda bryggjaríini "mánaðaruppgerð" yvir framleiðsluna av avgjaldsskyldugum øli fyri undanfarna mánað til viðkomandi øki hjá Toll- og Skattstovu Føroya. Í uppgerðunum stendur nær og hvussu nógv er tappað. Litratalið er faldað við avgjaldssatsinum, og "mánaðaruppgerðin" vísir, hvussu nógv bryggjaríið skal gjalda.

Økini hava greitt frá, at bryggjaríini altíð hava goldið til tíðina, og tí hevur ongantíð verið neyðugt at tilskriva rentu.

Tjaldurs Apotek sendir einki yvirlit yvir framleiðsluna, uttan at rykt verður eftir tí, og tað gongur long tíð at fáa uppgerð yvir framleiðsluna. Økisstjórin hevur umrøtt málið við landsapotekaran fyri at bøta um mannagongdina.

Eftirlit

Sambært trygdarreglunum, sum eru gjørdar fyri Norðoya-, Eysturoyar-, Vága- og Suðuroyar øki, hevur Tollvaldið eisini eftirlit við, at framleiðslugjald á bryggjaríunum verður roknað av allari avgjaldsskyldugari framleiðslu, áðrenn hon verður latin út í søluliðið. Eftirlit við vørugoymsluni skal ófráboðað verða gjørt við jøvnum millumbilum. Ongar neyvari ásetingar eru um, hvussu eftirlitini skulu fara fram í verki.

Eftirlit verða javnan gjørd. Vit hava víst á, at tey verða ikki skjalprógvað, og tí sæst ikki, nær tey eru gjørd, hvat úrslitið var, og hvør hevur gjørt eftirlitini. Eisini er ivasamt, hvønn týdning eftirlitini hava. Vit hava víst á, at skipaðar og greiðar reglur hava stóran týdning fyri starvsfólkini, so tey vita, hvat tey skulu gera, og hetta er eisini ein fyrimunur, tá ið onnur skulu taka yvir.

Vit hava mælt Toll- og Skattstovu Føroya til at umhugsa at fara yvir til at kanna avroknningarnar av framleiðslugjøldum í sambandi við vanlig roknskapar- og virkiseftirlit, og hava vit eisini mælt til at umhugsa eina skipan, har grannskoðarin hjá framleiðsluvirkinum, ið kennir framleiðslu- og roknskaparmannagongdirnar, t.d. einaferð árliga váttar, at mannagongdir og bókhaldið eru hóskandi skipað við atliti at útrokning og avrokning av framleiðsluavgjaldinum, og váttar, at tær uppgerðir, ið eru latnar Toll- og Skattstovu Føroya viðvíkjandi framleiðsluavgjaldi í farna ári, eru rættar.

Stýrið tekur undir við hesari mannagongd, og vil seta hana inn í tær arbeiðs- og trygdarreglur og mannagongdir, ið arbeitt verður við at seta í verk. Eisini verður arbeitt við at skjalprógva eftirlitini betur, soleiðis at altíð ber til at síggja, nær eftirlitini eru gjørd, hvat úrslitið var, og hvør hevur gjørt eftirlitini.

3. LØGMANSFYRISITINGIN OG SJÁLVSTÝRISMÁL

3.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.", letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meir- ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

3.1.1 §2 Løgmansfyrisitingin o.a.

2.11.1.02. Løgmansskrivstovan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 13 mió.kr. Minninýtslan er 703 t.kr. Sambært løgmanni er ein høvuðsorsøk til minninýtsluna, at tær 400 t.kr., sum játtaðar vórðu til "Hernaðarkanning", ikki vórðu nýttar.

2.11.2.04. Arbeiði av nýggjum kommunubygnaði (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 610 t.kr. Upprunaliga játtanin var 510 t.kr. Eykajáttan á 100 t.kr. varð veitt í september 2000. Minninýtslan er 159 t.kr. Løgmaður vísir á, at tá ið fíggjarliga umsitingin av kommununum flutti frá Fíggjarmálastýrinum til Løgmansskrivstovuna, var ætlanin at seta fólk í starv tíðliga á heysti; men starvið varð ikki sett fyrr enn 20. desember 2000. Samstundis vísti tað seg ikki at vera neyðugt at keypa útbúnað til nýggja starvsfólkið, tí innbúgv og telda vóru tøk á Løgmansskrivstovuni.

2.13.1.01. Viðskiftastovur (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,2 mió.kr. Meirnýtslan er 138 t.kr. Sambært løgmanni er høvuðsorsøkin til meirnýtsluna, at eitt leigumál á Viðskiftastovuni í Keypmannahavn varð sagt upp, og tað eydnaðist ikki at leiga hølini út aftur í árinum.

2.13.3.01. Menningarhjálp

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 200 t.kr. Sambært løgmanni er seinnu árini peningur latin eftir umsókn til ymisk tiltøk uttanlands, mest sum kreppuhjálp. Í 2000 var eingin peningur latin, tí ongar skikkaðar umsóknir vóru.

3.1.2 §10 Sjálvstýrismál o.a.

10.11.1.01. Sjálvstýrisfyrisitingin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5,1 mió.kr. Minninýtslan er 706 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var av ymiskum orsøkum bíðað við at seta ferð á arbeiðið at gera uppskot til føroyska rættarskipan. 500 t.kr. vóru settar av til Rættarskipanarnevndina. Annars vóru færri samráðingar millum ríkisstjórnina og Landsstýrið enn væntað.

10.14.1.01. Ymsar útreiðslur (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,4 mió.kr. Minninýtslan er 547 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hevur ein fulltrúi á Løgmansskrivstovuni á sumri 2000 tikið yvir ábyrgdina av lógardátugrunninum, og tí er skipanin vorðin bíligari. Frammanundan nýtti grunnurin uttanhýsis arbeiðsorku.

3.2 Løgmansskrivstovan

Roknskaparreglugerð

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at Løgmansskrivstovan hevði ikki eina fullfíggjaða roknskaparreglugerð. Løgmansfyrisitingin hevur nú eina roknskaparreglugerð, sum er samsvarandi rundskrivinum frá Fíggjarmálastýrinum 6. februar 2001.

Tænastuavtalur/hvat skal verða roknað sum løn/A-inntøka

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit eina tænastuavtalu millum Løgmansskrivstovuna og eina einstaklingafyritøku, har m.a. var ásett, at viðkomandi fekk eitt fast mánaðargjald og skuldi arbeiða á Løgmansskrivstovuni fulla arbeiðstíð hvønn arbeiðsdag. Meirtímar skuldu koma undir flex-skipanina, Løgmansskrivstovan skuldi lata alla neyðuga útgerð og bera allan kostnað av skeiðum o.ø., og ásett var eisini, at almennu reglurnar um koyripening og dag- og tímapening skuldu verða nýttar.

Vit vístu á, at tílíkar ásetingar í eini tænastuavtalu bendu á, at talan skattliga var um ein løntakara. Løgmansskrivstovan boðaði frá, at spurningurin í januar 2001 varð lagdur fyri Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya til støðutakan, um talan var um A- ella B-inntøku, og at Løgmansskrivstovan fór at fylgja avgerðini.

Í november 2001 spurdu vit, hvat var hent í málinum, og bóðu um avrit av samskiftinum við Stýrið. Í januar 2002 sendi Løgmansskrivstovan okkum svarið frá Stýrinum. Niðurstøðan hjá Stýrinum er, at talan er um ein vanligan lønmóttakara, og at fasta mánaðargjaldið skal um afturhaldsskipanina sum A-inntøka. Í grundgevingini vísir Stýrið m.a. á, at arbeiðsuppgávan hevur tey eyðkenni, sum eru galdandi fyri vanligar løntakarar. Talan er um fasta samsýning fyri persónligt arbeiði í tænastu fyri onnur. Talan er um vanliga arbeiðstíð, og meirtímar koma undir flex-skipan. Arbeiðið verður gjørt eftir ávísing frá arbeiðsgevaranum og fyri hansara rokning. Talan er um ein og sama arbeiðsgevara, sum eigur arbeiðstólini og ber allan kostnaðin av eykalutum og umvælingum.

Í frágreiðingini vístu vit eisini á, at tað at gera serligar tænastusáttmálar við einstaklingar er eitt nýtt fyribrigdi innan landsumsitingina, sum kann blíva ein fyrimynd hjá øðrum stovnum, gongur Løgmansskrivstovan undan á hesum øki. Spurningurin er eisini, um tað er rætt, at einstakir stovnar/deildir loysa ein generellan lønartrupulleika við at gera serstakar tænastusáttmálar, har lønarlagið liggur omanfyri galdandi lønarsáttmálar. Í svari sínum 4. januar 2001 kunnaði løgmaður um, at Løgmansskrivstovan leggur dent á *"ikki at fara út um tey mørk, ið verða sett í almennu fyrisitingini"*.

Í februar 2002 hevur Løgmansskrivstovan víst á, at avtalan, sipað verður til, er farin úr gildi 1. november 2001. Løgmansskrivstovan hevur tí onga tænastuavtalu av slíkum slag.

Leasing

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at Løgmansskrivstovan hevur sáttmálar um at leiga kopimaskinur. Sáttmálarnir lúka ikki ásetingarnar í játtanarskipanini um leasing. Løgmansskrivstovan boðaði í januar 2001 frá, at hon var farin at kanna, hvussu hon á bestan hátt kundi koma burturúr hesum sáttmálum, fyri síðani at keypa í staðin.

Í apríl 2001 vísti Løgmansskrivstovan m.a. á, at tað loysir seg ikki fíggjarliga. Skal sáttmálin verða sagdur upp, og avtala verða gjørd um at keypa maskinurnar, kemur tað sambært veitaranum at kosta 6-700.000 kr. Eisini varð víst á, at Løgmansskrivstovan hevur ikki játtan í 2001 at keypa maskinurnar.

Vit hava síðani gjørt vart við, at talan er um ein heimildarspurning. Ein sáttmáli um fíggjarliga langtíðarleigu, sum reelt kemur í staðin fyri at keypa, er í veruleikanum lántøka, og ein partur av leigugjaldinum er tá at meta sum renta og afturrindan av láni, og til lántøku krevst serlig lógarheimild. Í játtanarskipanini í fíggjarlógaruppskotinum 2002 er neyvari útgreinað, hvussu hugtakið "fíggjarlig langtíðarleiga" skal verða skilt. M.a. stendur, at er langtíðarleigan galdandi størsta partin av tíðini, sum aktivið verður nýtt, so er talan um fíggjarliga langtíðarleigu, sum reelt kemur í staðin fyri keyp. Í so máta er líka mikið, um ognarrætturin verður latin langtíðarleigaranum, tá ið leigutíðin er av.

Í november 2001 spurdu vit, hvat var hent í málinum. Í januar 2002 kunnaði løgmaður um, at Løgmansskrivstovan hevur tikið sjónarmiðið til eftirtektar. Samráðingar hava verið við veitaran. Eingin endalig avtala er gjørd, men lagt er upp til, at Løgmansskrivstovan keypir maskinurnar so skjótt sum gjørligt.

3.3 Samsýning o.a. til landsstýrismenn

Sambært § 32, stk. 2, í stýrisskipanarlógini verða neyvari reglur fyri setanarviðurskiftum løgmans og landsstýrismanna ásettar í løgtingslóg, og eru tær ásettar í Ll. nr. 10/1993 "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m." við seinni broytingum. Í lógini eru neyvari ásetingar um løn, eftirløn umframt skattafrítt borðfæ og kostnaðarendurgjøld.

Í seinastu frágreiðing kunnaðu vit um, at løn/samsýning, borðfæ og kostnaðarendurgjøld til løgmann og landsstýrismenn vóru samsvarandi ásetingunum í lógini.

Ongar ásetingar eru í lógini um kostnaðarendurgjald fyri heimatelefon/fría telefon. Seinastu nógvu árini hevur tó verið siðvenja at veita endurgjald, og sagt kann verða frá, at Fíggjarnevndin á fundi 20. mars 1981 góðkendi, *"at landsstýrismenn fáa fría heimatelefon, tó soleiðis at teir fyri privatar samtalur gjalda 1.000 kr. um árið"*. Okkum kunnugt, verður hetta gjald ikki rindað.

Vit vístu á, at ymiskt er, hvussu endurrindað verður fyri telefonútreiðslur:

- Fleiri landsstýrismenn hava fartelefon, sum landið hevur keypt og rindar fyri beinleiðis.
- Aðrir fáa endurrindað útreiðslur av egnari fartelefon í egnum navni, umframt útreiðslur av vanligu heimatelefonini.
- Ein landsstýrismaður fær ikki endurrindað útreiðslur av vanligu heimatelefonini.
- Ein landsstýrismaður hevur fingið árligt telefonendurgjald kr. 2.068.
- Ein landsstýrismaður, ið hevur fingið fartelefon frá Stýrinum at nýta, letur telefonrokningarnar fyri privata heimatelefon til aðalstýrið, sum bókar tær sum vanligar telefonútreiðslur hjá Stýrinum.

Telefonendurgjald til løgmann og landsstýrismenn er ikki nakar fíggjarliga tyngjandi postur í landsroknskapinum, men eftir okkara tykki er talan um eitt prinsippielt mál, sum vit hava mælt løgmanni til at greiða:

- Sambært § 27, stk. 2, í stýrisskipanarlógini tilnevnir løgmaður landsstýrismenn, og sambært § 32, stk. 2, skulu neyvari reglur fyri setanarviðurskiftum løgmans og landsstýrismanna verða ásettar í løgtingslóg.
- Neyvari reglur eru í dag ásettar í Ll. nr. 10/1993 "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna" v.s.b., har ásetingar eru um m.a. skattafrí kostnaðarendurgjøld.
- Er heimild at veita onnur kostnaðarendurgjøld enn tey lógarásettu?
- Er rætt, at telefonendurgjøld til landsstýrismenn ikki longur verða bókað á somu høvuðskontu, sum onnur kostnaðarendurgjøld?

- Fartelefon er eitt nýtt fyribrigdi, sum hevur broytt mynstrið viðvíkjandi spurninginum um m.a., hvat er ein heimatelefon, og hvat telefonendurgjaldið skal vera, alt eftir hvør eigur og rindar fyri møguliga fartelefon.
- Gjaldstovan og fleiri aðalstýri hava sett spurningar um m.a. heimildina at rinda telefonendurgjald; hvussu nógv skal verða rindað, hvør er rætta mannagongdin, hvørji rættindi hevur ein landsstýrismaður, hvat skal verða givið upp skattliga o.a.

Sambært § 25 í stýrisskipanarlógini verður samsýning løgtingsmanna ásett við løgtingslóg, og vanligt hevur verið, at løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna og lógin um samsýning løgtingsmanna hava verið broyttar/dagførdar um somu tíð. Tað varð ikki gjørt, tá ið lógin um samsýning løgtingsmanna seinast varð broytt/dagførd.

Sjálvt um arbeiðið hjá einum løgtingsmanni ikki kann samanberast við arbeiðið hjá einum landsstýrismanni, vístu vit á, at skattafrítt telefonendurgjald til løgtingsmenn óbeinleiðis er heimilað í § 1, stk. 4, í Ll. nr. 12/1999 "um samsýning og eftirløn løgtingsmanna", har tað er ásett, at sum endurgjald fyri útreiðslur, ið standast av arbeiðinum sum løgtingsmaður, verður veitt hvørjum tingmanni eitt skattafrítt kostnaðarískoyti kr. 2.000 um mánaðin. Av viðmerkingunum til lógina gongur fram, at talan er um telefon, brúk av egnari teldu o.a.

Í februar 2001 boðar Løgmansskrivstovan frá, at frágreiðingin frá Landsgrannskoðanini hevur elvt til tvey tiltøk:

1. Ætlanin er at leggja fram uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna o.a. Her verður skotið upp, at løgmaður ella landsstýrismaður, fær endurgjald fyri samskiftisútreiðslur kr. 2.000 um mánaðin.
2. Harafturat verður arbeitt við at gera leiðreglur fyri nýtslu av fartelefonum í fyrisitingini, sum eisini skulu galda fyri løgmann og landsstýrismenn. Hesar leiðreglur verða settar í gildi við rundskrivi.

Ad 1) Í februar 2002 hevur løgmaður víst á, at hann í mars 2001 legði uppskot fyri tingið, har nevnda áseting um samskiftisútreiðslur var við. Lógaruppskotið varð samtykt við gildi frá 1. januar 2002. Í desember 2001 samtykti Løgtingið at seta lógina úr gildi aftur. Beint eftir hetta feldi Løgtingið nýtt uppskot frá løgmanni um broyting í løgtingslóg "um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.", har m.a. endurgjald av samskiftisútreiðslum var ásett. Løgmaður vísir á, at tíverri er støðan viðvíkjandi samskiftisútreiðslum sostatt óbroytt, og tí má verða umhugsað, hvat skal verða gjørt, verður endurgjald fyri samskiftiskostnað ikki ásett í løgtingslóg í næstum.

Ad 2) Løgmaður hevur 7. februar 2002 sett í verk leiðreglur fyri nýtslu av fartelefonum í fyrisitingini.

3.4 Sjálvstýrisfyrisitingin (GL 2001/2 02 1-1)

Sjálvstýrisfyrisitingin hoyrir undir landsstýrismanninum í sjálvstýrismálum. Tvey starvsfólk arbeiða burturav við sjálvstýrismálum. Løgmansskrivstovan umsitur játtanina til Sjálvstýrisfyrisitingina og aðrar høvuðskontur undir § 10 "Sjálvstýrismál o.a.".

Fleiri starvsfólk á Løgmansskrivstovuni arbeiða fyri Sjálvstýrisfyrisitingina. Lønir og aðrar útreiðslur í hesum sambandi verða fyrst bókaðar á játtanina hjá Løgmansskrivstovuni, og verða síðani fluttar til Sjálvstýrisfyrisitingina sum "Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar". Í fíggjarárinum 2000 var talan um 1 mió.kr.

3.4.1 Roknskaparviðurskifti o.a.

Burtursæð frá lønarútreiðslunum, sum Gjaldstovan bókar, bókar Løgmansskrivstovan sjálv inntøkur og útreiðslur í fíggjarstýringarskipan landsins. Kannað verður, um bókingarnar samsvara við undirliggjandi skjøl, og verður tað váttað við átekning á mánaðarroknskapin, sum løgmansstjórin góðkennir.

Vit valdu út nøkur skjøl, og kannaðu m.a., um kontering, upphædd, veitingarslag, ávísing og skráseting var í lagi. Einki var at finnast at. Roknskaparhaldið var "ajour", mánaðarroknskapir, skjøl, avrit av ávísingum o.a. vórðu sett uppá pláss og goymd forsvarliga, og bókingar um ársskiftið 2000/2001 vóru farnar á rætt fíggjarár.

Stuðul o.a.

Sambært roknskapinum eru samanlagt 330 t.kr. bókaðar á kontu 54.90 "Annar stuðul". Vit ivast í, um heimild er at rinda stuðul av eini rakstrarjáttan, ið er ætlað til rakstur av "Sjálvstýrisfyrisitingini", og vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

Í februar 2002 hevur Løgmansskrivstovan boðað frá, at landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum hevur ongantíð ætlað, at játtanin einans skuldi vera til rakstur av sjálvari Sjálvstýrisfyrisitingini. Sambært viðmerkingunum í samtyktu fíggjarlógini fyri 2000 til "10.11.1.01 Sjálvstýrismál" er endamálið m.a. "at arbeiða framhaldandi við at greina sjálvstøðugan búskap, løgfrøði og fyrisiting" og "at skipa fyri upplýsing í sambandi við ætlaðu broytingarnar og komandi fólkaatkvøður". Hvørki løgdeildin ella Løgmansskrivstovan sum heild hava orku og førleika til at røkja hesar uppgávur, samstundis sum vanligu uppgávurnar skulu verða røktar.

Løgmansskrivstovan vísir eisini á, at játtanin er um 5 mió.kr., meðan starvsfólkatalið er 2. Av hesum sæst, at ætlanin alla tíðina hevur verið, at partur av játtanini skuldi verða nýttur til eitt nú nevndarsamsýningar í sambandi við greiningararbeiði, og sum stuðul til greiningar- og kunningartiltøk, sum virka við somu evnisøkjum sum sjálvstýrismálið.

"Hin føroyski happadrátturin"

Seinastu 10 árini hevur nettovinningurin frá Happadráttinum í miðal verið uml. 1,4 mió.kr., og fyrisitingarútreiðslurnar 0,9 mió.kr. Sostatt hevur árliga yvirskotið í miðal ligið um 0,5 mió.kr. Færri seðlar eru seldir seinastu árini, og m.a. tí er yvirskotið minkað og var í 2000 einans 20 t.kr. Heldur gongdin fram, er vandi fyri, at Happadrátturin kemur at geva undirskot.

Vit hava spurt landsstýrismannin, hvørji tiltøk hann ætlar at seta í verk. Landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur sett ein arbeiðsbólk at endurskoða veddingarlógina og evna uppskot til um eina framtíðar veddingarskipan.

Fíggjarstøða

Vit hava víst á, at ein partur av rokningunum hjá skuldarunum undir "Landsfólkayvirlitinum" eru gamlar, og at eitt ferðaforskot undir "Norðurlandasamstarv" frá 1998 var ikki avroknað. Í februar 2002 boðaði Løgmansskrivstovan frá, at stig eru tikin til at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

3.4.2 Lønargrannskoðan

Nøkur lønarmál vórðu vald út. Kannað varð m.a., um setanarskriv, prógv o.o. skjalprógv vóru í málinum, og um lønin var sambært galdandi sáttmála og lønartalvum. Niðanfyri verður greitt frá viðmerkingum okkara.

Tænastuavtala/hvat skal roknast sum løn/A-inntøka

Í 1999 gjørdi Løgmansskrivstovan eina tíðaravmarkaða tænastuavtalu við eitt starvsfólk, har m.a. varð ásett eitt fast mánaðargjald, roknað út frá 40 arbeiðstímum um vikuna íroknað møguligt meirarbeiði, 35 tímar um ársfjórðingin, áðrenn talan var um yvirtíð. Løgmansskrivstovan skuldi útvega høli og lata alla neyðuga útgerð. Avtalan vardi í reiðiliga hálvt ár, tá ið starvsfólkið varð sett í fast starv.

Starvsfólkið helt seg síðani hava rætt til frítíðarløn hetta hálva árið, og vísti m.a. á, at talan bert var um ein formligan sáttmála, sum var gjørdur, tí at stundir høvdu ikki verið at lýsa starvið leyst, og at ásetingarnar um arbeiðstíð/yvirtíð vórðu gjørdar í samsvari við BLF-sáttmálan. Talan var ongantíð um nakra fyritøku, hann rindaði alt meirvirðisgjaldið aftur, hevði einki at draga frá, og øll inntøkan varð givin upp til skattingar. Løgmansskrivstovan var ósamd og vísti á, at hann var ikki í starvi, tí at hann í hesum tíðarskeiði arbeiddi sambært umrøddu tænastuavtalu.

Vit hava vístá, at talan er um eitt prinsippielt mál: nær ein persónur eftir skattalógini má verða roknaður at vera móttakari av A-inntøku (løntakari). Eftir okkara tykki bendir nógv á, at hann er løntakari. Løgmansskrivstovan hevur boðað frá, at spurningurin hevur verið tikin upp við Toll- og Skattstovu Føroya, og at Løgmansskrivstovan hevur greitt fingið at vita, at talan er um A-inntøku.

Løgmansskrivstovan hevur vístá, at nú eru ongar slíkar tænastuavtalur.

Serligir ráðgevarasáttmálar

Í desember 1999 gjørdi landsstýrismaðurin vegna Løgmansskrivstovuna serligan sáttmála við eitt starvsfólk, at hann til desember 2000 skuldi fáa samsýning sum ráðgevi, svarandi til stig I í BLF-sáttmálanum.

Í september 2000 gjørdi landsstýrismaðurin serligan sáttmála við ein annan fulltrúa, at hann til desember 2000 skuldi hava samsýning sum ráðgevi, svarandi til stig I í BLF-sáttmálanum. Gjaldstovan gjørdi vart við, at ein tílík broyting sambært galdandi reglum kravdi serliga góðkenning. Løgmansskrivstovan vísti á, at talan var um eina konsulent-uppgávu. Gjaldstovan legði síðani málið fyri Fíggjarmálastýrið/lønardeildina, sum vísti á, at talan var um eitt tíðaravmarkað starv, og tí kravdist góðkenning sambært LD-Rundskrivi 1999-9. Av samskiftinum skilst, at málið er loyst "politiskt", so landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur "givið eftir", og tí gav aðalstjórin í Fíggjarmálastýrinum Gjaldstovuni boð um at rinda lønina, hóast skeivu mannagongdina.

Í skrivi í desember 2000 til landsstýrismannin í fíggjarmálum vísti landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum á, at eingin ivi var um, at umrøddu størv kravdu serfrøðingaførleika, og tí hevði landsstýrismaðurin gjørt av, við ráðgeving frá løgdeildini, at seta fólkini í starv sambært sáttmála, har tey vórðu lønt eftir BLF-sáttmálanum ájavnt við serfrøðingar.

Sum grundgeving vísti landsstýrismaðurin m.a. á:

- *at* sjálvstýrismál eru eitt nýtt umsitingar- og fyrisitingarøki í landsstýrinum, sum er tíðaravmarkað, og tí skipað sum ein verkætlan við serstakari játtan,
- *at* sáttmálarnir eru gjørdir fyri at fáa ávísar tíðaravmarkaðar uppgávur loystar,
- *at* uppgávurnar høvdu kravt munandi meira orku og pening, skuldu tær verið loystar við at keypa uttanhýsis serfrøði ella við at byggja upp kontinuerlig fyrisitingarlig størv ella eitt nýtt aðalstýri,
- *at* størvini kunnu ikki verða samanborin við onnur størv í fyrisitingini,

at hesir sáttmálar skapa ikki fordømir, og eiga ikki á nakran hátt at verða tengdir at starvsfólkaviðurskiftunum og serfrøðingakvotunum á Løgmansskrivstovuni annars.

Eftir okkara tykki eru umrøddu sáttmálar dømi um, at ein fyrisiting/landsstýrismaður loysir ein generellan lønartrupulleika við at gera serstakar tænastusáttmálar, har lønarlagið liggur omanfyri galdandi lønarsáttmálar. Vit halda, at aðrir landsstýrismenn og stovnsleiðarar, við líka góðum grundgevingum, kunnu vísa á hópin av øðrum størvum, sum krevja serfrøðingaførleika.

Løgmansskrivstovan vísir á, at ráðgevarnir eru ikki longur í starvi á Løgmansskrivstovuni.

Nevndarsamsýning

Í tilmæli í 1999 til Fíggjarmálastýrið, um at góðkenna eina serliga nevndarformanssamsýning kr. 15.000 um mánaðin, vísti Løgmansskrivstovan m.a. á, at freistin, til uppgávan skuldi vera liðug, var stutt (eitt ár), uppgávan var verkliga og fakliga ógvuliga umfatandi og krevjandi og tók nógvar tímar hvønn dag, og avrátt var, at formaðurin – tá ið einki serligt var – skuldi vera tøkur á Løgmansskrivstovuni um 40% av fullari tíð. Kr. 15.000 er nakað meira enn 40% av einari mánaðarløn, men skuldi hann afturfyri ikki verða løntur fyri skrivlig avrik. Sambært svarinum gongur Fíggjarmálastýrið/lønardeildin út frá, at skal nevndarformaðurin nýta 40% av fullari tíð til nevndararbeiði, hevur hann ikki samstundis annað fulltíðarstarv við síðuna av. Út frá hesum verður samsýningin kr. 15.000 góðkend.

Í mai 2000 gjørdu vit vart við, at viðkomandi hevði fulltíðarstarv á øðrum almennum stovni. Løgmansskrivstovan svaraði, at tað var uttan fyri teirra ábyrgdar- og heimildarøki at taka støðu til, um hann til fulnar røkti sítt fulltíðarstarv. Løgmansskrivstovan hevði ábyrgdina av, at hann veruliga gjørdi tað arbeiði, hann var biðin um at gera, og sum var hildið at svara til 40% av fullari tíð. Løgmansskrivstovan helt hesa treyt vera lokna. Almenni stovnurin hevur í januar 2002 boðað frá, at viðkomandi hevur røkt sítt fulltíðarstarv har til fulnar. Nú nærum 3 ár eru liðin, hava vit spurt Løgmansskrivstovuna, um tey framvegis halda, at treytin um at arbeiða minst 40% av fullari tíð á Løgmansskrivstovuni er lokin í øllum tíðarskeiðnum, og vit hava biðið um skjalprógv. Vit vístu eisini á, at viðkomandi eisini er løntur fyri skrivlig avrik, hóast tað skuldi vera íroknað føstu samsýningina.

Løgmansskrivstovan hevur ikki víst til nakað skjalprógv fyri arbeiðstíðini. Viðvíkjandi spurninginum um løn fyri skrivlig avrik, hevur Løgmansskrivstovan í februar 2002 víst á, at síðani umrødda samsýning varð ásett, er arbeiðslagið hjá nevndini munandi broytt, og formaðurin hevur átikið sær at gera arbeiði, sum eftir vanligari meting liggja væl uttanfyri fakøki hansara. Tað er í hesum sambandi, at hann hevur fingið samsýning fyri skrivlig avrik, og Løgmansskrivstovan heldur ikki samsýningina hava verið stóra í mun til avrikini.

3.4.3 Fundar- og ferðasamsýning

Vit kannaðu fundarsamsýningar og ferðaendurgjald til limir í Grundlógarnevndini. Við støði í útgoldnum samsýningum kunnaðu vit okkum um mannagongdina. Við at fara ígjøgnum yvirlit frá fundum, hava vit kannað, um limirnir hava verið á fundi, og hvussu langir fundirnir hava verið, og vit hava kannað, um útgoldnar ferða- og fundarsamsýningar eru sambært galdandi reglum. Niðanfyri verður greitt frá viðmerkingum okkara.

Fundarsamsýning

Fundarpeningur verður veittur í mun til, hvussu langur fundurin er. Summir nevndarlimir búgva ella starvast ikki í Havnini, sum er fundarstaður. Tíðin, tað tekur at ferðast til og úr Havnini, verður roknað uppí fundin. Henda mannagongd tykist vera í tráð við ”umfarsskriv

um nevndarsamsýningar", 10. januar 1983, sum ásetir, at *"Limir, sum hava langan veg til fundarstaðin, kunnu fáa upp til fullan fundarpening".*

Sambært § 4 í Ll. nr. 10/2000 "um Grundlógarnevnd" rindar landskassin kostnaðin av nevndararbeiðinum. Sambært viðmerkingunum til lógina er talan um m.a. fundarsamsýning til løgtingsmenn. Nakrir løgtingsmenn, sum eru nevndarlimir, búgva ikki í Havnini, og tíðin, tað tekur hjá teimum at ferðast til og úr Havnini, verður eisini roknað uppí fundin. Vit ivast í, um henda mannagongd er rætt. Fundarpeningur verður vanliga veittur sum endurgjald fyri mista inntøku í tí fasta starvinum, nevndarlimurin er í, men tingmenn verða ikki drignir í løn, tá ið teir eru á fundi í Grundlógarnevndini. Sambært nýggju lógini um samsýning løgtingsmanna verður starvið sum løgtingsmaður roknað sum fulltíðarstarv, ella í minsta lagi sum høvuðsstarv.

Løgmansskrivstovan vísir á:

at virkið sum grundlógarnevndarlimur er ikki partur av starvinum sum løgtingsmaður. Tað sæst m.a. av, at tingarbeiðið verður ikki lagt til rættis við atliti at virkseminum hjá Grundlógarnevndini, og umsitingin hjá Løgtinginum tók av lønini hjá teimum løgtingsmonnum, sum vóru við á ferðini hjá Grundlógarnevndini í Íslandi og USA.

at siðvenja er, at starvsfólk hjá fyrisitingini, ið fáa fundarsamsýning, skulu vátta, at tey ikki taka lut í nevndararbeiðinum sum partur av vanligu arbeiðstíðini. Tað er ikki siðvenja, tá ið talan er um fólk, ið ikki eru í starvi hjá fyrisitingini. Løgtingið er ikki partur av fyrisitingini.

at av tí at einki serstakt er ásett um, hvussu fundarsamsýningin til tingmenn skal verða roknað, og einki stendur í viðmerkingunum til lógina, um at serligar meginreglur skulu leggjast til grund, er fundarsamsýningin veitt eftir "vanligum meginreglum".

Ferðasamsýning

Fleiri nevndarlimir fáa skattafrítt kilometurendurgjald kr. 2,90 fyri at ferðast í egnum bili frá heimstaðnum til fundarstaðin og heimaftur. Vit halda tað ikki vera rætt. Sambært rundskrivi frá Toll- og Skattstovu Føroya um skattafríar veitingar sambært § 29, nr. 7, í skattalógini, er reglan fyri kilometurendurgjaldi bert galdandi, tá ið arbeiðsgevari rindar endurgjald til løntakara fyri at nýta egnan bil í arbeiðsørindum.

Vit hava víst á, at sambært Ll. nr. 93 frá 6. juni 1997 "um stuðul til ferðaútreiðslur", sum broytt við Ll.nr. 46/2001, verður frá inntøkuárinum 1997 stuðul latin eftir umsókn til at ferðast millum bústað og arbeiðsstað. Í kunngerð, seinast nr. 103 frá 28. juni 2001, eru neyvari reglur ásettar. Í viðmerkingum sínum vísir Løgmansskrivstovan bert á, at *"útgoldið er eftir uppgerð hjá einstaka liminum í Grundlógarnevndini".*

Tingfundir

Tað er komið fyri, at fundur hevur verið í Grundlógarnevndini sama dag, sum tingfundur hevur verið. Í einstøkum føri hava tingmenn tá fingið fundarpening, íroknað ta tíð, tað tekur at ferðast til og úr Havnini, umframt skattafrítt kilometurendurgjald o.a. fyri at ferðast frá heimstaðnum til fundarstaðin og heimaftur.

Í viðmerkingunum sigur Løgmansskrivstovan, at grundlógarnevndarfundirnir hava næstan uttan undantak verið so langir, at tingmenn, tá ið samanfall hevur verið millum tingfund og grundlógarnevndarfund, hava verið noyddir at valt, um teir fóru á tingfund ella á grundlógarnevndarfund. Grundlógarnevndarlimir fáa ikki samsýning uttan so, at teir, áðrenn teir fara av fundi, skrivliga vátta fundarluttøku sína. Henda mannagongd, og tað, at tingmenn ikki hava møtiskyldu, ger, at Løgmansskrivstovan ikki heldur talan vera um nakran trupulleika.

3.4.4 Viðmerkingar

Endamálið við grannskoðanini er m.a. at ansa eftir, at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

Vísandi til málini, sum eru umrødd undir "Lønargrannskoðan", hevur Løgmansskrivstovan í fleiri førum ikki hildið grundleggjandi ásetingar í skattalógini, og lønarásetingar hava ikki verið í tráð við galdandi sáttmálar, rundskriv og avtalur við Fíggjarmálastýrið um samsýning. Tá ið tað frættist, at Løgmansskrivstovan ger tílíkar sáttmálar/avtalur, so verður torført at grundgeva fyri, hví onnur ikki kunnu gera tað sama, og tað kann bróta niður galdandi reglur í sambandi við lønarumsiting.

Hesar avtalur eru gjørdar m.a. vísandi til, at við verandi lønarlagi er trupult er at fáa fatur á sakkønum fólki, serliga eitt styttri tíðarskeið. Eftir okkara tykki átti hesin trupulleiki at verið loystur á annan hátt. Vit halda eisini tørv vera á at greina, hvønn myndugleika Fíggjarmálastýrið/lønardeildin og Gjaldstovan hava í sambandi við umsiting av lønum, herímillum um og nær ein "politisk avgerð" kann seta til viks galdandi reglur.

Vísandi til mannagongdina og ivamálini, sum eru umrødd undir "Fundar- og ferðasamsýning", halda vit, at tørvur er á at dagføra og nágreina reglurnar um nevndar-, fundar- og ferðasamsýning.

3.5 Viðskiftastovan (GL 1998/2 02 2-4)

Í januar 2001 sendu vit løgmanni frágreiðing til viðmerkingar um grannskoðan av Viðskiftastovuni. Vit mintu á, at í frágreiðing til løgmann í september 1998 høvdu vit víst á vantandi dagføring av endamáli og starvsøki, at ongar ítøkiligar ætlanir vórðu lagdar fyri virksemið í einum ári, og at burtursæð frá brævaskifti, var eingin skipað skráseting av virkseminum. Tá varð kunnað um, at Løgmansskrivstovan og Viðskiftastovan arbeiddu við at endurskoða endamál og starvsøki, og at raðfesta virksemið hjá Stovuni.

Leiðarin á Viðskiftastovuni kunnaði í januar 2001 um, at arbeitt hevði verið við málinum til á heysti 1999, men hóast fleiri áheitanir frá Viðskiftastovuni um at halda fram og finna eina haldgóða loysn, lá málið hjá uttanlandsdeildini, sum ikki tyktist vera sinnað at gera meira við tað. Vit spurdu løgmann, hvørji stig hann ætlaði at taka fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í desember 2001 kunnaði løgmaður um, at í august 2001 hevði fundur verið millum leiðaran á Viðskiftastovuni, løgmansstjóran og deildarstjóran á uttanlandsdeildini á Løgmansskrivstovuni. Á fundinum varð gjørt av m.a.,:

- *at* Løgmansskrivstovan ger uppskot til formliga bygnaðin hjá viðskiftastovum/umboðsstovum mótvegis myndugleikunum í Føroyum. Uppskotið verður sent til ummælis hjá Viðskiftastovuni og hinum umboðsstovunum,
- *at* uttanlandsdeildin leggur kunning til Viðskiftastovuna inn í sínar dagligu mannagongdir, so at hon fær fulla kunning um viðkomandi mál,
- *at* Viðskiftastovan fær ítøkiligar uppgávur at loysa frá Løgmansskrivstovuni,
- *at* báðir partar skulu gera sítt til at betra um samstarvið og samskiftið í síni heild.

Løgmansskrivstovan hevur síðani fyrireika eitt uppskot til fyriskipan, ið fevnir um eins orðaðar reglur fyri Løgmansskrivstovuna og tær tríggjar viðskiftastovurnar. "Fyriskipan um Uttanríkistænastu Føroya" er sett í gildi 7. februar 2002.

3.6 Eftirkannan av lógaruppskotum og kunngerðum

Ein av arbeiðsuppgávunum hjá Løgmansskrivstovuni/løgdeildini er: ”Eftirkanning av uppskotum til lógir og kunngerðir”.

Í rundskrivi 24. januar 2000 um ”Mannagongd um lógaruppskot o.a., sum verða at leggja fyri Løgtingið”, er m.a. ásett, at Løgmansskrivstovan/løgdeildin skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar at ”viðgera” øll lógaruppskot. Síðani verða lógaruppskotini latin løgmanni, við átekning um, at løgdeildin hevur viðgjørt tey.

Í rundskrivi 29. februar 2000 ”um lógarsmíð”, eru krøv til lógaruppskot, m.a. við støði í ásetingunum í § 37 í tingskipanini.

Vit hava spurt, hvussu Løgmansskrivstovan hevur skipað ”viðgerðina” av lógaruppskotum og kunngerðum, hvussu nógv starvsfólk taka sær av hesum arbeiði, og hvat tað ítøkiliga merkir, at eitt lógaruppskot er áteknað ”viðgjørt”. Vit bóðu eisini um avrit av møguligum innanhýsis reglum og mannagongdum.

Løgmaður hevur greitt frá, at ongar ítøkiligar innanhýsis mannagongdir og reglur um sjálvt innihaldið í eftirkanningini eru tøkar; men arbeitt verður við at fáa hóskandi reglur og vegleiðingar o.a. til vega. 5 løgfrøðingar eru á løgdeildini. Teir nýta allir lutvíst sína arbeiðstíð til at viðgera uppskotini til lógir og kunngerðir. Hvussu tað verður lagt til rættis dagliga, kann vera ymiskt, m.a. treytað av, hvat lógaruppskotini snúgva seg um, hvussu nógv lógaruppskot eru at viðgera, og hvørji onnur átrokandi mál eru á skránni á deildini.

At eitt lógaruppskot er áteknað “viðgjørt” merkir, at tað er eftirkannað av løgdeildini. Tað er tó altíð landsstýrismaðurin, ið hevur ábyrgdina av øllum lógaruppskotum og kunngerðum á sínum málsøki. Endamálið við eftirkanningini av uppskotum til lógir og kunngerðir er at tryggja einsháttað fakligt støði í lóggávuni. Eftirkanningin fevnir um innihaldslig og tøknilig viðurskifti.

Seinastu árini hevur skipanin verið, sum lýst í umrøddu rundskrivum. Mangan hevur raðfylgjan í mannagongdini tó ikki verið fylgd til fulnar. Politiska viðgerðin gongur ofta fyri seg um somu tíð, sum lógaruppskotið verður viðgjørt á løgdeildini. Uppskotini eru tó altíð eftirkannað, áðrenn tey verða løgd fyri formligan landsstýrisfund.

- - - - -

Í § 3, stk. 2, í K. nr. 114/1996 ”um roknskaparverk landsins o.a.”, er ásett, at lógaruppskot, kunngerðir og rundskriv, sum viðvíkja landsins roknskaparverki, skulu verða løgd fyri Fíggjar- og búskapardeildina/Føroya Gjaldstovu at góðkenna. Fíggjarmálastýrið/Gjaldstovan hevur víst á, at aðalstýri hava ikki virt hesa áseting, og sambært Gjaldstovuni kann tað føra til óskil á roknskaparøkinum, og vera við til at bróta niður tað, sum bygt er upp.

Í rundskrivinum um ”Mannagongd um lógaruppskot o.a...”, og í rundskrivi 29. februar 2000 ”um lógarsmíð”, eru ásetingar og krøv til lógaruppskot, m.a. við støði í ásetingunum í § 37 í tingskipanini. Einki er tó nevnt um § 3, stk. 2, í roknskaparkunngerðini, og eftir øllum at døma hevur Løgmansskrivstovan/løgdeildin ikki kannað eftir, um henda áseting verður hildin.

Í desember 2001 hevur løgmaður boðað frá, at eins og at eftirkanna lógaruppskot, er tað ábyrgdin hjá hvørjum landsstýrismanni sær at tryggja, at reglurnar smb. § 3, stk. 2, í roknskaparkunngerðini verða hildnar. Eisini má tað vera ábyrgdin hjá tí myndugleika, ið varðar av kunngerðini, í hesum føri Gjaldstovuni vegna landsstýrismannin, at gera vart við seg, verða reglurnar ikki hildnar. Hinvegin eiga hesar reglur eisini at verða lýstar í “Mannagongd um lógaruppskot o.a., ið verða at leggja fyri Løgtingið”, ið júst lýsir, hvussu lógaruppskot o.l. “ferðast” í skipanini.

Løgmaður vil tryggja, at tað kemur við í mannagongdina. Tó ætlar løgmaður ikki at teingja hesar reglur í roknskaparkunngerðini at eftirkanningini á løgdeildini. Í broyttu manna-

gongdini verður tikið við, at ávís lógaruppskot og kunngerðir eisini skulu verða løgd fyri Gjaldstovuna at góðkenna. Eftir ætlan skuldi nýggja mannagongdin verða klár at seta í verk í februar 2002, men tað verður helst nakað seinkað.

3.7 Stuðulslóggáva

Í sambandi við grannskoðan okkara seinastu mongu árini eru vit komin fram á, at umsitingin av studningi sum heild tykist fløkt og óskipað, og er merkt av tvørrandi heimildum at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð og til at gjalda út studning. Nógvar studningsjáttanir eru einans lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlógina. Í frágreiðingini undir "Útbúgving og gransking o.a.", hava vit meira alment viðgjørt spurningin um stuðulslóggávur og stuðulsumsiting.

Eftir okkara tykki, er stórur tørvur á at bøta um okkara stuðulslóggávu, og vit hava gjørt vart við, at talan er um eitt øki, har Løgmansskrivstovan/løgdeildin kundi havt ein virknan og samskipandi leiklut.

4. FISKIVINNA

4.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

5.11.1.05. Fiskimálastýrið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 14,8 mió.kr. Minninýtslan er 4,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar avlopið á høvuðskontuni frá undirkontu 21 "Granskingarætlanir". Meirnýtslan á undirkontu 20 "vanligt virksemi" stendst av, at kontan ber allar felagsútreiðslur til rakstur av Fiskimálastýrinum.

5.11.1.15. Viðlíkahald (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 400 t.kr. Minninýtslan er 104 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var nýtslan minni enn væntað.

5.34.1.01. Fiskivinnuráð, nevndir og yrkisráð (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 600 t.kr. Minninýtslan er 439 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at frágreiðingin um støðuna í fiskiflotanum dró út. Umskipan er framd av ráðgevingini í fiskivinnuni sambært løgtingslóg, og fiskivinnupolitikkurin varð ikki liðugt orðaður fyrr enn í 2001.

5.34.1.10. Lønjavningarstovan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.480 t.kr. Minninýtslan er 801 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er 1½ starv á Lønjavningarstovuni ósett, og harafturat er minni enn ætlað brúkt til edvútreiðslur.

5.34.2.01. Fiskiveiðieftirlitið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 27 mió.kr. Minninýtslan er 1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum stavar nettoavlopið 4% frá, at Tjaldrið var ikki á sleipistød. Harafturat varð einki endurgjald rindað fyri felagsrakstur av Fiskimálastýrinum.

Brimil kom ikki í sigling í 2000. Upphæddin, sum varð spard, varð nýtt til meirútreiðslur til orkukeyp, tí oljuprísirnir hækkaðu so mikið nógv.

5.34.2.02. Nýtt vaktarskip (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 58,8 mió.kr. Minninýtslan er 386 t.kr. Við eykajáttanarlógini í september 2001 varð avlopið endurjáttað til at rinda síðstu útreiðslurnar í sambandi við íløguna.

5.34.3.01. Fiskirannsóknarstovan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7.937 t.kr. Meirnýtslan er 89 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð roknað við einum yvirskoti uppá 100 t.kr. á undirkontu 40 "inntøkufíggjað virksemi", men yvirskotið javnvigaði tó bert.

5.34.3.07. Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8 mió.kr. Minninýtslan er 1,95 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var nýtslan minni á einstøkum verkætlanum enn játtað.

5.34.4.01. Inntøkutrygd (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 42 mió.kr. Minninýtslan er 16,6 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er skipanin soleiðis háttað, at í góðum tíðum verður minni goldið út enn í ringum tíðum. Høvuðsorsøkin til stóra avlopið í 2000 er, at árið bæði til fiskiskap og –prís var eitt av teimum frægu.

5.34.4.04. Sjúkratrygd (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6,8 mió.kr. Minninýtslan er 437 t.kr.

5.34.4.22. Flutningsstuðul (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,6 mió.kr. Minninýtslan er 164 t.kr.

5.34.5.01. Útlán / 5.34.5.07. Effektivar veðhaldsútreiðslur

Útlán

Á fíggjarlógini var játtanin til útlán 1,5 mió.kr. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar "Stuðul til vinnu" og "útlán v.m." 108,8 mió.kr., og inntøkurnar "Afturgjald av útlánum v.m." 88,5 mió.kr. Tey stóru frávikini standast av, at avskrivingar av vinnulánum verða tiknar við, bæði sum stuðul til vinnu og sum afturgjald av lánum.

Effektivar veðhaldsútreiðslur

Á fíggjarlógini var játtanin til útlán 1 mió.kr., og játtanin til afturgjald av lánum 12,2 mió.kr. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslur "Stuðul til vinnu" og "útlán v.m." 8,9 mió.kr., og inntøkur "Afturgjald av útlánum v.m." 29,1 mió.kr. Stóru frávikini standast av, at í landsroknskapinum verða vinnulánsavskrivingar tiknar við, bæði sum stuðul og sum lánsafturgjald, við ymiskum forteknum.

Sambært landsstýrismanninum er tað Gjaldstovan, ið umsitur hesar kontur, og Fiskimálastýrið hevur tí ikki neyðugt roknskaparligt innlit í viðurskiftini. Í sambandi við góðkenningina av greinaroknskapinum hevur Stýrið gjørt vart við hesi viðurskifti. Gjaldstovan, Fiskimálastýrið og Toll- og Skattstova Føroya hava á fundi í november 2001 viðgjørt málið, og avtalað, at Gjaldstovan skuldi gera uppskot til roknskaparligar mannagongdir. Fiskimálastýrið viðger í løtuni uppskotið frá Gjaldstovuni.

5.35.1.01. Sjóvinnufyrisitingin/Skráseting Føroya og Trygdarmiðstøðin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,1 mió.kr. Minninýtslan er 690 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu inntøkurnar av at skráseta partafeløg hægri, enn mett varð. Frá 1. januar 2001 er Skráseting Føroya ikki longur partur av virkseminum hjá Sjóvinnufyrisitingini.

5.35.1.04. Bjargingarfeløg (onnur játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 249 t.kr. Minninýtslan er 69 t.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu 69 t.kr. settar av til at endurrinda meirvirðisgjaldið í sambandi við at útvega Vága Bjargingarfelag nýggjan sjúkrabil.

6.11.1.25.21 Tilbúgvingarætlan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 715 t.kr. Minninýtslan er 110 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð kontan umsitin av Vinnumálastýrinum meginpartin av fíggjarárinum 2000.

Lønarkarmur

Høvuðskonturnar niðanfyri vísa roknskapir, har farið er upp um ásetta lønarkarmin.

(t.kr)

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	Munur
5.34.3.04.	Magnus Heinason (rakstrarjáttan)	5.240	5.601	361
5.34.3.07.	Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan)	0	2.104	2.104
5.34.4.04.	Sjúkratrygd (lógarbundin játtan)	0	138	138

4.2 Almennar viðmerkingar

Vit hava í 2001 grannskoðað roknskapar- og játtanarviðurskiftini hjá nøkrum stovnum/deildum undir Fiskimálastýrinum:

- Trygdarmiðstøðin/Sjóvinnufyrisitingin
- Magnus Heinason
- Fiskiveiðieftirlit/Tyrlutænastan
- Nýtt vaktarskip

Niðanfyri verður kunnað um viðmerkingar okkara til roknskaparviðurskifti, sum eru felags fyri fleiri stovnar. Síðani verður greitt frá grannskoðanini av einstøkum stovnum, har serlig viðurskifti verða umrødd. Vit hava eisini tikið í aftur viðmerkingar frá seinastu frágreiðing okkara í mars 2001 og greitt frá, í hvønn mun viðurskifti, ið tá vórðu umrødd, eru komin í rættlag.

Roknskaparhald

Aðalskrivstovan í Fiskimálastýrinum og Fiskirannsóknarstovan skráseta sjálvi í bókhaldsskipanini hjá Gjaldstovuni, undantiknar eru lønar- og ferðaútreiðslur, ið verða sendar Gjaldstovuni at bóka.

Í sambandi við vitjanir á stovnum/deildum kannaðu vit, um roknskaparhaldið var dagført, og um mánaðarroknskapir, skjøl, avrit av ávísingum o.a. vórðu sett uppá pláss og goymd forsvarliga. Harafturat kannaðu vit, um bókingar um ársskiftið vóru farnar á rætt fíggjarár. Einki var at finnast at.

Vantandi roknskaparreglugerðir

Landsstovnar skulu hava eina reglugerð fyri roknskaparhaldinum á stovninum, samsvarandi rundskrivi frá Fíggjarmálastýrinum 6. februar 2001. Roknskaparreglugerðin skuldi verða góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001. Landsstýrismaðurin kunnaði í september 2001 um, at roknskaparreglugerðir vóru fyri allar deildirnar í Fiskimálastýrinum.

Roknskapargóðkenning

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini, skal stovnsleiðarin góðkenna roknskapin mótvegis hægri myndugleika. Hesi viðurskifti eru komin í rættlag í 2001.

Góðkenning av greinaroknskapum

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálastýrinum á serligum góðkenningarskjali. Fiskimálastýrið hevur góðkent greinaroknskapirnar í 2001 fyri "§ 5 Fiskivinnumál". Í hesum sambandi er vístá, at Stýrið hevur ikki neyðugt innlit í at góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi "Útlán" og "Effektivar veðhaldsútreiðslur", og sum vístá omanfyri, verður arbeitt við at loysa málið.

Yvirlit yvir ognir

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skulu stovnar hava yvirlit yvir ognir og útbúnað. Vit hava áður gjørt vart við, at bert fáir av landsins stovnum hava eitt dagført yvirlit. Fiskimálastýrið hevur í november 2001 kunnað um, at eitt fullfíggjað ognaryvirlit hjá Stýrinum er um at verða liðugt.

4.3 Fiskimálastýrið (GL 2000/2 14 1-3)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 14. mars 2001 umrøddu vit roknskaparviðurskiftini hjá ymiskum deildum í Fiskimálastýrinum.

Vit vístu m.a. á, at av teimum ferðaforskotum, ið ikki ultimo september 2000 endaliga vóru gjørd upp, vóru 25 eldri enn ein mánað. Í januar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at viðmerkingarnar vóru tiknar til eftirtektar, og at viðurskiftini vórðu fingin í rættlag. Ultimo september 2001 vóru 42 ferðaforskot eldri enn ein mánað.

Í november 2001 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Fiskimálastýrið var farið í gjøgnum øll ferðaforskotini og hevði heitt á starvsfólkini um at avgreiða viðurskiftini. Fólk, sum ikki eru í starvi í Stýrinum, men sum hava ferðast fyri Fiskimálastýrið, hava skrivliga fingið boð um at avgreiða síni ferðaviðurskifti. Við støði í rundskrivi frá lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum hevur Fiskimálastýrið gjørt eina innanhýsis reglugerð fyri at byrgja fyri, at ferðaforskot í framtíðini ikki verða gjørd upp ella avroknað.

4.4 Trygdarmiðstøðin (GL 2000/2 14 1-4)

Nøkur skjøl vórðu vald út at grannskoða neyvari. Okkara stakroyndir bendu á, at nógv skjøl upprunaliga vórðu skeivt konterað, og nóg gott eftirlit var ikki við konteringum, tá ið skjølini vórðu ávíst og síðani bókað. Vit eru síðani kunnað um, at mannagongdin er broytt, og at viðurskiftini eru komin í rættlag.

Vit mæltu til, at inngjøld fyri trygdarskeið verða samanborin við luttakaralistar. Í teimum førum, tá ið skeið ikki verða goldin kontant ella um peningastovn, verður rokning skrásett í debitorskipan landsins. Í sambandi við eftirlitið vístu vit á, at 2 rokningar vóru meira enn 120 dagar gamlar. Vit mæltu til at fylgja reglunum um innkrevjing og áminningar, og at taka stig til at krevja pengarnar inn.

Stovnurin keypir sær lærarahjálp frá Tekniska Skúla í Klaksvík og frá Klaksvíkar Sjómansskúla. Tá ið skúlarnir senda Trygdarmiðstøðini rokningar fyri útlænt starvsfólk, minka teir sínar lønarútreiðslur við at kreditera roknskaparkontu 1180 "Endurgjald í samband við lønir". Vit hava vístá, at tá ið stovnurin fær tílíkar rokningar frá øðrum almennum stovni, skal rokningin verða konterað sum lønarútreiðsla, soleiðis at lønarútreiðslan ikki verður "burtur" í landsroknskapinum.

4.5 Fiskiveiðieftirlit/tyrlutænasta (GL 2000/2 14 2-2)

Vit hava kannað roknskapin 2000 fyri játtanina "Fiskiveiðieftirlit"/tyrlutænasta, og í hesum sambandi eisini gjøgnumgingið sáttmálan um at veita tyrlutænastu til leiting og bjarging, ið

varð gjørdur í februar 2001 við heimild í Ll. nr. 127 frá 22. desember 2000 "um tyrlutænastu". Í desember 2001 sendu vit landsstýrismanninum eina frágreiðing, har vit settu fleiri spurningar. Niðanfyri verður tikið samanum frágreiðing okkara, og eru viðmerkingarnar frá landsstýrismanninum/Fiskimálastýrinum eisini tiknar við.

4.5.1 Játtanartøl og roknskapartøl 2000

Høvuðskonta 5.34.2.05. "Fiskiveiðieftirlit"/tyrlutænasta

(1.000 kr.)	Játtan	Roknskapur	Munur
Stkt. 14 Keyp av vørum og tænastum	10.000	1.287	8.713
Stkt. 15 Keyp av útbúnaði	-	8.459	-8.459
Tilsamans	**10.000**	**9.746**	**254**

Í 2000 eru útreiðslurnar 9.746 t.kr. Talan er um 2 rokningar frá Atlantsflog dagfestar 28. desember 2000 (í 1.000 kr.):

1) Rokning fyri fyrireiking av SAR (search and rescue) tænastu:

Konsulenttænastur	430	
Fyrireikandi útbúgving pilotar/mekanikarar	307	
Fyrireikingararbeiði	550	1.287

2) Rokning fyri SAR útgerð, sum er á tyrluni Bell 412 (995.200$ x 8,50): 8.459

9.746

Ad 1) Sambært Fiskimálastýrinum var talan um fyrireikingararbeiði í sambandi við skipan av SAR tænastuni, bæði eksterna frágreiðing frá serkønum í SAR tænastu og fyrireikandi arbeiði á fleiri økjum, so skipanin kundi virka við stuttum skotbrái.

Ad 2) Sambært Fiskimálastýrinum er talan um serliga SAR útgerð, sum er sett í ella á nýggju tyrluna. Víst verður til, at sambært § 8 í sáttmálanum millum Atlantsflog og Fiskimálastýrið um tyrlutænastu, skal Fiskimálastýrið útvega serútgerð til nýútvegaðu tyrluna, og Fiskimálastýrið eigur hesa útgerð. Fiskimálastýrið hevur ikki tryggjað sín ognarrætt mótvegis møguligum panthavarum í tyrluni. Fiskimálastýrið hevur í februar 2002 kunnað um, at ætlanin er at fáa viðurskiftini í rættlag.

Á fíggjarlógini 2000 vóru játtaðar 10 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið, sum varð lagt fyri tingið 30. september 1999, fer sáttmáli at verða gjørdur við Atlantsflog um at veita tyrlutænastu næstu 10 árini. Mett varð, at tað fór at kosta 10 mió.kr. um árið í kapital – og rakstrarkostnaði at skipa fyri tyrlutilbúgving við tveimum tyrlum og 24 tíma vaktarskipan.

Sáttmálin, sum eftir ætlan skuldi koma í gildi í 2000, varð skrivaður undir 7. februar 2001. Tyrlutænastan, sipað verður til í viðmerkingunum, byrjaði ikki í 2000, men í 2001, og nevndu rokningar eru gjald fyri annað enn tað, játtanin var ætlað til. Út frá teim upplýsingum vit hava, halda vit tað tí vera ivasamt, um heimild var at rinda nevndu rokningar av játtanini 2000.

4.5.2 Løgtingslóg um tyrlutænastu

§ 1, stk. 1, í Ll. nr. 127/2000 "um tyrlutænastu" heimilar landsstýrismanninum at gera ein 10 ára sáttmála við tænastuveitara um at veita tyrlutænastu. Sambært § 1, stk. 2, fevnir tænastan um "leiting og bjarging" á sjógvi og landi, eftirlitsflúgving fyri Fiskiveiðieftirlitið, sjúkraflutning og bráðfeingis tyrluflúgving.

Sambært § 2, stk. 1, er treytin fyri sáttmálanum, at tænastuveitarin útvegar sær eina miðalstóra, serútgjørda tyrlu, og at manning er tøk til eitt í sáttmálanum avtalað árligt flúgvitímatal.

Sambært § 2, stk. 2, kunnu avvarðandi landsstýrismenn avtala, at verandi tyrla eisini kann verða nýtt til tænastuna.

Í § 3 er ásett, at tænastuveitarin á hvørjum ári skal lata Fiskimálastýrinum ein grannskoðaðan, greinaðan ársroknskap í sambandi við tyrlutænastuna. Ársroknskapurin verður latin Fiskimálastýrinum í seinasta lagi 1 viku eftir, at hann er samtyktur á aðalfundi felagsins.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið hevur landsstýrismaðurin kunnað Løgtingsins Vinnunevnd um, at tyrlutænastan ikki varð bjóðað út, men teir høvdu valt at taka samráðingar upp við Atlantsflog fyri at hava tænastuna á føroyskum hondum. Ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Fiskimálastýrinum, Vinnumálastýrinum, sjúkrahúsverkinum og løgregluni var komin eftir, at "tann føroyska loysnin" var so bílig, sum til bar. Vit hava spurt, hvat hendan meting byggir á.

Sambært Fiskimálastýrinum er talan um at knýta SAR-tænastuna saman við verandi tyrlutænastu í Føroyum. Mett varð, at møguleikin fyri rakstrarligum fyrimunum var størri, um tyrlutænasturnar vórðu riknar av sama felag. Operativt, tekniskt og fyrisitingarliga byggir SAR-tænastan á eina organisatión, sum er skipað. Sparingin er, at sama tyrla og manning, ið verður brúkt til bygdaflúgving, eisini verður brúkt til SAR og "back-up" til SAR-tænastuna. Flogskipararnir fáa meginpartin av neyðugu flogvenjingini í vanligu bygdaflúgvingini. Annars varð neyðugt at flúgva fleiri kostnaðarmiklar tímar við nýggju tyrluni.

4.5.3 Sáttmálin um tyrlutænastu

7. februar 2001 skrivaðu Fiskimálastýrið og Atlantsflog undir sáttmála "um tyrlutænastu", galdandi frá 1. januar 2001 til 31. desember 2010.

§ 3 Neyðætlan

Atlantsflog átekur sær at hava verandi Bell 212 tyrlu tøka, um nýggja tyrlan ikki er í rakstri. Atlantsflog og Fiskimálastýrið skulu í felag finna aðra loysn á tyrlutilbúgvingini, er Bell 212 tyrlan ikki tøk.

§ 6 Samsýning

Fiskimálastýrið rindar Atlantsflog árliga samsýning 14 mió.kr. umframt MVG. Í nevndu upphædd er íroknað samsýning fyri 170 flogtímar (blokktímar). Rokning fyri eyka flogtímar verður send eina ferð um mánaðin. Vit hava spurt, hvussu komið er fram til 170 flogtímar. *Sambært Fiskimálastýrinum er størsti kostnaðurin av tilbúgvingini at hava manning og tyrlu tilbúnað. Atlantsflog skeyt upp, at talið í sáttmálanum var 150 tímar. Arbeiðsbólkurin kannaði, hvussu nógv tíð var brúkt til SAR og sjúkraflutning, og talið lá tilsamans um 40 til 60 tímar seinastu 4 árini fyri tyrlurnar hjá Færøernes Kommando og Atlantsflog. Roknað varð við 20 til 30 tímum til venjingar, og restin, umleið 75 tímar, skuldu verða nýttir til fiskiveiðieftirlit. Fiskiveiðieftirlitið metti 75 tímar til eftirlit verða ov lítið, og samlaða tímatalið varð tí hækkað til 170 tímar.*

§ 7 Endurskoðan av árligari samsýning

§ 7, stk. 1 Fyritreytir

Sambært stk. 1, byggir árliga samsýningin, 14 mió.kr., á fyritreytirnar í eini rakstrarætlan, sum Atlantsflog hevur sett upp fyri nýútvegaðu tyrluna og verandi tyrlu. Avgerandi fyritreytirnar fyri rakstrarætlanini eru:

1) At verandi skipan, um at røkja innanoyggja tyrluflúgving við tyrluni Bell 212, heldur fram, meðan sáttmálin um tyrlutænastuna er í gildi. Sáttmáli er millum Føroya Landsstýri

(Vinnumálastýrið) og Atlantsflog um innanoyggja tyrluflúgving. Sambært § 4 í tí sáttmálanum er árliga samsýningin 5 mió.kr. (høvuðskonta 6.38.2.04. ”Tyrlutænastan”).

2) at Atlantsflog kemur ikki at hava útreiðslur av, at Bell 212 tyrlan skal lúka økt myndugleikakrøv. Sambært viðmerkingunum til løgtingslógaruppskot ”um tyrlutænastu” mælti ein arbeiðsbólkur m.a. til, at eyka tangar verða settar í tyrluna Bell 212, so hon kundi røkka út á 200 fjórðingar. Vit hava spurt, um Bell 212 tyrlan er ”uppgraderað” sambært tilmælinum, hvussu nógv serútgerðin hevur kostað, og hvar útreiðslurnar eru bókaðar. *Sambært Fiskimálastýrinum er Bell 212 ikki “uppgraderað”, men Atlantsflog hevur gjørt munandi ábøtur á tyrluna*. Sambært sáttmálanum fellur skyldan hjá Atlantsflog at halda Bell 212 tyrluna tøka burtur, um eigarin (Føroya Landsstýri) ella Fiskimálastýrið ikki ynskja at rinda útreiðslurnar av øktum myndugleikakrøvum.

3) at Atlantsflog framvegis kann hýsa og halda tyrlurnar viðlíka undir núverandi umstøðum.

§ 7, stk. 3 Broytingar av árligari samsýning

Fiskimálastýrið hevur rætt til helvtina av staðfestum roknskaparligum vinningi yvir eina millión, sambært grannskoðaðum partsroknskapi.

Atlantsflog hevur rætt til at fáa eitt staðfest roknskaparligt hall goldið av Fiskimálastýrinum, tó so, at Atlantsflog ber tær fyrstu 250 t.kr. av møguligum halli.

Harafturat hevur Atlantsflog rætt til at fáa árligu samsýningina hækkaða, vísir partsroknskapurin eitt hall, sum stendst av vøkstri í útreiðslum til starvsfólk, brennievni og viðlíkahald.

§ 8 Keyp og viðlíkahald av serútgerð

Fiskimálastýrið útvegar serútgerð til nýútvegaðu tyrluna, ið er neyvari tilskilað í fylgiskjali. Ásett er, at Fiskimálastýrið eigur hesa útgerð. Vit hava spurt, um tílík útgerð er útvegað, hvussu nógv hon kostaði, og hvar útreiðslurnar eru bókaðar. *Sambært Fiskimálastýrinum kostaði útgerðin uml. 8.459 t.kr., og er bókað í landsroknskapinum 2000 á játtanina til “Fiskiveiðieftirlit”/tyrlutænasta*.

§§ 12, 14 og 15 Keypsskylda og forkeypsrættur

Sáttmálin er galdandi til 31. desember 2010. Frá 1.1.2003 til 31.12.2010 hava partarnir tó møguleika eina ferð um árið at biðja um samráðingar fyri at endurskoða sáttmálan.

Í § 12, stk. 3, er ásett, at Fiskimálastýrið skrivliga kann siga samstarvið við Atlantsflog upp við 12 mánaða freist. Ger Fiskimálastýrið av at siga samstarvið upp, hevur Stýrið vísandi til § 15 skyldu at keypa nýútvegaðu tyrluna fyri handilsvirðið, tó í minsta lagi bókaða virðið.

Sambært § 16, hevur Fiskimálastýrið til 31. desember 2010 forkeypsrætt til tyrluna til keypsprís, sum próvfast verður bjóðaður av triðjamanni.

Landið rindar allar útreiðslur, og harafturat rentur og avdráttir av láninum, í sáttmálaskeiðnum. Eftir 10 árum hevur landið rindað ein stóran part av kostnaðinum fyri tyrluna, umframt viðlíkahald, og “bókaða” virðið svarar til restskuldina, tí bæði avskrivingar- og avdráttartíðarskeiðið eru 16 ár. Vit hava vístá, at sannlíkt er, at tyrlan eftir 10 árum hevur eitt handilsvirði, sum er væl hægri enn bókaða virðið. Vit hava spurt, hví landið sambært sáttmálanum hevur forkeypsrætt/skyldu at keypa tyrluna til handilsvirðið. *Sambært Fiskimálastýrinum er tað ikki er vist, at handilsvirðið um 10 ár er væl hægri enn bókaða virðið. Tað veldst um marknaðin. Tað er ikki óvanligt í ásetingum um keypsskyldu og forkeypsrætt, at talan er um marknaðarvirðið*.

Vit hava spurt, um Fiskimálastýrið hevur gjørt nakrar útrokningar av fyrimunum og vansum, hevði landið keypt tyrluna frá byrjan. *Sambært Fiskimálastýrinum hava Landsstýrið*

og stovnar tess ikki serkunnleika til at umsita tyrlutænastu. Politisk avgerð varð tí tikin um, at tænastan, t.e. íløga og rakstur, skuldi verða løgd út til aðrar at reka.

4.5.4 Rakstrarætlan

Í § 7, stk. 1, í sáttmálanum um tyrlutænastuna verður víst til eina rakstrarætlan, sum er grundarlagið undir ásetanini av árliga gjaldinum. Talan er um mettar inntøkur og útreiðslur (1.000 kr.)

Útgreining av rakstrarætlan:

1.	Rakstrarinntøkur		
	Fiskiveiðieftirlit	14.000	
	Tyrlutænastan/innanoyggja flúgving	5.000	
	Útoyggjastuðul	150	
	Ferðafólk	452	
	Chartur	2.600	22.202
2.	Flúgviútreiðslur (flúgvitíð 750 tímar)		
	Startgjald ferðafólk: 4.524 á kr. 12	54	
	Startgjald tyrla: 750 tímar á kr. 250	188	
	Fuel: 750 tímar á kr. 1.553	1.165	
	Viðlíkahald: 750 tímar á kr. 5.461	4.095	-5.502
3.	Starvsfólkakostnaður		
	Flogskiparar og stýrimenn (6)	4.835	
	Mekanikarar (3)	1.435	
	Rakstrarleiðari	350	-6.620
	Handling		-400
4.	Annar kostnaður		
	Konsession	150	
	Skrivstovuútr, tlf., o.a.	200	
	Fyrisiting o.a.	1.000	-1.350
	Trygging		-1.922
5.	Rentur og íløga		
	Keyp av tyrlu: 7.104.300$ á 8,15	57.900	
	Eykalutir: 1% av íløgu	579	
	Partur hjá Fiskimálastýrinum	-10.000	
	Íløga, tilsamans	48.479	
	Renta: 6,8% av íløgu	3.297	-3.297
	Avskriving/avdráttur yvir 16 ár		-3.030
	Rakstrarúrslit		**81**

Vit hava lisið rakstrarætlanina. Í flestu førum er ikki greinað, hvussu komið er fram til upphæddirnar. Vit hava tí sett landsstýrismanninum fleiri spurningar, og niðanfyri verður greitt frá hesum samskifti.

Samantvinnan av 2 tyrlum/játtanum

Í § 1, stk. 2, í lógini er ásett, at tyrlutænastan fevnir um leiting og bjarging á sjógvi og landi, eftirlitsflúgving fyri Fiskiveiðieftirlitið, sjúkraflutning og bráðfeingis tyrluflúgving. Sambært § 3 letur tænastuveitarin greinaðan ársroknskap fyri tyrlutænastuna.

Í rakstrarætlanini er raksturin av báðum tyrlunum blandaður saman, og sambært § 7, stk. 2, í sáttmálanum skal Atlantsflog árliga seta ein grannskoðaðan partsroknskap upp fyri báðar tyrlurnar. Vit hava biðið um eina frágreiðing.

Sambært Fiskimálastýrinum varð undir samráðingunum við Atlantsflog umrøtt, um rakstrarroknskapur skuldi verða gjørdur fyri hvørja tyrlu sær. Gjørt varð av ikki at skilja roknskapirnar sundur, tí talan var um somu umsiting, tyrluskiparar, mekanikarar og annað starvsfólk til báðar tyrlurnar. Harafturat kundi tað vísa seg at vera ein fyrimunur í sambandi við inntøkur av tyrlurakstrinum.

Ad 1) Rakstrarinntøkur

Í rakstrarætlanini eru inntøkurnar í 2001 av ferðafólkaflutningi og chartur mettar til at verða uml. 1,1 mió.kr. lægri enn í 2000. Vit hava spurt, hvussu komið er fram til hesi tøl. *Sambært Fiskimálastýrinum hevði Atlantsflog í 2000 havt inntøkur av nøkrum stórarbeiðum, sum vóru liðug, og tí metti Atlantsflog tað vera neyðugt at lækka mettu inntøkurnar.*

Ad 2) Flúgviútreiðslur og viðlíkahald

Flúgviútreiðslurnar eru roknaðar við støði í 750 tímum. Sambært ársfrágreiðingini í 2000 í ársroknskapinum hjá Atlantsflog fleyg tyrlan í 2000 789 tímar. Vit hava spurt, hvussu tímatalið 750 er ásett, og hvussu tímarnir eru býttir millum nýútvegaðu og gomlu tyrluna. *Sambært Fiskimálastýrinum er tímatalið, sum víst á undir rakstrarinntøkunum, nógv lækkað. Tað ber ikki til at býta tímarnar millum tyrlurnar, men Bell 212 verður í høvuðsheitum nýtt til bygdaflúgving og Bell 412 til SAR og eftirlitsflúgving.* Vit hava eisini spurt, hvussu komið er fram til viðlíkahaldsútreiðslurnar. Landsstýrismaðurin hevur ikki svarað hesum spurningi.

Ad 3) Starvsfólkakostnaður

Vit hava spurt, hvørjar fortreytir liggja aftanfyri metta starvsfólkakostnaðin, og um rakstrarleiðari er settur við tilknýti til tilbúgvingina á sjógvi og landi. *Fiskimálastýrið hevur ikki aðrar upplýsingar enn tær, sum ganga fram av rakstrarætlanini.*

Ad 4) Annar kostnaður

Roknað verður við 150 t.kr. til konsession o.a. Afturat skrivstovuútreiðslunum 200 t.kr., verður roknað við 1.000 t.kr. til fyrisiting o.a. Vit hava spurt, hvør konsession talan er um, og vit hava biðið um eina útgreining av metta fyrisitingarkostnaðinum. *Sambært Fiskimálastýrinum er konsessiónin gjald til donsku myndugleikarnar fyri at fáa loyvi at flúgva tyrlurnar. Fiskimálastýrið hevur ikki aðra útgreinan av metta fyrisitingarkostnaðinum enn hana, sum gongur fram av rakstrarætlanini.*

Ad 5) Rentur og íløga

Roknað varð við, at Bell 412EP tyrlan kostaði uml. 7,1 mió.$ til kurs 8,15 ella uml. 57,9 mió.kr., og at keypið varð fíggjað við eini rentu upp á 6,80%. Vit hava spurt, um útveganarvirði, kursur og renta svaraðu til metingarnar, og vit hava biðið um avrit av lánsbrævi. *Sambært Fiskimálastýrinum er bókaða virðið á tyrluni sambært upplýsingum frá Atlantsflog 56,7 mió.kr. Keypið varð fíggjað við eini rentu uppá 6,9%. Fiskimálastýrið hevur ikki avrit av lánsbrævinum.*

Í rakstrarætlanini er ein postur "Partur hjá Fiskimálastýrinum", sum er 10 mió.kr. Vit hava biðið landsstýrismannin um eina frágreiðing. Landsstýrismaðurin hevur ikki svarað hesum spurningi.

4.5.5 Viðmerkingar

Tað er álagt Landsgrannskoðanini at ansa eftir, at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum. Sum víst á omanfyri, halda vit heimildina vera ivasama, at halda nevndu útreiðslur í landsroknskapinum 2000.

Tað er eisini álagt Landsgrannskoðanini at ansa eftir, at hóskandi er atborið fíggjarliga, í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

Sum vit hava lýst málið, hevur landið fyri 19 mió.kr. um árið gjørt 10 ára sáttmála við partafelag um tyrluflúgving við 2 tyrlum. Landið eigur aðra tyrluna. Vit hava ikki fingið nøktandi frágreiðing um, hví landið ikki sjálvt eisini keypti nýútvegaðu tyrluna. Ístaðin rindar landið í sáttmálaskeiðnum eina høga rentu umframt avdráttir av láni hjá felagnum, sum eigur nýútvegaðu tyrluna.

Ger Fiskimálastýrið av at siga samstarvið upp, hevur landið skyldu at keypa tyrluna til handilsvirðið, tó í minsta lagi bókaða virðið, sum svarar til restskuldina av láninum. Tað er sannlíkt, at handilsvirðið er væl hægri enn bókaða virði. Skal landið siga upp samstarvið, kann tí verða talan um at rinda felagnum eina munandi upphædd, uttan at felagið ber nakran váða av týdningi.

Tænastan er ikki boðin út, og eingin meting tykist verða gjørd av kostnaðinum, sammett við, at annað felag, ella stovnur, átók sær at veita somu tænasturnar, undir somu treytum.

Árliga gjaldið, 19 mió.kr., byggir á eina rakstrarætlan við støði í mettum útreiðslum og inntøkum. Eftir øllum at døma hevur Fiskimálastýrið ikki útvegað sær neyvari útgreiningar av fortreytunum fyri rakstrarætlanini og mett um tær. Eru t.d. útreiðslurnar í rakstrarætlanini yvirmettar og inntøkurnar undirmettar, so kann tað í sjálvum sær geva felagnum ein vinning.

Verða árligu nettoútreiðslurnar hægri enn 19 mió.kr., rindar landið "undirskotið". Verða nettoútreiðslurnar lægri, letur landið frá sær meira enn helmingin av "yvirskotinum".

4.6 Nýtt vaktarskip (GL 2000/2 14 2-2)

Í september 1998 heitti Fiskimálastýrið á 21 skipasmiðjur, um at geva tilboð uppá at byggja skipið. Tá ið freistin var úti 15. oktober 1998, vóru 10 tilboð komin inn. Tey lógu úr 70,4 mió.kr. og upp til 116,5 mió.kr.

Landsstýrismaðurin setti ein stýrisbólk at viðgera innkomnu tilboðini, og samráðingar vórðu tiknar upp við 3 skipasmiðjur. Sambært frágreiðingini frá stýrisbólkinum 12. januar 1999 vóru endurskoðaðu tilboðini:

(í mió.kr.)

	Sáttmálaprísur	Eftirlitsútr.	Tilsamans
Tórshavnar Skipasmiðja	109,3	0,7	110,0
Mycklebust Mek. Verksted, Noreg	93,8	1,0	94,8
Huangpu, Kina	81,5	6,5	88,0

Stýrisbólkurin mælti frá at byggja skipið í Kina. Mælt varð til at byggja skipið í Noregi í staðin fyri í Føroyum, tí tað var bíligari, og skipið kundi verða latið fyrr.

Í viðmerkingunum til eykafíggjarlógaruppskotið februar 1999 varð kunnað um, at ein hóskandi loysn, skuldu sjómansskúlanæmingar kunna sigla við skipinum, kostaði 3,0 mió.kr. eyka, og skuldi hesin kostnaður verða lagdur afturat prísinum, sum so varð 97,8 mió.kr.

23. apríl 1999 varð sáttmálin við Mycklebust Mekaniske Verksted A/S skrivaður undir. Sáttmálaprísurin varð 105,5 mió.NOK. Sambært frágreiðingini frá stýrisbólkinum 12. januar 1999 var sáttmálaprísurin uml. 108,3 mió.NOK, svarandi til 93,8 mió.kr. Sostatt lækkaði sátt-

málaprísurin uml. 2,8 mió.NOK, hóast tað varð neyðugt, sambært viðmerkingunum til eykafíggjarlógina februar 1999, at hækka sáttmálaprísin 3 mió.kr.

Fiskimálastýrið hevur í februar 2002 greitt frá, at metti sáttmálaprísurin í januar 1999 uppá 108,3 mió.NOK var ein endurskoðað meting av upprunatilboðnum frá november 1998. Undir sáttmálasamráðingunum varð alt tilfarið síðani gjøgnumgingið av nýggjum. Í hesum sambandi varð staðfest, at nautiska útgerðin var væl bíligari enn mett, og ávís teknisk útgerð varð mett óneyðug. Neyðugu broytingarnar vegna sjómansskúlanæmingarnar vórðu bíligari enn mett, og eisini á øðrum økjum varð funnið fram til bíligari loysnir, soleiðis at endaligi sáttmálaprísurin í apríl 1999 lækkaði til 105,5 mió.NOK. Vegna kurshækkingar varð sáttmálaprísurin í føroyskum krónum tó so at siga tann sami, sum mett í januar 1999.

Yvirlit yvir játtanartøl og roknskapartøl 1998 til 2001 (1.000 kr.):

	1998	1999	2000	2001	Tilsamans
Roknskapur	**1.536**	**38.960**	**58.414**	**229**	**99.139**
Játtan	17.000	23.000	58.800	-	99.180
"Endurjáttað"	-16.000	16.000	-	380	-
Munur	**536**	**-40**	**-386**	**-151**	**-41**

Útreiðslurnar til at fyrireika og byggja skipið, og sigla tað heim, fevna um 4 fíggjarár. Flestu útreiðslurnar eru hildnar í 1999 og 2000. Samlaðu útreiðslurnar eru 99.139 t.kr., og samlaða játtanin var 99.180 t.kr. Sostatt er so at siga samsvar millum játtan og nýtslu.

Vit hava kannað roknskapartølini, og niðanfyri hava vit liðað tey sundur, fyri at geva eina mynd av, hvat peningurin er nýttur til.

		(NOK)	Kursur	
1. Byggikostnaður:				
-Sáttmálaprísur		105.500	90,055	95.008
-Eykaútreiðslur til útgerð til skúlastovu umborð	1.152			
-Aðrar broytingar smb. avtalu	259			
-Dagbøtur	-240	1.171	92,50	1.083
-Goldið til skipasmiðjuna, tilsamans		106.671		96.091
-Mentamálastýrið, endurrindað fyri útgerð til skúlastovu				-1.050
				95.041
2. Prosjektering og sakkøn hjálp:				
-Prosjektering o.a.			1.142	
-Ráðgevandi verkfrøðingur			344	
-Sakførara kostnaður			314	**1.800**
3. Eftirlitsútreiðslur í Noregi:				
-Løn			873	
-Húsaleiga			96	
-Telefonútreiðslur			42	
-Leiga av bili			57	**1.068**
4. Ferðaútreiðslur:				
-Kost- og dagpeningur			152	
-Gestir til avhendan av Brimli			154	
-Kanningarferð til Kina			168	
-Ferðaútreiðslur annars			255	**729**
Tilsamans				**99.139**

Meginparturin av útreiðslunum er byggikostnaður. Talan er um gjøld til norsku skipasmiðjuna samsvarandi byggisáttmálanum, sum var 105,5 mió.NOK. Landsbankin keypti tíðliga í mai 1999 105,5 mió.NOK til kurs 90,055, svarandi til uml. 95 mió.kr.

Vit hava við stakroyndum kannað útreiðsluskjølini, sum vórðu send Gjaldstovuni at bóka. Tey eru konterað, góðkend og ávíst sambært galdandi reglum.

4.7 Magnus Heinason (GL 2000/2 14 3-8)

Magnus Heinason hevur eina kekk-kontu, sum í dag einamest verður nýtt til at gjalda inn á frá avreiðingum á Fiskamarknaði Føroya. Undir grannskoðanini komu vit fram á fleiri útgjøld, sum eftir galdandi reglum skulu verða rindað um búskaparskipan landsins. Vit mæltu Fiskimálastýrinum/Fiskirannsóknarstovuni til at taka spurningin upp við Gjaldstovuna, um frávik skulu verða gjørd frá reglunum.

Vit vístu á, at sambært reglunum skulu møguligar rentuinntøkur av peningastovnskontum verða góðskrivaðar landskassanum, og vit mæltu til at taka spurningin, hvør "eigur" rentuna av inniogn á peningastovnskontuni, upp við Gjaldstovuna.

Vit hava í fleiri ár vístá, at farið verður upp um lønarkarmin. Við eykajáttanarlógini fyri november 2001 varð gjørd ein tillaging av játtanini, fyri at lønarkarmurin fyri 2001 kundi verða hildin, og hendan mannagongdin verður eisini nýtt í framtíðini.

4.8 Lønjavningarstovan (GL 2000/2 14 4-5)

Lógargrundarlag

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 14. mars 2001 vístu vit m.a. á, at sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 73/1997 "um Lønjavningargrunn", broytt við Ll. nr. 83/1998, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð neyvari reglur fyri mannagongdum í sambandi við útgjøld frá Lønjavningarstovuni. Hóast tað í lógini er álagt landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur, eru tær ikki settar. Landsstýrismaðurin boðaði í mars 2000 frá, at arbeitt varð við málinum. Landsstýrismaðurin greiddi í januar 2001 frá, at arbeiðið var drigið út, og at roynt varð skjótast gjørligt at fáa viðurskiftini í rættlag. Fiskimálastýrið hevur í februar 2002 kunnað um, at ongar broytingar eru gjørdar í lógargrundarlagnum.

Í februar 2002 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fiskimálastýrið í 2001 hevur gjørt roknskaparreglur fyri Lønjavningarstovuna. Í 2002 er 1 mió.kr. sett av á fíggjarlógini til íløgur og ábøtur á edv-skipanirnar á Lønjavningarstovuni. Ætlanin er, at hesar skulu samskifta beinleiðis við nýggju lønarskipanina á Gjaldstovuni, sum fer at virka seinni í ár. Í sambandi við dagføringina av edv-skipanunum verður neyðugt at fara ígjøgnum allar mannagongdirnar í sambandi við, at veitingarnar verða rindaðar, og fáa hesar allýstar og gjørdar til reglugerðir. Somuleiðis er játtan sett av til eitt roknskaparfólk, fyri at styrkja um førleikan hjá Lønjavningarstovuni á økinum. Ætlanin er at byrja arbeiðið, tá ið roknskaparfólkið er sett.

Góðkenning av roknskapum

Sambært § 2, stk. 1, í Ll. nr. 83/1998 um "Lønjavningargrunn", hevur stovnurin til endamáls at fyrisita skipanir viðvíkjandi minstuløn, dagstudningi, minstaforvinningi o.a., og hvønn mánað fær Lønjavningarstovan ein mánaðarroknskap fyri hvørja høvuðskontu. Stovnsleiðarin skal kanna, um bókingarnar eru rættar, og vátta við átekning á roknskapin. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at mannagongdin varð ikki fylgd. Tað er nú komið í rættlag.

Innaneftirlit

Vit hava eisini mælt til, at útrokningarnar viðvíkjandi teimum ymisku stuðulsskipanunum, sum Lønjavningarstovan umsitur, á ein skipaðan hátt við stakroyndum verða eftirkannaðar. Landsstýrismaðurin boðaði í mars 2000 frá, at roynt fór at verða sum skjótast at seta eitt innaneftirlit í verk. Í september 2000 staðfestu vit, at einki var hent. Deildarstjórin greiddi frá, at stovnurin hevði ikki neyðugu arbeiðsorkuna at loysa uppgávuna. Landsstýrismaðurin boðaði í januar 2001 frá, at hesi viðurskifti fóru at verða raðfest hægri í framtíðini.

Fiskimálastýrið hevur í februar 2002 kunnað um, at Lønjavningarstovan hevur fingið hægri lønarjáttan á fíggjarlógini 2002, ið skal verða nýtt til at seta eitt fólk við roknskaparligum førleika, til m.a. at taka sær av hesi uppgávu.

Edv-viðurskifti

Lønjavningarstovan umsitur ymiskar stuðulsskipanir til fiskivinnuna. Talan er um fleiri serstakar edv-skipanir, t.d. er ein skipan til dagstudning/minstuløn, ein til minstaforvinning og ein til telefonstuðul. Vit hava áður vístá, at eingin vegleiðing ella dokumentatión er til tær ymisku skipanirnar. Landsstýrismaðurin kunnaði í mars 2000 um, at arbeitt varð við málinum. Í september 2000 staðfestu vit, at einki var hent. Landsstýrismaðurin boðaði í januar 2001 frá, at øll KT-viðurskifti hjá Lønjavningarstovuni fóru at verða endurskoðað, fyri tøkniliga at endurskipa økið.

Fiskimálastýrið hevur í februar 2002 kunnað okkum um, at á fíggjarlógini 2002 er 1 mió.kr. sett av til edv-íløgur í sambandi við ábøtur og dagføringar av verandi skipanum, herímillum ein automatisering av roknskaparligu viðurskiftunum mótvegis skipanunum hjá Føroya Gjaldstovu.

4.8.1 Sjúkratrygd

Í frágreiðing okkara í juli 1999 til Fiskimálastýrið varð greitt frá grannskoðanini á Lønjavningarstovuni av m.ø. umsiting av Ll. nr. 72/1997 "um sjúkratrygd til fiskimenn" sjúkratrygd.

Vit vístu á, at um ein fiskimaður søkir Vanlukkutryggingina um dagpening vegna sjúku, verður ikki kannað eftir, um hann eisini fær sjúkratrygd, og tá ið Lønjavningarstovan heldur ikki kannar, um fiskimaðurin fær dagpening frá Vanlukkutryggingini, ber til at fáa sjúkradagpening úr báðum skipanum.

Eingin umsóknarfreist er ásett í lógini. Einki er til hindurs fyri hjá fiskimanni at søkja um sjúkratrygd fleiri mánaðir eftir, at hann er vorðin sjúkur, og í samband við grannskoðanina av einstøkum málum varð komið fram á slík dømi.

Vit vístu eisini á, at í fleiri førum hava teir, sum fáa sjúkratrygd, í sama tíðarskeiði aðra arbeiðsinntøku. Hugsast kann, at í fleiri førum er orsøkin, at fiskimaðurin er ikki førur fyri at vera til skips, og fær tí sjúkraviðbót, men hann er tó førur fyri at arbeiða eitthvørt á landi. Í lógini um sjúkratrygd er ikki ásett, um fiskimaðurin kann hava aðra inntøku, samstundis sum hann fær sjúkraviðbót. Heldur ongar ásetingar eru um lutvísa mótrokning, sum t.d. í § 9, stk. 5, í lógini um sjúkradagpening (frá Almannastovuni).

Sambært § 2 er sjúkratrygdin ásett til 12.725 kr. um mánaðin. Lønjavningarstovan rindar harafturat 12% í frítíðarløn av sjúkratrygdini. Í lógini stendur einki um frítíðarløn. Tá ið upphæddin er ásett í lógini, hildu vit tað vera ivasamt, um heimild er at rinda frítíðarløn.

Okkara niðurstøða var, at lógin um sjúkratrygd er ófullfíggjað, og als ikki er samskipað við lógarásetingarnar um sjúkradagpening frá Almannastovuni og Vanlukkutryggingini.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar 8. mars 2000 varð tikið samanum viðmerkingar okkara, og vístvarð á veikleikar og ivamál viðvíkjandi umsiting av sjúkratrygd. Í uppskoti til

samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 1995-1998 (Lm. nr. 53/11 1999) mælti Løgtingið landsstýrismanninum í fiskivinnumálum til at skunda undir at fáa umrøddu viðurskifti í rættlag. Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 1999 (Lm. nr. 62/8 2000) átalaði Løgtingið, at einki var hent.

Í januar 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann hevði roynt at broytt løgtingslógina um sjúkratrygd, men politisk undirtøka fekst ikki. Ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Fiskimálastýrinum og vinnuni hevði arbeitt við at tillaga lóggávuna, men eingin endalig niðurstøða varð gjørd. Tí eru framvegis viðurskifti, sum gera, at lóggávan ikki kann verða umsitin til lítar. Landsstýrismaðurin kunnaði um, at hann fer støðugt at bøta um hesi viðurskifti.

Vit hava í november 2001 grannskoðað 20 mál um sjúkratrygd og staðfest, at støðan er óbroytt:

1. Til ber at fáa sjúkratrygd og samstundis fáa dagpening frá Føroya Vanlukkutrygging
2. Eingin umsóknarfreist er ásett
3. Til ber at fáa sjúkratrygd og samstundis hava aðra inntøku
4. Frítíðarløn verður goldin út, hóast eingin heimild er í lógini
5. Lógin er ikki samskipað við lógirnar um dagpening frá Almannastovuni og frá Vanlukkutryggingini

Í sambandi við grannskoðan á Almannastovuni í november 2001 av sjúkradagpeningi eru vit komin fram á eitt mál, har viðkomandi samstundis fekk sjúkradagpening frá Almannastovuni og sjúkratrygd frá Lønjavningarstovuni.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur í oktober 2001 kunnað okkum um, at Almanna- og Heilsumálastýrið hevur havt fund við Fiskimálastýrið og Lønjavningarstovuna, og 26. juni 2001 latið Fiskimálastýrinum eitt notat um, hvussu hesar skipanir kunnu (sam)skipast í framtíðini.

Almanna- og Heilsumálastýrið mælir í notatinum til, at lógin um sjúkratrygd antin verður tikin av, ella at upphæddin og tíðarskeiðið verður javnt stillað við dagpeningalógina, so sleppast kann undan dupultarbeiði og møguligum dupultútgjaldi. Næsta stigið er, at Fiskimálastýrið skal gera eitt tilmæli, sum politisk støða skal takast til. Vit hava í desember 2001 spurt landsstýrismannin, hvat síðani er hent í málinum.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at umsitingin í Fiskimálastýrinum hevur latið landsstýrismanninum eitt notat, har mælt verður til, at politisk støða verður tikin til hesar møguleikar í sambandi við lógina um sjúkratrygd:

at uppskot verður lagt fyri Løgtingið um at taka lógina um sjúkratrygd av, tí hildið verður, at lógin ikki longur kann haldast at hava sjálvstøðugan týdning. Tá ið talan er um sjúku ella skaða, kemur fiskimaður undir dagpeningalógina.

at uppskot um broyting í løgtingslóg um sjúkratrygd verður lagt fyri Løgtingið, har hædd verður tikin fyri teimum viðurskiftum, sum Landsgrannskoðanin metir vera óheppin.

at málsøkið "sjúkratrygd" verður flutt til Almanna- og Heilsumálastýrið. Hesin møguleiki er ikki umrøddur við Almanna- og Heilsumálastýrið.

Í § 1, stk. 2, í Ll. nr. 72/1997 "um sjúkratrygd" verður víst til "lovbekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988 om dagpenge ved sygdom eller fødsel". Sambært § 30, stk. 2, í Ll. nr. 74 frá 8. mai 2001 "um dagpening vegna sjúku v.m." fór lógarkunngerðin úr gildi 1. juni 2001. Sostatt er neyðugt at broyta tilvísingina í lógini um sjúkratrygd. Vit hava spurt landsstýrismannin, nær hetta kemur í rættlag. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at tá ið politisk støða er tikin til, hvat skal henda við løgtingslógini um sjúkratrygd, verður uppskot lagt fyri Løgtingið, sum tekur hædd fyri hesum.

4.8.2 Mánaðarligur minstaforvinningur

Í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar 14. mars 2001 tóku vit samanum úrslitið av grannskoðanini av Lønjavningarstovuni, herímillum eisini av mánaðarligum minstaforvinningi. Víst varð á, at tørvur var á greiðari reglum á fleiri økjum, og mælt varð til ymsar ábøtur:

1. Avrokningarblað: Vit mæltu til at broyta mannagongdina, so at avrokningarblaðið eisini verður váttað. Hetta er komið í rættlag í 2001.
2. Maður ikki við allar túrar: Vit mæltu til, at neyvari reglur verða ásettar í kunngerð.
3. Bert A-inntøka verður roknað sum onnur inntøka: Útróðrarmaður kann hava stórar B-inntøkur, uttan at tað minkar um minstaforvinningin.
4. Inntøkutreytir: Í sambandi við grannskoðanina komu vit fram á fleiri dømi um bátar, sum ikki høvdu verið nakran túr í einum mánaði. Sostatt var manningarparturin 0 kr, men manningin fekk fullan minstaforvinning. Tað kundi lata seg gera, tí báturin, 6 undanfarnu mánaðirnar, hevði avreitt fyri so mikið, at hann leyk treytirnar í § 2, stk. 1, í lógini um minstaforvinning. Nevnt varð sum dømi, at um einsamallur maður avreiddi fyri 54 t.kr. í einum mánaði, leyk hann treytirnar fyri at fáa minstaforvinning komandi 5 mánaðirnar uttan at fara á flot. Teoretiskt nýttist honum sostatt bert at rógva út 6. hvønn mánað fyri at fáa minstaforvinning. Fiskimálastýrið kunnaði um, at landsstýrismaðurin arbeiddi við einum broytingaruppskoti, sum skuldi fyribyrgja, at tað kundi koma fyri. Fiskimálastýrið kunnaði annars um, at teir vóru greiðir yvir trupulleikarnar viðvíkjandi skipanini við minstaforvinningi, men at ringt var at koma fram til eina skipan, sum virkaði nóg væl.
5. Skeivur frymil var í edv-skipanini: Tí vórðu allar útrokningar gjørdar manuelt. Vit mæltu til, at feilurin í edv-skipanini varð rættaður. Hetta er komið í rættlag í 2001.
6. Minstaforvinning og arbeiðsloysisstuðul: Sambært § 3, stk. 3, kann fiskimaður ikki koma undir skipanina um minstaforvinning, um hann samstundis er undir aðrari inntøkutrygdarskipan. Vit komu fram á eitt dømi, har maður hevði fingið minstaforvinning í sama tíðarskeiði, sum hann hevði fingið arbeiðsloysisstuðul. Fiskimálastýrið hevur í februar 2002 kunnað um, at mannagongdin er broytt soleiðis, at samskifti er við ALS í sambandi við útgjaldingarnar.

Fiskimálastýrið helt, at skipanin við mánaðarligum minstaforvinningi er politiskt tilætlað av Løgtinginum. Landsstýrismaðurin hevði roynt at broytt lógina, men politisk undirtøka fekst ikki. Ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Fiskimálastýrinum og vinnuni hevði arbeitt við at tillaga lóggávuna, men eingin endalig niðurstøða varð gjørd. Tí vóru framvegis viðurskifti, sum gjørdu, at lóggávan ikki kann verða umsitin til lítar. Landsstýrismaðurin boðaði í januar 2001 frá, at hann fór støðugt at bøta um hesi viðurskifti.

Vit hava í januar 2002 spurt landsstýrismannin, hvat er hent í málinum. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Fiskimálastýrinum og vinnuni hevði arbeitt við at tillaga lóggávuna, men eingin endalig niðurstøða varð gjørd. Fiskimálastýrið metir, at skipanin við mánaðarligum minstaforvinningi er politiskt tilætlað av Løgtinginum. Landsstýrismaðurin hevur roynt at broyta løgtingslógina, men politisk undirtøka fekst ikki fyri hesum, og tí varð uppskotið tikið aftur undir viðgerðini í Løgtinginum.

4.9 Fiskivinnuroyndir

Játtanin til "Fiskivinnuroyndir", sum Fiskimálastýrið umsitur, hevur seinnu árini verið 8 mió.kr. Talan er um eina "rakstrarjáttan". Í viðmerkingunum stendur einans:

"Fiskimálastýrið umsitur fiskivinnuroyndir, sum verða fyriskipaðar í samstarvi millum Fiskirannsóknarstovuna, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Menningarstovuna. Játtanin er til fiskivinnuroyndir og kanningar, herímillum vørumenning og hvussu mest fæst burtur úr øðrum fiskasløgum."

Í frágreiðing okkara frá september 1998 til landsstýrismannin í fiskivinnumálum vístu vit m.a. á, at fíggjarlógin, og tær fáu viðmerkingarnar frá landsstýrinum í fíggjarlógaruppskotinum, er einasta heimild fyri hesi lutfalsliga stóru studningsskipan. Vit hildu hetta ikki vera nøktandi, og heittu á Fiskimálastýrið um at viðgera spurningin.

Sambært roknskapinum fyri játtanina í 2000 eru lønir hildnar fyri 2,1 mió.kr. Somuleiðis eru lønir hildnar undir m.a. Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum eru "fíggjaðar" av hesi høvuðskontu, hóast játtanin til "Fiskivinnuroyndir" ongan lønarkarm hevur, og einans er útgreinað sum standardkonta 14 "Keyp av vørum og tænastum".

Løgtingsgrannskoðararnir hava í áravís víst á, at játtanin er alt ov lítið útgreinað, og í uppskotum til samtyktar hevur Løgtingið átalað, at tað ikki er broytt.

Í november 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at í fíggjarlógaruppskotinum 2002 varð skotið upp at greina játtanina út á standardkontu 11 og 14. Fiskimálastýrið arbeiðir við at endurskoða verandi mannagongdir í sambandi við játtan av umsóknum til "Fiskivinnuroyndir v.m.", og at fáa tær evnaðar til, til eina meira hóskandi formliga skipan. Hetta arbeiðið fer fram saman við nýsetta verkætlanarleiðaranum innan fiskiídnaðargransking.

4.10 Stuðulslóggáva og stuðulsumsiting

Vit hava seinastu árini víst á, at góður lóggávusiður er, at fyri studningsskipanir, sum venda sær til ein breiðan umsøkjaraskara, verða neyvari reglur ásettar í serstakari lóg við m.ø.:

1. Neyvari endamálsáseting í lógini. Í viðmerkingunum: ítøkiligar ásetingar fyri, hvørji úrslit/eyðkenni kunnu nýtast sum mát fyri, um endamálið er rokkið.
2. Lýsing/avmarkan av, hvør kann fáa stuðul, hvussu stuðulin verður roknaður út, og hvussu stór samlaða stuðulsupphæddin er, vísandi til fíggjarlóg.
3. Reglur fyri, hvussu og nær stuðulin verður goldin út.
4. Heimild í lógini at áseta reglur fyri viðgerð og góðkenning av umsóknum, krøv til skjalprógv, treytir fyri játtan og nýtslu av stuðuli.
5. Heimild í lógini at krevja, at einstaklingar, feløg ella viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar o.l., skulu lúka ávís krøv/verða góðkend, sum treyt fyri stuðuli.
6. Heimild í lógini at áseta neyvari treytir og reglur viðvíkjandi fíggjarætlan, eftirliti, roknskapum og grannskoðan.
7. Ásetingar í lógini um, at ein tilsøgn um stuðul fellur burtur, ella stuðulin skal verða rindaður aftur, um móttakarin ikki longur lýkur settar treytir, ella ikki megnar at fullføra eina ætlan innan ásetta tíð.
8. Upplýsingarskyldu og atgongd til kanningar á staðnum.
9. Møguligar revsireglur.

Umrøddu trupulleikar viðvíkjandi stuðulsumsiting er ikki eitt serstakt fyribrigdi hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, og í frágreiðingini undir "Útbúgving og gransking o.a." hava vit meira alment viðgjørt spurningin um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting.

5. VINNUMÁL o.a.

5.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

6.36.1.04. Havbúnaðarroyndir

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 14,6 mió.kr. Minninýtslan er 3,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vóru 11 mió.kr. veittar P/F Fiskaaling sum stuðul til arbeiðið innan kynbøtur, royndir við nýggjum fiskasløgum, aliráðgeving og royndir við nýggjum aliøkjum. Eftir ætlan skuldu 3,6 mió.kr. verða nýttar til verkætlanir innan sjúkufyribyrging, men áhugin var lítil, og tí varð bert ein lítil partur av upphæddini nýttur til endamálið.

6.37.2.04. Endurgjald til skipasmíð

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5 mió.kr. Minninýtslan er 1,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum var virksemið innan føroyska skipabygging eitt sindur slakari enn mett, og tí var ein partur av játtanini ikki nýttur.

6.37.3.01. Rúsdrekkasøla Landsins (landsfyritøka)

Á fíggjarlógini var yvirskotið mett til 12 mió.kr. Úrslitið er 1,7 mió.kr. hægri. Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin, at sølan vaks við 8,7%. Rúsdrekkasølan heldur, at sølan er vaksin við batnaða búskapinum og øktu keypiorkuni.

6.38.1.04. Hald av landsvegum (rakstrarjáttan)

Tilsamans vóru játtaðar 36,4 mió.kr. Minninýtslan er 1,1 mió.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 654 t.kr.

Á fíggjarlógini fyri 2001 eru høvuðskonturnar 6.38.1.01. "Landsverkfrøðingsskrivstovan", 6.38.1.04. "Hald av landsvegum", 6.38.1.13. "Havnir" og 6.38.2.07. "Flogferðsla" tiknar av og lagdar undir nýggja høvuðskontu 6.38.1.02. "Landsverkfrøðingsstovnurin". Sambært landsstýrismanninum hevur hetta givið stovninum ein smidligari játtanarbygnað, og tað er lættari at halda rakstrar- og lønarkarmin.

6.38.1.11. Vegagerð í Leirvík

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2,5 mió.kr. Minninýtslan er 753 t.kr. Sambært landsstýrismanninum var ætlanin bíligari enn mett, tí "gamli" vegurin var í væl betri standi, enn hildið var.

6.38.1.14. Havnir (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 21,6 mió.kr. Minninýtslan er 4,2 mió.kr. Í 2000 vóru 14,7 mió.kr. játtaðar til "Høvuðsendamál 2. Skopun/Gamlarætt/Hest", soleiðis at arbeiðið við at umbyggja og tillaga hesar ferjulegur kundi verða gjørt liðugt, áðrenn Teistin skuldi í sigling.

Tillagingarnar av ferjulegunum á Gomlurætt og í Skopun vóru so gott sum lidnar í 2000, og tað var liðugt at dýpa í Hesti, men farið varð ikki undir at gera atløgusíðuna í Hesti fyrr enn í 2001, og er tað høvuðsorsøkin til, at so stórur partur av játtanini varð ikki nýttur.

6.38.1.17. Asfaltering við ferjulegurnar í Leirvík og Vestmanna

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 800 t.kr. Meirnýtslan er 188 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð ætlanin dýrari, tí lendið var nógv meira "slitið", enn upprunaliga hildið.

6.38.3.01. Postverk Føroya (landsfyritøka)

Tilsamans vóru játtaðar 7,6 mió.kr. Minninýtslan er 2,2 mió.kr. Postverk Føroya fekk eina eykajáttan 9 mió.kr. á eykajáttanarlógini fyri juni 2000, tí framskrivingar av rakstrinum vístu hetta hall. Raksturin gekk tó eitt sindur frægari enn væntað, tí inntøkurnar frá brøvum og bløðum vórðu eitt sindur hægri. Tí varð møguligt at lækka játtanina á eykajáttanarlógini fyri november 2000 til 7,6 mió.kr.

6.38.3.07. Útvarps- og sjónvarpssendistøðir (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,1 mió.kr. Minninýtslan er 864 t.kr.

6.38.4.01. Bileftirlit Føroya (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini var yvirskotið mett til 790 t.kr. Úrslitið er 516 t.kr. hægri. Høvuðsorsøkin var, at áðrenn ársskiftið vórðu óvanliga nógv koyrikort latin inn til at verða býtt um. Gamla koyrikortið gekk út 31. desember 2000. Eisini merkir vøksturin í búskapinum, at bilatalið veksur, og soleiðis eisini virksemið hjá Bileftirlitinum.

Lønarkarmur

Høvuðskonturnar niðanfyri vísa roknskapir, har farið er upp um ásetta lønarkarmin:

(t.kr)

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	Munur
6.38.1.01.	Landsverkfrøðingsskrivstovan (rakstrarjáttan)	6.050	6.083	33
6.38.1.04.	Hald av landsvegum (rakstrarjáttan)	31.630	32.284	654
6.38.4.01.	Bileftirlit Føroya (rakstrarjáttan)	4.300	4.309	9

6.38.1.04. Hald av landsvegum (rakstrarjáttan)

Tað vóru serliga tvær orsakir til, at lønarútreiðslurnar vórðu størri enn ætlað.

1. Semja varð gjørd við Føroya Arbeiðarafelag um samsýning fyri kallivakt í sambandi við kavarudding. Tað førdi við sær eina økta lønarútreiðslu uml. 800 t.kr.
2. Landsverkfrøðingsstovnurin kendi seg í 2000 noyddan at raðfesta trygdina av tunlum frammarlaga. Umleið 1,5 mió.kr. vórðu nýttar til endamálið, av hesum meginparturin lønir.

5.2 Almennar viðmerkingar

Vit hava í 2001 grannskoðað roknskapar- og játtanarviðurskiftini hjá nøkrum stovnum/deildum undir Vinnumálastýrinum:

- Skráseting Føroya
- Bileftirlit Føroya
- Heilsufrøðiliga Starvsstovan
- Arbeiðseftirlitið
- Tyrlutænastan (Vinnumálastýrið)

- Endurgjald til skipasmíð (Vinnumálastýrið)

Niðanfyri verður kunnað um viðmerkingar okkara til roknskaparviðurskifti, sum eru felags fyri fleiri stovnar. Síðani verður greitt frá grannskoðanini av stovnum, har serlig viðurskifti verða umrødd. Vit hava eisini tikið í aftur viðmerkingar frá seinastu frágreiðing okkara í mars 2001 og greitt frá, í hvønn mun viðurskifti, ið tá vórðu umrødd, eru komin í rættlag.

Roknskaparhald

Fleiri av stovnunum undir Vinnumálastýrinum skráseta sjálvir í bókhaldsskipanini á Føroya Gjaldstovu. Undantikið eru lønar- og ferðaútreiðslur, ið verða sendar Gjaldstovuni at bóka. Í sambandi við vitjanir á stovnum/deildum kannaðu vit, um roknskaparhaldið var dagført, og um mánaðarroknskapir, skjøl, avrit av ávísingum o.a. vórðu sett uppá pláss og goymd forsvarliga. Harafturat kannaðu vit, um bókingar um ársskiftið vóru farnar á rætt fíggjarár. Einki var at finnast at.

Vantandi roknskaparreglugerðir

Landsstovnar skulu hava eina reglugerð fyri roknskaparhaldinum á stovninum samsvarandi rundskrivi frá Fíggjarmálastýrinum 6. februar 2001. Roknskaparreglugerðin skuldi vera góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001.

Flestu stovnarnir hava latið Vinnumálastýrinum uppskot til roknskaparreglugerð. Vinnumálastýrið hevur boðað frá, at farið er undir at góðkenna roknskaparreglugerðirnar í januar 2002.

Roknskapargóðkenning

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini, skal stovnsleiðarin góðkenna roknskapin mótvegis hægri myndugleika. Tað verður gjørt á stovnunum undir Vinnumálastýrinum.

Yvirlit yvir ognir

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal eitt yvirlit yvir ognir og útbúnað vera á stovninum. Vit hava áður gjørt vart við, at bert fáir av landsins stovnum hava eitt dagført yvirlit. Tað er eisini galdandi fyri nakrar stovnar undir Vinnumálastýrinum.

5.3 Vinnumálastýrið (GL 2000/2 15 1-1)

5.3.1 Vantandi góðkenning av greinaroknskapinum

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálastýrinum á serligum góðkenningarskjali. Vinnumálastýrið hevur ikki góðkent greinaroknskapirnar í 2001 fyri § 6 Vinnumál o.a.

Vinnumálastýrið boðaði í desember 2001 Fíggjarmálastýrinum frá, at treytirnar, sum verða settar í góðkenningarskjalinum, eru so umfatandi, at neyðugt varð at taka tær við í roknskaparreglugerðunum hjá stovnunum undir Vinnumálastýrinum, áðrenn greinaroknskapurin kann verða góðkendur. Vinnumálastýrið miðaði ímóti, at roknskaparreglugerðirnar fyri stovnarnar undir Stýrinum fóru at verða góðkendar um ársskiftið 2001/2002. Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at aðalstjórin í Vinnumálastýrinum fer at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálastýrinum frá januar 2002 at rokna.

5.3.2 Vantandi stjórnan av kunningartrygd (GL 2001/1 02 0-2)

Í skrivi til løgmann í august 2001, sum eisini varð sent landsstýrismonnunum til kunningar, vístu vit m.a. á :

at arbeiðið innan landsumsitingina, at tryggja tann elektroniska partin av kunningarkervinum, fer fram óskipað og uttan viðurkendar standardar,

at tað lættliga kann fáa sera óhepnar fylgjur,

at vandi er fyri, at peningur og starvsfólkaorka verða ikki nýtt á skynsaman hátt,

at KT-Forum so at siga ikki er til longur,

at DNL-stýrið ikki hevur ásett nakrar felags trygdarreglur,

at tað er ógreitt, hvørja ábyrgd og hvønn myndugleika KT-forum, DNL-stýrið, onnur stýri og stovnar hava, og hvørjar avleiðingarnar eru, verða boð ikki fylgd.

Vit mæltu Landsstýrinum til, sum skjótast, at taka støðu til, um:

- landsumsitingin skal halda seg til viðurkendar standardar innan stjórnan av kunningartrygd,
- stjórnan av kunningartrygd (Information security management) skal verða gjørt til egið ábyrgdarøki, við egnari játtan,
- stovnar og landsstýrismenn, hvør í sínum lagi, skulu seta krøvini til kunningartrygd, ella um málsøkið skal leggjast til ein landsstýrismann,
- neyðugt er at samskipa arbeiðið í landsumsitingini, og um krøv skulu verða sett til samskiftið stovnanna millum í arbeiðinum við kunningartrygd.

Løgmaður ásannaði í svarskrivi sínum í oktober 2001, at eingin felags kunningar- ella trygdarpolitikkur er ásettur enn, og hann vísti á, at síðani landsumsitingin varð umskipað í 1996/97, hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum havt ábyrgdina av málsøkinum kunningartøkni. Landsstýrismaðurin hevur sostatt ábyrgdina av:

- at tað almenna hevur ein yvirskipaðan kunningartøkni- og trygdarpolitikk.

Løgmaður vísti eisini á, at tað eisini fevnir um ábyrgd av samskipanini millum stýrini t.v.s.:

at kunningartøknin í fyrisitingini verður á einum nøktandi og rímiliga einsháttaðum støði,

at tann samlaði fakligi førleikin á økinum verður mentur og fullnýttur,

at stuðla undir implementeringina av felags tvørgangandi KT-loysnum í almennu umsitingini.

Sambært skrivinum frá løgmanni skal Vinnumálastýrið við hjálp frá einum tvørgangandi KT-forum m.a. gera uppskot til ein KT-trygdarpolitikk, ið skal taka støði í altjóða standardum innan stjórnan av KT-trygd.

Løgmaður vísti á, at yvirskipaða lýsingin av KT-trygd er ábyrgdarøki hjá landsstýrismanninum í vinnumálum. Stovnar og landsstýrismenn skulu sostatt ikki hvør í sínum lagi seta yvirskipaðu krøvini til KT-trygd, men taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri karmarnar.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at Stýrið hevur heitt á aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna um at velja umboð í eitt endurskoðað KT-forum. KT-forum er ikki fullmannað enn. Vinnumálastýrið hevur orðað eitt uppskot til ein KT-politikk, ið skal vera viðgjørt í KT-forum. Tá ið arbeiðið er liðugt, verður tilmælið latið løgmanni og landsstýrismonnum at taka støðu til. Miðað verður ímóti, at arbeiðið skal verða liðugt í seinasta lagi 1. mai 2002.

5.4 Bileftirlit Føroya (GL 2000/2 16 9-5)

Sambært § 64 í løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 "um ferðslu", seinast broytt við Ll. nr. 56/2001, eru gjøldini fyri tænastur, ið Bileftirlitið veitir, herímillum gjøld fyri sýn, spjøldur, koyriroyndir og koyrikort, ásett í lóg. Í desember 2000 tók Bileftirlitið formliga yvir frá Gjaldstovuni umsitingina av vegskattainntøkunum, og í tí sambandinum varð ein roknskaparreglugerð gjørd, sum lýsti arbeiðsuppgávurnar og ábyrgdarøkini.

Virksemið á Bileftirlitinum er fjøltáttað og fer fram í ymsum edv-skipanum. Flestu búskaparligu skrásetingarnar fara fram í edv-skipanum, sum Gjaldstovan hevur ment og rekur. Tann funktiónsskilnaður, sum er ásettur í roknskaparreglugerðini, er settur í verk í edv-skipanunum, og vit hava eisini staðfest, at skráseting av inntøkum, avstemman av kassa og peningastovnskontum o.a. er væl umsitin.

Bileftirlitið hevur ment og rekur "egnar" edv-skipanir, eina kassaskipan umframt 4 aðrar edv-skipanir, m.a. til at loysa skrásetingaruppgávurnar, sum áður lógu hjá Fútaskrivstovuni.

KT-fyritøka umsitur og mennir hesar skipanir. Vit vístu á, at Bileftirlitið var ógvuliga bundið at einum fólki hjá edv-veitara sínum, og vit mæltu til, at samstarvið við fyritøkuna verður formaliserað. Sambært stjóranum verður farið undir hetta í 2002.

Vit hava víst á, at eingin skrivlig skjalfesting av edv-skipanunum finst á stovninum, og ongar brúkaravegleiðingar eru. Stjórin hevur boðað frá, at í 2002 verður farið undir hesar uppgávur, og vísir á, at menningin av egnum edv-skipanum hevur, sambært KT-fyritøkuni, fylgt teimum standardum og normum, sum eru á økinum. Skjalfestingin av edv-skipanunum kann skrivast út, soleiðis at edv-kønur kann taka yvir, um tað er neyðugt.

Vit vístu á, at sambært roknskaparrundskrivinum frá Fíggjarmálastýrinum skal verða greitt frá í roknskaparreglugerðini, "hvussu og hvar edv verður nýtt, og hvussu henda uppgáva er skipað". Víst skal vera til viðkomandi skjøl (kervisfrágreiðing og brúkarahandbók), hvussu skipanin verður nýtt, og hvørji eftirlit eru. Harafturat skal verða víst til skjalatilfar, ið vísir tøkniliga bygnaðin av edv-skipanini, og vísir, hvør hevur atgongd til edv-útgerð, forrit og skráir. Stjórin hevur boðað frá, at í sambandi við, at roknskaparreglugerðin verður dagførd í 2002, verða hesar frágreiðingar eisini gjørdar.

Skrásetingareftirlitið hevur ikki góðkent edv-skipanirnar. Sambært stjóranum er tilgongdin byrjað, og væntandi verður tilfarið sent Dátueftirlitinum miðskeiðis í 2002.

5.5 Heilsufrøðiliga Starvsstovan (GL 1997/2 08 2-1)

Lógargrundarlag

Heilsufrøðiliga Starvsstova – stytt HFS - varð sett á stovn við Ll. nr. 18/1975 "um almenna starvsstovu". Høvuðsendamálini hjá stovninum, sum fyrisitingarliga varð lagdur undir landsdjóralæknaembætið, vóru sambært § 2 í lógini:

at gera kanningar av vatni og ráevnum o.ø. til matvøruframleiðslu

at gera góðskukanningar av matvørum til bæði heimamarknaðin og útflutnings

at granska og geva praktiska frálæru

at veita heilsumyndugleikunum ráð og leiðbeiningar og

at loysa tær uppgávur, sum higartil høvdu ligið undir fiskiídnaðarstovuni

Ll. nr. 18/1975 varð tikin av við Ll. nr. 23/1986 "um Heilsufrøðiliga Starvsstovu". Í Ll. nr. 23/1986 varð endamálsorðingin tikin burturúr lógini, og í staðin fyri varð í § 1, stk. 2, álagt Landsstýrinum við kunngerð at áseta neyvari reglur fyri HFS um arbeiðsøki, samskipanar-

viðurskifti og starvsfólkaviðurskifti. Hóast mong ár eru liðin, eru ongar reglur ásettar í kunngerð.

Landsstýrismaðurin vísir til eitt arbeiðsskjal frá august 2000 um skipan av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Landsdjóralæknaembætinum, sum landsstýrismaðurin, aðalstjórin, landsdjóralæknin og stjórin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hava skrivað undir. Her er avtalað, hvørjar uppgávur, hvør parturin hevur ábyrgdina av. Partarnir hava síðani arbeitt sambært skjalinum, sum verður grundarlagið undir kunngerðini um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, sum ætlanin er at gera í næstum.

Bygnaður

Frá 1. januar 2001 er Heilsufrøðiliga Starvsstovan fyrisitingarliga skipað við eini matvørudeild, eini umhvørvisdeild og trimum kanningarstovum (kemiskari-, mikrobiologiskari- og fiskapatologiskari kanningarstovu), umframt einari avgreiðsluskrivstovu.

Matvørudeildin hevur eftirlitsuppgávur o.a. sambært matvørulógini, og umhvørvisdeildin sambært umhvørvisverndar- og havumhvørvisverndarlógini. Kanningarstovurnar gera greiningararbeiði og selja kanningarúrslit til fólk og virki, umframt hinar deildirnar á stovninum. Størsti parturin av inntøkunum stavar tó frá sølu til virkir.

Avgreiðsluskrivstovan hevur ábyrgd av samskiftinum innan- og uttanhýsis, herímillum telduskipanini á stovninum, skipar fyri skráseting av komandi og farandi posti, hevur ábyrgd av bókasavninum, tekur sær annars av roknskaparhaldinum og øllum vanligum umsitingaruppgávum, og er við í ráðleggingini og fíggjarstýringini á stovninum.

Roknskaparlig viðurskifti

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur gjørt eina reglugerð fyri roknskaparhaldinum. Síðani hevur stovnurin tillagað hana eftir krøvunum í roknskaparrundskrivinum frá Fíggjarmálastýrinum. Sambært landsstýrismanninum er dagførda roknskaparreglugerðin góðkend í januar 2002.

Síðani 1997 hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan skrásett beinleiðis í bókhaldsskipanini á Føroya Gjaldstovu. Kannað verður, um mánaðarroknskapirnir samsvara við undirliggjandi skjøl, og mánaðarroknskapurin verður váttaður av stjóranum mótvegis Vinnumálastýrinum.

Vit grannskoðaðu roknskaparviðurskiftini og í hesum sambandi kannaðu vit eisini við stakroyndum roknskaparskjøl og lønarútgjaldingar. Einki var at finnast at, og eftir okkara tykki eru journalviðurskiftini fyrimyndarlig.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eina neyva stýring av vøru- og tænastuskuldarum. Skuldarar, ið ikki røkja sínar skyldur, fáa einans kanningarúrslit útflýggjað móti kvittan, tó undantikið lógarkravd eftirlit.

Vit hava ikki kannað edv-trygdina á stovninum. Stjórin metir, at edv-viðurskiftini eru trygg, og hevur í skrivi kunnað neyvari um hesi.

Játtanarroknskapir

Játtanarliga er virksemið hjá stovninum býtt sundur í:

- Vanligt virksemi (undirkonta 20): góðkenningar- og eftirlitsuppgávur innan matvøru- og umhvørvisøkini.
- Inntøkufíggjað virksemi (undirkonta 40): rakstur av kanningarstovunum.
- Inntøkufíggjað virksemi (undirkonta 45): verkætlanir.

Sambært játtanarskipanini kunnu landsstovnar fáa játtan til inntøkufíggjað virksemi, um virksemið lýkur ávísar treytir. Endamálið við at skilja inntøkufíggjað virksemi frá vanligum virksemi er, at talan er um sølu av tænastum í kapping við onnur, og m.a. skal prísurin fyri sølu av tænastunum ikki verða kappingaravlagandi mótvegis privatum og øðrum almennum kappingarneytum, og langtíðar miðalkostnaðurin skal verða fíggjaður. Tað merkir m.a., at prísurin skal verða ásettur soleiðis, at inntøkurnar fíggja beinleiðis útreiðslur, roknaðan part av felagsútreiðslunum hjá stovninum, umframt mettar avskrivingar og roknaða rentu.

Samandráttur av roknskapartølunum fyri 2000:

Undirkonta: (í 1.000 kr.):	**20** Vanligt virksemi	**40** Kanningarstovur	**45** Verkætlanir	**Tilsamans**
Søla av vørum og tænastum	-749	-2.190	-653	-3.592
Eftirlits- og umsjónargjøld	-877	-	-	-877
Flytingarinntøkur	-12	-	-1.091	-1.103
Innanhýsis flytingar	-2.282	-3.390	-2.758	-8.430
Inntøkur tilsamans	**-3.920**	**-5.580**	**-4.502**	**-14.002**
Lønarútreiðslur	5.999	3.868	1.971	11.838
Aðrar útreiðslur	5.004	1.696	1.999	8.699
Innanhýsis flytingar	3.480	16	532	4.028
Útreiðslur tilsamans	**14.483**	**5.580**	**4.502**	**24.565**
Nettoútreiðslur	10.563	0	0	10.563

Vanligt virksemi

Í 2000 eru inntøkurnar 3.920 t.kr. Av inntøkunum "Søla av vørum og tænastum" eru 375 t.kr. "overhead" frá verkætlanum á undirkontu 45. Av inntøkunum "Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar" eru uml. 1,6 mió.kr. fluttar frá Oljumálastýrinum til umhvørvisdeildina í sambandi við umsiting av nýggju havumhvørvislógini, 300 t.kr. eru fluttar frá játtanini til "Fiskivinnuroyndir", og 336 t.kr. er roknað "overhead" frá verkætlanum á undirkontu 45.

Inntøkufíggjað virksemi, kanningarstovur

Í 2000 eru inntøkurnar hjá kanningarstovunum 5.580 t.kr. tilsamans. 2.190 t.kr. av inntøkunum er "Søla av vørum og tænastum" og 3.390 t.kr. "Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar". Tað er undirskotið í rakstrinum hjá kanningarstovunum, sum verður flutt til undirkontu 20. Harafturat verða felagsútreiðslurnar eisini bornar av "vanliga virkseminum" á undirkontu 20, sum soleiðis eisini óbeinleiðis fíggjar kanningarstovurnar.

Prísáseting

Landsstýrið hevur við K. nr. 37/2000 "um gjøld fyri tænastur, sum HFS veitir", heimilað stovninum at áseta gjald fyri sínar veitingar, til fulnað fyri tær útreiðslur, sum standast av veitingunum, og hevur álagt HFS at gera príslista fyri sýniskanning, løggilding, skráseting, góðkenning, váttan, eftirlit o.s.fr. Príslisti er gjørdur viðvíkjandi kemiskum og mikrobiologiskum kanningum, men listin fevnir ikki um gjøld fyri løggilding, skráseting, góðkenning o.s.fr.

Sambært § 1 hevur landsstýrismaðurin eftirlit við prísásetingunum hjá stovninum. Tá ið kunngerðin varð sett í gildi, góðkendi Vinnumálastýrið allar prísir. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at sambært § 3 í K. nr. 37/2000 skal HFS kunna landsstýrismannin um møguligar broytingar í gjøldum og um ásetingar av nýggjum gjøldum, og at hann á henda hátt kann fremja eftirlitið.

Prísirnir á tænastunum hjá HFS verða ásettir ájavnt prísum hjá kanningarstovum í øðrum londum. Í summum førum hava kanningarstovurnar roynt at rokna út veruliga kostnaðin, men tað verður ikki skrásett, hvussu nógv einstaka tænastan kostar.

Vit hava víst á, at kanningarstovumar lúka ikki treytirnar í játtanarskipanini um "inntøkufíggjað virksemi", og virksemið kann vera kappingaravlagandi. Landsstýrismaðurin er samdur við Landsgrannskoðanini í hesum og ásannar, at gjøldini ikki svara til kostnaðin av tænastuni. Roknað varð við undirskoti fyrstu árini, og at inntøkur og útreiðslur síðani fóru at javnviga eftir nøkrum árum. Í 2002 verður roknað við einum undirskoti svarandi til 58% av samlaðu útreiðslunum. Frá 2003 fer Vinnumálastýrið ikki at stýra virkseminum á kanningarstovunum sum "inntøkufíggjað virksemi". Ætlanin er tó at varðveita raksturin á egnari undirkontu, soleiðis at virksemið framhaldandi gongur greitt fram á fíggjarlógini, og fyri at HFS og Vinnumálastýrið kunnu verða eggjað til at fáa raksturin at bera seg.

Inntøkufíggjað virksemi, verkætlanir

Í 2000 var talan um einar 20 virknar verkætlanir.

Søla av vørum og tænastum er 653 t.kr., harav 200 t.kr. eru fluttar millum umhvørvisdeildina á undirkontu 20 og verkætlanina "Umhvørviseftiransing". 453 t.kr. eru overheadinntøkur, harav 374 t.kr. vóru "overheadinntøkur" í 1999 hjá undirkontu 20, sum vórðu fluttar millum ár. Vinnumálastýrið hevur heitt á stovnin, um at ansa eftir at slíkt ikki hendir aftur.

Flytingarinntøkurnar fevna einamest um stuðul frá útlendskum stovnum og grunnum til umhvørvisverkætlanir.

Av inntøkunum "innanhýsis flytingum millum almennar stovnar" stava 2,1 mió.kr. frá játtanini "Fiskivinnuroyndir", og 0,6 mió.kr. frá játtanini "Stuðul til umhvørvisverndartiltøk".

Av útreiðslunum í fíggjarárinum 2000 vóru 711 t.kr. "overheadútreiðslur" til undirkontu 20.

Fiskivinnuroyndir

Sum nevnt stava 2,1 mió.kr. av inntøkunum frá játtanini til "Fiskivinnuroyndir". Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið umsitur Fiskimálastýrið "Fiskivinnuroyndir", sum verða fyriskipaðar í samstarvi millum Fiskirannsóknarstovuna, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Menningarstovuna. Játtanin er til fiskiroyndir og kanningar, herímillum vørumenning og hvussu sum mest fæst burtur úr øðrum fiskasløgum.

Seinnu árini hevur siðvenja verið, at HFS fær ein part av játtanini, uml. 2 mió.kr., til at fíggja nakrar av sínum verkætlanum. Talan er í flestu førum um verkætlanir, sum HFS tekur stig til. Tilmælið um býtið av játtanini verður vanliga lagt fyri landsstýrismannin í fiskivinnumálum í mars mánaði at taka støðu til.

Yvirlit yvir verkætlanir í 2000

Nr.	Heiti	t.kr
26	Hjáframleiðsla 1998	9
29	Vandamálsgreining 1998	330
38	Trihalomethanir	150
39	Vatngóðska, árstíðarvariatiónir	130
41	Laksaslógv	425
42	Hjáframleiðsla – forprosjekt	375
48	Úrtøkuøking og størri gagnnýtsla av hjáframleiðslu	650
	Tilsamans	2.069

Vanliga mannagongdin er, at HFS heldur útreiðslurnar á teim ymisku verkætlanunum, og við jøvnum millumbili verða rokningar sendar Fiskimálastýrinum. Rokningarnar svara til útreiðslurnar, og í flestu førum er harafturat talan um eitt overhead uppá 20%, sum verður latið undirkontu 20. Hesin bókingarháttur ber í sær, at inntøkur og útreiðslur hjá verkætlanunum vanliga javnviga við árslok.

Stuðul til umhvørvisverndartiltøk

Ein serlig verkætlan ber heitið "Umhvørviseftiransing". Av inntøkunum í 2000 stava 602 t.kr. frá játtanini "Stuðul til umhvørvisverndartiltøk", sum er undir málsøkinum "Umhvørvi og orka". Á fíggjarlógini 2001 er mannagongdin broytt. Av játtanini "Umhvørvisvernd" uppá 2,92 mió.kr., sum eisini er undir málsøkinum "Umhvørvi og orka", eru 600 t.kr. fluttar til verkætlanina, og 2,32 mió.kr. eru fluttar til undirkontu 20 "vanligt virksemi", har tær fíggja lønarútreiðslurnar hjá umhvørvisdeildini.

Samanumtikið má verkætlanin "Umhvørviseftiransing" haldast at fevna um virksemi, sum er ein partur av vanliga virkseminum hjá HFS á umhvørvisøkinum. Stjórin hevur greitt frá, at virksemið í fíggjarárinum 2001 er játtað á undirkontu 20, men av tí at lønarkarmurin ikki er hækkaður samsvarandi, er lønin í 2001 bókað á undirkontu 45.

Aðrar verkætlanir

Aðrar verkætlanir eru í høvuðsheitum verkætlanir á umhvørvisøkinum, sum verða fíggjaðar av m.ø. norðurlendskum stovnum og grunnum. Harav er verkætlanin "AMAP" tann størsta. Verkætlanin fevnir um samskipaðar kanningar av dálking av umhvørvi í fleiri londum, og verður fíggjað av Dansk Polarcenter.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sendir rokning til stuðulslataran fyri hildnar útreiðslur, umframt eitt overhead uppá 60% av lønarútreiðslunum. Av hesum fara 20% til at rinda part av føstum útreiðslum, sum undirkonta 20 hevur av at umsita og hýsa verkætlanini. Restin, tey 40%, verða verandi á undirkontu 45, og verða at nýta til at seta í verk nýggjar verkætlanir og til at rinda møguligt hall av øðrum verkætlanum.

Viðmerkingar

Játtanarreglurnar um "inntøkufíggjað virksemi", sum skal verða bókað á serstakari undirkontu, er sum útgangsstøði ætlað til vinnuliga sølu av vørum og tænastum, og strongu reglurnar um prísáseting skulu forða fyri, at alment vinnuligt virksemi verður kappingaravlagandi.

Verkætlanirnar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kunnu í flestu førum ikki metast sum vanligt vinnuligt virksemi. Talan er um granskingar- og menningarverkætlanir, sum stovnurin oftast tekur stig til, í framhaldi av vanliga virkseminum. Hesar verkætlanir verða fyri ein stóran part fíggjaðar av árligu játtanini til "Fiskivinnuroyndir", og kemur úrslitið av verkætlanunum stovninum og ofta eisini vinnulívinum til góðar. Í øðrum førum er talan um verkætlanir, sum fara fram í samstarvi við m.a. norðurlendskar stovnar og grunnar.

Verkætlanirnar verða framdar yvir 1-3 ár, og starvsfólkini, sum starvast við verkætlanunum, eru sett eftir sáttmála, sum ofta bert er galdandi fyri eitt ár í senn, og fyri ein stóran part verða reglurnar um útreiðslur í sambandi við "inntøkufíggjað virksemi" hildnar. Leiðslan hevur víst á, at skipanin við "inntøkufíggjaðum virksemi" er smidlig í mun til vanliga virksemið, m.a. tí stovnurin er ikki bundin av lønar- ella ferðakarmi.

Umrøddu verkætlanir á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eru ikki nakað eindømi, at verkætlanir undir "inntøkufíggjað virksemi" eru ikki vinnuligar. Eftir okkara tykki er á øllum málsøkjum tørvur á einum greiðum skilnaði á undirkontustøði ímillum "inntøkufíggjað virksemi" og annað "studningsfíggjað virksemi", sum ikki er vinnuligt, men sum heilt ella lutvíst

verður fíggjað av øðrum. Hetta gerst meira viðkomandi, nú tað verður alt meira vanligt, at privat feløg, grunnar o.o. eru við til at fíggja m.a. ymsar granskingarverkætlanir. Í tí sambandi er avgerandi at staðfesta, at talan skal verða um granskingarvirksemi, sum stovnurin sjálvur hevur áhuga í at fremja, og at tað er stovnurin, sum hevur "ognarrættin" til úrslitini, sum kunnu verða almannakunngjørd. Okkum kunnugt arbeiðir Fíggjarmálastýrið við at broyta játtanarskipanina, so tað eisini verður heimild at hava ikki-vinnuligt "studningsfíggjað virksemi" á serstakari undirkontu.

5.6 Arbeiðseftirlitið (GL 1997 / 2 09 2-1)

Lógargrundarlagið undir Arbeiðseftirlitinum er Ll. nr. 70/2000 "um arbeiðsumhvørvi"; Ll. nr. 51/1992 "um kavaravinnu" og L. nr. 68, 1. april 1912 "angående sprængstoffer", sum broytt við Ll. nr. 40/1978.

Sambært § 63 í uppskotinum til nýggju løgtingslógina um arbeiðsumhvørvi (Lm. nr. 80/1999) kundi landsstýrismaðurin seta í gildi fyrisitingarliga ásettar reglur, sum eru galdandi í Danmark. Eisini varð skotið upp, at fyrisitingarliga ásettu reglurnar sluppu undan at verða kunngjørdar eftir vanligum reglum. Fyrimunirnir vóru, at stovnurin slapp undan orkukrevjandi týðingum og dagføring av reglunum samsvarandi teknisku- og millumtjóða menningini.

Vinnunevnd Løgtingsins strikaði § 63 í uppskotinum, og tí helt stovnurin, at minst ein løgfrøðingur mátti verða settur í starv á Arbeiðseftirlitinum í 2002. Landsstýrismaðurin hevur í januar 2002 kunnað um, at í sambandi við samráðingarnar um játtan fyri 2002 gjørdi Fíggjarmálastýrið vart við, at tað helt løgfrøðiligu uppgávuna eiga at liggja hjá Vinnumálastýrinum. Vinnumálastýrið helt tað tó vera eina betri loysn, um ein løgfrøðingur arbeiddi burturav við slíkum málum á Arbeiðseftirlitinum.

Sambært § 70 í Ll. nr. 70/2000 "um arbeiðsumhvørvi" er Ll. nr. 58/1974 "um arbeiðaravernd", við seinni broytingum, farin úr gildi. Sambært § 70, stk. 2, eru kunngerðir við heimild í Ll. nr. 58/1974 galdandi til tær verða settar úr gildi, ella verða avloystar av reglum settar við heimild í Ll. nr. 70/2000. 40 kunngerðir vórðu lýstar við heimild í Ll. nr. 58/1974.

Ein kunngerð er sett í gildi eftir nýggju lógini, tvær mangla bert at verða lýstar, og tvær eru ávegis. Stovnurin er ikki byrjaður at broyta reglugerðir o.l. Sostatt er nógv arbeiði eftir at gera.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, hvussu arbeiðið at endurskoða kunngerðir er raðfest, og at Vinnumálastýrið støðugt arbeiðir við at betra um rættargrundarlagið, sum stovnurin arbeiðir eftir.

Stovnurin umsitur bert partar av Ll. nr. 51/1992 "um kavaravinnu", og stjórin saknar eina formliga áheitan, har tað verður álagt stovninum at umsita lógina, vísandi til, at tað í § 15, stk. 1, er ásett, *"at Landsstýrið kann heimila Arbeiðseftirlitinum ella øðrum samsvarandi stovni undir Landsstýrinum at fremja tær heimildir, sum í hesi lóg eru latnar Føroya Landsstýri".* Vinnumálastýrið vísir á, at umsitingin av kavaraviðurskiftunum liggur hjá tveimum aðalstýrum, Fiskimálastýrinum og Vinnumálastýrinum. Í mai 2001 varð bólkur við umboðum frá aðalstýrunum og Arbeiðseftirlitinum settur til at gera uppskot til at dagføra reglurnar á økinum og fyri at gera av, hvussu økið skal verða umsitið í framtíðini. Í oktober 2001 varð nýggjur bólkur við umboðum frá Fiskimálastýrinum og Arbeiðseftirlitinum settur at gera tilmæli um reglur á økinum. Úrslitið er handað Vinnumálastýrinum í januar 2002.

Arbeiðseftirlitið umsitur bert tann partin av L. nr. 68/1912 "angående sprængstoffer", sum er ásett í K. nr. 11/1980 "um goymslur til spreingievni".

5.7 Ferðaráð Føroya (GL 1997/2 15 2-1)

Í seinastu frágreiðing varð umrøtt, at vit í februar 1998 høvdu víst á fleiri ógreið MVG-viðurskifti. Ferðaráðið hevði havt samskifti við Toll- og Skattstovu Føroya fyri at greiða trupulleikarnar, men hevði einki frætt aftur. Ferðaráðið hevur í februar 2002 kunnað um, at stovnurin í desember 2000 fekk svar frá Toll- og Skattstovu Føroya, men í skrivinum verður støða ikki tikin til allar teir reistu ivaspurningarnar.

5.8 Rúsdrekkasøla Landsins (GL 1997 / 2 03 9 - 6)

Vit hava grannskoðað ársroknskapin fyri 2000, og hava verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum í árinum. Eftir árslok hava vit grannskoðað vørusølu, vørunýtslu, vørugoymslur, lønir, rakstrarkostnað, gjøgnumgingið avstemmanir viðvíkjandi banka- og girokontum, kreditorum o.a. Vit hava eisini kannað, um samsvar er ímillum bókhaldið hjá Rúsdrekkasøluni og skrásettu roknskapartølini í landsroknskapinum.

Rúsdrekkasølan er partur av landsroknskapinum. Harafturat verður árliga gjørdur ein roknskapur eftir vanligum rakstrarbúskaparligum grundreglum. Niðanfyri er gjørdur ein samandráttur av roknskapunum árini 1996 – 2000:

(1.000 kr.)

	2000	1999	1998	1997	1996
Bruttovinningur	26.950	24.518	24.385	23.214	23.262
Starvsfólkakostnaður	-7.494	-6.550	-5.716	-6.763	-6.113
Avskrivingar	-1.928	-1.631	-1.941	-2.382	-1.778
Annar kostnaður	-4.698	-4.024	-4.062	-4.338	-4.027
Rentur, netto	218	97	68	4	119
Roknskaparligt avlop	13.048	12.411	12.734	9.735	11.463
Avskrivingar, førdar aftur	1.928	1.631	1.941	2.381	1.778
Íløgur	-1.298	-1.445	-902	-4.068	-1.533
Avroknað til landskassan	**13.678**	**12.597**	**13.773**	**8.048**	**11.708**
Aktiv:					
Støðisogn	4.383	5.013	5.199	6.239	4.553
Vørugoymsla	10.452	6.996	9.012	7.569	9.131
Inniogn í peningastovni	11.555	12.753	17.968	1.347	3.462
Áogn og tíðaravmarkanir	1.366	901	1.247	945	133
	27.756	**25.663**	**33.426**	**16.100**	**17.279**
Passiv:					
Vøru- og tænastuskuld	16.925	14.943	12.843	12.737	13.364
Millumrokning við landskassan	5.735	4.057	13.960	-4.227	-939
Mvg og tíðaravmarkanir	713	1.650	1.423	1.351	302
Skuld, tilsamans	23.373	20.650	28.226	9.861	12.727
Eginogn	4.383	5.013	5.199	6.239	4.552
	27.756	**25.663**	**33.426**	**16.100**	**17.279**

5.9 Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar (GL 1998/2 15 3-2)

Sambært §§ 1 og 2 í Ll. nr. 87/1996 "um endurgjaldsgrunn til alivinnuna" er endamálið við grunninum at veita endurgjald, tá ið landsdjóralæknin hevur givið boð um at avlíva fisk sambært § 7 í Ll. nr. 26/1987 "um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum" v.s.b.

Vit hava áður vískt á, at stóri vøksturin innan alivinnuna kundi hava við sær, at grunnurin neyvan varð førur fyri at veita fult endurgjald, skuldi álvarsom sjúka tikið seg upp. Stóri spurningurin var, hvat hendi, varð grunnurin tómur, og endurgjøldini vórðu størri enn eginognin. Vinnumálastýrið kom til ta niðurstøðu, at sambært § 6 í lógini er gjørt endaliga upp við skyldum landskassans mótvegis grunninum, og Stýrið helt ikki, at landskassin hefti fyri krøvum mótvegis grunninum.

Síðani er Ll. nr. 26/1987 tikin av við § 51, stk. 1, nr. 4, í Ll. nr. 16/2001 "um djórasjúkur". Sambært § 40, stk. 1, í hesi lóg letur tað almenna ikki endurgjald fyri fisk á nøkrum menningarstigi, ið verður avlívaður eftir boðum frá myndugleikunum. Sambært § 40, stk. 2, letur tað almenna ikki endurgjald fyri fíggjarligt tap, ið stendst av tiltøkum, sum verða áløgd eftir lógini.

Í sambandi við at ILA-sjúkan í 2000 rakti eitt alibrúk, varð eitt endurgjaldskrav reist ímóti grunninum. Hetta hendi, áðrenn lógin varð broytt,. Í 2001 eru goldnar út uml. 2,9 mió.kr. til felagið. Kravið var munandi størri, og málið er farið í rættin. Tá ið málið er endaliga avgreitt, er ætlanin at taka av lógina og grunnin.

Við árslok 2001 var eginognin hjá grunninum uml. 14,4 mió.kr.

5.10 Havbúnaðarroyndir (GL 1998/2 15 3-2)

Á fíggjarlógunum 1998-2001 er árliga játtanin til havbúnaðarroyndir 14,6 mió.kr. Sambært viðmerkingunum er játtanin lutað sundur í tveir partar:

Stuðul til arbeiði innan kynbøtur, royndir við nýggjum fiskasløgum, aliráðgeving og royndir við nýggjum aliøkjum	11,0 mió.kr.
Sjúkufyribyrging	3,6 mió.kr.
Tilsamans	14,6 mió.kr.

Um játtanina 11 mió.kr. verður greitt frá í viðmerkingunum, at endamálið er at veita stuðul til arbeiðið, sum Vinnumálastýrið fremur í samstarvi serliga við P/F Fiskaaling, og verður hetta samstarv ásett í sáttmála.

18. mars 1999 var ein 3-ára sáttmáli, um árligan studning 11 mió.kr., skrivaður undir millum Fiskaaling og Vinnumálastýrið. Í sáttmálanum verður vískt til umsóknina frá Fiskaaling 8. februar 1999, og er hon undirskjal til sáttmálan.

Umsóknin um tær 11 mió.kr. er greinað soleiðis út:

Kynbøtur	5,4 mió.kr.
Kalvaaling	4,2 mió.kr.
Aliráðgeving	0,4 mió.kr.
Royndir at finna nýggj aliøki	1,0 mió.kr.
Tilsamans	11,0 mió.kr.

Í umsóknini vísir felagið á, at í uppgerðini eru allar inntøkur frá kynbóta- og royndarvirkseminum íroknaðar, soleiðis at upphæddin, søkt verður um, má verða at rokna sum ein nettoupphædd. Kunnað verður um, at bókhaldið nú er lagt soleiðis til rættis, at skott er ímillum handilsliga virksemið hjá Fiskaaling og tað virksemið við verkætlanum, sum Fiskaaling rekur fyri Landsstýrið. Allar inntøkur og allar útreiðslur frá verkætlanarvirkseminum verða bókaðar á hvørja verkætlan sær. Gjørt verður vart við, at tær verkætlanir, sum verða gjørdar í bygningum og við útgerð, sum Fiskaaling eigur, mugu gjalda leigu, og harafturat hevur felagið roknað sær pening (over-head) at fyrisita royndarvirksemið.

Í sáttmálanum er m.a. ásett, at studningurin er treytaður av neyðugari játtan á fíggjarlógini. Eisini er ásett, at eitt yvirskot við árslok 2001, gjørt upp í seinasta lagi 1. apríl 2002, fellur aftur í landskassan.

Uppgerð yvir, hvussu studningurin er nýttur, skal á hvørjum ári verða latin Vinnumálastýrinum. Í sáttmálanum er eisini ásett, at studningurin skal verða førdur yvir raksturin, so hvørt sum hann verður nýttur, og at ikki nýttur studningur skal verða at síggja á fíggjarstøðuni.

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar kunnaðu vit um, at vit í skrivi til landsstýrismannin í februar 2001 høvdu víst á, at játtanar-, ognar- og roknskaparviðurskiftini, sum eru tengd at játtanini á fíggjarlógini til "Havbúnaðarroyndir", tykjast ógreið á fleiri økjum. Tað førir eisini við sær óvissu um roknskapar- og skattligu viðurskiftini hjá P/F Fiskaaling, sum eisini er fíggjarliga merkt av, at vinnuliga virksemið í 1999 gav hall, og so at siga er hildið uppat. Eftir okkara tykki er Løgtingið ikki nóg væl kunnað um hesa árligu játtan 11 mió.kr., sum eitt alment partafelag stendur fyri, og sum einans byggir á heldur ógreiðar og ófullfíggjaðar viðmerkingar á fíggjarlógini.

Talan er um eina lutfalsliga stóra játtan, sum fer til íløgur/verkætlanir, sum fevna um fleiri fíggjarár. Tí hildu vit tað vera rættast, at landsstýrismaðurin legði uppskot fyri tingið um serstaka lógarheimild, so at eitt so týðandi mál fær eina hóskandi viðgerð í tinginum. Í hesum sambandi átti tingið eisini at verið kunnað um støðuna hjá P/F Fiskaaling, so at tingið fekk høvi at taka støðu til, hvønn leiklut felagið skal hava í framtíðini.

Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2001 frá, at hann arbeiddi við einum lógaruppskoti, sum ætlandi skal greiða umrøddu játtanar-, ognar- og roknskaparviðurskifti. Landsstýrismaðurin væntaði, at lógaruppskotið fór at verða liðugt á heysti 2001. Landsstýrismaðurin hevur í januar 2002 kunnað um, at løgtingslógaruppskot um avhendan av almennum ognum til P/F Fiskaaling er sent til hoyringar, og at ætlanin er at leggja uppskotið fyri Løgtingið í hesi tingsetuni. Endamálið við lógaruppskotinum er at gera ognarviðurskiftini hjá felagnum greiðari og at bøta um møguleikarnar hjá felagnum at gera vísindaligar royndir í sambandi við aling av fiski o.a. Við lógaruppskotinum er eisini ætlanin at geva Løgtinginum eina hóskandi kunning viðvíkjandi virkseminum hjá P/F Fiskaaling, herímillum eisini um stuðulsviðurskiftini hjá felagnum.

Sambært landsstýrismanninum er ætlanin at leggja umsitingina av stuðlinum til Vinnuframagrunnin. Í 2002 lækkar játtanin til havbúnaðarroyndir við 3 mió.kr., og øll játtanin uppá 11 mió.kr. verður veitt P/F Fiskaaling til kynbøtur, royndir við nýggjum fiskasløgum, aliráðgeving og royndir við nýggjum aliøkjum.

5.11 Tyrlutænastan (GL 1998/2 15 3-2)

Vinnumálastýrið hevur seinnu árini rindað 5 mió.kr. á høvuðskontu 6.38.2.04. "Tyrlutænastan". Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið hava Føroya Landsstýri (Landsstýrið) og Atlantic Airways (Atlantsflog) sáttmála um flúgving millum oyggjarnar við tyrlu. Játtanin svarar til gjaldið, sum er ásett í sáttmálanum.

Sáttmálin fekk gildi 1. januar 1996. Sambært § 1 tekur Atlantsflog á seg at reka tyrluna hjá Landsstýrinum, og Landsstýrið letur Atlantsflog tyrluna til nýtslu, umframt eykalutir, vørugoymslu o.a.

Í § 3 er ásett, at Atlantsflog veitir Landsstýrinum tyrlutænastu sambært galdandi ferðaætlan, umframt SAR (Search and Rescue). Veitingin fevnir um operativa og tekniska raksturin/viðlíkahaldið. Tyrlutænastan fevnir um ta ferðaætlan, ið var galdandi í 1993, svarandi til 355 tímar. Í § 4 er ásett, at árliga samsýningin er 5 mió.kr. Sambært § 6 kann sáttmálin verða

sagdur upp til ein 1. mars við 6 mánaða skrivligari freist. Sáttmálin kann verða sagdur upp uttan freist, um annar parturin misheldur hann.

Fiskimálastýrið og Atlantsflog hava 7. februar 2001, við heimild í § 1, stk. 1, í Ll. nr. 127/2000 "um tyrlutænastu", gjørt 10-ára sáttmála um tyrlutænastu til "leiting og bjarging". Sambært sáttmálanum er ein avgerandi fyritreyt, at verandi skipan, við rakstri av innanoyggja tyrluflúgving við Bell 212 tyrluni, heldur fram, meðan sáttmálin er í gildi.

Sostatt tykist sáttmálin um innanoyggjaflúgving óbeinleiðis longdur til 10 ár, og raksturin av tyrluni, sum landið eigur, er roknskaparliga samantvinnaður við raksturin av nýggju tyrluni, sum Atlantsflog eigur, men í viðmerkingunum til fíggjarlógini til høvuðskontu 6.38.2.04. verður ikki kunnað um broyttu støðuna.

Sambært landsstýrismanninum ætlar Vinnumálastýrið at siga upp sáttmálan frá 1996 við Atlantsflog um innanoyggjaflúgving, og arbeiðir við at gera ein nýggjan sáttmála, har m.a. SAR-uppgávurnar verða tiknar burtur úr sáttmálanum, tí tilbúgving sum málsøki er flutt til Fiskimálastýrið.

Eykalutir o.a.

Við sáttmálanum frá 1996 fekk Atlantsflog nýtslurætt til eykalutir, vørugoymslu o.a., og ásett er, at ognirnar skulu haldast skildar frá ognunum hjá Atlantsflog, soleiðis at eingin ivi er um, hvør eigur tær.

Fer sáttmálin úr gildi, hevur Atlantsflog skyldu at lata Landsstýrinum tilskilaðu ognirnar aftur. Eru tær ikki til, hevur Landsstýrið rætt til eina peningaupphædd frá Atlantsflog, svarandi til virðið á ognunum. Tyrlan skal verða latin Landsstýrinum aftur í sama standi, sum við yvirtøkuna. Gjørt verður upp fyri komponentar og brúkslutir, sum skulu verða skiftir út eftir ávíst tíðarskeið ella flogtímatal, og munurin verður avroknaður millum partarnar.

Atlantsflog skal halda goymslur av komponentum og brúkslutum soleiðis, at virðið á goymsluni ongantíð fer niðurum 1 mió.kr. minni enn yvirtøkudagin.

Atlantsflog skal á hvørjum ári – 31. desember – telja ognirnar, og skal fyri tann 1. mars árið eftir lata Landsstýrinum samanteljingina, skrivliga og váttaða av felagsins grannskoðara saman við peningavirðinum á ognunum. Vit hava spurt landsstýrismannin, um tað verður gjørt, og biðið um avrit av seinastu uppgerð. Landsstýrismaðurin hevur sent okkum eina uppgerð pr. ultimo 2000, sum einans er váttað av felagnum, men ikki av grannskoðaranum. Eftir hesum at døma eru ásetingarnar í sáttmálanum ikki hildnar. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at Stýrið hevur ikki fingið uppgerðina á hvørjum ári, men tað verður gjørt í framtíðini.

5.12 Endurgjald til skipasmíð (GL 1998/2 15 3-2)

Í 2000 var stuðulin uml. 3,8 mió.kr.

Lógargrundarlag

Stuðulin verður goldin út við heimild í Ll. nr. 73/1996 "um studning til skipasmiðjur". Stuðul verður latin til fulla ella partvísa endurrindan av farmagjaldsútreiðslum og innflutningsgjøldum av tilfari til bygging ella umbygging av "flótandi eindum". Er talan um umbygging, skal kostnaðurin vera 3 mió.kr. ella meira.

Til endurrindan av farmagjaldsútreiðslum kann Landsstýrið, sambært § 1, stk. 1 og 2, veita stuðul upp til 4,5% av sáttmálaprísinum ella umbyggingarkostnaðinum. Sambært viðmerkingunum til løgtingslógaruppskotið helt Landsstýrið tað vera rætt at veita studning til endur-

rindan av farmagjaldsútreiðslum (orsakað) av fjarstøðu Føroya, soleiðis at føroyskar skipasmiðjur hava ein møguleika at kappast við útlendskar skipasmiðjur.

Til endurrindan av innflutningsgjøldum kann Landsstýrið, sambært § 2, stk. 1 og 2, veita stuðul upp til 3,5% av sáttmálaprísinum ella umbyggingarkostnaðinum. Sambært viðmerkingunum til løgtingslógaruppskotið hevði Toll- og Skattstova Føroya greitt frá, at tollur er fallin burtur á innfluttum vørum, ið hava uppruna í londum, sum Føroyar hava handilssáttmála við. Innfluttar vørur úr londum, ið Føroyar ikki hava handilssáttmála við, t.d. Japan og USA, sleppa ikki undan at rinda toll, um tollur er á vøruni. Er innflytarin MVG-skrásettur, kann meirvirðisgjaldið á innfluttum vørum verða drigið frá í sølu-MVG. Í viðmerkingunum verður eisini víst á, at fyrr varð veitt upp til 13% í endurrindan av innflutningsgjaldi av tilfari, men satsurin er broyttur til 3,5% eftir tilmæli frá Sáttmálastovninum.

Sambært § 3 verður studningur veittur eftir umsókn, og álagt er Landsstýrinum at áseta neyvari reglur í kunngerð. Hóast lógin hevur verið í gildi í fleiri ár, er kunngerðin ikki gjørd.

Stuðulsumsiting

Vanlig mannagongd er, at skipasmiðjur senda umsókn til Vinnumálastýrið. Vit hava mælt til, at umsóknarmannagongdin verður løgd í eina fasta legu, og at nýtt verða umsóknarskjøl at fylla út.

Vinnumálastýrið sendir umsóknina til Sáttmálastovnin at viðgera, og Sáttmálastovnurin letur landsstýrismanninum eitt tilmæli. Bræv verður síðani sent umsøkjaranum, hvussu stórur stuðulin væntandi verður, og at stuðulin verður goldin út, tá ið Vinnumálastýrið hevur fingið endaligu metingina frá Sáttmálastovninum.

Viðmerkingar

Sambært lógini er heimilað heilt ella lutvíst at endurrinda farmagjaldsútreiðslur og innflutningsgjøld, tó í mesta lagi ávikavist 4,5% og 3,5% av sáttmálaprísinum ella umbyggingarkostnaðinum. Í sambandi við grannskoðanina hava vit staðfest, at mannagongdin er, at stuðul verður veittur svarandi til hægst loyvda markið, tilsamans 8%.

Í málunum finst hvørki uppgerð av farmagjaldsútreiðslum ella innflutningsgjøldum, og talan er ikki um endurrindan av hesum útreiðslum. Eftir okkara tykki er mannagongdin ikki í tráð við ásetingarnar í lógini.

Vinnumálastýrið heldur, at ynski hevur verið um at sleppa undan trupulleikanum við at skjalprógva útreiðslur fyri farma- og innflutningsgjøld. Hóast Ll. nr. 73/1996 og viðmerkingarnar til lógaruppskotið ikki beinleiðis siga, hvussu lógin skal verða tulkað, heldur Stýrið ætlanina hava verið, at umsitingin ikki skuldi verða broytt í mun til árini frammanundan. Vinnumálastýrið heldur tí, at ætlanin hevur verið, at útreiðslurnar til farma- og innflutningsgjøld skulu ikki verða skjalprógvaðar, men at goldin verður ávísur prosentpartur av sáttmálavirðinum ella umbyggingarkostnaðinum.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at miðað verður ímóti at leggja nýtt uppskot til lóg um stuðul til skipasmíð fyri Løgtingið í hesi tingsetuni, har bæði studningsreglur og fyrisitingarligar mannagongdir verða endurskoðaðar, m.a. vísandi til viðmerkingarnar frá Landsgrannskoðanini. Í hesum sambandi verða eisini tikin neyðug fyrilit til altjóða sáttmálar og handilsavtalur. Lógaruppskotið er í løtuni til hoyringar hjá m.ø. Fíggjarmálastýrinum og vinnuni. Sambært uppskotinum minkar stuðulin eftir nøkrum árum úr 8% í 2002 til 5% av sáttmálaprísinum. Stuðulin skal verða umsitin av Vinnuframagrunninum. Skotið verður eisini upp at taka av Ll. nr. 73/1996 "um stuðul til skipasmiðjur", Ll. nr. 83/1990 "um stuðul til bygging av farmaskipum sum broytt við Ll. nr. 73/1996 og Ll. nr. 69/1988 "um sáttmálaeftirlit".

Sáttmálastovnurin

Sáttmálastovnurin er umrøddur í serstakari lóg. Sambært § 1, í Ll. nr. 69 frá 9. juni 1988 "um sáttmálaeftirlit", er Landsstýrinum heimilað undir Landsskrivstovuni at seta á stovn sáttmálastovn. Høvuðsendamálið er at vera eftirlitsmyndugleiki hjá Landsstýrinum í sambandi við veðhald og stuðulslán, veitt við heimild í lógini um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum.

Sambært § 2 verða allar umsóknir um stuðul til skipabygging sendar Sáttmálastovninum at viðgera. Stovnurin skal meta um allar lutir í umsóknum í sambandi við ný- ella umbygging, geva Landsstýrinum tilráðingar, hava eftirlit við hvørjum byggimáli og gera endaligu virðismetingina. Sambært § 3 skal Landsstýrið í kunngerð áseta neyvari reglur fyri virki stovnsins. Hóast lógin hevur verið í gildi í nógv ár, er kunngerðin ikki gjørd.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera ivasamt, um lógin hevur nakra meining í dag. §§ 1 og 4 hava neyvan nakran týdning, § 2 er helst ótíðarhóskandi, og § 3 áleggur Landsstýrinum at áseta eina kunngerð, sum tó ongantíð er gjørd. Sum nevnt, hevur landsstýrismaðurin ætlan um at taka av lógina "um sáttmálaeftirlit".

5.13 Vinnufremjandi grunnar o.a.

Í landsroknskapinum 2000 undir "eksternir grunnar" eru 3 grunnar, sum koma undir vinnumál:

- Grunnur Ferðavinnunar
- Ábyrgdargrunnurin
- Grunnurin til Ídnaðarfremjandi Endamál

Á síðu 43-47 í seinastu frágreiðing okkara frá 14. mars 2001 greiddu vit frá um roknskaparviðurskiftini fram til árslok 2000.

Sambært § 7 í Ll. nr. 81 frá 8. mai 2001 "um Vinnuframagrunn" vórðu grunnarnir tiknir av, og Vinnuframagrunnurin tók yvir allar ognir og skyldur, tó undantikið lán veitt av Gistingarhúsgrunninum (Grunnur Ferðavinnunar) og Grunninum til Ídnaðarfremjandi Endamál.

Umsiting og virksemi grunsins er neyvari ásett í K. nr. 142 frá 29. november 2001 "um umsiting og virksemi hjá Vinnuframagrunninum".

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at tá ið Grunnurin til Ídnaðarfremjandi Endamál, Ábyrgdargrunnurin og Grunnur Ferðavinnunar vórðu tiknir av og Vinnuframagrunnurin settur á stovn, var endamálið at gera stuðulsskipanirnar einfaldari og umsitingina meira gjøgnumskygda. Um Løgtingið samtykkir lógaruppskotið um studning til skipasmiðjur, og tá ið stuðulin til "Havbúnaðarroyndir" er lagdur til Vinnuframagrunnin at umsita, eru allar stuðulsskipanir til vinnu, uttan landbúnaðarstuðulin, endurskoðaðar. Vinnumálastýrið metir, at reglurnar fyri studningsskipanunum sostatt eru gjørdar greiðari og einfaldari.

Vísandi til almennu umrøðuna av trupulleikunum viðvíkjandi stuðulslóggávu og stuðulsumsiting í frágreiðingini undir "Útbúgving og gransking o.a." hevur landsstýrismaðurin í februar 2002 kunnað um, at við støði í teim royndum Vinnumálastýrið fær frá Vinnuframagrunninum, verður farið undir at endurskoða skipanina í komandi tingsetu. Tá verður støða eisini tikin til møguliga at gera eina serstaka lóg, sum fevnir um allan studning, og sum ásetir felags reglur og krøv, umframt heimild at áseta neyvari reglur og treytir fyri at veita studning. Spurningurin verður viðgjørdur í samráð við onnur aðalstýri.

6. ÚTBÚGVING OG GRANSKING o.a.

6.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

7.11.1.09. Undirvísingar- og Mentamálastýrið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 13,7 mió.kr. Meirnýtslan er 184 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er ein høvuðsorsøk til meirnýtsluna, at Stýrið, í longri tíð enn roknað varð við, húsaðist í tveimum bygningum, og sostatt kom at rinda eyka húsaleigu og annan húsakostnað.

Farið er upp um lønarkarmin við 550 t.kr. Vísandi til viðmerkingarnar niðanfyri til høvuðskontu 7.23.1.34, skuldi ein lønarflyting 116 t.kr. eisini verið bókað á hesi kontu. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna, at játtanin varð skerd við ársbyrjan, og at tað ikki eydnaðist at fáa lønarkarmin aftur í fíggjarárinum.

7.11.1.27. Undirvísingar- og Mentamálastýrið (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,7 mió.kr. Meirnýtslan er 455 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna, at arbeiðið, ið upprunaliga varð mett at vara tvey fíggjarár, varð gjørt liðugt í einum fíggjarári.

Vit hava í januar 2002 spurt landsstýrismannin, hví hann ikki bað Løgtingið um eykajáttan. Landsstýrismaðurin vísir á, at viðvíkjandi løgujáttanum, har arbeiðið er í gerð um ársskiftið, er tað sera trupult at halda játtanina og samstundis periodisera rokningar rætt. Vanliga er tað soleiðis, at eitt ávíst avlop er á løgujáttanum, ið verður endurjáttað árið eftir. Í hesum føri var farið upp um løgukarmin, men tá ið tær seinastu rokningarnar til rakstrarárið vóru bókaðar, var so langt fráliðið, at ikki bar til at biðja um eykajáttan.

7.23.1.16. Skúlabókagrunnurin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,6 mió.kr. Meirnýtslan er 674 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 461 t.kr. Sambært landsstýrismanninum svarar meirnýtslan til saldu við ársenda 1999 á útgávukontu hjá Skúlabókagrunninum, sum sambært C-átekning er flutt til fíggjarárið 2000.

Vit halda, at meirnýtslan er størri, enn C-átekningin heimilar.

Á fíggjarlógini 1998 var ein C-átekning, sum heimilaði Skúlabókagrunninum at flyta eitt møguligt avlop/hall av útgávuvirkseminum til næsta fíggjarár. Sama C-átekning er á fíggjarlógini 1999. Á fíggjarlógini 2000 er eingin tílík C-átekning.

Viðvíkjandi útgávuvirkseminum var í 1998 talan um eitt hall 79 t.kr. og í 1999 var eitt "avlop" 433 t.kr. Úrslitið fyri árini 1998 og 1999 er sostatt samanlagt eitt avlop 354 t.kr., og svarar hetta ikki til meirnýtsluna í 2000.

7.23.1.31. Próvtøkur (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,4 mió.kr. Meirnýtslan er 37 t.kr. Sambært landsstýrismanninum varð neyðugt at rinda fyri fleiri próvtøkuuppgávur, enn ætlað varð.

7.23.1.34. Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,6 mió.kr. Meirnýtslan er 67 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er ein lønarflyting 116 t.kr., sum skuldi verða bókað á kontu hjá Stýrinum, av misgáum bókað á hesa kontu.

7.23.2.01. Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) / 7.23.2.02. Sernámsdepilin (rakstrarjáttan)

Í játtanini til "Fólkaskúlan" er farið upp um lønarkarmin við 6,4 mió.kr., og fólkaskúlin hevur 12,1 mió.kr. í inntøkum, sum ikki eru við á fíggjarlógini. Eins og í 1998 og 1999 er orsøkin, at vantandi samsvar er ímillum játtanar- og bókingarmannagongd, og at vantandi samskipan er við játtanina til Sernámsdepilin, har lønarútreiðslurnar eru nógv lægri, enn játtað. Vit hava enn einaferð mælt til at samskipa játtanar- og bókingarmannagongdirnar. Sambært landsstýrismanninum eru mannagongdirnar fingnar í rættlag í 2001.

7.23.3.01. Studentaskúlar og hf-skeið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 46,9 mió.kr. Meirnýtslan er 93 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av, at við sáttmálanum í mars 1999 varð yvirtíðin munandi dýrari enn upprunaliga metingin.

7.23.3.03. Føroya Studentaskúli og hf-skeið (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 480 t.kr. Meirnýtslan er 29 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av, at fleiri útreiðslur, enn mett varð, stóðust av hugskotskappingini at byggja nýggjan bygning til studentaskúla og hf-skeið í Marknagili.

7.23.3.14. Studningur til læruplass (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 9,04 mió.kr. Meirnýtslan er 224 t.kr.

7.23.3.17. Ferðaendurgjald til læruplass

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 850 t.kr. Meirnýtslan er 54 t.kr. Sambært landsstýrismanninum sendu rættiliga nógv læruplass inn uppgerðir fyri 1998 og 1999 í 2000, og er tað fyri ein stóran part orsøkin til, at útgjøldini eru størri enn játtanin.

Í 2001 varð kunngerð um lønarendurgjald og ferðaendurgjald lýst. Sambært reglunum í kunngerðini skulu læruplássini senda inn uppgerð um endurgjøld í seinasta lagi 1 mánað eftir, at lærlingur hevur lokið eitt skúlaskeið. Tað skuldi ført við sær minni óvissu um samlaðu upphæddina í einum fíggjarári.

7.23.5.07. Frítíðarundirvísing (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5 mió.kr. Meirnýtslan er 42 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 494 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan um eina feilbóking. Ein flyting frá Tórshavnar kommunu, sum skuldi verið bókað undir fíggjarárinum 2000, er bókað í 2001.

7.23.5.10. Musikkskúlar (rakstrarjáttan)

Sambært landsroknskapinum er so at siga samsvar ímillum játtan og nýtslu. Farið er upp um lønarkarmin við 440 t.kr. Ein orsøk er, at Musikkskúlaskipanin hevur átikið sær at avgreiða lønarútgjaldingarnar til kommunalar leiðarar, sum kommunurnar síðani endurrinda. Upphæddin er bókað á "Flyting frá kommunum". Eftir ætlan heldur henda tænasta uppat.

7.23.6.01. Føroya Sjómansskúli (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8,7 mió.kr., og sambært landsroknskapinum er minninýtslan 57 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 283 t.kr.

7.23.6.13. Føroya Læraraskúli (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 12,1 mió.kr. Meirnýtslan er 195 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 317 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av eykaútreiðslum til olju og av ymiskum telduarbeiði í sambandi við netið á skúlanum, íbinding til FSL og telduskráseting av bókasavninum.

7.23.6.17. Biofar (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 990 t.kr. Meirnýtslan er 28 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 217 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av, at trupult hevur verið at stýra rakstrinum so neyvt, at eingin meirnýtsla varð. Í 2001 er mannagongdin broytt, so trupulleikin ikki skal endurtaka seg.

7.23.6.19. Granskingarætlanir

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,68 mió.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 214 t.kr.

7.24.1.07. Málnevndin & Navnanevndin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 297 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 24 t.kr.

7.24.1.25. Ungdóms- og bygdahús

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 350 t.kr. Meirnýtslan er 55 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av, at stuðul við ársbyrjan í 2001, varð goldin av játtanini fyri 2000.

7.24.3.10. Føroya Fornminnissavn (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5,7 mió.kr. Meirnýtslan er 97 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av, at stovnurin í sambandi við hetta ársskiftið, valdi at bóka ávísar uppgerðir á rætt roknskaparár. Stovnurin hevur sett eitt betri eftirlit í verk.

7.24.3.13. Føroya Náttúrugripasavn (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2,9 mió.kr. Hóast avlopið á játtanini er 65 t.kr., eru inntøkurnar uml. 2,5 mió.kr. hægri, enn mett varð frammanundan, og farið er upp um lønarkarmin við 654 t.kr. Stovnurin hevur havt inntøkur og útreiðslur í sambandi við verkætlanir, sum ikki hava verið tiknar við, tá ið fíggjarlógin varð gjørd.

7.24.3.20. Menning av mentan og mentanararvi (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 240 t.kr. Meirnýtslan er 20 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av einum tekniskum mistaki.

7.24.7.01. Studningur til politiska upplýsing

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2,7 mió.kr. Meirnýtslan er 55 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av einum bókingarfeili við árslok, og kemur játtanin tí at vísa tilsvarandi minni nýtslu í 2001.

Lønarkarmur

Á høvuðskontunum niðanfyri, vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin:

(t.kr)

Konta	Navn	Lønar-karmur	Rokn-skapur	Munur
7.11.1.09.	Undirvísingar- og Mentamálastýrið (rakstrarjáttan)	10.818	11.368	550
7.23.1.10.	Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð(rakstrarjáttan)	1.474	1.483	9
7.23.1.16.	Skúlabókagrunnurin (rakstrarjáttan)	2.475	2.936	461
7.23.2.01.	Fólkaskúlin (rakstrarjáttan)	154.135	160.569	6.434 [1)]
7.23.2.02.	Sernámsdepilin (rakstrarjáttan)	29.126	16.937	-12.189 [1)]
7.23.5.07.	Frítíðarundirvísing (rakstrarjáttan)	8.423	8.917	494
7.23.5.10.	Musikkskúlar (rakstrarjáttan)	7.664	8.104	440
7.23.6.01.	Føroya Sjómansskúli (rakstrarjáttan)	6.525	6.808	283
7.23.6.13.	Læraraskúlin (rakstrarjáttan)	11.494	11.811	317
7.23.6.17.	Biofar (rakstrarjáttan)	900	1.117	217
7.23.6.19.	Granskingarætlanir	0	214	214
7.24.1.07.	Málnevndin & Navnanevndin (rakstrarjáttan)	237	261	24
7.24.3.13.	Føroya Náttúrugripasavn (rakstrarjáttan)	2.516	3.170	654

[1)] Stóru frávikini standast av, at sundurgreinaðar ætlanir á fíggjarlógini samsvara ikki við, hvussu bókað verður.

6.2 Almennar viðmerkingar

Í 2001 hava vit grannskoðað roknskapar- og játtanarviðurskiftini á ymsum stovnum/játtanum undir Mentamálastýrinum:

- Mentamálastýrið
- Yrkisútbúgvingarskrivstovan (Yrkisdepilin)
- Musikkskúlaskipanin
- Klaksvíkar Sjómansskúli
- Føroya Sjómansskúli
- Føroya Læraraskúli
- Føroya Landsbókasavn
- Føroya Landsskjalasavn
- Føroya Fornminnissavn
- Føroya Náttúrugripasavn
- Mentanargrunnurin
- Ymsar studningsjáttanir

Niðanfyri er í stuttum tikið samanum úrslitið av grannskoðanini, og vit hava eisini tikið í aftur viðmerkingar frá seinastu frágreiðing okkara í mars 2001 og greitt frá, í hvønn mun viðurskifti, ið tá vórðu umrødd, eru komin í rættlag. Fyrst verður greitt frá almennum viðmerkingum, sum eru felags fyri fleiri stovnar, og síðani verður greitt frá grannskoðanini av stovnum, har serlig viðurskifti verða umrødd.

Roknskaparreglugerðir

Samsvarandi rundskrivi frá Fíggjarmálastýrinum 6. februar 2001 skulu landsstovnar hava eina reglugerð fyri sínum roknskaparhaldi. Roknskaparreglugerðirnar á øllum stovnum skulu verða góðkendar í seinasta lagi 31. desember 2001. Flestu stovnar undir Mentamálastýrinum hava gjørt uppskot til reglugerð fyri roknskaparhaldinum, sum í desember 2001 eru latin Mentamálastýrinum at góðkenna.

Mentamálastýrið hevur í heyst arbeitt við at gera sína egnu roknskaparreglugerð, og nú hon er liðug, heldur arbeiðið, við at gjøgnumganga og góðkenna roknskaparreglugerðirnar hjá stovnunum undir Stýrinum, fram. Mentamálastýrið hevur boðað Fíggjarmálastýrinum frá, at arbeiðið verður liðugt nakað eftir ársskiftið.

Roknskapargóðkenning og onnur viðurskifti

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skal roknskapurin verða góðkendur av stovnsleiðaranum. Mentamálastýrið hevur heitt á stovnarnar um at senda Stýrinum eitt avrit av játtanarroknskapinum við átekning um, at roknskapurin er í samsvari við bókingarskjøl. Í sambandi við grannskoðanina varð staðfest, at tað verður gjørt á flestu stovnum.

Vantandi góðkenning av greinaroknskapinum

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálastýrinum á serligum góðkenningarskjali. Aðalstjórin í Mentamálastýrinum hevur ikki sent Fíggjarmálastýrinum nakað góðkenningarskjal í 2001.

Í februar 2002 hevur landsstýrismaðurin sagt frá, at í sambandi við verksetan av roknskaparreglugerðini, er góðkenningarskipan sett í verk.

Roknskaparhald

Vit hava kannað, um roknskaparhaldið var dagført, og um mánaðarroknskapir, skjøl, avrit av ávísingum o.a. vórðu sett uppá pláss og goymd forsvarliga. Einki var at finnast at. Sum eisini varð víst á í seinastu frágreiðing okkara, hava skúlarnir onga journalskipan.

Nøkur skjøl vórðu vald út at grannskoða neyvari, og kannað varð m.a., um konteringar, upphæddir, veitingarslag, ávísingar og skrásetingar vóru í lagi, og um bókingar um ársskiftið vóru farnar á rætt fíggjarár.

Útreiðsluskjøl

Á nøkrum stovnum hava vit mælt til, at avrit altíð verður tikið av útreiðsluskjølunum, og at útreiðsluskjøl, m.a. í sambandi við umboðan, verða greinað neyvari, og at skrivað verður á skjølini, í hvørjum sambandi útreiðslan er hildin, og hvør hevur verið við.

Konteringar

Á nøkrum stovnum hava vit víst á, at ikki øll skjøl verða konterað rætt, og at útreiðslur skulu verða konteraðar á rætt slag, óheft av endamálinum.

Bókingar um ársskiftið

Á einstøkum stovnum, hava vit gjørt vart við, at sambært § 13 í roknskaparkunngerðini skulu útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, verða skrásettar, tá ið tær verða latnar.

Yvirlit yvir ognir

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal á stovninum vera eitt yvirlit yvir ognir og útbúnað. Vit hava fleiri ferðir áður gjørt vart við, at bert fáir av landsins stovnum hava eitt dagført yvirlit. Tað er eisini galdandi fyri flestu stovnar á hesum málsøki.

6.3 Mentamálastýrið (GL 2000/2 10 1-2)

Í oktober 2001 vitjaðu vit í Mentamálastýrinum, har vit grannskoðaðu roknskaparviðurskiftini, og í hesum sambandi kannaðu vit eisini við stakroyndum roknskaparskjøl og lønarútgjaldingar.

Mentamálastýrið/landsstýrismaðurin ræður yvir nógvum játtanum, ið eru ætlaðar til studning. Vit ivaðust tí í, um tað er heimild at rinda 29 t.kr. í studningi av rakstrarjáttanini, ið er ætlað til rakstur av Mentamálastýrinum. Sambært landsstýrismanninum er talan um skeivar bókingar, tí talan er um studning, ið landsstýrismaðurin kundi játtað yvir høvuðskontu 7.23.1.07 "Ymiskir studningar".

7 lønarútgjaldingar í mars 2001 vórðu valdar út. Kannað varð m.a., um setanarskriv, prógv o.o. skjalprógv vóru í málunum, og um lønin var sambært galdandi sáttmála og lønartalvum, og niðurstøðan av grannskoðanini var:

- Í 2 málum varð lønin hvønn mánað í áravís ávíst sum "leys løn", hóast talan er um fastlønt starvsfólk. Hetta tí størvini ikki vóru endaliga flokkað, vegna trætu við Fíggjarmálastýrið ávikavist um eitt "serfrøðingastarv" og um ein løn skal vera í 36. ella 37. lønarflokki. Tað er nú í lagi.
- Í einum máli var talan um óvanliga nógva yvirtíð. Í februar 2002 hevur landsstýrismaðurin kunnað neyvari um málið.
- Í 2 málum manglaðu prógv fyri útbúgving. Tað er nú í lagi.

"Próvtøkur"

Mentamálastýrið, fólkaskúladeildin, hevur fingið kr. 6.000 í stuðuli frá Mentanargrunni Landsins til tiltakið, at lesa upp svenskar "rit- og rimsagor" fyri skúlanæmingum í 1.-5. flokki. Vit hava spurt landsstýrismannin, hví hesin stuðul er bókaður á høvuðskontu "Próvtøkur", og í februar 2002 hevur hann boðað frá, at talan er um skeiva bóking. Upphæddin skuldi verið bókað á "Skúlabókagerð" og haðani flutt einum málara, sum hevði gjørt tilfar til tiltakið. Feilurin verður rættaður í ár.

Vit halda, at tað er ikki rætt mannagongd, at ein deild í Mentamálastýrinum søkir um stuðul frá Mentanargrunninum til tílík tiltøk fyri skúlanæmingum.

6.4 Yrkisútbúgvingarskrivstovan og stuðulsjáttanir (GL 2000/2 10 1-2)

6.4.1 Yrkisútbúgvingarskrivstovan

Yrkisútbúgvingarskrivstovan, eisini nevnd Yrkisdepilin, veitir Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum skrivarahjálp. Sambært § 19 í Ll. nr. 94/1998 "um yrkisútbúgvingar" fyrisitur Yrkisútbúgvingarráðið yrkis- og arbeiðsmarknaðarútbúgvingar og ger tilmæli til landsstýrismannin um útbúgvingarreglur o.a.

Sambært § 22 í lógini tilnevnir Yrkisútbúgvingarráðið yrkisnevndir, sum skulu gera neyvari reglur fyri útbúgvingarnar, góðkenna læruplass o.a. Yrkisútbúgvingarnar verða í dag bólkaðar í 9 bólkar við hvør sínari nevnd. 1. februar 2000 varð settur ein skrivari, sum yrkisnevndirnar eru saman um.

Játtanin til Yrkisdepilin er ein partur av játtanini til Undirvísingar- og Mentamálastýrið, høvuðskontu 7.11.1.09, undirkontu 21.

Vit grannskoðaðu roknskaparviðurskiftini og í hesum sambandi kannaðu vit eisini við stakroyndum roknskaparskjøl og lønarútgjaldingar. Einki var at finnast at.

Yrkisdepilin fyrisitur eisini høvuðskonturnar "ferðaendurgjald til læruplass", "lønarendurgjald til læruplass" og "eftirútbúgving av yrkislærdum".

6.4.2 Stuðulsjáttanir

Studningur til læruplass

Sambært § 33, stk. 4, í Ll. nr. 94/1998 "um yrkisútbúgvingar" skal landskassin endurrinda arbeiðsplássinum lærlingaløna, meðan lærlingur fær ta til læruna hoyrandi skúlagongd. Reglur eru ásettar í K. nr. 116 frá 14. desember 2000.

Í seinasta lagi 1 mánað eftir, at lærlingurin er komin aftur av einum skúlaskeiði, skal læruplássið á serstøkum oyðublaði senda inn uppgerð fyri útreiðslurnar. Vit hava við stakroyndum kannað, um oyðubløðini eru fylt út og váttað, og um studningurin er rætt skrásettur í bókhaldinum. Einki var at finnast at.

Ferðaendurgjald til læruplass

Játtanin er til endurgjald fyri ferðaútreiðslur til tey læruplass, sum mugu senda lærlingar til Danmarkar at ganga í skúla, av tí at skúlaundirvísing ikki fæst í Føroyum. Í § 33, stk. 5, í Ll. nr. 94/1998 "um yrkisútbúgvingar" er ásett, at landskassin rindar arbeiðsplássinum eitt fast gjald til ferðaútreiðslurnar, og í § 2 í K. nr. 116 frá 14. desember 2000 er fasta gjaldið ásett til kr. 3.500 fyri hvørt skúlaskeið.

Í seinasta lagi ein mánað eftir, at lærlingurin er komin aftur av einum skúlaskeiði, skal læruplássið á serstøkum oyðublaði senda inn uppgerð fyri útreiðslurnar. Vit hava við stakroyndum kannað, um oyðubløðini eru fylt út og váttað, og um studningurin er rætt skrásettur í bókhaldinum. Einki var at finnast at.

Bæði lønarendurgjald og ferðaendurgjald verða goldin út við heimild í § 33 í Ll. nr. 94/1998 "um yrkisútbúgvingar"; men hóast tað, er játtanin "studning til læruplass" ein lógarbundin játtan og játtanin "ferðaendurgjald til læruplass" onnur játtan. Í 2002 er tað broytt, soleiðis at báðar játtanirnar nú eru "lógarbundnar".

Eftirútbúgving av yrkislærdum

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina verður stuðul játtaður til skeiðsluttøku hjá yrkislærdum, t.e. handverkarum og handils- og skrivstovufólki, so at tey kunnu fylgja við fakliga, og varðveita yrkisførleika og kappingarføri. Í februar 2000 varð reglugerð gjørd, har m.a. er ásett, at stuðulin verður latin einstaklingum til skeiðsgjald og ferðaútreiðslur.

Vit halda ikki, at játtanin hevur tey eyðkenni, sum ein "rakstrarjáttan" skal hava sambært játtanarskipanini.

Í 2000 eru allar útreiðslurnar bókaðar sum "stuðul til vinnu", standardkontu 53. Vit halda tað ikki vera rætt bókað, tí talan er um stuðul til einstaklingar.

Vit hava við stakroyndum kannað, um oyðubløðini eru fylt út, og um váttan frá skeiðstaðnum um, at umsøkjarin hevur tikið lut í skeiðnum, er løgd við. Einki var at finnast at.

Eftir okkara tykki eru nógvir ivaspurningar tengdir at játtanini og endamálinum við játtanini. Vit halda tað vera óheppið at hava játtanir, sum eru so breitt og leyst orðaðar, í 3 reglum í viðmerkingunum til eina fíggjarlóg.

Í februar 2002 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at vinnu- og miðnámsskúladeildin fer at viðgera hesa játtan og játtanarheitið í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2003.

6.5 Musikkskúlaskipanin (GL 2001/2 10 9-5)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 69/1984 ”um stuðul til musikkskúlar”, sum broytt við Ll. nr. 67/1996. Harumframt eru 3 rundskriv frá 1985.

Sambært § 1 í lógini verður latin studningur úr landskassanum til musikkskúlar. Sambært § 3 skulu musikkskúlarnir vera knýttir at eini kommunu ella einum kommunalum felagsskapi.

Musikkskúlaleiðarin hevur námsfrøðiligu og fakligu ábyrgdina. Í musikkskúlaskipanini eru 16 musikkskúlar, við hvør sínum leiðara á staðnum, sum vegna kommununa tekur sær av næmingagjøldum, hølisviðurskiftum, ljóðførum og ognum annars.

45 lærarar eru knýttir at musikkskúlaskipanini, og í 2001 er talan um 35,3 heiltíðarstørv. Lærararnir verða settir av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá avvarðandi kommunu/ kommunufelagsskapi ella nevndini fyri musikkskúlan.

Skjalagrannskoðan

Vit valdu nøkur skjøl út og kannaðu m.a., um kontering, upphædd, ávísing og skráseting var í lagi. 30 t.kr. eru goldnar sum ”stuðul til annað virksemi”, standardkontu 54.90. Vit hava víst á, at talan er um játtanarslagið “rakstrarjáttan”, og vit halda ikki, at heimild er at nýta játtanina til tílíkan stuðul. Musikkskúlaleiðarin hevur boðað frá, at slíkur stuðul verður ikki latin í framtíðini.

Lønargrannskoðan

Lærararnir verða løntir sambært sáttmála við Føroya Musikklærarafelag. Vit grannskoðaðu lønarútgjaldingar í mars 2001 til 5 lærarar. Burtursæð frá yvirtíðarløn til ein lærara, var einki at viðmerkja.

Musikkskúlaleiðarin hevur fyri 2 árum síðani sett í verk eina skipan við uppmøtingarlistum, har lærarin skrásetir uppmøting hjá næmingunum. Vit halda talan vera um eitt sera týðandi eftirlitsamboð hjá musikkskúlaleiðaranum, og vit eru kunnað um, at arbeitt verður við at menna skipanina.

Studningur til kommunur/flyting frá kommunum

Í § 4 í lógini er ásett, at landskassin letur musikkskúlunum studning svarandi til 50% av útreiðslunum til læraraløn. Harafturat rindar landskassin studning (100%) til ferðaútreiðslur til lærarar, sum undirvísa á fleiri skúlum.

Í veruleikanum er tað soleiðis, at lønarútreiðslur hjá musikkskúlalærarunum verða fyrst goldnar av landskassanum, og 50% verða síðani endurrindað av kommununum.

Vit hava við stakroyndum kannað, um ferðaútreiðslur og dagpeningur eru rætt roknað sambært galdandi reglum. Einki var at finnast at.

Vit hava við stakroyndum kannað lønarútreiðslur og tímar, sum eru nýttir sum grundarlag í uppgerðini av kommunanna parti av lønarútreiðslunum 1. januar – 31. juli 2001:

- Vit ivast í, um tað er rætt, at rokna dagpening og náttarviðbót sum útreiðsla til læraralønir, har stuðulin er 50%, tí sambært lógini skal landskassin rinda ferðaútreiðslurnar (100%). Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 boðað frá, at fyri at fáa samsvar millum lóg og praksis, hevur Mentamálastýrið søkt um eykajáttan fyri tey 50% av dagpeninginum, sum kommunurnar hava rindað. Ætlanin er sostatt, at landið í framtíðini skal rinda hesa útreiðslu 100%.

- Musikkskúlarnir rinda ein miðalkostnað fyri hvønn undirvísingartíma, óansæð um lærarin fær lága ella høga løn. Talan er sostatt ikki um faktiska endurrindan av lønarútreiðslum til læraraløn. Musikkskúlaleiðarin hevur greitt frá, at tað ber til at býta eftir faktisku útreiðslunum, men tá skulu skúlarnir helst verða meira sjálvstøðugir enn í løtuni.
- Lønarútreiðslan til sjúkravikar í einum ávísum skúla/øki varð lutað sundur millum allar skúlar í landinum. Hetta er óivað skilagott og praktiskt, men sambært lógini skal landskassin lata einstaka musikkskúlanum í studningi 50% av útreiðslunum til læraraløn, og tí ivast vit í, um verandi mannagongd er røtt. Musikkskúlaleiðarin heldur, at ov stór útsving verða, skal einstaki skúlin rinda sjúkravikar.

Samanumtikið halda vit, at ósamsvar er ímillum § 1 í lógini, har ásett er, at landskassin letur studning, og § 5, har ásett er, at landsstýrismaðurin setir lærararnar. Lógin verður heldur ikki umsitin, sum var talan um studning úr landskassanum. Landskassin rindar allar lønarútreiðslurnar, og 2 ferðir árliga endurrinda kommunurnar landskassanum 50% av lønarútreiðslunum til lærararnar, í mun til hvussu nógvar tímar musikkskúlarnir í kommununum hava fingið tillutað.

Vit halda, at musikkskúlaskipanin er væl umsitin, men vit hava tó mælt landsstýrismanninum til at umhugsa at endurskoða lógina, soleiðis at fult samsvar verður ímillum praksis og allar ásetingar í lógini.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 boðað frá, at hann fer at seta eina innanhýsis nevnd at kanna, hvørjar tillagingar skulu til, fyri at fáa samsvar millum praksis og allar ásetingar í lógini.

6.6 Fólkaskúlin (GL 1996/2 10 2-1)

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at lønarskipanin til læraraløn er gomul og ótíðarhóskandi, og nøktandi dokumentatión, vegleiðing o.t. er ikki til skipanina. Til at avloysa hesa skipan fór Mentamálastýrið á vári 2000 undir at menna eina forskipan til nýggja felags lønarskipan, sum Gjaldstovan stendur fyri. Arbeiðið at gera forskipan hevur ligið stilt eina tíð, men Mentamálastýrið hevur kunnað um, at tað verður gjørt liðugt nú til várs.

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at Lønarstovan hevur innanhýsis eftirlit á teimum mest týðandi økjunum. Vit hildu tað tó vera ein veikleika, at ongar samanskrivaðar reglur lýstu, hvørji innanhýsis eftirlit skuldu verða gjørd, frá tí at lærari verður settur, til løn verður goldin út og bókað, hvussu stemmað skuldi verða av, hvussu arbeiðið skuldi verða skjalprógvað, og hvørja ábyrgd og heimild hvør einstakur hevði. Tað vildi eisini lætt um, tá ið nýggj starvsfólk vórðu sett. Vit mæltu til at fara undir arbeiðið. Í januar 2002 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálastýrið hevur valt at bíða, tí nýggj skipan verður tikin í nýtslu.

6.7 Klaksvíkar Sjómansskúli (GL 2000/2 10 4-5)

Klaksvíkar Sjómansskúli undirvísir við støði í Ll. nr. 65/1984 "um sjómansútbúgving" við seinni broytingum. Undirvísingarvirksemi skúlans fevnir um heimaskiparar, skiparar, sjóvinnuútbúgving og skipskokkar. Hálvtannað ár gongur ímillum, at næmingar verða tiknir upp til heimaskiparar/skiparar, og til sjóvinnuútbúgving og skipskokk verða næmingar tiknir upp tvær ferðir um árið.

Fyrru lestrarhálvu 2001 vóru 19 næmingar í 2 flokkum, 8 skipara- og 11 kokkanæmingar. Ov fáir næmingar vóru til ein sjóvinnuflokk. Í september 2001 eru 28 næmingar í 3 flokkum: 14 skipara-, 8 kokka- og 6 sjóvinnunæmingar. Sambært virksemisyvirlitinum í viðmerkingunum til fíggjarlógina er roknað við hægri næmingatali.

Vit hava spurt, um nakað mark er fyri, hvussu smáir flokkarnir kunnu vera. Sambært landsstýrismanninum er markið vanliga 6 næmingar.

Vísandi til, at samlaða næmingatalið er minkandi, hava vit spurt landsstýrismannin, um hann hevur ætlanir um at samskipa virksemið á sjómansskúlunum í Havn og í Klaksvík.

Landsstýrismaðurin vísir á, at 24. juli 2001 varð nýggj lóg nr. 55 "um útbúgving av manning á skipum o.ø." samtykt. Arbeitt verður í løtuni við at laga útbúgvingarnar til nýggj krøv, ið IMO og vinnulívið annars seta. Í hesum sambandi verður møgulig samskipan av virkseminum eisini tikin til viðgerðar.

Vegna serligar umstøður undirvístu ikki allir lærarar skylduga tímatalið fyrru lestrarhálvu 2001. Bert 5 umsøkjarar vóru til várskeiðið í sjóvinnuflokkinum, og skeiðið varð avlýst. Í samráð við Trygdarmiðstøðina varð tí avrátt, at læraararnir skuldu hjálpa Trygdarmiðstøðini, so skeið kundi verða hildið har hvørja viku, í staðin fyri aðru hvørja viku. Tá ið Trygdarmiðstøðin 1. juni 2001 setti ein mann afturat í starv, fall tímatalið, sum læraararnir á sjómansskúlanum undirvístu á Trygdarmiðstøðini, niður í einki. Stjórin hevur víst á, at skúlin ongan húsavørð hevur, og at læraararnir til hetta arbeiði hava nýtt fitt av tímum, sum ikki eru taldir við nakrastaðni.

Spurdur, svarar landsstýrismaðurin, at tað vanliga ikki verður hildið vera rætt, at skúlastjórin roknar tænastu sum húsavørður við í skylduga undirvísingartímatalið, og Mentamálastýrið fer at tryggja sær, at tað ikki hendir í framtíðini. Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at av tí at Klaksvíkar Sjómansskúli er ein lítil skúli, við avmarkaðum virksemi, verður ikki hildið grundarlag vera fyri at seta ein húsavørð í fast starv, og arbeiðið hjá stjóranum sum húsavørður hevur verið góðtikið, sum ein neyðloysn. Nú verður kannað, hvussu uppgávan kann verða røkt í framtíðini.

6.8 Føroya Sjómansskúli (GL 2000/2 10 4-5)

Føroya Sjómansskúli undirvísir við støði í Ll. nr. 65/1984 "um sjómansútbúgving" v.s.b. Undirvísingarvirksemi skúlans fevnir um heimaskiparar, skiparar og skipsførarar. Í september 2001 gingu 74 næmingar á skúlanum í 6 flokkum. Eftir summarfrítíðina byrjaðu 18 næmingar.

Sambært virksemisyvirlitinum, í viðmerkingunum til fíggjarlógina, er roknað við hægri næmingatali. Vit hava spurt, um nakað mark er fyri, hvussu smáir flokkarnir kunnu vera. Sambært landsstýrismanninum er markið vanliga 6 næmingar.

Vísandi til, at samlaða næmingatalið er minkandi, hava vit spurt landsstýrismannin, um hann hevur ætlanir um at samskipa virksemið á sjómansskúlunum í Havn og í Klaksvík. Landsstýrismaðurin vísir á, at 24. juli 2001 varð nýggj lóg nr. 55 "um útbúgving av manning á skipum o.ø." samtykt. Arbeitt verður í løtuni við at laga útbúgvingarnar til nýggj krøv, ið IMO og vinnulívið annars seta. Í hesum sambandi verður møgulig samskipan av virksemi eisini tikin til viðgerðar.

Inntøkurnar hjá skúlanum eru uml. 1,8 mió.kr. hægri, enn ætlað varð. Í oktober 2000 fekk skúlin uml. 1.543 t.kr. í gávu til at keypa nautiska útgerð fyri. Vit hava víst á, at skúlin ikki hevur nýtt rætta mannagongd, tá ið gávan varð bókað. Hon er inntøkuførd í 2000, men ikki øll útgerðin, ið gávan varð ætlað til, varð keypt í 2000. Tá ið skúlin keypir írestandi útgerðina fyri 324 t.kr. í fíggjarárinum 2001, so kemur tað at "tyngja" vanliga raksturin í 2001.

Sjómansskúlin skipar fyri ymsum skeiðum innan sjóvinnu. Alt virksemið, í sambandi við hesi skeið, verður skrásett á undirkontu fyri seg, sum inntøkufíggjað virksemi. Inntøkufíggjaða virksemið gav hall í 2000, tí færri skeið vórðu hildin, enn ætlað varð.

Við støði í lønarútgjaldingini í mars 2001 vórðu 3 starvsfólk vald út til neyvari eftirlit. Vit hava kannað, um tímaútrokning, føst løn og úrtíðarløn er roknað út samsvarandi sáttmála.

Harafturat er kannað, um fasta lønin og starvsaldur samsvara við setanarskriv, prófvskjøl o.t. Einki var at finnast at. Vit vístu á, at ein lærari fær 5 tíma niðurskurð fyri dygdarmenning. Niðurskurðurin er ikki heimilaður í lønarsáttmálanum, men er ásettur eftir samráðingum við Mentamálastýrið. Eisini var talan um 2 tíma niðurskurð fyri heimasíðugerð-/ansing, sum heldur ikki er ásett í sáttmála.

6.9 Føroya Læraraskúli (GL 2000/2 10 4-5)

Undirvísingarvirksemi Læraraskúlans fevnir um lærara- og námsfrøðiliga útbúgving. Næmingar verða vanliga tiknir inn eina ferð um árið. Í august 2001 eru uml. 200 næmingar í 8 flokkum.

Lógargrundarlagið hjá Føroya Læraraskúla er:

- Lov nr. 52/1979 for Færøerne om læreruddannelsen, som sat i kraft ved bek. nr. 71/1984
- Ll. nr. 69/1980 "um læraraútbúgving", sum broytt við Ll. nr. 67/1996
- K. nr. 13/1990 "um námsfrøðiliga útbúgving" og
- K. nr. 26/1991 "um læraraútbúgving"

Landsstýrismaðurin hevur í januar 2002 kunnað um, at ætlanin er í vár at endurskoða lógargrundarlagið fyri læraraútbúgving og námsfrøðiútbúgving.

Í eykajáttanarløgtingslógini fyri september 2000 varð boðað frá, at skúlin rekur skeiðsvirksemi, sum inntøkufíggjað virksemi. Talan er um nýtt skeiðsvirksemi fyri dagrøktarum kring landið. Eingin nýtsla var skrásett á hesi undirkontu í 2000. Undirkontan til inntøkufíggjað virksemi kom við eykajáttanarlóg seint á árinum. Skeiðið í dagrøkt varð hildið fyri summarfrítíðina, og sambært stjóranum átti hetta virksemi at verið umbókað, men tað varð ikki gjørt.

Játtanartøl og roknskapartøl seinastu 5 árini

(t.kr.)	2001	2000	1999	1998	1997
Játtan á fíggjarlóg	11.888	11.824	11.689	10.055	9.759
Eykajáttan	500	290	272	1.800	500
Samlað játtan	**12.388**	**12.114**	**11.961**	**11.855**	**10.259**
Roknskapur		**12.309**	**12.007**	**11.444**	**11.042**
Munur		+195	+46	-411	+783

Viðmerkingar til fíggjarárini 1997-1999

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 umrøddu vit m.a. játtanartrupulleikarnar hjá Læraraskúlanum í 1997 og 1998. Vit vístu á, at høvuðstrupulleikin var, at samsvar hevði ikki verið ímillum nógv økta virksemið og játtanina til skúlan. Hildið varð, at fíggjarlógaruppskotini fyri 1997 og 1998 vóru undirmett, og at Løgtingið og Fíggjarnevndin ikki fingu neyðugar og rættar upplýsingar, sum gjørdu tað møguligt frammanundan, á einum haldgóðum grundarlagi, at taka støðu til, um peningur skuldi verða játtaður til verandi og økt virksemi á skúlanum.

Í álitinum frá Fíggjarnevndini í sambandi við uppskot til eykajáttanarlóg fyri oktober 1998, átalaði Fíggjarnevndin harðliga, at skúlin hevði økt virksemið, uttan at neyðug játtan var fingin frammanundan.

Í frágreiðing frá Mentamálastýrinum 15. november 1999 varð vístá, at Læraraskúlin hevði havt meirnýtslu øll fíggjarárini síðani 1990. Skúlin hevði egna fíggjarstýringarskipan til 1996, og hevði tí møguleika fyri at "rulla" hallið frammanfyri sær frá fíggjarári til fíggjarár, uttan at

tað sást í landsroknskapinum. Allir avvarðandi myndugleikar vistu um tað, og mannagongdin varð steðgað, tá ið skúlin kom undir fíggjarstýringarskipan landsins.

Vísandi til landsroknskapin 1999 var at kalla samsvar ímillum játtan og nýtslu í 1999. Eykajáttanin 272 t.kr. í november 1999 varð játtað í sambandi við nýggjar lønarsáttmálar.

Viðmerkingar til fíggjarárið 2000

Upprunaliga játtanin til skúlan var 11.824 t.kr. Á eykajáttanarlóg fyri desember 2000 varð játtanin hækkað við 290 t.kr. Hóast eykajáttan hevði skúlin eina meirnýtslu 195 t.kr., og lønarútreiðslurnar eru uml. 317 t.kr. hægri, enn ætlað varð.

Sambært fíggjarlógini er talan um eina "rakstrarjáttan". Vanligu reglurnar fyri rakstrarjáttan eru, at nettojáttanin skal verða hildin, og loyvt er ikki at vaksa um lønarpartin.

Í okkara skjalagrannskoðan komu vit fram á eina rokning fyri olju uml. 71 t.kr., ið var dagfest og bókað á 2001, hóast oljan varð latin í desember 2000. Eisini vóru rokningar fyri ymisk haldaragjøld, sum vanliga verða bókaðar í desember mánað, hesa ferð bókaðar í januar 2001. Vísandi til § 13 í roknskaparkunngerðini skulu útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, verða skrásettar, tá ið tær verða latnar. Vórðu útreiðslurnar skrásettar sambært galdandi reglum, og á sama hátt sum undanfarin ár, hevði meirnýtslan í 2000 verið størri.

Í frágreiðing frá landsstýrismanninum 2. mai 2001, um meir-/minninýtslu í 2000 á grein 7, verður vístá, at Læraraskúlin hevur trongan fíggjarkarm at virka undir, og sjálvt smáar broytingar í rakstrinum útloysa meirnýtslu. Sambært frágreiðingini stóðst meirnýtslan av hækkandi oljuprísum, umvæling av teldukervinum og telduskráseting av bókasavninum.

Viðmerkingar til fíggjarárið 2001

Á fíggjarlógini 2001 er játtanin til Læraraskúlan 11.888 t.kr. Í juni 2001 veitti Fíggjarnevndin 500 t.kr. í eykajáttan.

Vit bóðu rektaran greiða frá, hví játtanin í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001 var lægri enn játtanin í 2000, og hví biðið varð um eykajáttan 500 t.kr. í juni mánaði. Vit bóðu síðani landsstýrismannin um viðmerkingar til frágreiðing rektarans. Landsstýrismaðurin boðaði frá, at hann ikki vil gera viðmerkingar, meðan ein kanning fer fram.

Í fíggjarnevndarskjalinum 15. juni 2001 kunnaði landsstýrismaðurin í mentamálum um, at hann hevði sett eina nevnd at kanna hetta málið. Í skrivi frá løgmanni til landsstýrismannin 18. juni 2001 vísti løgmaður á, at Landsstýrið á ongan hátt kann góðtaka, at játtanartrupulleikar, sum áttu at hava verið eyðsýndir fyri langari tíð síðani, gerast bráðfeingistrupulleiki. Um nevndina, landsstýrismaðurin hevði sett, helt løgmaður, at kanningararbeiðið átti at verði gjørt sum skjótast, og helst av uttanfyristandandi persónum.

Eitt grannskoðaravirkið varð biðið um at kanna fíggjarviðurskiftini á Læraraskúlanum og lata landsstýrismanninum úrslitið av kanningini í seinasta lagi 10. september 2001. Í oktober 2001 bóðu vit um eitt eintak av frágreiðingini. Í januar 2002 helt Mentamálastýrið seg ikki hava fingið endaligu frágreiðingina. Mentamálastýrið hevði fingið eina frágreiðing, men eftir at hava lisið hana, helt Mentamálastýrið, at frágreiðingin var ikki nøktandi og fylgdi ikki kanningarsetninginum. Frágreiðingin var tí í januar 2002 send aftur til grannskoðaravirkið, saman við rokningini, og tessvegna kundi Mentamálastýrið ikki útvega Landsgrannskoðanini eintak av frágreiðingini. Síðani hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at grannskoðaravirkið hevur átikið sær at gera frágreiðingina lidna, uttan tó at staðfesta ábyrgd.

Av tí at málið er ikki endaliga avgreitt, gera vit ikki meira við tað í hesi frágreiðing.

Leasing

Læraraskúlin hevur leigað 2 kopimaskinur. Í játtanarskipanini er ásett, at sáttmálar kunnu ikki verða gjørdir um fíggjarliga leasing, sum reelt kemur í staðin fyri keyp. Vit hava mælt til, at skúlin saman við Mentamálastýrinum fer ígjøgnum sáttmálarnar fyri at tryggja, at ásetingarnar í játtanarskipanini um leasing verða hildnar.

Lønargrannskoðan

Flestu lærararnir í føstum starvi eru settir sambært sáttmála við Magistarafelag Føroya, meðan einstakir eru settir sum danskir tænastumenn. Harafturat eru fleiri tímalærarar.

Við støði í lønarútgjaldingini í mars 2001 valdu vit 5 lærarar út til neyvari eftirlit. Av hesum 5 vóru 4 magistarar og 1 tænastumaður. Kannað varð m.a., um setanarskriv, prógv o.o. skjalprógv vóru í málunum, um útgoldin løn var sambært lønartalvum, sáttmálum og góðkendum avtalum, og um lønirnar vóru skrásettar/bókaðar.

Niðurstøðan av grannskoðanini er, at verður støðið tikið í sáttmálanum við Magistarafelagið, einum skrivi frá Undervisningsministeriet 6. januar 1983 umframt teimum tulkingum og "óskrivaðu reglunum", sum Læraraskúlin hevur fyri tímaniðurskurði og lønarásetingini, so eru útgoldnu lønirnar rættar. Men lønarumsitingin byggir ikki í øllum førum á eitt neyvt og skjalfest grundarlag, sum kann verða grannskoðað, og vit hava tí mælt til at bøta um viðurskiftini.

Mentamálastýrið fer í næstum at taka allan spurningin upp við skúlan og lønardeildina í Fíggjarmálastýrinum. Mentamálastýrið vísir eisini á, at í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum skúlamál, verður spurningurin um donsku tænastumenninar á Læraraskúlanum eisini tikin upp við danska fíggjarmálaráðið. Tað verður gjørt av Fíggjarmálastýrinum. Samstundis væntar Mentamálastýrið, at lønarumsitingin kemur at verða á einum neyvari og skjalfestum grundarlagi.

Avspákingartímar

Sambært sáttmálanum við Magistarafelagið kunnu lærarar í ávísan mun spara upp yvirtímar til avspákingar. Árini 1993 til 2000 hevur talið av avspákingartímum verið hægri, samanlagt svarandi til ímillum 1,5 – 2 fulltíðarstørv, býtt millum 8-10 lærarar. Lærararnir hava sostatt eitt lønarkrav, sum ikki hevur verið skrásett í roknskapinum. Ultimo 2000 svaraði hetta krav til uml. 500 t.kr. Rektarin heldur, at talið á avspákingartímum fer at lækka í skúlaárinum 2001/2002, so tímarnir samanlagt koma at svara til uml. 1 fulltíðarstarv, og er henda lækking tikin við í fíggjarætlan skúlans fyri 2002. Vit hava mælt til at taka spurningin um avspákingarskipanina upp við Mentamálastýrið.

6.10 Undirvísingarskylda hjá skúlastjórum (GL 2000/2 10 4-5)

Í frágreiðingum okkara til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 og í mars 2001, varð undirvísingarskyldan hjá skúlastjórunum á Maskinmeistaraskúlanum, Føroya Sjómansskúla og Klaksvíkar Sjómansskúla, umrødd, og víst varð á, at stjórarnir ikki undirvístu skylduga tímatalið. Setanarviðurskiftini hjá stjóranum á Maskinmeistaraskúlanum eru ógreið og óformlig, og bæði hann og stjórin á Føroya Sjómansskúla hava gjørt vart við, at ásetta skylduga tímatalið er ov høgt.

Í januar 2001 boðaði Mentamálastýrið okkum frá, at arbeitt varð við málinum saman við lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum. Vit hava síðani heitt á landsstýrismannin, um at kunna okkum um, nær arbeiðið eftir ætlan verður liðugt. Í september 2001 hevur Mentamálastýrið boðað frá, at málið framvegis er tengt at sáttmálasamráðingunum við avvarðandi yrkisfeløg, og at Mentamálastýrið, saman við lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum, fer at viðgera hesi

viðurskifti, soleiðis at til ber at seta eitt lægri skyldugt undirvísingartímatal í gildi frá næsta skúlaári. Mentamálastýrið vónar við hesum, at samsvar fæst millum ásetta undirvísingartímatalið hjá stjórunum og veruliga tímatalið, ið undirvíst verður.

6.11 Fróðskaparsetur Føroya (GL 1996/2 10 4-1)

Er Fróðskaparsetur Føroya ein sjálvsognarstovnur

Í frágreiðing okkara í mars 2000 varð m.a. vístá, at játtanarliga og roknskaparliga er Fróðskaparsetrið øll árini viðgjørt sum aðrir landsstovnar, og at ein serligur roknskapur við heitinum "Fróðskaparsetur Føroya – sjálveigandi stovnur" er tað einasta, sum ítøkiliga bendir á, at ein partur av virkseminum er sjálvsognarstovnur. Hesin roknskapurin liggur uttanfyri landsbókhaldið, og verður á hvørjum ári settur upp og grannskoðaður av løggildum grannskoðara.

Í november 2001 legði Fíggjarmálastýrið fram álit um "Landsstovnar og –grunnar". Niðurstøðan í álitinum er, at "Fróðskaparsetur Føroya - sjálveigandi stovnur" er ikki ein sjálveigandi stovnur, og er ikki ein landsstovnur, ið hevur fingið delegeraða fíggjarheimild, tvs. at stovnurin eigur at verða tikin við í landsroknskapin á sama hátt sum restin av Fróðskaparsetrinum. Vit hava í januar 2002 spurt landsstýrismannin, hvat síðani er hent í málinum.

Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at Mentamálastýrið hevur ikki enn gjørt meira við hetta mál. Hann ger annars vart við, at tá ið álitið um "Landsstovnar og –grunnar" sigur, at talan er ikki um ein sjálveigandi stovn, so má tað haldast at vera beinleiðis skeivt. Landsstýrismaðurin vísir á, at Fróðskaparsetur Føroya er ein sjálvsognarstovnur, og at tað kann ikki verða broytt við lóg og enn minni við einum áliti um grunnar. Harafturat vísir landsstýrismaðurin á, at Fróðskaparsetur Føroya, sum sjálvsognarstovnur, kann ikki verða ein partur av landskassaroknskapinum. Landskassin eigur heldur ikki ognirnar hjá Fróðskaparsetrinum, tað er stovnurin sjálvur, sum eigur seg sjálvan.

Leasing av kopimaskinum

Vit hava áður vístá, at Fróðskaparsetrið hevur leigað/leasað nakrar kopimaskinur, við teirri grundgeving, at ongi ráð vóru at keypa. Mentamálastýrið boðaði í november 2000 frá, at Fróðskaparsetrið segði seg ikki hava aðrar møguleikar enn at leasa, m.a. tí at Fróðskaparsetrið hevði ikki játtan tøka til at keypa neyðugu maskinurnar, og tí megindeildirnar og setursskrivstovan ikki húsast í somu hølum. Í skrivinum boðar Mentamálastýrið eisini frá, at arbeitt varð við at loysa trupulleikan, men tað fór møguliga at taka 2-3 ár.

Í skrivi til landsstýrismannin í januar 2002 gjørdu vit aftur vart við, at í játtanarskipanini er ásett, at sáttmálar kunnu ikki verða gjørdir um fíggjarliga leasing, sum reelt kemur í staðin fyri keyp. Vit vístu á, at ein sáttmáli um fíggjarliga langtíðarleigu, sum reelt kemur í staðin fyri keyp, er í veruleikanum lántøka, og ein partur av leigugjaldinum er tá at meta sum renta og afturrindan av láni, og til lántøku krevst serlig lógarheimild.

Í februar 2002 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálastýrið hevur kannað hesar leasingavtalur. Útvegarin hevur boðað frá, at tað ber ikki til at gera ein sáttmála og leiga út hesar maskinurnar fyri eitt ár í senn. Einasta loysn, sum útvegarin kann koma við, er at keypa maskinurnar leysar av sáttmálanum fyri tað restvirði, sum nú er í sáttmálanum og síðani skriva ein tænastusáttmála uppá maskinurnar.

Mentamálastýrið hevur biðið Fróðskaparsetur Føroya taka neyðug stig til at frígera seg frá tí sáttmála, ið Setrið hevur bundið seg til.

6.12 Granskingarætlanir (GL 1998/2 10 9-2)

Í seinastu frágreiðing vístu vit aftur á, at fíggjarlógin, og tær fáu viðmerkingarnar í fíggjarlógaruppskotinum, eru einastu heimildirnar fyri hesi studningsskipan, og tað hildu vit ikki vera nøktandi. Í 2001 er høvuðskonta 7.23.6.19. "Granskingarætlanir" løgd niður, og játtanin er flutt til høvuðskontu 7.23.6.21. "Granskingargrunnurin". Sambært Ll. nr. 85/2001 "um gransking" er stovnaður sjálvstøðugur granskingargrunnur, ið hevur til endamáls at stuðla gransking.

6.13 Yrkisskúlar og aðrir skúlar

Í februar 2001 vístu vit á, at hóast Ll. nr. 106/1998 "um yrkisskúlar" kom í gildi 1. januar 1999, hevur landsstýrismaðurin ikki ásett nakrar reglur, sum ásett er í § 14 í lógini. Mentamálastýrið boðaði tá frá, at ein innanhýsis arbeiðsbólkur fór at verða settur at arbeiða við málinum.

Í uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum 2000 (Lm. nr. 62/8 2000) heitti Løgtingið á landsstýrismannin um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Landsstýrismaðurin hevur í desember 2001 kunnað um, at arbeiðið er ikki liðugt enn, men at vinnu- og miðnámsskúladeildin hevur gjørt fastar mannagongdir fyri, hvussu fíggjarlógar-arbeiðið, herímillum játtan til góðkent undirvísingarvirksemi skal fara fram. Allar miðnáms-útbúgvingar eru undir somu høvuðskontu, og landsstýrismaðurin hevur tí møguleika at flyta pening ímillum tær ymisku útbúgvingarnar. Av tí at næmingar velja ymiskt hvørt ár, vísir tað seg at vera neyðugt á hvørjum ári at flyta flokkar.

Eftir er tó at gera almennar reglur um fleiri viðurskifti, so sum:

- Greiðan skilnað millum inntøkufíggjað virksemi og alment góðkent undirvísingar-virksemi, herímillum at endurskoða rundskriv um yvirskot frá eginrakstri.
- Hvussu avdráttir á lánum hjá sjálvsognarstovnum, sum landið rindar, skulu verða bókaðir.
- Hvat skal verða bókað í landsroknskapinum, og hvat skal vera hildið uttanfyri.
- Krøv viðvíkjandi at bóka á egnum teldukervi.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at nøkur av omanfyristandandi viðurskiftum verða tikin upp í sambandi við, at uppskot um roknskaparreglugerð, sum skúlarnir hava sent inn, verða viðgjørd í Mentamálastýrinum fyrst í 2002.

6.14 Skúlabókagrunnurin (GL 1997/2 10 6-2)

Lógargrundarlagið undir Skúlabókagrunninum er Ll. nr. 36/1959 "um útgávu av skúlabókum" v.s.b. Í februar 2000 lótu vit landsstýrismanninum eina frágreiðing um grannskoðan av Føroya Skúlabókagrunni, har eisini Bókamiðsølan varð umrødd. Í frágreiðingini varð m.a. víst á, at lógargrundarlagið var ófullfíggjað, og var ikki dagført, at játtanarviðurskiftini vóru ógreið. Ein arbeiðsbólkur varð settur at viðgera hesar spurningar og lata landsstýrismanninum uppskot til broytingar.

Í januar 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Mentamálastýrið á heysti 2000 hevði gjørt uppskot til nýggja lóg um útgávu av undirvísingarmiðlum. Landsstýrismaðurin helt, at um uppskotið varð samtykt, varð møguligt at loysa umrøddu trupulleikar.

Í november 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at lógaruppskot um at skipa regluverkið um Skúlabókagrunnin og Bókamiðsøluna í februar 2001 varð sent Føroya Lærarafelag og Yrkisfelagnum til hoyringar. Uppskotið fekk kaldliga móttøku frá feløgunum. Tey vístu m.a.

á, at Skúlabókagrunnurin als ikki kundi verða skipaður sum ein almennur stovnur sambært lógaruppskotinum, tí ognarviðurskiftini vóru ógreið. Tey vístu eisini á, at Skúlabókagrunnurin ikki kundi útinna virksemi sítt nóg væl, kundi hann ikki flyta yvirskot/hall um ársskiftið, og at feløgini høvdu ein søguligan rætt til at taka lut í tí yvirskipaða útgávuarbeiðinum av undirvísingarmiðlum. Stutt eftir hoyringarfundin gjørdi Skúlabókagrunnurin, í samráði við tveir løgfrøðingar, sítt egna lógaruppskot, sum varð sent Mentamálastýrinum. Mentamálastýrið kundi ikki taka undir við uppskotinum hjá Skúlabókagrunninum.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at fyri Føroya Lærarafelag er spurningurin um at broyta regluverkið og skipanina hjá Skúlabókagrunninum eitt eymt mál, sum ávirkar "kenslur" felagsins. Føroya Lærarafelag og limir tess hava verið sálin í Skúlabókagrunninum síðan 1936, og hava í fleiri umførum verið við til at bjargað ella endurreist "grunnin". Tætta samstarvið millum fakfeløgini og Skúlabókagrunnin hevur havt við sær, at arbeiðið hjá landsstýrismanninum at umskipa regluverkið hevur gingið striltið.

Mentamálastýrið hevur í sambandi við viðgerðina av málinum bíðað eftir endaligu viðgerðini av álitinum "um landsstovnar og –grunnar", sum Fíggjarmálastýrið hevur gjørt. Landsstýrismaðurin hevur álagt eini innanhýsis nevnd at arbeiða víðari við málinum, soleiðis at lógaruppskot um at skipa Skúlabókagrunnin verður lagt fyri Løgtingið í februar 2002.

6.15 Bókamiðsølan

Í frágreiðingini um Skúlabókagrunnin vístu vit á, at Bókamiðsølan tykist vera ein almennur stovnur, hvørs ognir falla til Skúlabókagrunnin, heldur Bókamiðsølan uppat við virksemi sínum. Virksemið verður tó hvørki tikið við á fíggjarlóg ella í landsroknskapin.

Skuldarar og ognarar í roknskapinum hjá Bókamiðsøluni eru fyri ein stóran part skuldarar og ognarar hjá Skúlabókagrunninum, og avrokningin lagar seg í ein ávísan mun eftir gjaldførinum hjá Bókamiðsøluni. Vit spurdu, um ikki rættast hevði verið, at játtanin til Bókamiðsøluna var ein rakstrarjáttan, ella at Bókamiðsølan og Skúlabókagrunnurin játtanarliga og roknskaparliga vórðu mett sum ein og sami stovnur.

Í februar 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at eitt lógaruppskot var gjørt, har Bókamiðsølan verður gjørd til ein sjálvsognarstovn.

Í november 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at í sambandi við at Skúlabókagrunnurin verður umskipaður, helt hann tað vera ráðiligast, at øll viðurskiftini fingu eina nýggja viðgerð.

6.16 Útbúgvingarstuðul (GL 2000/2 10 9-6)

Stuðulsstovnurin umsitur stuðul og lán til fólk í útbúgving, og krevur lánini innaftur. Lógargrundarlagið er Ll. nr. 45/1999 "um útbúgvingarstuðulsskipan". Við heimild í lógini eru 4 kunngerðir lýstar, sum áseta neyvari reglur á økinum.

Í november 2000 sendu vit landsstýrismanninum frágreiðing um grannskoðan av Stuðulsstovninum, og í februar 2001 fingu vit viðmerkingar frá landsstýrismanninum.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2001 tóku vit samanum úrslitið av grannskoðanini. Niðanfyri verður kunnað um, í hvønn mun viðurskifti, ið tá vórðu umrødd eru komin í rættlag.

Stuðul til lesandi, útlán

Í frágreiðingini vístu vit á:

1. bókaðu lestrarlánini í landsroknskapinum hava í fleiri ár ikki stemmað mótvegis lánsskipanini á Stuðulsstovninum.

Sambært Stuðulsstovninum stemma lánini í landsroknskapinum við lánsskipanina hjá Stuðulsstovninum í 2000, eftir at ein munur uml. 4,5 mió.kr. varð bókaður burtur yvir útjavningarkontuna. Hildið varð, at tað var ein ómøgulig uppgáva at fara fleiri ár aftur í tíðina at finna munin.

2. við árslok 1999 vóru 3 girokontur skrásettar í landsroknskapinum undir stovnsnummarinum hjá Stuðulsstovninum, 2 við kreditsaldu, men eingin stemmaði við uttanhýsis kontuavrit. Í 2000 vórðu 4 peningastovnskontur stovnaðar afturat til inngjøld.

Sambært Stuðulsstovninum stemmaðu hesar peningastovnskontur 31. desember 2000, við tað at eftirbókingar, 88 t.kr. netto, vórðu gjørdar yvir útjavningarkontu. Talan er um munir frá fleiri árum. Hildið varð, at tað var ein ómøgulig uppgáva at fara fleiri ár aftur í tíðina at finna munirnar.

3. samlað tøl fyri rentutilskriving, goldna rentu, rentuafturføring o.l., sum verða skrásett í lánsskipanini á Stuðulsstovninum, verða hvønn mánað latin Gjaldstovuni at bóka. Sambært landsroknskapinum vóru rentuinntøkurnar av lestrarlánum 447 t.kr. í 1999 og 711 t.kr. í 1998. Vit dugdu ikki at síggja, hvussu komið var fram til hesar inntøkur, sum eyðsýnt vóru skeivar.

Stuðulsstovnurin hevur sagt frá, at mannagongdin nú er broytt, soleiðis at rentutilskrivingin verður bókað á eina fíggjarstøðukontu og mótbókað sum rentuinntøkur. Rentuinntøkurnar í 2000 og pr. 31. august 2001 í skipanini hjá Stuðulsstovninum stemma við landsroknskapin.

Leiðarin á Stuðulsstovninum hevur eisini kunnað um, at EDV-skipanin er lagað til soleiðis, at nú ber til at stemma av í millum lánsskipanina á Stuðulsstovninum og landsbókhaldið.

Edv-skipanin

Í frágreiðingini varð víst á, at í so at siga øllum lutum er umsitingin av stuðli og lánum knýtt at edv-skipanini á stovninum, sum varð tikin í nýtslu í august 1993. Skipanin er sjálvvirkandi á nógvum týðandi økjum, tað verið seg at rokna út, gjalda út og bóka stuðuls- og lánsveitingar, renturokna, skráseta inngjøld, rokna út afturgjaldsupphæddir, senda áminningarskriv um eftirstøður o.s.fr.

Vit hildu eina orsøk til trupulleikarnar at stemma av lán og peningastovnskontur vera, at Stuðulsstovnurin hevði ikki havt nóg gott innlit í edv-skipanina, og vit mæltu stovninum til, við sakkønari hjálp, at útvegað sær eitt dagført innlit í, hvussu skipanin var bygd upp, og hvussu hon virkaði o.a.

Leiðarin á Stuðulsstovninum hevur greitt frá, at:

- Stuðulsstovnurin nú hevur dokumentatión av skipanini, av tabellstrukturinum og av hardware-uppseting.
- Brúkaravegleiðingar vórðu gjørdar, tá ið skipanin varð tikin í nýtslu, men tær eru ongantíð dagførdar.
- Brúkararættindi eru bygd inn í skipanina, og hava starvsfólkini ymisk brúkararættindi.
- Eingin avtala er gjørd um menning og viðlíkahald av skipanini, men verður hetta gjørt eftir tørvi.
- Fysiska trygdin er í lagi, og reglur fyri back-up eru gjørdar og verða fylgdar hvønn dag.
- Stuðulsstovnurin fekk pening á eykafíggjarlógini fyri september 2001 at kravfesta eina nýggja telduskipan. Ábøtur á verandi skipan verða tí ikki raðfestar so høgt sum higartil.

Journalviðurskifti

Vit vístu á, at ein stovnur við so nógvum samskifti hevur tørv á einari journalskipan. Stuðulsstovnurin hevur kunnað um, at nýggja telduskipanin eisini fevnir um eina journalskipan.

Húsaleigukvittanir

Sambært § 6 í K. nr. 71/1999 "um útbúgvingarstuðul" hava lesandi, ið kunnu skjalprógva útreiðslur av egnum bústaði, rætt til stuðul sum útibúgvandi. Í vegleiðingini til umsóknarbløðini stendur, at tey skulu lata inn "ÚS-leiguváttan" og skulu til einu hvørja tíð kunna leggja fram húsaleigukvittanir fyri hvønn mánað í stuðulsárinum. Vit vístu á, at í ongum føri hevði Stuðulsstovnurin kravt húsaleigukvittanir.

Stuðulsstovnurin heitti í februar/mars 2001 á 40 næmingar, ið høvdu latið inn ÚS-leiguváttanir, um at lata húsaleigukvittanir inn fyri eitt ávíst tíðarskeið. 38 næmingar luku formligu krøvini til húsaleigukvittanirnar, meðan 2 næmingar ikki svaraðu. Teir vórðu síðani kravdir eftir tí ov nógv útgoldna stuðlinum.

Fyri at minka um møguliga misnýtslu av skipanini, hevur stovnurin í skúlaárinum 2001/2002:

- táttað krøvini til, hvussu goldið verður, og kunnað um viðurskifti, ið hava týdning í hesum sambandi
- sent skúlunum skriv
- dagført nýggju krøvini í vegleiðingini til næmingarnar
- sett fleiri upplýsingar á ÚS-leiguváttanini, ið verður undirskrivað av útleigara og leigara

Stuðulsstovnurin hevur nú ætlanir um hvørt ár at biðja um húsaleigukvittanir frá næmingum.

Annar almennur stuðul, ið ætlaður er til livikostnað

Vit vístu á, at millum tey, sum vald vórðu út, fingu 4 eisini almannahjálp, hóast tað í § 2, stk. 1, nr. 5, í Ll. nr. 45/1999 "um útbúgvingarstuðulsskipan" var ásett, sum treyt fyri at fáa stuðul, at umsøkjarar fáa ikki annan almennan stuðul, ið er ætlaður til livikostnað. Mannagongdin varð broytt frá august 2000.

Við broyting í lógini sambært Ll. nr. 60 frá 27. apríl 2001, sum kom í gildi 1. august 2001, koma øll lesandi nú undir lógina um útbúgvingarstuðul, eisini tey, sum eru viðskiftafólk hjá Almannastovuni. Veitingin frá Almannastovuni verður roknað út við grundarlagi í tørvinum hjá viðkomandi. Hjá lesandi, sum fáa almannaveiting, verður studningsupphæddin mótroknað í veitingini, soleiðis at samanlagda upphæddin frá Stuðulsstovninum og Almannastovuni verður tann sama, sum áðrenn lógarbroytingina.

Lestrarvirkni/samskifti við skúlarnar

Sambært § 2, stk. 1, nr. 4, í lógini um útbúgvingarstuðulsskipan, er tað eitt krav, at móttakarin er lestrarvirkin. Í august 2000 sendi Stuðulsstovnurin skúlunum yvirlit yvir teir næmingar, sum stóðu skrásettir at ganga á skúlanum farna skúlaárið, og heitt varð á skúlarnar um at vátta yvirlitið. Allir skúlarnir uttan ein sendu listarnir innaftur. Teir næmingar, ið høvdu fingið goldið ov nógv, skuldu rinda stuðulin aftur.

Stuðulsstovnurin hevur aftur í august í 2001 sent skúlunum eitt yvirlit. Allir listarnir eru komnir inn aftur, og stovnurin er í ferð við at kanna teir. Í framtíðini verða listar sendir út á hvørjum ári.

Innkrevjing av ov nógv goldnum stuðuli

Fólk í útbúgving, sum fáa stuðul, hava sambært § 15 í lógini skyldu til beinanvegin at boða frá, gevast tey við útbúgvingini, ella onnur viðurskifti broytast, ið ávirka stuðulin. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at um Stuðulsstovnurin varð varugur við, at lesandi hevði fingið ov nógvan stuðul, fingu tey boð um at rinda stuðulin aftur. Eingin áminning varð send, og krøvini vórðu einans skrásett í einum rokniarki.

Leiðarin hevur greitt frá, at viðurskiftini eru komin í rættlag. Næmingar, ið hava fingið ov nógvan stuðul goldnan út, verða skrásettir í eini lánsskipan.

Innheintan av eftirstøðum

Sambært § 8 í nýggju lógini um útbúgvingarstuðul er heimilað Toll- og Skattstovu Føroya at krevja inn skuld, ið stavar frá Stuðulsstovninum. Vit vístu á, at sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið var ætlanin við lógarbroytingini at effektivisera innkrevjingina av eftirstøðum, og at Toll- og Skattstovan við lógarbroytingini fekk heimild at krevja lánsskuldina aftur eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri innkrevjingina av persónsskatti í samtíðarskattalóggávuni.

Vit vístu eisini á, at lógin hevði verið í gildi í nærum 2 ár, men at einki mál var sent Toll- og Skattstovu Føroya til innheintingar. Av tí at trupulleikar høvdu verið á innkrevjingardeildini, hevði Toll- og Skattstovan biðið Stuðulsstovnin bíða.

Stuðulsstovnurin hevur síðani fleiri ferðir heitt á Toll- og Skattstovu Føroya, fyri at fáa avtala mannagongdirnar í sambandi við innkrevjingina, og í oktober 2001 vórðu mannagongdir viðvíkjandi avhendan av málunum o.a. avtalaðar, og fyrstu málini vórðu latin Toll- og Skattstovu Føroya í desember 2001.

Harafturat vísir leiðarin á Stuðulsstovninum í november 2001 á:

- *at* telduskipanin er broytt soleiðis, at hon kann handfara avhendanina til Toll- og Skattstovuna,
- *at* avtala er gjørd við Føroya Gjaldstovu og Toll- og Skattstovu Føroya um, hvussu hesar bókingar skulu verða gjørdar,
- *at* Stuðulsstovnurin hevur fingið responsum frá sakførara um innheintan av lánum, har viðgjørdir eru spurningar sum: rentur, renturs renta, rentutilskriving, fyrnaðar rentur, innheintingarmøguleikar og uppsetan av nýggjum skuldarbrøvum.

6.17 Føroya Landsbókasavn (GL 1998/2 11 2-7)

Føroya Landsbókasavn hevur virkað eftir Ll. nr. 31/1952, sum fór úr gildi 1. januar 2002, samstundis varð Ll. nr. 79 frá 8. mai 2001 ”um bókasøvn” sett í gildi.

Vit hava grannskoðað roknskaparviðurskiftini, og í hesum sambandi eisini við stakroyndum kannað roknskaparskjøl og lønarútgjaldingar. Landsbókasavnið hevur 5 peningastovnskontur skrásettar á fíggjarstøðuni. Konturnar vórðu skrásettar í landsbókhaldinum í oktober 1999 eftir eina grannskoðanarvitjan. Síðani var einki bókað. Vit hava mælt til, at rørslurnar verða bókaðar, soleiðis at samsvar verður millum peningastovnssaldu og landsbókhaldið. Annars var einki var at finnast at.

Játtanin til bókasøvn í er liðað sundur á 3 undirkontur: 20. Føroya Landsbókasavn, 21. Fólkabókasøvn og 40. Inntøkufíggjað virksemi.

6.17.1 Fólkabókasøvn

Vísandi til sundurgreiningina av játtanini hevur seinastu mongu árini staðið ein mett inntøka uppá 625 t.kr. Upprunaliga var talan um mettar inntøkur av sølu av bókum til bygda- og skúlabókasøvn. Fyri fleiri árum síðani vísti Gjaldstovuna á, at talan er ikki um, at landið keypir og selur bøkur. Tá ið bøkur verða keyptar til bygda- og skúlabókasøvn, er tað eitt arbeiðið, sum Landsbókasavnið skipar fyri. Landsbókasavnið kannar, hvussu nógv eintøk skulu keypast, keypir og rindar fyri bøkurnar. Tá ið bøkurnar verða sendar bókasøvnunum fáa tey rokning frá Landsbókasavninum fyri bøkurnar, innbinding av føroyskum bókum og fyri umsitingargjald.

Av praktiskum orsøkum leggur Landsbókasavnið pening út fyri bygda- og skúlabókasøvnini og krevur peningin innaftur. Tí eru ongar inntøkur bókaðar í roknskapinum í nógv ár, men mettu inntøkurnar 625 t.kr. eru ongantíð broyttar samsvarandi hesum. Vit hava tí mælt til at fáa samsvar millum játtanar- og skrásetingarmannagongdina.

6.17.2 Inntøkufíggjað virksemi

Lønarútreiðslur "burtur" í landsroknskapinum

Sambært landsroknskapinum eru ongar inntøkur á undirkontu 40, og lønarútreiðslurnar eru einans 17 t.kr. Útgreinaður rakstrarroknskapur fyri 2000 vísir, at uml. 248 t.kr. eru goldnar í lønum. Rokningar eru sendar almennum og kommunalum stovnum fyri uml. 231 t.kr. Fakturerað verður á StRk. 1180 "Endurgjald í sambandi við lønir", og tískil verða lønarútreiðslurnar hjá Landsbókasavninum "neutraliseraðar".

Nakrir landsstovnar bóka lønarrokningina frá Landsbókasavninum sum lønarútreiðslur í sínum roknskapi. Aðrir bóka rokningina sum "keyp av tænastu". Verður tann hátturin nýttur, verður lønarútreiðslan burtur í landsroknskapinum. Landsbókasavnið hevur boðað frá, at málið verður tikið upp við Gjaldstovuna og rættað.

At lønarútreiðslur verða "burtur" í landsroknskapinum, tí ein stovnur mótroknar lønarútreiðslur á kontu 1180, uttan at stovnurin, sum skal bera lønarútreiðslurnar, bókar tær sum lønir, er eitt fyribrigdi, sum ger seg galdandi á fleiri stovnum undir Mentamálastýrinum. Vit hava mælt Mentamálastýrinum til at taka spurningin upp við Gjaldstovuna.

Ivasamt, um talan er um "inntøkufíggjað virksemi"

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er virksemið á undirkontu 40 at skráseta bókasøvn á almennum stovnum, skúlum, hjá felagsskapum o.ø. Endamálið er, at tað um eina telduskipan skal bera til at síggja, hvørjar bøkur eru hvar í landinum. Ein bókavørður ger arbeiðið, og rokning verður send stovnunum.

Sambært játtanarskipanini kunnu landsstovnar fáa játtan til inntøkufíggjað virksemi, um virksemið lýkur ávísar treytir. Endamálið við at skilja inntøkufíggjað virksemi frá vanligum virksemi er, at talan er um sølu av tænastum í kapping við onnur. Prísurin skal m.a. ikki verða kappingaravlagandi mótvegis privatum og øðrum almennum kappingarneytum, og langtíðar miðalkostnaðurin skal verða fíggjaður.

Landsbókavørðurin hevur greitt frá, at endamálið er at nøkta ein tørv, og ikki at fáa vinning burturúr virkseminum. Uppgávan tykist tí vera partur av vanliga virksemi stovnsins, og landsbókavørðurin heldur, at uppgávan á undirkontu 40 er varandi. Vit halda tað helst hevði verið rættari, at virksemið varð játtað á undirkontu 20 undir vanliga virkseminum.

Fleiri stovnar/skúlar undir Mentamálastýrinum hava undirkontur, sum sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina bera heitið „Inntøkufíggjað virksemi". Í nógvum førum lýkur virksemið eyðsæð ikki tær serligu treytir, sum eru ásettar í játtanarskipanini fyri hetta hugtak. Vit

hava tí mælt Mentamálastýrinum til at endurskoða allar tílíkar undirkontur undir § 7 "Útbúgving og gransking o.a."

6.18 Føroya Landsskjalasavn (GL 1998/2 11 2-7)

Vit grannskoðaðu roknskaparviðurskiftini á Landsskjalasavninum, og í hesum sambandi kannaðu vit eisini við stakroyndum roknskaparskjøl og lønarútgjaldingar. Einki var at finnast at.

Føroya Landsskjalasavn hevur síðani í 1998 havt skiftandi "vikarierandi stjórar". Søkt er fleiri ferðir eftir nýggjum stjóra, men starvið er ikki sett. Seinasti "vikarierandi stjóri" vildi ikki halda fram í starvinum eftir 1. mars 2001.

Deildarstjórin á mentamáladeildini í Mentamálastýrinum er fyribilssettur stjóri. Hann hevur latið umsitingarleiðaranum á savninum ræðisrættin og dagligu leiðsluna upp í hendi.

Journalskipanir

Sambært § 7 í Ll. nr. 49/1992 "um Føroya Landsskjalasavn" er ásett, at almennir stovnar, undir eftirliti av Landsskjalasavninum, hava ábyrgdina av, at skjalasavnið verður bygt upp og forsvarliga varðveitt. Landsskjalasavnið er ráðgevi hjá stovnunum í spurningum um málsviðgerð, uppbygging av skjalasavni, gerð av yvirlitum yvir innihaldið í skjalasøvnunum og í spurningum um goymsluviðurskifti á skjalasøvnunum. Vanlig mannagongd er, at stovnurin kemur við einum uppskoti um journalætlan, journallykil og málsgongd. Síðani verður uppskotið viðgjørt í samskifti millum stovnin og Landsskjalasavnið. Landsskjalasavnið skal síðani góðkenna uppskotið.

Landsskjalasavnið hevur bert góðkent journalskipanir hjá 10 stovnum. Afturat hesum hevur Landsskjalasavnið góðkent journalskipanir hjá nøkrum stovnum, sum seinni eru umskipaðir. Landsskjalasavnið hevur eftirlit við uml. 40 øðrum skipanum, sum ikki eru góðkendar. Stovnurin heldur, at flest allar lúka treytirnar fyri at verða góðkendar.

Leikluturin hjá Landsskjalasavninum er at ráðgeva. Stovnurin kann ikki áleggja øðrum stovnum at fáa sær eina journalskipan. Landsskjalasavnið kunnaði um, at orka er ikki til at hava eftirlit við teimum uml. 125 stovnunum, sum savnið skal sambært Ll. nr. 49/1992. Vit hava spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir hann hevur, at bøta um viðurskiftini. Landsstýrismaðurin hevur sagt frá, at Mentamálastýrið er sinnað at bøta um viðurskifti savnsins í teimum førum, har stovnurin hevur tørv á størri játtan fyri at virka, sum hann skal.

Landsskjalasavnið hevur kunnað um, at verkætlan verður fyrireikað, sum hevur til endamáls at skráseta øll journalviðurskifti hjá stovnum, ið skjalasavnslógin fevnir um. Endamálið er at leggja til rættis framtíðar goymslutørv, neyðugar lógarbroytingar og at tryggja skiftið til kunningartøkni innan almenna fyrisiting.

Starvsfólkaviðurskifti

Stovnurin hevur 5 starvsfólk: 2 savnshjálparar, 1 søgufrøðing, 1 kønan í savnsfyriskipan og 1 umsitingarleiðara. Síðani miðskeiðis í 90-árunum hevur stovninum vanta ein konservator. Umsitingarleiðarin heldur, at skal stovnurin røkja uppgávur sínar nøktandi, hevur hann, umframt einum stjóra, eisini tørv á einum konservatori, tí savnindi stovnsins farast. Harafturat er tørvur á 2 savnshjálparum, skal stovnurin kunna umsita tey savnindi, sum í løtuni liggja á goymslu óviðgjørd.

Vit hava spurt landsstýrismannin, hvørjar ætlanir hann hevur, at bøta um viðurskiftini. Landsstýrismaðurin hevur sagt frá, at Mentamálastýrið er sinnað at bøta um viðurskifti savnsins á starvsfólkaøkinum. Mentamálastýrið fer at hava samráðingar við Landsskjalasavnið um hesi og onnur viðurskifti, sum kunnu vera savninum at gagni.

Hølisviðurskifti

Sambært § 8 í Ll. nr. 49/1992 ”um Føroya Landsskjalasavn” hava almennir stovnar skyldu at avhenda Landsskjalasavninum savnindi teirra, tá ið tey eru 30 ára gomul. Eftir avtalu í 1990, millum donsku stjórnina og Landsstýrið um skjalasøvn hjá stovnum ríkisins í Føroyum, hava teir avhendingarskyldu til Landsskjalasavnið.

Arbeiðsbólkur, settur av Landsstýrinum í 1997, gjørdi tilmæli um at byggja nýtt landsskjalasavn. Sambært kanning, ið arbeiðsbólkurin gjørdi, var hølistørvurin 1. januar 1998 hildin at vera uml. 2.300 fermetrar, harav uml. 1.300 fermetrar vóru goymslutørvur. Bólkurin mælti Landsstýrinum til at byggja eini savnshús 2.400 fermetrar til støddar, soleiðis at tørvurin varð nøktaður fram til ár 2008. Til sammetingar kunnu vit vísa á, at sambært einum yvirliti frá Landsskjalasavninum hevur stovnurin eina gólvvídd uppá 785 fermetrar, harav 475 fermetrar eru goymsla.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at í løguætlanini á fíggjarlógini er byggimálið sett til 2005. Byggigrunnur savnsins varð á sinni niðurlagdur við lóg, og peningurin fluttur í landskassan. Mentamálastýrið tekur upp samband við Landsskjalasavnið um hølisviðurskiftini.

6.19 Føroya Fornminnissavn (GL 1998/2 11 2-7)

Játtanin til Føroya Formninnissavn er á høvuðskontu 7.24.3.10. Fornminnissavnið virkar sambært hesum lógum:

- Ll. nr. 32/1952 ”um fornminnissavn”
- Ll. nr. 19/1948 ”um at friða fornminni og bygningar”
- Ll. nr. 17/1972 við seinni broytingum ”um bygdasøvn”

Vit grannskoðaðu roknskaparviðurskiftini, og í hesum sambandi kannaðu vit eisini við stakroyndum roknskaparskjøl og lønarútgjaldingar. Vit vístu m.a. á, at:

- Kassin varð taldur upp og samsvar var ikki við landsbókhaldið, m.a. tí ein kassauppgerð var ikki skrásett. Mælt varð til, at um- og eftirbókingar vórðu gjørdar.
- Fornminnissavnið hevur 5 peningastovnskontur. Við árslok 2000 var ikki samsvar millum 4 saldur sambært kontuavritum frá peningastovninum og saldur í landsbókhaldinum. Mælt varð til at stemma hesar kontur av.
- Saldan á kontu 0649 “Millumr., peningaligar flytingar millum stovnar og landskassa” var ikki rætt, m.a. tí feilbókingar vóru gjørdar í sambandi við, at farið varð yvir til nýggju bókhaldsskipanina hjá Gjaldstovuni, og tí ein upphædd 150 t.kr. var skeivt bókað á kontuna. Mælt varð til at greina og bóka munirnar.
- Ferðaforskot vóru ultimo mars 2001 uml. 54 t.kr. Eitt ferðaforskot var ikki endaliga gjørt upp, hóast meira enn eitt ár var umliðið. Sambært galdandi reglum skal ferðin verða gjørd upp í seinasta lagi 3 vikur eftir heimkomu. Mælt varð til at fáa viðurskiftini í rættlag.

“Bygdasøvn” og “Friðað hús og fornminni”

Aðrar játtanir/høvuðskontur á fíggjarlógini 2000 við tilknýti til Fornminnissavnið eru:

- 7.24.3.16. “Bygdasøvn”
- 7.24.3.19. “Friðað hús og fornminni”

Landið kann við støði í Ll. nr. 17/1972 v.s.b. rinda góðkendum bygdasøvnum 60% av rakstrarútreiðslunum í stuðli. Einans uml. 275 t.kr. eru goldnar av játtanini 1.389 t.kr.

Stovnurin hevur víst á, at bygdasøvnini lótu ikki roknskapirnar inn fyrr enn freistin at bóka í 2000 var farin, og tí var ikki møguligt at bóka stuðulin í 2000.

Í samráð við Mentamálastýrið er gjørt av, at stuðulin í framtíðini verður goldin 1 ár afturút eftir góðkendum roknskapi.

6.20 Føroya Náttúrugripasavn (GL 1998/2 11 2-7)

Vit grannskoðaðu roknskaparviðurskiftini á Náttúrugripasavninum, og í hesum sambandi kannaðu vit eisini við stakroyndum roknskaparskjøl og lønarútgjaldingar.

Hóast samsvar millum samlaða játtan og nýtslu í 2000, eru inntøkurnar uml. 2,5 mió.kr. hægri, enn mett um, farið er upp um lønarkarmin við uml. 654 t.kr., og aðrar útreiðslur eru 1,8 mió.kr. hægri, enn mett varð. Orsøkin til hesi lutfalsligu stóru frávik er, at stovnurin hevur havt inntøkur og útreiðslur í sambandi við verkætlanir, sum ikki vóru tiknar við, tá ið fíggjarlógin fyri stovnin varð gjørd. Sambært stjóranum er ætlanin at stovna eina undirkontu til verkætlanir, soleiðis at inntøkur og útreiðslur, ið standast av hesum virksemi, verða skildar frá vanliga rakstrinum.

Náttúrugripasavnið umsitur fleiri verkætlanir, ið hava fremmanda fígging. Sambært vegleiðing frá Føroya Gjaldstovu 29. desember 1998 um "Fremmand fígging av almennum virksemi og íløgum", er fremmand fígging peningur, sum t.d. granskingarstyrkur, tilskot, gávur o.t., sum stavar aðrastaðni frá enn beinleiðis av játtanarlóg. Sambært somu vegleiðing skal loyvi verða fingið frá aðalstýri stovnsins, áðrenn farið verður undir tílíkt virksemi. Sambært stjóranum er nyttuleyst at søkja Mentamálastýrið um loyvi, tí Stýrið ofta hevur eina ov langa viðgerðartíð, í mun til tær tíðarfreistir, ið eru, tá ið søkt verður um pening til verkætlanir. Í februar 2002 hevur Mentamálastýrið sagt frá, at Stýrið kennir ikki til, at tað er nyttuleyst hjá Náttúrugripasavninum ella øðrum stovnum undir Stýrinum at venda sær til Stýrið. Pástandurin kemur óvart á, og verður tikin í størsta álvara. Landsstýrismaðurin fer sum skjótast at taka henda spurning upp við Náttúrugripasavnið.

Við fíggjarárslok 2000 eru 4 verkætlanir gjørdar upp fyri árið, og avlopið er flutt á fíggjarstøðuna. 6 verkætlanir við fremmandari fígging halda fram í 2001.

Í 2000 fekk stovnurin 715 t.kr. frá játtanini "Upplýsing um grind" undir fiskivinnumálum. Av hesi upphædd, eru 330 t.kr. fluttar til 2001, sum var talan um fremmanda fígging. Vit hava víst á, at mannagongdin er ikki rætt. Tað er nú rættað.

Stovnurin hevur eina sølubúð í sambandi við framsýningarhøllina. Inntøkurnar frá sølubúðini verða settar inn á bankakontuna hjá stovninum, og verða við jøvnum millumbilum fluttar Gjaldstovuni. Bankakontan er ikki skrásett í landsbókhaldinum. Vit hava mælt til at fáa viðurskiftini í rættlag í samráð við Gjaldstovuna.

6.21 "Graslíkisvøllir og grasvøllir"

Útreiðslurnar í 2000, 2.875 t.kr., eru bókaðar sum "tilskot til einstaklingar", á standardkontu 52. Tað halda vit ikki vera rætt, tí talan er um stuðul, 2.575 t.kr. til Grunnin Tórsvøll og 300 t.kr. til Tofta Ítróttarfelag. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at stuðulin skuldi verið bókaður á standardkontu 54 "Stuðul til annað virksemi".

Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið 1999 varð kunnað um, at *"størsta umsóknin er til Tórsvøll. Verkætlanin umfatar bygging av nýggjum fótbóltsstadion við grasvølli í Gundadali í Havn. Fyrsta byggistig verður mett at kosta kr. 26.500.000. Tað umfatar tað mest neyðuga, soleiðis at altjóða dystir kunnu leikast á vøllinum: Grasvøll, rennibreyt, eystara skýli við 3.700 sitiplássum, vestara skýli við 1.700 sitiplássum, nátthús, girðing um vøllin o.a. Studningurin er í mesta lagi 30% ella kr. 7.950.000, sum verður játtaður yvir trý ár".*

Árini 1999-2001 hevur landið rindað tilsamans 6,3 mió kr. til Grunnin Tórsvøll. Í hesari upphædd eru 1,35 mió.kr., sum eru goldnar Fótbóltssambandi Føroya í oktober 2001, sambært transporti dagfestur 5. apríl 2001 frá Vinnurekandi Grunninum Tórsvølli.

Vit hava spurt landsstýrismannin, um hann heldur, stuðulin er veittur til ætlaða endamálið sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið 1999. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at av tí at táverandi landsstýrismaður vildi hava greiðu á, hvussu vorðið var við heimildarspurninginum, vendi hann sær eftir ráðum frá Fíggjarmálastýrinum til Løgtingsins Fíggjarnevnd við umsókn um at fáa broytt tekstin.

Niðanfyri hava vit tikið samanum gongdina í málinum.

Í uppriti um Tórsvøll, sum Mentamálastýrið gjørdi í januar 1999, stendur, at høvuðsætlanin við einum stórum landsstadion við rennibreyt, sum m.a. kann verða nýtt til Oyggjaleikir, er burtur. Er fyritreytin fyri játtanini, at talan skuldi vera um eitt landsstadion við ávísum standardi, er ivasamt um hon er nøktað. Talan er um at tulka fíggjarlógina og viðmerkingarnar í henni. Skriv verður tí sent løgdeildini við fyrispurningi.

Í skrivinum til Løgmansskrivstovuna/løgdeildina stóð, at Mentamálastýrið royndi at greiða tey fløkjaligu viðurskifti, sum høvdu tikið seg upp um heimildirnar hjá landsstýrismanninum at gjalda út til Tórsvøll av játtanini á fíggjarlógini fyri 1998 og 1999. Í skrivinum vísti Mentamálastýrið á, at spurningurin var prinsippiellur, tí tað snúði seg um, hvussu stórar broytingar kundu verða gjørdar í eini verkætlan í mun til viðmerkingarnar til fíggjarlógina. Mentamálastýrið vísti eisini á, at viðmerkingarnar í fíggjarlógini vóru rættiliga nágreiniligar viðvíkjandi tí, sum skuldi vera við í verkætlanini, men at verkætlanin varð broytt til "grasvøll við mest neyðugu fasilitetunum".

Í mars 1999 var niðurstøðan hjá løgdeildini, at *"í nevnda føri, har talan er um tulking av játtanarrættarligum reglum, er tað Fíggjarmálastýrið, ið hevur tann sakkøna kunnleikan. Tað vildi verið natúrligt at lagt málið fyri Fíggjarmálastýrið"*. Mentamálastýrið bað tí Fíggjarmálastýrið um eina niðurstøðu í spurninginum, um broytingarnar í verkætlanini vóru so stórar í mun til viðmerkingarnar á fíggjarlógini, at málið mátti aftur til politiska viðgerð.

Niðurstøðan hjá Fíggjarmálastýrinum er, at hóast nýggja verkætlanin væntandi fór at tæna meginpartinum av teimum endamálum, ið varð ætlað í upprunaligu verkætlanini, so helt Fíggjarmálastýrið, at nýggja verkætlanin var ein onnur, enn hon ið var lýst í viðmerkingunum til fíggjarlógina. Fíggjarmálastýrið helt, at ætlaða broytingin broytti grundarlagið undir áður játtaða studninginum. Fíggjarmálastýrið mælti tí landsstýrismanninum í mentamálum til at lata Løgtingið taka støðu til broyttu verkætlanina, annaðhvørt við eykajáttan ella við fíggjarnevndarskjali, har viðmerkingarnar og upphæddin á høvuðskontuni varð broytt, soleiðis tær svaraðu til broyttu verkætlanina.

Í fíggjarnevndarskjali 28. juni 1999 søkti landsstýrismaðurin í mentamálum Fíggjarnevndina um at broyta viðmerkingarnar á fíggjarlógini fyri 1999 til § 7.24.6.11. "Graslíkisvøllir og grasvøllir".

Fíggjarnevndin helt ikki málið kundi verða viðgjørt sum eykajáttanarmál sbr. stýrisskipanarlógini § 44, stk. 2, tí umsóknin var um at broyta viðmerkingarnar til fíggjarlógina. Nevndin vísti á, at við einari løgtingslóg kann støða bert verða tikin til broytingar í tí kunngjørda fíggjarlógarteksti við tilhoyrandi tølum. Helt Landsstýrið fast við umsóknina, mælti Fíggjarnevndin Landsstýrinum til at senda nevndini eitt uppskot til C-átekning til kontu 7.24.6.11. Fíggjarnevndin boðaði tó samstundis frá, at *"nevndin tekur til eftirtektar, at peningur við verandi játtan verður nýttur til upplýsta endamálið"*.

Fyri at verða heilt vísur í síni søk, fekk landsstýrismaðurin sama dag munnliga váttað frá embætismanni hjá Løgtinginum, at støðan hjá Fíggjarnevndini skuldi skiljast soleiðis, at tað

var yvirskriftin, sum var galdandi. Við støði í tí, sum her varð fört fram, helt landsstýrismaðurin, at stuðulin varð veittur til ætlaða endamálið.

Samskiftið í hesum máli vísir, at bæði Mentamálastýrið og Fíggjarmálastýrið hava verið samd um, at talan var um eina aðra verkætlan, enn upprunaliga ætlað, og at heimild var ikki at veita stuðulin. Ein avleiðing kundi verið, at eingin stuðul varð rindaður. Men samskiftið hevur snúð seg um, hvussu rætt skuldi verða atborið, fyri at útvega heimild at rinda stuðulin til nýggju verkætlanina. Hóast Fíggjarnevndin formliga vísti málinum frá sær, vísandi til stýrisskipanarlógina, so góðkendi nevndin reelt, at stuðulin varð veittur til eina aðra verkætlan, tá ið tað í svarinum til Mentamálastýrið stóð, at *"nevndin tekur til eftirtektar, at peningur við verandi játtan verður nýttur til upplýsta endamálið"*. Helst var tað tí, at málið ongantíð kom til viðgerðar sum uppskot til eina C-átekning, hvørki í Fíggjarnevndini ella á Løgtingi.

6.22 "Politiskt virksemi og upplýsing"

Stuðulin verður veittur sambært Ll. nr. 92 frá 4. juni 1996 "um stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing". Í § 5 í lógini er ásett, at stuðulin skal verða settur inn á serstaka banka-, sparikassa- ella girokontu, sum ikki kann verða brúkt til onnur endamál. Tann, sum fær stuðul, skal í seinasta lagi 1. apríl á hvørjum ári senda Landsstýrinum fráboðan um, at stuðulin í álmanakkaárinum fyri er nýttur til tey endamál, sum eru nevnd í § 1. Heldur Landsstýrið, at peningurin er ikki nýttur til nevndu endamál, kann Landsstýrið steðga útgjaldingini fyribils.

Vit hava spurt, um landsstýrismaðurin seinastu 2 valskeiðini, á hvørjum ári innan 1. apríl hevur fingið tær í lógini ásettu fráboðanir um, at stuðulin í álmanakkaárinum fyri er nýttur til tey endamál, sum eru nevnd í § 1.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at stuðulin hevur verið goldin út til hvønn 31. mars. Tá ið nøktandi frágreiðing um nýtsluna árið fyri var komin Stýrinum í hendi, varð hildið áfram at gjalda stuðulin út fram til næsta 31. mars.

Vit hava eisini spurt, hvussu landsstýrismaðurin seinastu 2 valskeiðini hevur havt eftirlit við, um peningurin er nýttur til nevndu endamál, og um landsstýrismaðurin heldur, at nóg greiðar eftirlitsheimildir eru í lógini.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at sum nøktandi frágreiðing hevur verið góðtikið, at stuðulsmóttakarin váttaði, at stuðulin var nýttur til tilætlaða endamálið. Landsstýrismaðurin hevur ikki vilja farið longur, tí hann heldur ikki at tað liggur á landsumsitingini at meta um, hvat er politiskt virksemi.

Í desember 2001 var grein í einum blaðið um, at ein partur av tí peningi, ið varð latin Verkamannafylkingini til politiska upplýsing, síðani er latin sum gáva til at keypa ein sjúklingabuss. Vísandi til at peningurin er ikki nýttur til ætlaða endamálið, hava vit í januar 2002 biðið landsstýrismannin um eina frágreiðing. Landsstýrismaðurin hevur víst á, at eisini Verkamannafylkingin hevur í apríl 1998 latið Mentamálastýrinum váttan um, at "stuðulin verður nýttur til politiska upplýsing". Mentamálastýrið hevur ikki gjørt meira við málið, nú Løgmansskrivstovan hevur tikið yvir umsitingina av játtanini til "Politiskt virksemi og upplýsing". Játtanin er flutt undir §10 "Sjálvstýrismál o.a." frá fíggjarárinum 2001.

6.23 Mentanargrunnur Landsins (GL 2000/2 11 9-3)

Lógargrundarlagið undir Mentanargrunni Landsins er Ll. nr. 84/2000 "um Mentanargrunn Landsins" og K. nr. 109/2000 "um Mentanargrunn Landsins".

Sambært § 3 í lógini verður Mentanargrunnur Landsins stjórnaður av nevnd við 5 limum, sum landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum tilnevnir. Sambært § 2, stk. 3, í kunngerðini ásetir nevndin, í einari starvsskipan, neyvari reglur fyri sínum virksemi. Landsstýrismaðurin skal góðkenna starvsskipanina.

Vit hava í januar 2002 spurt, nær starvsskipanin væntandi verður liðug. Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at hann hevur fingið eitt uppskot til starvsskipan at góðkenna, sum hevur verið viðgjørt í Mentamálastýrinum. Mentamálastýrið hevur nakrar viðmerkingar til uppskotið, og tær eru sendar Mentanargrunninum. Landsstýrismaðurin hevur vísst á, at so skjótt uppskotið er broytt og sent Stýrinum aftur, verður tað avgreitt.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Grunnurin nýtir bókhaldsskipanina á Føroya Gjaldstovu, og roknskapurin verður tikin við í landsroknskapin undir fylgiskjal E: "Roknskapir, eksternir grunnar."

Sambært § 5 í Ll. nr. 84/2000 verða ognir, rættindi og skyldur, sum Mentunargrunnur Føroya Løgtings hevði sambært reglugerð nr. 61 frá 29. mai 1991, fluttar til Mentanargrunn Landsins.

Rakstrarroknskapur 1998-2000

(1.000 kr.)	**2000**	**1999**	**1998**
Lønarútreiðslur	807	669	675
Aðrar útreiðslur	186	118	54
Tilskot til einstaklingar/feløg	2.044	1.874	1.441
Útreiðslur tilsamans	**3.021**	**2.658**	**2.170**
Søla av vørum og tænastum	42	102	25
Rentuinntøkur	153	144	166
Flytingarinntøkur	-	-	316
Játtan	2.500	2.200	1.700
Inntøkur tilsamans	**2.695**	**2.446**	**2.207**
Úrslit	*-342*	*-215*	*37*

Fíggjarstøða 1997-2000

(1.000 kr.)	**2000**	**1999**	**1998**	**1997**
Inniogn í peningastovnum	3.643	3.896	3.777	3.630
Millumr. við landskassan	0	-258	-239	-192
Stovnsfæ:	**3.643**	**3.638**	**3.538**	**3.438**
Útlán	1.752	1.787	1.776	1.811
- sett av móti tapi	-1.699	-1.715	-1.539	-1.429
	53	72	237	382
Inniogn í peningastovnum	1.178	1.302	1.472	1.200
Millumr. við landskassan	-302	-21	39	297
Virkispeningur:	**929**	**1.353**	**1.748**	**1.879**
Ogn, tilsamans	**4.572**	**4.991**	**5.286**	**5.317**

Stovnsfæ

31. desember 2000 var stovnsfæið hjá grunninum uml. 3,6 mió.kr. Til 2000 varð stovnsfæið, sambært løgtingssamtykt 8. mai 1984 í Lm. nr. 143/1983, hækkað við 100 t.kr. um árið, vísandi til § 5 í reglugerð nr. 61/1991 "fyri Mentunargrunn Føroya Løgtings". Reglugerðin varð sett úr gildi sambært § 6 í Ll. nr. 84/2000.

Sambært § 2 í Ll. 84/2000 er stovnsfæ grunsins tað sama, sum stovnsfæið hjá Mentunargrunni Føroya Løgtings, og inntøka grunsins er avkast av stovnsfænum og studningur á fíggjarlógini.

Sambært gerðabókini hjá grunninum hevur verið umrøtt at minka stovnsfæið og nýta tað til virksemi grunsins. Í lógini er ásett, at inntøkur grunsins eru m.a. avkast av stovnsfænum. Eftir okkara tykki er ivasamt, um heimild er at nýta stovnsfæið beinleiðis sum stuðul. Spurdur, sigur landsstýrismaðurin, at Mentamálastýrið ongar ætlanir hevur um at nýta stovnsfæ Mentanargrunsins sum stuðul.

Studningsendamál

Í § 1 í lógini er ásett, at endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum. Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann verða javnmett við hesar listagreinir.

Sambært § 1 í kunngerðini veitir Mentanargrunnurin stuðul til tey í § 1 í lógini nevndu endamál, herímillum starvsløgnir, íverksetanarstuðul, styttri skeið hjá listafólkum og stuðul til ymiskar verkætlanir. Mentanargrunnur Landsins kann harafturat eftir umsókn stuðla bóka- og fløguútgávum við upp til 30% av útgávukostnaðinum. Vísindaligt arbeiði, framsýningar, framførslur o.l. kunnu eftir umsókn fáa stuðul.

Studningur, skattskyldug/ikki skattskyldug inntøka

Vit hava víst á, at sambært § 60 í Ll. nr. 86/1983 "um landsskatt og kommunuskatt" v.s.b., verður studningur, og aðrir skattskyldugir styrkir, veittir av almennum myndugleikum ella stovnum og felagsskapum ella av almennum ella privatum grunnum, gávufægrunnum og tílíkum, roknaður sum A-inntøka.

Mentanargrunnurin rindar, uttan um skattaskipanina, studning til bókaútgávu og útgávu av fløgum o.a. inn á bankakontu hjá umsøkjara, og vit hava áður víst á, at henda mannagongd neyvan er í tráð við ásetingarnar í § 60 í skattalógini. Nevndin boðaði í januar 2000 frá, at kannað verður, um avtala kann verða gjørd um, at grunnurin eina ferð um árið gevur Toll- og Skattstovuni eitt yvirlit yvir, hvør hevur fingið stuðul.

Landsstýrismaðurin boðaði í mars 2000 frá, at arbeitt verður við at finna eina nøktandi loysn. Vit hava í januar 2002 biðið landsstýrismannin greiða frá, hvørji tiltøk hann hevur sett í verk fyri at fáa viðurskiftini í rættlag. Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at Mentamálastýrið hevur sjálvt viðgjørt henda spurning við Toll- og Skattstovu Føroya í sambandi við útgjaldan av stuðli. Mentamálastýrið fer at kunna grunnin um hesi viðurskifti.

Studningsmóttakari

Vit hava fyrr víst á, at vit ivaðust í, um tað var rætt at veita studning til stovnar o.o., sum frammanundan fingu rakstrarjáttan/stuðul á løgtingsfíggjarlógini, ella at veita studning til virkir og feløg, sum ikki hava "tørv" á studningi.

Landsstýrismaðurin hevði í svarskrivi sínum 10. mars 2000 m.a. hesar viðmerkingar:

> *"Hesin spurningur er ikki so heilt einfaldur, sum hann kann tykjast. Partar av listaøkinum eru soleiðis skipaðir, at virksemið bert kann fara fram við hjálp av fleiri fíggingarkeldum. Tað eigur tí at vera skilt millum kjarnuvirksemi og verkætlanir. Út frá hesum sær Undirvísingar- og Mentamálastýrið einki skeivt í, at t.d. Leikarafelagið fær sítt høvuðsvirksemi fíggjað av Leikpalli Føroya (løgtingsfíggjarlógin) og partvís av øðrum fíggjarkeldum – almennum eins og privatum. Uttan hetta fíggingarmynstur verður torført at uppihalda listarligum virksemi í Føroyum.....Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur tí ongar ætlanir um at broyta hesa praksis við nýggju lógini og kunngerðini. Undirvísingar- og Mentamálastýrið heldur, at verður henda játtanarmannagongd broytt, soleiðis at eitt nú Leikarafelagið verður avskorið frá studningi úr grunninum, so dettur yrkissjónleikur niður*

fyri í Føroyum. Undirvísingar- og Mentamálastýrið heldur somuleiðis, at tað hevði verið skeivt at forða listarligum felagsskapum og mentanarstovnum í at fáa stuðul úr Mentanargrunninum til verkætlanir, tiltøk og t.d. eftirútbúgving.

Hinvegin skal Undirvísingar- og Mentamálastýrið geva Landsgrannskoðanini rætt í, at tað er skeiv játtanarpraksis at veita stuðul til umsøkjara, ið ikki hevur tørv á stuðli, t.d. kommunur og alment forlag, ið fíggjarliga er væl fyri. Av tí, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið jú ikki kann leggja seg út í avgerðir hjá stýrinum fyri grunnin (tað vildi jú verið ímóti sjálvum meginprinsippinum við Mentanargrunninum), verður lagt upp fyri hesum trupulleika í kunngerðini til lógina."

Vit duga ikki at síggja, at nøkur áseting í kunngerðini um Mentanargrunn Landsins leggur upp fyri umrødda trupulleika. Í februar 2002 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálastýrið heldur ikki, at hesi viðurskifti skulu verða skipað í kunngerðini. Mentamálastýrið heldur tað vera ov stórt inntriv í frælsi nevndarinnar. Hinvegin hevur landsstýrismaðurin á fundi við formannin, næstformannin og skrivaran í Mentanargrunni Landsins kunnað umboðini um sjónarmið Mentamálastýrisins í hesum máli. Niðurstøðan á fundinum var, at nevnd grunsins í síni játtanarpraksis í framtíðini fer at hava fyrilit fyri teimum sjónarmiðum, sum bæði Landsgrannskoðanin og landsstýrismaðurin hava latið komið til sjóndar í hesum máli.

Í sambandi við grannskoðan av útgjaldingum í roknskapinum 2000 eru vit komin fram á fleiri dømi um studning til stovnar o.o., sum frammanundan fáa rakstrarjáttan/stuðul á fíggjarlógini, t.d.: Fróðskaparsetur Føroya, Undirvísingar- og Mentamálastýrið, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Føroyahúsið, Føroya Blindastovnur, Føroya Fornminnissavn, Bókadeild Føroya Lærarafelags og Sjónvarp Føroya, har eitt starvsfólk hevur fingið stuðul til at fara á ráðstevnu í Kanada um public service sjónvarpsstøðir.

Fleiri av stovnunum/feløgunum hava eisini fingið studning til somu endamál frá øðrum stuðulsjáttanum, ið Mentamálastýrið umsitur.

Hvat teimum einstøku játtanunum viðvíkur, vísir landsstýrismaðurin á, at Mentamálastýrið heldur tað ikki vera rætt fullkomiliga at avskera almennar stovnar frá at søkja stuðul frá eitt nú Mentanargrunni Landsins til ávísar smærri verkætlanir. Hinvegin heldur Mentamálastýrið tað ikki vera góða siðvenju at játta eitt nú Heilsufrøðiligu Starvsstovuni ella Bókadeild Føroya Lærarafelags studning.

Í desember 2001 eru vit kunnað um, at mannagongdin hjá nýggju nevndini er ikki at veita stuðul til vinnurekandi og kommunur ella til stovnar, sum eru á løgtingsfíggjarlógini.

6.24 Samskipan av studningi til mentanarmál o.a.

Endamál Mentanargrunsins er sera breitt orðað, og má sigast at fevna um studning til at kalla alt, sum hevur við mentan at gera.

Undir viðgerðini í tinginum av lógaruppskotinum varð samtykt at skoyta uppí endamálsorðingina: "bæði hjá leikum og lærdum". Mentanarnevndin vísti við hesum á, *"at tað er ein ávísur vandi fyri, at tað frameftir verður tyngri hjá leikfólki at fáa stuðul úr grunninum."*

Grundgevingin fyri, at skipa studningin innan karmarnar av einum grunni, var, at politiski myndugleikin als ikki skal leggja seg út í málsviðgerðina, tá ið talan er um studning til mentanarlívið.

Í almennu viðmerkingunum í uppskoti til løgtingslóg um Mentanargrunn Landsins (Lm. nr. 69/1999) er tað soleiðis greinað út:

"Meginreglan fyri at umsita Mentanargrunn Landsins og at umsita játtanir úr grunninum verður í framtíðini tann sama, sum hevur verið galdandi, síðan grunnurin varð stovnaður, nevniliga, at hóast hon verður vald av politiska myndugleikanum (landsstýrismanninum), so hevur nevndin allan myndugleikan at játta pening eftir umsókn og sambært tí

reglugerð,ið landsstýrismaðurin ger við støði í lógini. Henda skipan, at politiski myndugleikin als ikki leggur seg út í málsviðgerðina av umsóknum og avgerðum um játtan, er vanlig siðvenja í Norðurlondum, tá talan er um stuðul til mentanarlívið."

Gongdin hevur verið ein onnur, síðani lógin varð samtykt, tí í dag umsitur politiski myndugleikin/landsstýrismaðurin fleiri og størri játtanir. Nevnt kann verða sum dømi høvuðskonta 7.24.1.13 "Ymiskir studningar", sum í 2001 og 2002 er ávikavist uml. 3 og 2,7 mió.kr. Sambært viðmerkingunum í uppskoti til fíggjarlóg fyri 2001 til undirkontu 7.24.1.13.04 "Stuðul til onnur endamál" er játtanin 2 mió.kr. til "mentanarpolitisk strategisk tiltøk hjá landsstýrismanninum í mentamálum". Í 2002 er játtanin 1,7 mió.kr. til "íverksetan av mentanarætlan 2001-2005, til menning av mentan og list, til virknan stuðul til mentanarlív á bygd og í bý so sum konsertir, framsýningar, keyp av list og framflyting (promovering) av list innan- og uttanlands v.m."

Fleiri aðrar kontur á fíggjarlógini fevna um mentanarstudning. Sum dømi kunnu verða nevnd:

Høvuðskonta 7.24.2.01. "Tónleikur og sangur". Játtanin 750 t.kr. í 2001 fer "til at stuðla og menna tónleik og sang í Føroyum." Játtanin er so at siga markað til meginfeløg, ávikavist Konsertfelagið, Kórsamband Føroya, Sláið Ring, Føroya Tónleikarafelag, umframt til Føroya Symfoniorkestur.

Høvuðskonta 7.24.1.05. "Tiltøk fyri børn og ung". Játtanin 900 t.kr. í 2001 fevnir "um ta upphædd,ið Mentamálastýrið umvegis P/f Ítróttarvedding fær burtur av veddingarpeninginum. Peningurin verður eftir umsókn játtaður til verkætlanir og tiltøk til gagns fyri børn og ung. Játtanin verður umsitin sambært leiðreglum 8. juni 2000. Leiðreglurnar fevna um endamál, dømi um tiltøk,ið kunnu fáa stuðul, umsóknarbløð, umsóknarfreistir, lýsing eftir umsóknum, treytir o.m.a."

Høvuðskonta 7.23.7.16. "Næmingastuðul til listamenn". Játtanin í 2001 100 t.kr., ætlað "til at stuðla føroyskari myndlist. Fólk, sum lesa hægri lestur, og sum við framsýning(um) hava víst góðar gávur, kunnu søkja Mentamálastýrið um stuðul. Listafelag Føroya gevur tilmæli í hesum máli. Játtanin er eisini til eftirútbúgving av listafólkum og verður eftir umsókn játtað av Mentamálastýrinum og eftir ummæli frá Føroysk Myndlistafólk."

Nevndin í Mentanargrunninum veitir studning sambært serstakari lóg og kunngerð. Harafturat eru fleiri aðrar studningsjáttanir til mentanarendamál, sum liggja innanfyri breiðu endamálsorðingina hjá Mentanargrunninum, men sum liggja uttanfyri málsviðgerðina hjá nevndini fyri Grunnin. Flestu av hesum nógvu studningsjáttanum, sum politiski myndugleikin (landsstýrismaðurin) umsitur, eru bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingunum til fíggjarlógina.

Landsstýrismaðurin vísir á, at prinsippið um, at politiski myndugleikin skal stuðla uttan at stýra er vanligt í norðurlondum. Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at Norðurlond eins og norðurlendski ráðharrastovnurin, umframt at játta stuðul til mentanarlívið eftir "armslongdarprinsippinum", eisini hava strategiskar puljur til ráðharran at nýta, heldur ráðharrin tað vera neyðugt ella munagott at veita stuðul til mentanarlig tiltøk. Landsstýrismaðurin í mentamálum fer í næstum at leggja uppskot til orðaskiftis "Uppskot um mentanarpolitiska ætlan fyri tíðarskeiðið 2002-2006". Ætlanin fevnir eisini um eitt hugskot at skipa hetta øki við lóg, og innan árslok 2003 at leggja fram uppskot um løgtingslóg um stuðul til list og listarligt virksemi.

6.25 Alment um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting

Nógvu studningsjáttanirnar, sum politiski myndugleikin (landsstýrismaðurin) umsitur, eru bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlógina. Summar játtanir eru til meginfeløg, sum síðani umsita studning til undirliggjandi feløg, ofta uttan neyvari ásetingar frá landsstýrismanninum. Fleiri játtanir fevna um at kalla sama breiða endamál og sama umsøkjaraskara.

Fleiri stovnar/feløg kunnu fáa studning til somu endamál frá meginfeløgum, frá Mentanargrunninum umframt frá stuðulsjáttanum, ið landsstýrismaðurin umsitur. Mentanargrunnurin veitir studning sambært ásetingum í serstakari lóg, men fleiri aðrar studningsjáttanir til mentanarendamál, liggja innanfyri breiðu endamálsorðingina fyri virkseminum hjá Mentanargrunninum.

Umsitingin av studningi til mentanarendamál tykist sum heild fløkt og óskipað, og er eisini merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv, í sambandi við málsviðgerð og útgjalding av studningi. Í ávísan mun er talan um fleirfalda málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Eftir okkara tykki er tørvur á eini sanering/upprudding viðvíkjandi stuðulsgrundarlagi/-lóggávu og stuðulsumsitingini, so endamál og treytir o.a. verða greiðari, so tað slepst undan dupultarbeiði, so umsøkjari bert skal venda sær eina staðni fyri at søkja almennan studning o.s.fr.

Mentamálastýrið er samt við Landsgrannskoðanini í hesari áskoðan og vónar, at á hesum øki kann verða ruddað upp við einari komandi listastuðulslóggávu.

Vit hava seinastu árini vístá, at tað er góður lóggávusiður, at neyvari reglur um studningsskipanir, sum venda sær til ein breiðan umsøkjaraskara, verða ásettar í serstakari lóg við m.ø.:

1. Neyvari endamálsáseting í lógini. Í viðmerkingunum: ítøkiligar ásetingar fyri, hvørji úrslit/eyðkenni kunnu nýtast sum mát fyri, um endamálið er rokkið.
2. Lýsing/avmarkan av, hvør kann fáa stuðul, hvussu stuðulin verður roknaður út, og hvussu stór samlaða stuðulsupphæddin er, vísandi til fíggjarlóg.
3. Reglur fyri, hvussu og nær stuðulin verður goldin út.
4. Heimild í lógini at áseta reglur fyri viðgerð og góðkenning av umsóknum, krøv til skjalprógv, treytir fyri játtan og nýtslu av stuðuli.
5. Heimild í lógini at krevja, at einstaklingar, feløg ella viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar o.l., skulu lúka ávís krøv/góðkennast, sum treyt fyri stuðuli.
6. Heimild í lógini at áseta neyvari treytir og reglur viðvíkjandi fíggjarætlan, eftirliti, roknskapum og grannskoðan.
7. Ásetingar í lógini um, at ein tilsøgn um stuðul fellur burtur, ella stuðulin skal verða rindaður aftur, lýkur móttakarin ikki longur settar treytir, ella megnar ikki at fullføra eina ætlan innan ásetta tíð.
8. Upplýsingarskyldu og atgongd til kanningar á staðnum.
9. Møguligar revsireglur.

Umrøddu trupulleikar viðvíkjandi stuðulsumsiting er ikki eitt serstakt fyribrigdi hjá landsstýrismanninum í mentamálum, og í samráð við fleiri aðalstýri átók Landsgrannskoðanin sær í september 2001 at skipa fyri einum skeiði í "umsiting av stuðulsjáttanum o.a.".

Eitt endamál við skeiðnum var at fáa innlit í tey tiltøk, ið danska miðfyrisitingin hevur sett í verk seinastu 5 árini, fyri at greiða ivamál og trupulleikar viðvíkjandi stuðulslóggávu og stuðulsumsiting. Serkøn fólk hildu fyrilestrar, og rúgvismikið skrivligt tilfar varð útflýggjað. Við støði í hesum átaki varð miðað ímóti at vísa á ein fyrimyndarligan frymil fyri stuðulslóggávu og stuðulsumsiting.

Skeiðið var lagað til føroysk viðurskifti, og lýst vórðu ítøkilig dømi um trupulleikar við føroyskari stuðulslóggávu, stuðulsjáttanum og stuðulsumsiting. M.a. vóru lógirnar um granskingargrunnin, vinnuframagrunnin, mentanargrunnin umframt stuðulsskipanir innan fiskivinnu- og almannaøkið til viðgerðar. Niðurstøðan var, at stórur tørvur er á at bøta um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting.

Luttakarar á skeiðnum vóru frá umsitingini hjá Løgtinginum og landsumsitingini. Talan var um starvsfólk, ið hava við játtanarlig viðurskifti, og/ella stuðulslóggávu og stuðulsumsiting at gera, og var høvi at umrøða og viðgera teir játtanarligu ivaspurningar, sum eru í stýrisskipanarlógini, í játtanarskipanini og viðvíkjandi stuðulslóggávu/stuðulsjáttanum. Aðalstjórarnir og løgmansstjórin vóru við á skeiðnum ein dag. Endamálið við skeiðnum var at lýsa verandi trupulleikar og vísa á, hvussu teir kunnu verða loystir.

Spurdur, hvørji tiltøk landsstýrismaðurin hevur/ætlar at seta í verk til tess at bøta um stuðulslóggávu og stuðulsumsiting, hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sum framhald av mentanarpolitiska orðaskiftinum, sum verður í tinginum í næstum, umhugsar landsstýrismaðurin at skipa listastuðulsøkið við lóg.

7. ALMANNA- OG HEILSUMÁL

7.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

8.11.1.08. Almanna- og Heilsumálastýrið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 20,7 mió.kr. Minninýtslan er 2,7 mió.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 543 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at eins og fyri árið 1999 hevur minninýtslan samband við lønarverkætlanina. Sáttmálin um at keypa vaktarskipan, sum varð ætlaður at skriva undir í juni 2000, varð ikki skrivaður undir fyrr enn í desember 2000. Tað hevur fört við sær, at flestu útreiðslurnar av verkætlanini komu at verða goldnar út í 2001, ístaðin fyri í 2000. Fyri at sleppa undan at verkætlanin varð seinkað meira, ella steðgaði upp, tí játtanin í 2001 varð ov lítil, varð søkt um at fáa umleið 2,6 mió.kr. av avlopinum í 2000 endurjáttaðar, og tað varð samtykt við eykajáttanarlógini fyri mars 2001.

8.20.1.04. Upplýsing og ráðgeving (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,2 mió.kr. Minninýtslan er 264 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er orsøkin, at Fyribyrgingarráðið, ið skuldi koma ístaðin fyri Aids- og Tubbaksráðini, varð ikki stovnað fyrr enn á heysti 2000, meðan hini ráðini vórðu tikin av mitt í árinum.

8.20.1.07. Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 600 t.kr. Minninýtslan er 117 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tríggir felagsskapir søktu um og fingu stuðul.

8.20.2.04. Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,3 mió.kr. Minninýtslan er 949 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst minninýtslan av, at eitt kommunulæknastarv í Klaksvík hevur verið ósett, og tí at sáttmálin við Kommunulæknafelagið varð undirskrivaður seinni enn væntað, og tað førdi við sær minni útreiðslur í 2000.

8.20.2.07. Skúlalæknaskipanin (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 314 t.kr. Minninýtslan er 232 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst minninýtslan av, at avtala um nýggja skúlalæknaskipan ikki enn er gjørd.

8.20.3.04. Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 224,7 mió.kr. Meirnýtslan er 2,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum kemst meirnýtslan av, at m.a. olja, heilivágur og servørur vórðu dýrari, enn mett varð.

8.20.3.08. Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 13,3 mió.kr. Minninýtslan er 938 t.kr. Hóast ongan lønarkarm, eru 330 t.kr. nýttar til lønir. Sambært landsstýrismanninum er talan um eina byggiverkætlan,

og tí kann vera trupult at áseta, nær útreiðslurnar verða hildnar. Søkt varð um at fáa endurjáttað 842 t.kr. av avlopinum av játtanini fyri 2000, og tað varð játtað á eykajáttanarlógini fyri mars 2001.

8.20.3.10. Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 41,2 mió.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 687 t.kr.

8.20.3.20. Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 62,2 mió.kr. Meirnýtslan er 8,6 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er meginparturin av meirnýtsluni ein vøkstur í útreiðslunum til Ríkissjúkrahúsið, og harafturat eisini ein vøkstur í útreiðslum til viðgerðarstøð í øðrum londum. Vøksturin stendst bæði av, at viðgerðirnar eru vorðnar dýrari, og at talið á sjúklingum er vaksið. Tað hevur eisini fört við sær, at útreiðslurnar til flutning og gisting hjá sjúklingum og avvarðandi eru øktar til uml. 0,5 mió.kr.

8.20.5.01. Lánsafturgjald

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 800 t.kr. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslurnar 2,2 mió.kr. og inntøkurnar 10,7 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan lán, sum kommunurnar hava goldið aftur. Kommunurnar fingu lánini til at byggja heilsumiðstøðir fyri. Føroya Gjaldstova umsitur hesa kontu, og tí ber illa til hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum at greiða frá, hví so nógvar inntøkur eru bókaðar í 2000.

8.21.1.04. Almannastovan (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 24,2 mió.kr. Minninýtslan er 584 t.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst minninýtslan av, at fleiri størv, sum ætlanin var at seta í 2000, ikki vóru sett, og tað sæst aftur á lønarkontuni, sum hevur eina minninýtslu uml. 0,5 mió.kr.

Á eykajáttanarløgtingslógini fyri mars 2001 vórðu játtaðar 1.137 t.kr. til "nýgerð av edv", sum *"er endurjáttan av ónýttari játtan fyri 2000."* Vit vilja vísa á, at ónýtt játtan fyri 2000 er bert 584 t.kr.

8.21.1.13. Vanlukkutryggingarráðið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini var nettoútreiðslujáttanin 350 t.kr. Minninýtslan er 154 t.kr. Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin minni virksemi. Í sambandi við nýggju pensjónslógina er ein partur av arbeiðinum hjá Ráðnum flutt til Almannastovuna.

8.21.1.25. Studningur annars

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 250 t.kr. Minninýtslan er 160 t.kr. Sambært landsstýrismanninum nýtir landsstýrismaðurin játtanina t.d. til at stuðla feløgum og einstaklingum í sambandi við ítøkilig tiltøk. Orsøkin til minninýtslu er, at landsstýrismaðurin hevur játtað minni, enn væntað varð.

8.21.3.01. Barnaforsorg (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 21,5 mió.kr. netto. Á eykajáttanarløgtingslógini fyri september 2000 varð játtanin hækkað 11,6 mió.kr. Netto er minninýtslan 4 mió.kr.

8.21.3.04. Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini var útreiðslujáttanin 8,8 mió.kr. og inntøkujáttanin 9 mió.kr. Inntøkur eru kravd gjøld, bøtur o.a.: 8,7 mió kr., og flyting frá kommunum: 290 t.kr. Sambært landsroknskapinum eru útreiðslur og inntøkur einans ávikavist 1.202 t.kr. og 290 t.kr. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at roknað varð, við at uml. 8,9 mió.kr. skuldu verða goldnar út, men upphæddin bleiv bara 1,2 mió.kr. Somuleiðis varð roknað við, at 9 mió.kr. fóru at verða goldnar inn, men bert 0,3 mió.kr. komu inn. Talan er um eitt samlað frávik uml. 1,2 mió.kr.

Vit vilja vísa á, at høvuðsorsøkin til munirnar er, at útgreiningin í landsroknskapinum er nettotøl, meðan sundurgreiningin á fíggjarlógini vísir bruttotøl. Sambært bókhaldinum eru 9,1 mió.kr. bókaðar sum forskotsrindan av barnapeningi (útgjald), og 7,9 mió.kr. bókaðar sum afturrindan av barnapeningi (inngjald). Flyting frá kommunum er 290 t.kr.

8.21.3.05. Stuðul til uppihaldspening (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6,3 mió.kr. Minninýtslan er 1,1 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst minninýtslan av, at færri umsóknir vóru um stuðul til uppihaldspening, enn mett varð.

Vit vilja vísa á, at 883 t.kr., sum eru goldnar út í februar/mars 2001, áttu at verið bókaðar á fíggjarárið 2000.

8.21.3.07. Føroya Barnaheim (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6,1 mió.kr. Minninýtslan er 764 t.kr. Sambært landsstýrismanninum kemst minninýtslan av, at væl færri børn hava verið á Barnaheiminum, enn normerað varð.

8.21.3.10. Børn og ung við atferðartrupulleikum (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,3 mió.kr. Minninýtslan er 657 t.kr. Sambært landsstýrismanninum kemst minninýtslan av, at væl færri búfólk hava verið á stovninum, enn normerað varð.

8.21.6.01. Serforsorg (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 75,8 mió.kr. Meirnýtslan er 1,1 mió.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 2,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av, at kostnaðurin av nýggjum og øktum virksemi varð størri, enn roknað varð við, tá ið ætlanin fyri fíggjarárið 2000 varð gjørd.

8.21.6.04. Eldrarøkt (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 170,1 mió.kr. Minninýtslan er 1,8 mió.kr. Orsakirnar til minninýtsluna eru sambært landsstýrismanninum, at útreiðslurnar til Tórshavnar Privata Vistarheim gjørdust lægri, at øll játtanin til viðlíkahald varð ikki nýtt, og at útreiðslurnar til eldrasambýli vórðu ikki so høgar, sum roknað varð við frammanundan, tí 3 eldrasambýli lótu upp seinni enn ætlað.

8.21.6.16. Eldrasambýli (løgujáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,2 mió.kr. Minninýtslan er 1,6 mió.kr. Hóast ongan lønarkarm, eru 100 t.kr. nýttar til lønir. Á hesi kontu er heimilað landsstýrismanninum at veita stuðul til at keypa, byggja og umbyggja hús til eldrasambýlir og aðrir eldrabústaðir. Í 2000 varð, sambært landsstýrismanninum, stuðul veittur 3 kommunum, uml. 0,5 mió.kr. til hvørja kommunu.

8.21.7.01. Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini var útreiðslujáttanin 102,5 mió.kr., og inntøkujáttanin 3,2 mió.kr. Inntøkurnar eru flytingar frá kommunum. Meirútreiðslurnar eru 1,6 mió.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 288 t.kr.

Útreiðslurnar til arbeiðsloysisforsorg eru 1 mió.kr. lægri, enn mett varð.

Meirútreiðslurnar býta seg í høvuðsheitum sundur soleiðis:

- § 9 fyribils hjálp 1,0 mió.kr.
- § 18 hjálparamboð 1,8 mió.kr.

MVG-útreiðslur fyri hjálpartól 1,6 mió.kr. eru bókaðar á StRk. 75, og fluttar á eina felags játtan undir § 20 í landsroknskapinum. Vit skulu vísa á, at henda mannagongd er skeiv, tí talan er ikki um keyp av vørum og tænastum, men um veitingar til einstaklingar. Bókingarhátturin førir við sær, at útreiðslur til hjálpartól vísa 1,6 mió.kr. minni enn tær veruligu útreiðslurnar eru. Meirnýtslan á høvuðskontuni er sostatt í roynd og veru 3,2 mió.kr.

8.21.7.07. Tiltøk fyri ung

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,5 mió.kr. Minninýtslan er 855 t.kr. Kontan verður vanliga kallað "Ung í arbeiðið" og kom, tá ið kreppan var uppá tað ringasta. Tá kundu kommunur seta ung fólk í arbeiði, og fáa lønina endurgoldna frá landskassanum. Kreppan í samfelagnum er av, og sambært landsstýrismanninum er tørvurin á hesi kontu alsamt minkandi.

8.21.8.01. Fólkapensjón (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini var útreiðslujáttanin 314,6 mió.kr., og inntøkujáttanin 10,6 mió.kr. Inntøkurnar eru flytingar frá kommunum. Meirútreiðslan er 2,2 mió.kr. Hóast ongan lønarkarm, eru 88 t.kr. nýttar til lønir.

8.21.8.05. Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan)

Á fíggjarlógini var útreiðslujáttanin 179,5 mió.kr., og inntøkujáttanin 6 mió.kr. Minninýtslan er 2,8 mió.kr. Hóast ongan lønarkarm, eru 7,6 mió.kr. nýttar til lønir.

Lønarkarmur

Á høvuðskontum niðanfyri vísir roknskapurin, at farið er upp um ásetta lønarkarmin:

t.kr.

Konta	Navn	Lønarkarmur	Roknskapur	*Munur*
8.11.1.08.	Almanna- og Heilsumálastýrið (rakstrarjáttan)	12.271	12.814	*543*
8.20.3.08.	Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan)	0	330	*330*
8.20.3.06.	Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)	41.908	42.595	*687*
8.20.3.15.	Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan)	33.324	33.339	*15*
8.21.6.01.	Serforsorg (rakstrarjáttan)	48.179	50.341	*2.162*
8.21.6.02.	Bústovnar, serforsorg (løgujáttan)	0	100	*100*
8.21.6.16.	Eldrasambýlið (løgujáttan)	0	100	*100*
8.21.7.01.	Vanlig forsorg (lógarbundin játtan)	10.528	10.816	*288*
8.21.8.01.	Fólkapensjón (lógarbundin játtan)	0	88	*88* [1)]
8.21.8.04.	Avlamispensjón (lógarbundin játtan)	0	7.349	*7.349* [1)]

[1)] Vit hava fleiri ferðir áður vísst á, at hóast eingin lønarkarmur er játtaður barnaforsorgini, vanligari forsorg og fólka- og fyritíðarpensjónini, verða lønarútreiðslur bókaðar á hesar játtanir. Í 2000 eru lønarútreiðslur játtaðar barnaforsorg og vanligari forsorg, men framvegis er eingin lønarkarmur fyri fólka- og fyritíðarpensjón. Samanlagt eru lønarútreiðslurnar 7,4 mió.kr. í 2000. Talan er m.a. um lønarútreiðslur til stuðulsfólk, og í ávísum førum er talan um stovnslíknandi tiltøk. Vit halda tað vera misvísandi og skeivt framhaldandi at bóka slíkar lønarútreiðslur á hesar kontur. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina fær Løgtingið at vita, at talan er um *"tilskot til einstaklingar"*.

7.2 Almanna- og Heilsumálastýrið (GL 2000/2 08 1-1)

Í juni 2001 grannskoðaðu vit roknskaparviðurskiftini í Almanna- og Heilsumálastýrinum, har vit m.a. kunnaðu okkum um mannagongdir á roknskaparøkinum og við stakroyndum gjøgnumgingu skjøl og lønarmál.

Reglur fyri mannagongdum á roknskaparøkinum

Eingin reglugerð finst fyri, hvussu roknskaparhaldið í Stýrinum er fyriskipað. Samsvarandi rundskrivi frá Fíggjarmálastýrinum frá 6. februar 2001, skal ein slík reglugerð verða gjørd og góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001. Í oktober 2001 spurdu vit landsstýrismannin, hvussu langt arbeiðið við roknskaparreglum fyri Stýrið og fyri stovnarnar undir Stýrinum er komið ávegis, og nær allar reglugerðirnar væntandi verða lidnar og góðkendar. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 svarað, at miðað verður ímóti at fáa flest allar reglugerðirnar góðkendar í februar 2002.

Roknskapargóðkenning og onnur viðurskifti

Deildarleiðarar stemma av og kanna mánaðarliga roknskapirnar fyri sínar deildir, men teir átekna ikki roknskapirnar. Stýrið helt, at roknskapirnir vórðu kannaðir regluliga í 2000, men tað var ivasamt í 2001, og stóðst tað av manglandi arbeiðsorku. Greitt varð frá, at vanliga vórðu viðmerkingar gjørdar í roknskapirnar, um rættingar skuldu verða gjørdar, men tað sæst ikki á roknskapinum, um hann er góðkendur ella liðugt kannaður. Vit hava mælt til, at tað verður gjørt í framtíðini.

Aðrar játtanir

Í 2000 hevur Almanna- og Heilsumálastýrið eisini umsitið 30 aðrar høvuðskontur á fíggjarlógini, har játtanirnar samanlagt eru uml. 160 mió.kr. Almanna- og Heilsumálastýrið bókar harafturat rakstrarútreiðslur og –inntøkur fyri 4 høvuðskontur; har játtanirnar samanlagt eru uml. 480 mió.kr.

Sambært roknskaparkunngerðini skal stovnsleiðarin hvønn mánað stemma av og góðkenna roknskapin, og tað skal verða váttað við átekning á mánaðarroknskapin. Sambært § 9 í roknskaparkunngerðini skal roknskapurin verða góðkendur mótvegis hægri myndugleika.

Eingin formaliserað eftirlits- og góðkenningarmannagongd er fyri omanfyrinevndu høvuðskontur, men sagt verður, at tað fer at koma í rættlag, tá ið roknskaparreglurnar verða gjørdar. Vit hava biðið Stýrið kunnað okkum um, á hvønn hátt hetta verður skipað.

Vantandi góðkenning av greinaroknskapum

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálastýrinum á serligum góðkenningarskjali. Almanna- og Heilsumálastýrið hevur ikki góðkent greinaroknskapirnar í 2001 fyri § 8 Almanna- og Heilsumál o.a.

Yvirlit yvir ognir

Almanna- og Heilsumálastýrið hevur gjørt eitt yvirlit yvir ognir. Yvirlitið er frá 1999, og vit hava mælt til at dagføra yvirlitið.

Gjøgnumgongd av lønarmálum

Lønarmál hjá 10 starvsfólkum vórðu vald út til neyvari eftirlit. Kannað varð, um setanarskriv, avrit av prógvum o.o. skjalprógv vóru í málunum, og um útgoldna lønin var samsvarandi galdandi lønartalvum. Harafturat kannaðu vit, um øll starvsfólk, lønt sambært sáttmála við Starvsmannafelagið, vóru rætt flutt yvir í nýggju lønarskipanina, ið kom í gildi 1. mars 2001.

Tænastumannastørv

Landsstýrismaðurin undirskrivaði 30. apríl 1998 setanarbrøv til tríggjar deildarstjórar í Almanna- og Heilsumálastýrinum. Í brævi til deildarstjórarnar sama dag skrivar Stýrið m.a.: *"at starvið er ætlað at verða lønt í 37. lønarflokki í sáttmálanum millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálastýrið, endalig fráboðan er tó ikki komin frá Fíggjarmálastýrinum enn."*

Øll tænastumannastørv og øll onnur størv við lønum, ið svara til tænastumannastørv í 36. lønarflokki ella hægri, skulu sambært játtanarskipanini verða góðkend av Fíggjarmálastýrinum, áðrenn tey verða skipað.

Í august 2001 kunnaði Almanna- og Heilsumálastýrið um, at Fíggjarmálastýrið ongantíð hevur góðkent størvini. Løgmansskrivstovan góðkendi størvini munnliga, í sambandi við at ein arbeiðsbólkur varð settur at viðgera flokking av øllum stjórastørvum innan almennu fyrisitingina. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at við semju millum Fíggjarmálastýrið og Tænastumannafelag Landsins 6. september 2001 hevur Fíggjarmálastýrið góðkent, at m.a. deildarstjórar í aðalstýrunum verða løntir í 37. lønarflokki.

Tekniskur stjóri

Ein tekniskur stjóri starvaðist í Almanna- og Heilsumálastýrinum frá 1. desember 1999 til 31. desember 2000. Starvið varð ongantíð góðkent av Fíggjarmálastýrinum, men løgmaður kunnaði í skrivi í mai 1999 um, at hann hevði gjørt av, at Almanna- og Heilsumálastýrið kundi seta starvið. Sambært landsstýrismanninum var orsøkin til, at løgmaður góðkendi starvið, at málið gjørdist politiskt.

Tá ið Landsstýrið gjørdi av at savna byggiumsiting landsins og skipa hana undir Landsverkfrøðingsstovninum, varð tekniski stjórin fluttur til Landsverkfrøðingsstovnin.

Endurgjald í sambandi við lønir

Sambært roknskapinum fyri 2000 eru á kontu 1180: "Endurgjald í sambandi við lønir", bókaðar 320 t.kr. Gjøgnumgongd av skjølunum vísti, at Stýrið 31. juli 2000 hevði sent rokningar fyri byggiumsiting til hesar løgukontur, sum Stýrið sjálvt hevur ræðisrættin yvir:

8.20.3.08.	Landssjúkrahúsið, útbygging	kr. 120.000
8.21.6.02.	Bústovnar, serforsorg	kr. 100.000
8.21.6.16.	Eldrasambýli	kr. 100.000

Stýrið hevur greitt frá, at talan er um løn til tekniska stjóran. Peningurin er bókaður á felags íløgu- og viðlíkahaldskontur, ið tekniski stjórin skuldi taka sær av. Eftir okkara tykki er tað ivasamt, um Stýrið kann útreiðsluføra løn hjá einum starvsfólki í Stýrinum á aðrar høvuðskontur. Á hendan hátt ber til at seta starvsfólk í Stýrinum, uttan at tað ávirkar nettoútreiðslu-

og lønarkarmin. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 boðað frá, at hann er samdur við okkum, at mannagongdin er ivasom.

Samsýning sum ráðgevi hjá bygginevndini

1. apríl 1998 gjørdi bygginevndin fyri Landssjúkrahúsið eina avtalu við ráðgeva, sum afturfyri fekk 15 t.kr. í samsýning um mánaðin.

Í apríl 2000 gjørdi deildarstjórin á fíggjardeildini – sum eisini var bygginevndarformaður - vart við, at ivasamt var, um samsýningin framhaldandi skuldi verða rindað, tá ið ráðgevin nú var settur í starv sum tekniskur stjóri í Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Í mai 2000 heitti aðalstjórin á bygginevndarformannin um at steðga samsýningini. Í skrivi september 2000 frá deildarstjóranum á fíggjardeildini varð avtalan søgd upp við 3 mánaða ávaring, vísandi til § 8 í avtaluni. Sostatt varð samsýningin goldin út alt árið 2000, hóast ráðgevin varð settur í starv sum tekniskur stjóri í Stýrinum 1. desember 1999. Í august 2001 greiddi Stýrið frá, at tey ikki vistu, hví so long tíð gekk, áðrenn avtalan varð søgd upp.

Edv-nýtsla/edv-trygd

Almanna- og Heilsumálastýrið hevur eitt millumstovnanet, ið fevnir um netið millum Almanna- og Heilsumálastýrið, sjúkrahúsini, Almannastovuna, Landsapotekaran, øll apotekini, og flestu stovnar innan Heimarøktina og Serforsorgina. Vit hava spurt, hvussu Stýrið hevur tryggjað seg ímóti óviðkomandi atgongd á netið, og hvørjar ásetingar annars Stýrið hevur viðvíkjandi edv-trygd. Sambært landsstýrismanninum hava allir stovnar, sum eru á netinum, ein felags "firewall", ið skal forða fyri, at óviðkomandi fáa atgongd. Allir stovnarnir hava eisini felags samband við DNL. Stovnarnir hava higartil í stóran mun sjálvir ásett, hvørjar edv-trygdarreglur galda.

7.3 Almannastovan (GL 1996/2 07 1-1)

Roknskaparviðurskifti

Vit hava grannskoðað roknskaparviðurskiftini á Almannastovuni. Síðani november 1999 hevur Almannastovan bókað í FSL-skipanini. Vit hava áður vístá, at eingin reglugerð er gjørd fyri, hvussu roknskaparhaldið er fyriskipað. Í februar 2001 kunnaði almannastjórin um, at viðurskiftini væntandi komu í rættlag innan stutta tíð. Í oktober 2001 hevur Almannastovan sent Almanna- og Heilsumálastýrinum uppskot til roknskaparreglugerð at góðkenna.

Vit hava í fleiri ár gjørt var við, at mánaðarroknskapurin verður ikki váttaður mótvegis hægri myndugleika, sum hann skal sambært § 9 í roknskaparkunngerðini. Í november 2001 vísti almannastjórin á, at tað hevur verið trupult at fáa skipað eitt grundarlag undir góðkenningini av mánaðarroknskapum, bæði viðvíkjandi rakstrinum og viðvíkjandi almannaveitingunum, m.a. tí roknskapardeildin hevur verið ov illa mannað.

Almannastjórin vísti eisini á, at í 2001 hevur Almannastovan megnað at gera allar avstemmanir av millumrokningum og gjaldføriskontum viðvíkjandi rakstri og flestu almannaveitingunum. Í november 2001 fór Almannastovan undir at senda góðkendar og áteknaðar mánaðarroknskapir fyri alt 2001 til Almanna- og Heilsumálastýrið, bæði viðvíkjandi rakstri og veitingum.

Samskifti við almannastjóran

Samskiftið við almannastjóran um grannskoðanarfrágreiðingar á almannaøkinum hevur ikki verið nøktandi. Dømi eru um skriv, sum hava ligið ósvarað á Almannastovuni í upp til 5-6 mánaðir, hóast vit fleiri ferðir í áminningarskrivum hava kunnað almannastjóran um, at

sambært § 20 í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." skulu øll skriv verða svarað innan 6 vikur, verður longri freist ikki sett. At almannastjórin eftir øllum at døma ikki virðir lógarásettu svarfreistina, er sera darvandi fyri okkara arbeiði. Í desember 2001 hava vit kunnað landsstýrismannin um viðurskiftini.

Edv-skipanin

Edv-skipanin á Almannastovuni er ein journal-, málsviðgerðar-, útrokningar- og útgjaldsskipan. Hon varð tikin í nýtslu 1. januar 2000. Í seinastu frágreiðing kunnaðu vit um, at eftirlitsumhvørvið var ikki nóg trygt, og vit mæltu til ábøtur á fleiri økjum.

Mælt varð til:

1. at orða ein edv-politikk í samstarvi við Fíggjarmálastýrið/Gjaldstovuna og samskifta um framtíðar menning á edv-økinum fyri at loysa lýstu trupulleikarnar, og mælt varð til at bíða við at menna forsorgar-, dagpeninga- og alimentatiónsskipanina, til ein ítøkilig kravfesting er viðgjørd partanna millum,
2. at halda ásetingarnar í § 4, stk. 5, í roknskaparkunngerðini um at menna egnar búskaparskipanir og fáa skráirnar formliga góðkendar sambært §§ 4-8 í Ll. nr. 62/1984 v.s.b. "um evnisskráir hjá almennum myndugleikum",
3. at gera greiðar reglur fyri ábyrgd og heimild hjá edv-starvsfólkunum, at bjóða starvsfólkunum hóskandi útbúgving, bøta um eftirlitið við feilum og misnýtslu, og at fáa sáttmálaviðurskiftini við veitaran í rættlag,
4. at gera reglur fyri mannagongdum í sambandi við skipanarbroytingar og mannagongdir fyri dagføring av dokumentatión,
5. at gera greiðar reglur fyri "kontrasignering", tillutan og umsiting av brúkararættindum, at skifta atlátið regluliga, og at gjøgnumganga eksternar samskiftislinjur,
6. at dokumentatiónin verður savnað og skipað á Almannastovuni, og at gera greiðari reglur fyri varðveitslu og dagføring av dokumentatión,
7. at gera neyðætlan, reglur fyri back-up og at avmarka atgongdina til edv- rúmið.

Í september 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tilmælini vóru tikin til eftirtektar, og hann vísti til eina arbeiðs- og tíðarætlan, sum greindi út, hvussu umrøddu viðurskifti ætlandi skuldu verða fingin í rættlag. Landsstýrismaðurin hevur í november 2001 kunnað um, hvat síðani er hent í málinum:

Ad 1) Vit hava einki svar fingið.

Ad 2) Ll. nr. 73 frá 8 mai 2001 "um viðgerð av persónsupplýsingum" kom í gildi 1. januar 2002, og Almannastovan roknar við, at treytirnar í lógini verða loknar innan 6 mánaða tíðarfreistina, ið ásett er í lógini.

Ad 3) Starvslýsingar eru gjørdar fyri starvsfólkið á edv-deildini. Í starvslýsingunum eru m.a. sett krøv til at skjalprógva tær mest týðandi arbeiðsuppgávurnar.

Almannastovan hevur sent edv-fólk á skeið, bæði í uppseting, kervisumsiting og innlegging av skipanini. Almannastovan er í sáttmálasamráðingunum við veitaran um viðlíkahald og rakstur av skipanini. Landsstýrismaðurin leggur stóra áherðslu á, at Almannastovan fær hesi viðurskifti í rættlag. Í løtuni starvast 3 fólk á edv-deildini á Almannastovuni, og søkt er eftir einum edv-mennara. Við bindandi sáttmála við stovn uttanfyri húsið, fæst eitt breiðari grundarlag undir tí servitan, ið er neyðug at hava um edv-skipanina.

Ad 4) Í sambandi við skipanarbroytingar (brúkaraynski/broyting av lóggávu o.a.) hevur Almannastovan ásett eina skipaða mannagongd og sett dokumentatiónskrøv.

Ad 5) Skipanarbroyting, sum ger tað neyðugt fyri brúkaran at skifta atlát regluliga, er umbiðin. Saman við veitaranum er Almannastovan farin undir at broyta trygdarskipanina. Landsstýrismaðurin vísir á, at kostnaðurin av optimalu loysnini kann blíva so stórur, at játtanin røkkur ikki til. Tað hevur ikki verið møguligt í 2001 at seta upp neyðuga dátuverju (fire-wall), men trupulleikin verður loystur í árinum, sum kemur. Talan er um eina útreiðslu uml. 2-300.000 kr.

Ad 6) Almannastovan hevur dagførd E/R-diagram yvir skipanina, umframt dagførdar tabellir. Harafturat er á edv-deildini ein lýsing av, hvussu forrit o.a. kunnu verða dokumenterað.

Ad 7) Almannastovan hevur avmarkað atgongdina til maskinrúmið við kotu-lási við ID-korti. Umframt náttarvaktina hava einans 4 fólk atgongd til rúmið.

Almannastovan hevur útvegað tilmæli frá Brunaumsjón Landsins um, hvørji tiltøk eru neyðug fyri at veita optimala trygd ímóti eldi, vatnskaða o.t. Kostnaðurin er mettur til umleið 200-300.000 kr. Tað hevur ikki verið gjørligt at halda hesar útreiðslur innanfyri rakstrarkarmin fyri 2001, og tí verður í løtuni arbeitt við eini fyribilsloysn.

Landsstýrismaðurin vísir á, at havast skal eisini í huga, at leigusáttmálin hjá Almannastovuni í Jónas Broncksgøta 27 er gingin út, og at samráðingar fara fram um nýtt leigumál. Kemur hetta leigumál ikki uppá pláss, er kostnaðurin av at gera ábøtur á maskinstovuna burturspiltur. Almanna- og Heilsumálastýrið fer í hesum sambandi at kanna møguleikarnar fyri at flyta maskinstovuna niðan á Staraveg 15 (hjá Landsapotekaranum), har serlig høli eru tøk til teldur við viðkvomum dátum.

Á eini serligari undirkontu undir Almannastovuni "Nýgerð av Edv" eru útreiðslurnar 10,6 mió.kr. í tíðarskeiðnum 1997-2001. Peningur varð fyrstu ferð játtaður í 1997. Tá varð hildið, at samlaði íløgan kom at kosta 4,4 mió.kr. Edv-skipanin varð seinkað í mun til upprunaligu ætlanina og er eisini vorðin munandi dýrari. Í 2002 er eingin peningur settur av á hesi undirkontu. Á undirkontu "Vanligt virksemi" er játtanin á standardkontu 15 "Keyp av útbúnaði" hækkað við 1,3 mió.kr. Í viðmerkingunum verður sagt, at økta játtanin til Almannastovuna lutvíst fer til at menna edv-skipanina á Almannastovuni.

Trupulleikar tengdir at roknskaparhaldi, -eftirliti og -góðkenning

Vit hava í áravís gjørt vart við trupulleikar við vantandi avstemman og roknskapargóðkenning í sambandi við bóking av almannaveitingum. Hesin trupulleiki varð á fyrsta sinni umrøddur í grannskoðanarfrágreiðingini fyri 1990.

Í juli 2000 umrøddu vit aftur hesi viðurskifti og vístu á, at tørvandi eftirlit í sambandi við útgjald og bóking av almannaveitingum ber í sær vanda fyri rakstrarfeilum og misnýtslu. Hvønn mánað verða uml. 40 mió.kr. goldnar út, og tí er átrokandi, at støða verður tikin til, hvørji eftirlit og hvørjar avstemmanir eru neyðugar.

Í frágreiðingini varð m.a. víst á, at

1. verandi eftirlit í sambandi við at leysgeva og gjalda út almannaveitingar er ikki nóg gott,
2. ongar vegleiðingar eru til raksturin, og eingin lýsing av ábyrgdar-/arbeiðsbýtinum ímillum deildir/starvsfólk,
3. mannagongdin viðvíkjandi roknskapargóðkenning av teim roknskaparpostum, har bókingar verða skaptar í edv-skipanini, er ikki trygg. Mælt varð til, at roknskapargóðkenningin mótvegis Almanna- og Heilsumálastýrinum verður formaliserað,

4. trupulleikarnir við at stemma av eru ikki loystir, serliga tá ið talan er um millumrokningarkontur í sambandi við útgjald, inngjald og bóking av veitingum, sum m.a. stava frá edv-skipanini,
5. kravið í § 11 í roknskaparkunngerðini til transaktións- og eftirlitsspor frá edv-skipanini á Almannastovuni til FSL-skipanina á Gjaldstovuni og aftur, er ikki lokið til fulnar,
6. tørvur er á at endurskoða innanhýsis kontuskipanina, gera eina konteringarleiðbeining og at ganga ígjøgnum og dagføra kontubrúnna millum edv-skipanina á Almannastovuni og FSL-skipanina.

Í september 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ein prosjektbólkur varð settur at gera ætlanir fyri, hvørji eftirlit eiga at vera í sambandi við at leysgeva og gjalda út, og hvussu eitt hóskandi arbeiðsbýti kundi verða skipað. Somuleiðis vóru ætlanir um at seta á stovn eina roknskapareind, sum skal taka sær av bæði almannaveitingunum og av rakstrinum av Almannastovuni. So skjótt gjørt er av, hvussu roknskaparfunktiónin eigur at verða skipað, fer almannastjórin at seta í verk eitt greiningararbeiði, at loysa trupulleikarnar í sambandi við kontuskipanina og trupulleikarnar við at stemma av.

Landsstýrismaðurin hevur í november 2001 kunnað um, hvat síðani er hent í málinum:

Ad 1 og 2) Almannastovan hevur gjørt uppskot til roknskaparreglugerð bæði fyri raksturin og almannaveitingarnar, og hevur gjørt skrivligar reglur fyri eftirlitinum á veitingardeildunum í sambandi við kontrasignering og útgjaldskoyringar. Skjalprógvað skal vera, hvørjar kanningar eru gjørdar í sambandi við hvørja útgjaldskoyring. Fyri at minka um feilirnir, ið fyrst verða staðfestir í sambandi við útgjaldskoyringarnar, verða feillistarnir gjøgnumgingnir. Tað er nú møguligt hjá deildunum at koyra feillistar dagliga.

Ad 3) Nevnda roknskaparreglugerð lýsir mannagongdirnar í sambandi við mánaðarligu roknskapargóðkenningina. Neyvari krøv til roknskapargóðkenningina eru ásett í innanhýsis leiðbeining.

Ad 4) Almannastovan er samd við Landsgrannskoðanini í, at í áravís hava nógvar arbeiðsuppgávur ligið á láni, tí ov lítil arbeiðsorka hevur verið á roknskapardeildini. Ætlanin er í januar 2002 at seta eitt roknskaparfólk afturat í fast starv. Harafturat hevur Almannastovan útvegað sær fyribils sakkøna hjálp at skipa roknskaparhaldið, menna fíggjarstýringina, og til innanhýsis eftirlit o.a., og Almannastovan er farin undir at gjøgnumganga og lýsa alt roknskaparøkið. Endalig støða til manningina á roknskapardeildini verður tikin, tá ið henda gjøgnumgongd er liðug, og tá ið bygnaðarbroytingin er sett í verk.

Landsstýrismaðurin roknar við, at teir trupulleikar, ið Landsgrannskoðanin vísti á í frágreiðingini frá juli 2000, nú verða loystir.

Ad 5) Eintýðugt transaktiónsspor ímillum VFS-skipanina og Fíggjarstýringarskipan landsins er gjørt. Samlaðu upphæddirnar kunnu nú skjótt og eintýðugt verða býttar út á persónsstøði.

Ad 6) Nýggj kontuskipan er gjørd á pensjónsøkinum, og útgreiningarnar eru munandi færri. Feilbókingar viðvíkjandi fíggjarárinum 2000, m.a. feilur í kontubrúnni ímillum VFS og FSL, eru í hesum sambandi rættaðar. Í brúkaramarkamótinum hevur Almannastovan avmarkað valmøguleikarnar (lýsing/veitingarslag) til tess at minka um vandan fyri feilinntøppingum.

7.4 Almannapensjónir (GL 2000/2 07 2 –3)

Heimildir-/tulkingarspurningar

Á s. 72-75 í seinastu frágreiðing lýstu vit samskiftið, sum síðan juli 2000 hevði verið millum Landsgrannskoðanina og landsstýrismannin um ávísar veitingar sambært almannapensjónslógini, ið kom í gildi 1. januar 2000. Vit hildu, at landsstýrismaðurin uttan neyðuga heimild:

1. lækkaði lógarásetta pensjónsviðbót, og hækkaði skattafría veiting samsvarandi
2. rindaði serligar persónligar viðbøtur
3. rindaði mista avlamisveiting, sum stuðul til hjálparráð.

Landsstýrismálanevndin tók í mai 2000 málið upp. Í løgfrøðiligum uppriti frá Løgmansskrivstovuni í februar 2001 var niðurstøðan, at landsstýrismaðurin hevði ikki á lógligan hátt fyrisitið málið, tí hann hevði fleiri ferðir fyrisitið uttan heimild, og landsstýrismaðurin hevði ikki latið Landsstýrismálanevndini, og harvið Løgtinginum, allar viðkomandi upplýsingar til at viðgera málið. 23. februar 2001 bað landsstýrismaðurin um at verða loystur úr embætinum, og løgmaður eftirlíkaði tí.

- - - - -

Inntøkugrundarlag

Við nýggju almannapensjónslógini (APL), ið kom í gildi 1. januar 2000, vórðu nógvu trupulleikarnir við at lýsa inntøkugrundarlagið loystir.

Sambært § 20 í APL er inntøkugrundarlagið skattskylduga inntøkan sambært skattalógini. Undantiknar eru sosialar pensjónir og arbeiðsmarknaðareftirlønir. Afturat inntøkuni skal verða løgd renta av peningi, ið verður skattaður eftir reglunum í rentuskattalógini. Í serligum førum skal uppihaldshjálp eftir forsorgarlógini verða løgd afturat inntøkuni.

Sambært § 18 í APL verður grundupphædd og viðbót til fyritíðarpensjónistar, umframt viðbótin til fólkapensjónistar, roknað út eftir inntøku. Sambært § 20, stk. 3, er tíðarskeiðið seinast álíknaða inntøkuárið.

Broytist inntøkan varandi aftaná pensjónstillutan, verður fyrsta pensjónsútrokningin, sambært § 20, stk. 4, grundað á væntaða inntøku frameftir.

Inntøkujavning av almannapensjón

Ein fíggjarliga týðandi spurningur er, hvussu ásetanin og eftirrokningin av pensjón sambært § 21 í APL skal verða tulkað.

Sambært stk. 1 er meginreglan, at pensjónin verður ásett eina ferð um árið (fyri komandi ár) út frá skattskyldugu inntøkuni seinast álíknaða inntøkuár. Sambært stk. 2 verður pensjónin tó umroknað í árinum,

1. verður inntøkan broytt varandi, og ein útrokning av pensjónini, grundað á væntaða inntøku frameftir, hevur við sær, at pensjónsupphæddin verður broytt, ella
2. henda broytingar í teimum persónligu viðurskiftunum, herímillum hjúnabandsstøða ella uppihaldarastøða, ella øðrum viðurskiftum, ið hava týdning fyri støddina á pensjónini.

Er ein broytt væntað inntøka torfør at ætla, kann pensjónin sambært stk. 3 verða ásett við styttri millumbilum enn eina ferð um árið, við grundarlagi í fyribilsskattaskrásetingini í verandi ári.

Verður pensjónin roknað út frá væntaðari framtíðarinntøku, skal hon sambært stk. 5 verða eftirroknað, tá ið endaliga inntøkan verður álíknað. Svarar álíknaða inntøkan ikki til mettu inntøkuna, skal munurin verða aftur-/eftirgoldin sambært stk. 6.

Almannastovan fær upplýsingar um inntøkur frá Toll- og Skattstovu Føroya, so hvørt álíkningin er liðug. Almannastovan kannar, um inntøkan seinast álíknaða inntøkuár samsvarar við inntøkugrundarlagið, ið pensjónin er goldin eftir. Er inntøkan hægri enn nýtta inntøkugrundarlagið, verður afturgjaldskrav sent pensjónistinum. Sambært § 22 í APL skulu pensjónistar boða Almannastovuni frá hvørjari broyting, sum kann hava við sær, at veitingar

lækka ella falla burtur, og sambært § 23 hevur pensjónistur, sum ikki hevur hildið upplýsingarskyldu sína eftir § 22, skyldu at afturrinda ta upphædd, hann av órøttum hevur fingið.

Ivamál um inntøkujavning av almannapensjónum

Í seinastu frágreiðing okkara í mars 2001 vístu vit á ivamál viðvíkjandi inntøkujavning av almannapensjónum. Í skrivi 10. januar 2002 hevur landsstýrismaðurin greitt frá sínum sjónarmiðum, og niðanfyri verður tikið samanum samskiftið um ivamálini:

Inntøkan lægri, ikki eftirgjald

Fær Almannastovan boð um, at inntøkan seinast álíknaða inntøkuár er lægri enn nýtta inntøkugrundarlagið, verður pensjónin hækkað frá næsta mánaðinum. Almannastovan roknar ikki eftirgjald, hevur pensjónisturin fingið ov lítið goldið út.

Landsstýrismaðurin heldur, *"at vísir uppgerðin av inntøkugrundarlagnum, at pensjónisturin hevur fingið ov lítið/ov nógv útgoldið, skal hann hava ávikavist goldið út/verða kravdur eftir muninum"*.

Eftir svarinum at døma, er mannagongdin á Almannastovuni skeiv.

Fyribils inntøka

Sambært avgerðum hjá Kærunevndini í almannamálum er "fyribils inntøka", ein inntøka, sum er styttri enn 3 mánaðir. Ein fyribils inntøka ávirkar ikki pensjónina tað árið, hon er vunnin, men sambært siðvenju á Almannastovuni, ávirkar fyribilsinntøkan pensjónina árið eftir. Vit halda tað vera ivasamt, um ein inntøka skal gera, at ein veiting minkar ella fellur burtur árið eftir, tá sama inntøka ikki ávirkar pensjónina í verandi ári, tí hon er at meta sum "fyribils inntøka".

Sambært landsstýrismanninum má høvuðsreglan framvegis vera, at pensjónin skal verða roknað um eftir endaliga álíknaða inntøkugrundarlagnum.

Nær verður veitingin broytt

Tað kann vera tilvildarligt, nær Almannastovan fær upplýsingarnar frá Toll- og Skattstovu Føroya. Við at rokna frá "næsta mánaði" verða allir pensjónistar ikki viðgjørdir eins. Vit hava sett spurnartekin við, um tað er rætt og í tráð við lógina, og um ikki hevði verið rættari at broytt veitingarnar frá 1. januar.

Landsstýrismaðurin heldur tað vera ein tekniskan og umsitingarligan spurning og ásannar, at tað kann vera óheppið, at allir pensjónistar ikki verða viðgjørdir eins. Landsstýrismaðurin heldur tó, at rættari hevði verið at fingið eitt betur samstarv við Toll- og Skattstovu Føroya, soleiðis at upplýsingarnar komu skjótari til Almannastovuna.

Vit hava ilt við at skilja svarið, tí endaliga álíkningin er m.a. treytað av, nær sjálvuppgávan skal verða latin inn og endaliga viðgjørd. Vit halda tað tí ikki vera ein tekniskan og umsitingarligan spurning.

Umrokning í árinum

Sambært § 21, stk. 2, verður pensjónin umroknað í árinum, broytist inntøkan varandi, ella henda broytingar í persónligu viðurskiftunum. Orðingin tykist benda á, at pensjónin skal verða roknað um, "verður inntøkan varandi broytt". Almannastovan umsitur lógina, og tí er tað Almannastovan, sum skal rokna pensjónina umaftur.

Í flestu førum boða pensjónistar frá, er inntøkan lækkað ella dottin burtur. Men tað kann koma fyri, at pensjónistur ikki boðar frá, at inntøkan t.d. er varandi lækkað, og tá verður

pensjónin ikki hækkað beinanvegin. Spurningurin er so, um pensjónisturin kann koma afturumaftur og krevja eina hækking við afturvirkandi gildi.

Varnast Almannastovan, at inntøkan varandi er hækkað, verður pensjónin roknað um, og møguligt afturgjald verður kravt. Lækkar inntøkan ella fellur burtur, roknar Almannastovan ikki av sínum eintingum umaftur í árinum.

Almannastovan tulkar ásetingina í § 21, stk. 2, um at *"pensjónin verður umroknað í árinum"*, sum at pensjónisturin hevur skyldu til at kunna Almannastovuna um inntøkubroytingar. Her kann verða viðmerkt, at fráboðanarskyldan í § 22 fevnir einans um broytingar, sum hava við sær, at veitingar lækka ella fella burtur.

Tað kemur eisini fyri, at Toll- og Skattstovu Føroya broytir skattskyldugu inntøkuna afturvirkandi. Í hesum sambandi tók Kærunevndin í 1997 prinsippavgerð um at fylgja punkt 162 í donsku vegleiðandi reglunum "om social pension": *"Hvis det nye indtægtsgrundlag, som følge af en ændret skatteansættelse hos skattemyndighederne, udgør et lavere beløb, skal pensionisten have efterbetalt den for lidt udbetalte pension"*.

Almannastovan førdi fram, *"at tað ikki ber til at rokna aftureftir, men bert frá tí degi, Almannastovan fær góðkendan roknskap"*. Í januar 1999 kunnaði Almannastovan um, at kærunevndaravgerðirnar frá 1997 ikki høvdu ført við sær, at Almannastovan hevði broytt siðvenju.

Eftir okkara tykki er tað ivasamt, bæði vísandi til ásetingarnar í lógini og til prinsipiellu avgerðirnar frá Kærunevndini, um lógargreinin er umsitin rætt.

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsreglan, at pensjónisturin hevur eitt rættarkrav uppá eina pensjón, sum eftir ávísum reglum kann lækka. Umsitingarlig viðurskifti kunnu gera, at ikki kann verða eftirroknað mitt í einum ári, men bíðað má verða eftir endaligu umrokningini. Tá ið hon er komin, verður gjørt upp, hvussu nógva pensjón hann hevur rætt til. Almanna- og Heilsumálastýrið fer at tosa við Almannastovuna um hetta mál.

7.5 Forsorgarútreiðslur (GL 2000/ 2 07 3-4)

Forsorgarútreiðslur verða hildnar við heimild í "Lov for Færøerne om offentlig forsorg jf. lovbekendtgørelse nr. 100/1988" við seinni broytingum. Eisini er talan um 13 kunngerðir.

Vit hava í 2001 grannskoðað samanlagt 85 forsorgarmál á Almannastovuni í Tórshavn, Runavík, Klaksvík og á Tvøroyri. Talan er um tilvildarliga vald mál, umboðandi allar deildir. Tó eru málini vald út við tí atliti, at tey fevna um ymisk sløg av veitingum og ymiskar málsviðgerar. Harafturat hava vit eisini kannað mál, har samlaða veitingin er stór. Niðanfyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini:

7.5.1 Útrokning og útgjald av veitingum

Nettoløn uttanum A-skattaskipanina

Í frágreiðing 19. november 1999 til landsstýrismannin vístu vit á dømi, har løn til stuðulsfólk var goldin út sum forsorgarhjálp til viðskiftafólkið. Vit vístu á, at talan var um samsýning fyri arbeiði, og tískil var talan um A-inntøku. Hildið varð, at tað hvørki var heimild at avrokna eina nettoupphædd, ella at rinda hana umvegis p-talinum hjá øðrum persóni enn tí, sum skuldi hava lønina. Í desember 1999 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tað bert í hesum eina føri var komið fyri, at Almannastovan hevði goldið løn uttanum A-skattaskipanina, og at Almannastovan mótvegis landsstýrismanninum hevði sagt, at tað var eitt mistak, sum ikki fór at endurtaka seg.

Kortini eru vit í 2001 komin fram á fleiri mál, har løn er goldin út uttanum A-skattaskipanina, í p-talinum hjá viðskiftafólkinum, til at rinda fyri arbeiðsgentu-/húshjálp.

Sambært almannastjóranum í desember 2001 er siðvenjan nú broytt, soleiðis at allar lønarútgjaldingar verða fluttar um A-skattaskipanina. Fyri at steðga møguligum øðrum gomlum veitingum, fer Almannastovan at gera kanningar á øllum økisdeildum.

Ikki brúktur barnafrádráttur

Í frágreiðing 19. november 1999 til landsstýrismannin umrøddu vit boðini frá Almanna- og Heilsumálastýrinum 18. apríl 1997 um, at útgoldin barnafrádráttur ikki skal verða mótroknaður í teimum veitingum, sum fólk fáa eftir forsorgarlógini. Landsstýrismaðurin ásannaði mistakið, og vildi rætta henda skeivleika mótvegis Almannastovuni. Barnafrádrátturin er ætlaður tí,ið hevur foreldramyndugleikan yvir barninum og ikki barninum sjálvum.

Í februar 2001 boðaði Almannastovan viðskiftafólkum sínum frá, at Almanna- og Heilsumálastýrið hevði givið boð um, at allur avlopsskattur skuldi verða mótróknaður í forsorgarhjálpini. Í mars 2001 boðaði Almannastovan so aftur frá, at ein misskiljing var hend, og at barnafrádrátturin í avlopsskattinum skuldi ikki verða mótroknaður forsorgarhjálpini.

Í praksisyvirlitinum frá 1996-1997 staðfestir Kærunevndin, at allar inntøkur skulu dragast frá roknaðu tørvsupphæddini, eisini møguligur avlopsskattur.

Sambært almannastjóranum *"hevur óbrúktur barnafrádráttur ikki verið mótroknaður í forsorgarhjálpini síðstu 5 árini smb. boðunum frá Landsstýrinum í 1997."*

Sambært Ll. nr. 47 frá 23. mars 1993 "um Kærunevnd í almannamálum", við seinni broytingum, tekur Kærunevndin endaliga fyrisitingarliga avgerð, og tí hava vit ilt við at skilja svarið frá almannastjóranum. Kærunevndin hevur harafturat víst á, at Almannastovan hevur skyldu at fylgja avgerðum hjá Kærunevndini, uttan mun til um Almannastovan heldur tær vera rættar ella ikki. Vit skilja heldur ikki, hví Almannastovan heldur seg hava skyldu at fylgja einum boðum frá 1997 frá landsstýrismanninum, ístaðin fyri at fylgja eini avgerð frá Kærunevndini og eini fráboðan frá landsstýrismanninum í 1999. Sambært almannastjóranum í januar 2002 hevur Almannastovan ikki fingið umrøddu fráboðan í 1999, og heldur tí, at skrivið frá landsstýrismanninum frá 1997 framvegis er í gildi.

Útrokning av nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkinum

Sambært § 9, stk. 1, í forsorgarlógini kann fyribilshjálp verða veitt fólki vegna sjúku, samlívsslit, barnsburð ella vantandi arbeiðsmøguleikar. Samlaða veitingin kann ikki fara upp um ta upphædd, sum verður goldin út til persónar,ið fáa dagpening eftir hægsta satsi, og sum ikki hava aðrar inntøkur. Tó kann samlaði stuðulin,ið verður goldin út í sambandi við vantandi arbeiðsmøguleikar, ikki vera hægri enn hægsta útgjaldið frá ALS, og viðkomandi skal ikki hava aðrar inntøkur.

Málsviðgerin kannar upplýsingarnar á umsóknarblaðnum, og kannar um prógv er fyri útreiðslunum. Góðkendar útreiðslur verða tøppaðar inn í eitt serligt Excel-rokniark, ið roknar veitingarupphæddina út. Síðani verður upphæddin tøppað inn í VFS-skipanina.

Almanna- og Heilsumálastýrið hevur um hendi at dagføra hesi rokniørk, hvørja ferð broytingar henda, t.d. tá ið hægsta dagpeningaupphædd ella hægsta útgjald frá Arbeiðsloysisskipanini verður broytt, ella broyting er í prosent-gjaldinum til Arbeiðsloysisskipanina. Í 2000 varð nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkið broytt 4 ferðir. Hvørja ferð skulu málsviðgerarnir rokna út veitingarupphæddina av nýggjum, og upphæddin skal síðan tøppast inn í VFS-skipanina.

Samanumtikið verður nógv arbeiðsorka nýtt at fáa til vega prógv fyri útreiðslum, at rokna út veitingarupphædd og at tøppa veitingarupphæddina inn í VFS-skipanina. Ásetingarnar um nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkið sambært § 9 í forsorgarlógini kunnu verða gjørdar einfaldari, um veitingarnar verða broyttar til bruttoupphæddir. Sagt kann verða, at í

frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin 16. apríl 1999 legði fyri tingið til aðalorðaskiftis, varð spurningurin um bruttoupphæddir umrøddur. M.a. stendur í frágreiðingini:

> *"Sum tað framgongur av nýggju donsku forsorgarlógini, so hava danir skipað seg soleiðis, at forsorgarveitingarnar eru bruttoupphæddir. Tað vil siga, at viðskiftafólkini fáa útgoldið eina bruttoupphædd, sum tey sjálvi kunnu ráða yvir. Sostatt skal umsitingin ikki gera metingar av tørvinum hjá hvørjum einstøkum viðskiftafólki, áðrenn útgoldið verður. Hetta ger umsitingina av forsorgarhjálp nakað væl einklari.*
>
> *Fyri at koma uttanum teir trupulleikar, sum eru á Almannastovuni í dag viðvíkjandi útrokning av fíggjarligari hjálp, verður mett, at føroyskar forsorgarveitingar, í tann mun tað er gjørligt, eiga at verða bruttoupphæddir.*
>
> *Mett verður, at tað í Føroyum skuldi verið møguligt at gjørt kontanthjálpsveitingarnar og veitingarnar fyri meirútreiðslur til foreldur at børnum, sum bera likamlig ella sálarlig brek, til bruttoveitingar."*

Spurdur, svarar landsstýrismaðurin í februar 2002, at hann hevur ikki nakra ítøkiliga ætlan um at broyta § 9.

Kirkjuskattur

Kirkjuskattur er ikki tikin við í útrokningina, tá ið nettodagpeninga- og nettoarbeiðsloysishámarkið verður roknað út, og er heldur ikki tikin við í útrokningina av nettoendurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku.

Tað hevur við sær, at tey, sum eru limir í fólkakirkjuni, fáa tað sama goldið út, sum tey sum ikki eru limir í fólkakirkjuni. Landsstýrismaðurin greiddi frá í desember 1999, at sambært § 9, stk. 2, er ikki heimild at síggja burtur frá kirkjuskattinum, tá ið nettodagpeningahámarkið verður roknað út.

Sambært almannastjóranum visti Almannastovan ikki um svarið frá landsstýrismanninum frá desember 1999, men er farin at kanna tað. Annars verður viðmerkt, at Almannastovan ikki kannar, um fólk eru limir í fólkakirkjuni ella ikki. Vit spurdu í januar 2002, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur á hesum øki, men vit fingu einki svar.

7.5.2 Veiting sambært § 9

Í einum máli er síðani 1993 veitt forsorgarhjálp vegna vantandi arbeiðsmøguleikar. Í sambandi við, at persónurin fylti 60 ár, varð heitt á hann um at søkja um framskundaða fólkapensjón smb. § 2, stk. 2, í fólkapensjónslógini. Tá ið hann sýtti fyri at gera tað, varð boðað honum frá, at forsorgarhjálpin kundi ikki verða hægri enn tann upphædd, hann kundi havt fingið í pensjón. Vit halda tað vera ivasamt, um veitingin smb. § 9 kann verða lækkað, tí at ein persónur ikki vil søkja um framskundaða fólkapensjón/lægstu fyritíðarpensjón. Sambært almannastjóranum verður málið tikið upp til nýggja viðgerð við atliti at § 13 í forsorgarlógini.

7.5.3 Treytir fyri hjálp sambært § 10

Sambært § 10 *"forudsætter ydelse af hjælp, at såvel den, der søger hjælpen, som ægtefællen i tilstrækkelig grad har udnyttet sine arbejdsmuligheder. Dette kan f.eks. anses for godtgjort 1) når den pågældende ikke har et rimeligt tilbud om arbejde eller deltagelse i beskæftigelsesfremmende foranstaltninger,..."*

Sum treyt fyri fyribilshjálp vegna arbeiðsloysi, boðar Almannastovan í brævi viðskiftafólkunum frá, at tey skulu lata Almannastovuni skrivligar váttanir frá arbeiðsgevarum um, at tey hava søkt arbeiði, annars verður veitingin frá Almannastovuni steðgað. Sambært innanhýsis reglunum á Almannastovuni, skulu viðskiftafólkini vísa á (prógva), at tey hava søkt

arbeiði og fingið noktandi svar frá í minsta lagi 3 arbeiðsgevarum. Sama ger seg galdandi, um tey lutvíst hava mist arbeiðið.

Spurdur um heimildina, svaraði almannastjórin, at dømini í § 10 eru ikki endalig, og tí verður hildið, at Almannastovan hevur heimild til at áseta umrøddu treytir.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera ivasamt, um Almannastovan hevur heimild at seta sum treyt, at fólk skulu prógva, at tey søkja arbeiði. Vit hava í januar 2002 grundgivið neyvari fyri hesum sjónarmiði, og hava biðið landsstýrismannin um hansara sjónarmið, men vit fingu einki svar.

7.5.4 Ráðgeving/endurmeting sambært § 12

Í frágreiðing 19. november 1999 til landsstýrismannin vístu vit enn einaferð á, at Almannastovan ikki hevur gjørt nakra endurmeting ella ráðgivið fólki, aftaná at tey hava fingið veiting í 3 mánaðir, soleiðis sum ásett er í § 12 í forsorgarlógini. Almannastovan vísti á, at við verandi starvsfólkaorku verður ongantíð gjørligt at gera nakra "uppfylging" aftaná 3 mánaðir. Vit spurdu, hvørji stig landsstýrismaðurin ætlaði at taka til tess at tryggja, at lógin verður hildin.

Landsstýrismaðurin boðaði tá frá, at hann vildi áleggja Almannastovuni at halda lógina. Vísir tað seg, at tað ikki kann lata seg gera, verður møguliga neyðugt at broyta lógina, soleiðis at eftirmeting verður seinni enn teir 3 mánaðirnar.

Í 2001 eru vit aftur komin fram á fleiri mál, har fólk í áravís hava fingið fyribils hjálp, í einum føri síðani 1993. Eftir øllum at døma er eingin ella nærum eingin eftirmeting samb. § 12 gjørd. Heldur ikki sæst, at møguleikin fyri varandi veiting samb. § 13 hevur verið umrøddur. Sambært praksisyvirliti frá 1993 frá Kærunevndini í almannamálum kann fyribilshjálp bert verða veitt í 12 mánaðir, síðani er talan um varandi veiting sambært § 13. Sambært leiðbeining frá Almanna- og Heilsumálastýrinum 6. mars 1998 er høvuðsreglan, at fyribilshjálp kann verða veitt í mesta lagi 12 mánaðir.

Almannastjórin hevur í desember 2001 kunnað um, at tað áður hevur verið trupult at fylgt hesari lógarásettu freist, av tí at ov lítil starvsfólkaorka er í mun til eina so stóra arbeiðsuppgávu. Umstøðurnar eru nú nógv broyttar, talið av viðskiftafólki er lækkað, og Almannastovan hevur fingið eina arbeiðsmarknaðardeild. Almannastovan hevur eisini víst á, at hon ikki heldur hjálpartíðarskeiðið lógliga kann verða avmarkað til 12 mánaðir undir øllum umstøðum, vísandi til § 12, stk. 2, ("skøn under regel"). Almannastovan fer at taka spurningin upp við Almanna- og Heilsumálastýrið.

7.5.5 Veitingar sambært § 13

Í einum máli hevur í fleiri ár verið veitt hjálp sambært § 13. Tá ið viðkomandi varð 62 ár í 1997, fekk hann boð frá Almannastovuni um at søkja framskundaða fólkapensjón, men tað sýtti hann fyri, og sambært uppritarblaðnum fór veitingin tí at verða steðgað. Veitingin steðgaði tó ikki, og í mars 2001 fekk hann framvegis veiting smb. § 13. Vit halda tað vera ivasamt, um Almannastovan kann steðga veitingini smb. § 13, tí at ein persónur ikki vil søkja um framskundaða fólkapensjón/lægstu fyritíðarpensjón.

Almannastjórin ásannar, at tað ikki ber til fyrisitingarliga at steðga veitingini. Tað rætta hevði verið, at Almannastovan reisti málið um pensjónstillutan sambært § 30, stk. 6, í almannapensjónslógini.

7.5.6 Veitingar sambært § 17

Eingin heimild er í forsorgarlógini til at áseta neyvari reglur um meirútreiðslur. Almanna- og Heilsumálastýrið hevur ikki gjørt vegleiðing fyri, hvat kemur undir meirútreiðslur sambært § 17. Almannastovan hevur innanhýsis vegleiðandi reglur, ið fyri ein stóran part eru frá 1991. Í einstøkum ivamálum hevur Almannastovan spurt Almanna- og Heilsumálastýrið um heimildina at játta serstakar útreiðslur smb. § 17. Í øðrum førum spyrja málsviðgerar deildarleiðararnar, ið síðani taka avgerðirnar.

Kærunevndin í almannamálum hevur í ávísum førum broytt avgerðir hjá Almannastovuni. Ein trupulleiki er, at innanhýsis reglurnar á Almannastovuni ikki verða broyttar samsvarandi. Eftir okkara tykki er vandi fyri tilvildarligari umsiting, og at allir borgarar ikki verða viðgjørdir eins. Almannastjórin ásannar, at henda uppgáva ikki hevur verið røkt til fulnar, men Almannastovan hevur raðfest økið høgt í 2002, og hevur m.a. sett 2 løgfrøðingar til at røkja hesa týðandi uppgávu.

Útreiðslur uttan skjalprógv

Vit eru komin fram á einstøk mál, har Almannastovan í áravís uttan skjalprógv hevur veitt stuðul til eykaútreiðslur uppá 2-3 t.kr. um mánaðin. Sambært almannastjóranum er talan um fjølbrekað børn, og hildið verður, at talan er um so nógvar og kostnaðarmiklar meirútreiðslur til serligan mat, klæðir, eyka vask, eyka hita, eyka telefon, eyka el, serligar leikur o.s.fr., at tað er torført at skjalprógva tær. Tí verður í slíkum førum veitt ein føst upphædd.

Vit halda ikki, at heimild er smb. § 17 at veita eina fasta upphædd til eykaútreiðslur uttan skjalprógv.

Minstamark fyri stuðli

Sambært innanhýsis reglunum verður stuðul ikki latin, um so er, at meirútreiðslurnar í miðal eru minni enn 200 kr. um mánaðin, ella minni enn 2.400 kr. um árið. Vit halda ikki, at heimild er smb. § 17 at áseta eitt minstamark fyri útreiðslum.

Almannastjórin ásannar í januar 2002, at eingin heimild er í § 17 at áseta eitt minstamark.

Ivasom heimild til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku

Ein stórur partur av útreiðslunum undir § 17 er endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Viðvíkjandi heimildini at endurrinda foreldrum inntøkumiss fyri at ansa brekaðum børnum heima, hevur Kærunevndin í almannamálum í fleiri førum víst á, at § 17 í forsorgarlógini, sum er galdandi í Føroyum, svarar til § 48 í dansku "bistandsloven", sum kom í gildi 1. apríl 1976. § 48, stk. 1, er orðað soleiðis:

> *"Personer, der i hjemmet forsørger et barn under 18 år med et fysisk eller psykisk handicap, kan få dækket de nødvendige merudgifter ved forsørgelsen, der er en følge af handicappet."*

Kærunevndin hevur víst á avgerðir, sum "Den Sociale Ankestyrelse" hevur tikið. "Den Sociale Ankestyrelse" gjørdi 3. juni 1977 av, at ein kommuna hevði skyldu smb. § 48 í "bistandsloven" at veita endurgjald fyri inntøkumiss til eina kvinnu, sum síðani 1972 hevði fingið endurgjald eftir § 73 í táverandi dansku forsorgarlógini. Víst kann verða á fleiri avgerðir frá "Den Sociale Ankestyrelse", ið staðfesta, at endurgjald fyri inntøkumiss kann verða veitt smb. § 48 í "bistandsloven".

Vit hava í hesum sambandi víst á, at § 48 í "bistandsloven" samsvarar ikki § 17 í forsorgarlógini, sum er orðað soleiðis:

"Personer, der i hjemmet forsørger et barn med fysisk eller psykisk lidelse, som medfører særlige udgifter ved forsørgelsen, har ret til at få dækket sådanne merudgifter, såfremt de ikke kan dækkes gennem særforsorgens hjælpeforanstaltninger. Hjælpen er betinget af, at lægelige anvisninger med hensyn til barnets pasning m.v. følges".

§ 17 var upprunaliga § 14 A, í "lov nr. 224 fra 17. maj 1970". Í "lov nr. 246 fra 8. juni 1983" bleiv § 14A til § 17. Í viðmerkingunum til uppskotið til "lov nr. 224/1970" varð m.a. fört fram:

"Forslaget om at optage en regel om, at den, der i hjemmet forsørger et handicappet barn, har ret til – uden hensyn til trang - at få dækket nødvendige merudgifter ved barnets forsørgelse, svarer til en nylig gennemført bestemmelse i den danske lov om offentlig forsorg. Det er ønskelig, at et barn kan blive i sit hjem, og det er derfor rimeligt, at der kan ydes hjemmet dækning for merudgifter ved forsørgelsen."

§ 17 í forsorgarlógini var orðað sum § 73 í táverandi donsku forsorgarlógini. Tað hevur helst ongantíð verið ætlanin við hesi grein, at hon skuldi fevna um endurgjald fyri inntøkumiss. Víst kann verða til fráboðan og rundskriv frá "Socialministeriet" í 1971 og 1972:

"Der kunne ikke til en gift kvinde, som med henblik på pasning af en 2-årig hørehandicappet søn overgik til deltidsbeskæftigelse, ydes hjælp til dækning af indtægtsnedgang. Der kan ydes husmoderafløsning (hjemmehjælp) til lejlighedsvis afløsning af personer, der i hjemmet passer et barn med en fysisk eller psykisk lidelse."

Í frágreiðingini til "Socialministeriet" í februar 1993 vístu vit á, at soleiðis sum § 17 í forsorgarlógini var orðað, varð hildið, at siðvenjan hjá Almannastovuni at veita endurgjald fyri inntøkumiss og at løna stuðulsfólki, var ikki í tráð við lógina.

Í frágreiðing um almannamál, sum landsstýrismaðurin 16. apríl 1999 legði fyri tingið til aðalorðaskiftis, varð spurningurin, um heimildina í § 17 at veita foreldrum endurgjald fyri inntøkumiss og at løna stuðulsfólkum, umrøddur. Landsstýrismaðurin vísti til viðlagda frágreiðing, har greitt varð frá, hvussu lóggávan virkaði og varð umsitin í dag, og hvørjar dagføringar vóru skilagóðar at fremja.

Viðvíkjandi endurgjaldi fyri inntøkumiss varð í frágreiðingini víst á, at møguleikin átti at verið har. *"Neyðugt er tó at gera eina aðra greiðari heimild til tess."* Viðvíkjandi stuðulsfólkum vísti landsstýrismaðurin á, at størsti útreiðsluposturin sambært § 17 var til stuðulsfólk, sum veittu børnum serligan pedagogiskan stuðul. Landsstýrismaðurin heldur hesa útreiðsla, ið verður latin sum persónligt ískoyti til pensjónina, kunna liggja aðrastaðni, lutvíst innan serforsorg, heimarøkt ella sum eykanormering til dagsstovnar. Sama er galdandi fyri vaksin í somu støðu. Landsstýrismaðurin heldur eisini, at útreiðslan er ein avleiðing av vantandi møguleikum at økja játtanir til stovnsendamál, sum so sæst aftur sum meirútreiðsla á lógarbundnum einstaklingaveitingum.

Í álitinum frá apríl 2001 "Ein lýsing av stuðulsfólkaøkinum - og eitt tilmæli um eina aðra skipan", varð í stuttum nomið við ivasama heimildargrundarlagið undir stuðulsfólkaøkinum, og hví umsitið varð við hesum heimildum. Hildið varð, at ein orsøk var, at neyðugar kunngerðir og reglur ongantíð vóru gjørdar. Av tí at upprunalóggávan er donsk, hevur siðvenja verið at brúka danskar reglur og kunngerðir vegleiðandi, uttan at løgfrøðiliga grundarlagið er bygt út og broytt samsvarandi.

Í svarskrivi til Trivnaðarnevndina í mars 2001, viðv. Lm. nr. 50/2000 "uppskot til løgtingslóg um dagpening vegna sjúku", kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað var ivasamt, um heimild var smb. § 17 í forsorgarlógini at veita foreldrum endurgjald fyri inntøkumiss. Landsstýrismaðurin helt tað vera ein áhugaverdan spurning. Sambært landsstýrismanninum *"er Almanna- og Heilsumálastýrið farið at kanna henda spurningin nærri beinanvegin."*

Í svarskrivi til Landsstýrismálanevndina í november 2001 er landsstýrismaðurin av tí fatan, at heimildin er ógvuliga ivasom at játta stuðlar eftir § 17. Hesa fatan byggir landsstýrismaðurin á samanberingina við danska lóggávu, sum positivt nevnir stuðlar, og eisini á, at orðingin "nødvendige merudgifter" ikki kann verða tulkað so vítt, at hon eisini fevnir um stuðlar. Sambært landsstýrismanninum eru stuðlar í hesum høpi ikki ein slík meirútreiðsla í mun til eitt "normalt" barn, men talan er um viðgerð. Sambært landsstýrismanninum er ætlanin at gera eina nýggja lóg fyri brekað børn. Í hesi lóggávu verður so heimild at játta stuðlar til likamliga og sálarliga sjúk børn. Endalig avgerð er tó ikki tikin, um serstøk lóggáva skal verða gjørd, ella um heimildirnar verða settar í nýggju forsorgarlógina.

Útrokning av endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku

Í innanhýsis reglum frá Almannastovuni fyri mista arbeiðsinntøku er einki ásett um frítíðarpening, frítíðarsamsýning, gjald til eftirlønargrunn og lívstrygging. Undir grannskoðanini eru vit komin fram á, at í ávísum málum eru hesi gjøld íroknað endurgjaldið, og í øðrum førum ikki.

Er endamálið at veita endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, so kundi útgangstøðið verið, hvørja inntøku viðkomandi kundi havt samsvarandi sínum førleika. Skattaviðurskiftini broytast nærum á hvørjum ári, tí átti endurgjaldið fyri mista arbeiðsinntøku eisini at verið roknað á hvørjum ári.

Sambært almannastjóranum er grundarlagið fyri útgjaldinum tann ítøkiliga inntøkunan hjá umsøkjaranum, áðrenn hann misti inntøkuna. Tað verður ikki hildið at vera møguligt at fara at meta um tað, sum hann vildi havt í innøku, hevði hann verið í vinnu. Sambært almannastjóranum er ikki vanligt at javna inntøkuna, sum endurgoldið verður fyri. Almannastjórin ásannar tó í januar 2002, at rættast er, at endurgjaldið verður roknað á hvørjum ári.

Útrokningin av endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku fer fram í einum rokniarki. Bruttolønin, kommunuskattaprosentið, prosentgjaldið til arbeiðsloysisskipanina og arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið og skattur verður tøppað inn. Síðani verður nettolønin sjálvvirkandi roknað út. Rokniarkið tekur ikki við barnafrádráttin í lands- og kommunuskattinum, og hevur tað við sær, at í ávísum førum, verður ov lítið goldið út.

Inntøkugrundarlagið fyri at rokna út mista arbeiðsinntøku tykist tilvildarlig. Hesi mál kunnu nevnast sum dømi:

at veitingin verður roknað út sum fyribilshjálp, vegna vantandi arbeiðsmøguleikar sambært § 9, men verður veitt og konterað undir § 17.

at veitingin verður roknað út sum fyribilshjálp, vegna vantandi arbeiðsmøguleikar sambært § 9, og verður konterað undir § 9.

at veitingin verður roknað út svarandi til miðalinntøkuna seinastu 6 mánaðirnar í 1999.

at veitingin varð roknað út í september 1999. Í mai 2001 varð sama upphædd framvegis goldin út.

at veitingin varð roknað út í 1990. Í mai 2001 varð sama upphædd framvegis goldin út.

at veitingin varð roknað út í juni 1986 svarandi til miðal avlamispensjón. Í juni 2001 varð sama upphædd framvegis goldin út, og er sostatt ongantíð broytt samsvarandi broytingunum í miðal avlamispensjón.

Vit spurdu í januar 2002, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevði viðvíkjandi útrokning og útgjald av endurgjaldi fyri mista arbeiðsinntøku.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at hann ætlar at kanna málið neyvari í hesum árinum.

Endurgjald fyri "Ung í arbeiði"

Í juli 2000 játtaði Almannastovan at rinda Tórshavnar kommunu kr. 3.904,00, sum endurgjald fyri ein, ið hevði arbeitt í "Ung í arbeiði" hjá Tórshavnar kommunu. Upphæddin varð goldin út sum "forvunnin upphædd" í p-talinum hjá mammuni og konterað eftir § 17 í forsorgarlógini. Spurdur, svaraði almannastjórin, *"at endurgjaldið til býráðið er ein játtan til gjald av løn smb. barnaforsorgarlógini. Peningurin er av misgáum útgoldin eftir skeivum veitingarslag"*.

Vit hava ilt við at skilja svarið, tí sambært viðmerkingunum í løgtingsfíggjarlógini 2000, verður stuðul m.a. veittur kommununum til løn til ung á høvuðskontu 8.21.10.7. "Tiltøk fyri ung".

Gjald fyri umlætting á stovni

Í juni 2000 játtaði Almannastovan at rinda einum umlættingarheimi fyri, at ein drongur kundi vera á stovninum umframt tey tíðarskeið, tá ið hann hevði pláss á stovninum. Til apríl 2001 hevur Almannastovan endurgoldið stovninum uml. 42 t.kr. Upphæddin er konterað sum "aðrar meirútreiðslur sambært § 17".

Sambært almannastjóranum er tað ein neyðloysn, til drongurin fær varandi stovnspláss. Avgerðin er grundað á, at eingin stuðul var at fáa til drongin.

Umlættingarheim eru sett á stovn við heimild í § 32 í forsorgarlógini, og raksturin verður fíggjaður við peningi á løgtingsfíggjarlógini, konta nr. 8.21.6.01.20. "Serforsorg". Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera heimild í § 17 at játta pening, sum fer til rakstur av stovni, ið virkar sambært § 32. Henda mannagongd førir eisini við sær, at roknskapurin fyri rakstrinum av stovninum verður ikki rættur, og at tørvurin á stovnsplássi verður ikki sjónligur.

Onnur viðurskifti

Í einum máli er endurgjald rindað fyri mista arbeiðsinntøku til ein, sum skuldi vera fylgisneyti hjá 15 ár gamla svágrinum, ið skuldi til kanningar á útlendskum sjúkrahúsi. Tað bar ikki til hjá foreldrunum at fara við honum. Vit halda tað vera ivasamt, um hann hevur rætt til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 17, tá ið hann ikki er forsyrgjari hjá barninum. Sambært almannastjóranum er konteringin skeiv – talan er um eina játtan smb. § 9.

Vit hava víst á, at sambært játtanarskrivinum er talan um mista arbeiðsinntøku sambært § 17 í forsorgarlógini, og endurgjaldið er roknað út eftir hesum. Er játtanin smb. § 9, skal ein ítøkilig tørvsmeting verða gjørd. Í hesum føri er eingin tørvsmeting gjørd. Almannastjórin ásannar í januar 2002, at talan er ikki um játtan eftir § 9, og at heimildin smb. § 17 er ivasom.

7.5.7 Veitingar sambært § 18 – endurbúgving

Vantandi reglur fyri endurbúgving

Seinastu mongu árini hava vit víst á, at sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini kann Landsstýrið áseta neyvari reglur fyri veitingum eftir hesi grein, og at hetta arbeiði átti at verið raðfest frammarlaga. Stórur tørvur er á neyvari reglum, m.a. viðvíkjandi endurbúgving, serliga fyri teir málbólkar, sum liggja "á markinum". Eisini hevur Almannastovan javnan biðið Landsstýrið um at koma við slíkum reglum. Í frágreiðing til landsstýrismannin frá november 1999 spurdu vit, hvørji stig landsstýrismaðurin ætlaði at taka á hesum øki.

Landsstýrismaðurin kunnaði í desember 1999 um, at ætlanin var at seta alt árið 2000 av at gera nýggja forsorgar- og barnaforsorgarlóg. Í hesum sambandi vóru eisini ætlanir um at gera greiðari reglur og neyðugar kunngerðir, sum vanta á næstan øllum forsorgarøkinum, eisini viðvíkjandi endurbúgving. Vit spurdu í januar 2001 landsstýrismannin, hvat síðani var hent í

málinum. Í mai 2001 svaraði landsstýrismaðurin, *"at ætlanin er at gera nakrar justeringar, tí orka er ikki í løtuni til at fara í gongd við at gera nýggja forsorgarlóg."*

Í august 2001 spurdu vit aftur landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Landsstýrismaðurin svaraði, at *"eitt uppskot til eina leiðbeining um endurbúgving er gjørt, men ikki viðgjørt. Viðgerðin byrjar í hesum mánaðinum. Av tí at evnið er umfatandi og skal sendast til hoyringar hjá øllum viðkomandi pørtum, so tekur tað tíð, til leiðbeiðingin verður endaliga liðug. Almanna- og Heilsumálastýrið hevur tí sett sær sum mál, at á vári 2002 skal leiðbeiningin vera liðug".*

Landsstýrismaðurin vísir í februar 2002 á, at *"orka er ikki til staðar í løtuni til at gera nýggja forsorgarlóg, og tí er ætlanin at gera ávísar broytingar ella vantandi kunngerðir á økinum ístaðin. Kunnast skal eisini um, at ein leiðbeining um vard størv er sett í gildi."*

Liðin eru nú meira enn 10 ár, síðani vit fyrstu ferð heittu á Landsstýrið um at áseta reglur sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini. Enn eru tær ikki ásettar.

ALV-skúlin

Næmingar, sum fáa játtað endurbúgving á ALV, rinda eitt ávíst gjald um mánaðin fyri at ganga á skúlanum. Almannastovan rindar skúlanum peningin, og peningurin verður konteraður undir § 18. Talan er um eitt ávegis gjald, og tá ið árið er liðugt, ger skúlin samlaða kostnaðin upp. "Undirskotið" verður lutað sundur á teir næmingar, sum hava gingið á skúlanum. Fyri 2000/01 rindaði Almannastovan kr. 15.500 pr. næming um mánaðin.

Fyri nógvum árum síðani er staðfest, at eingin lógarheimild er í almannalóggávuni at rinda fyri undirvísing á ALV-skúlanum, tí skúlin má haldast at hoyra undir undirvísingarverkið. Skúlin bjóðar út fólkaskúlafrálæru upp til fráfaringarroynd fólkaskúlans, umframt handilsskúlafrálæru á FHS-stigi. Frálæran í fólkaskúlanum er ókeypis hjá næmingum, og sambært § 26, stk. 1, í Ll. nr. 125/1997 "um fólkaskúlan" kann verða veitt næmingum sernámsfrøðilig hjálp og sambært § 11, stk. 2, í Ll. nr. 107/1998 "um støðisútbúgving innan FHS" kann verða givin næmingi, sum hevur tað fyri neyðini, serundirvísing og annar sernámsfrøðiligur stuðul.

Almannastovan boðaði í november 1998 frá, at hon var samd í hesum, men vísti á, at skúlaverkið ikki bjóðar hesa tænastu út, hóast ALV, Almannastovan og skiftandi landsstýrismenn í almannamálum hava virkað fyri tí, og álit er skrivað millum allar 3 partar í januar 1996. Tá ið tørvur er á hesi tænastu, heldur Almannastovan, at hon einki annað val hevur, enn at keypa hana, har hon kann fáast.

Vísandi til, at umsitingin á hesum øki framhaldandi var ólóglig, spurdu vit í november 1999, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevði um at fáa viðurskiftini í rættlag. Landsstýrismaðurin kunnaði í desember 1999 um, at hann ætlaði einaferð fyrst í 2000 at taka málið um ALV-skúlan sum heild upp við landsstýrismannin í undirvísingarmálum.

Vit spurdu í januar 2001 landsstýrismannin, hvat var hent í málinum. Í mai 2001 segði landsstýrismaðurin enn einaferð, at hann fór at taka málið um ALV-skúlan upp við landsstýrismannin í mentamálum.

Vit spurdu síðani aftur í august 2001, hvat var hent í málinum. Landsstýrismaðurin svaraði, at Almanna- og Heilsumálastýrið var í ferð við at manna ein arbeiðsbólk við umboðum frá Mentamálastýrinum, Almanna- og Heilsumálastýrinum, Almannastovuni og ALV-stýrinum. Ætlanin var, at hesin arbeiðsbólkur, helst í 2001, skuldi koma við einum tilmæli um framtíðina hjá ALV-skúlanum. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at álitið væntandi verður handað landsstýrismanninum í næstum. Viðmerkt skal verða, at ein arbeiðsbólkur, umboðandi somu myndugleikar, í 1995 gjørdi eitt álit, ið varð handað landsstýrismanninum í januar 1996.

Hóast tað nú eru nærum 10 ár síðani, at staðfest varð, at eingin lógarheimild er í almannalóggávuni at rinda fyri undirvísing á ALV-skúlanum, verður framvegis goldið fyri undirvísingina.

Kontering av veitingum

Í ávísum førum verður uppihaldshjálp undir endurbúgving konterað sum hjálp eftir § 18, og í øðrum førum verður hjálpin konterað sum hjálp eftir § 9. Til fánýtis hava vit øll nítiárini víst á, at konteringarnar eru alt ov tilvildarligar, og at ein av orsøkunum er, at eingin konteringarleiðbeining er gjørd.

Sambært landsstýrismanninum, í september 2000, var ætlanin at gera eina roknskaparfunktión á Almannastovuni, og henda funktión skuldi m.a. loysa trupulleikarnar við konteringini.

Í sambandi við broytingina av kontuskipan á pensjónsøkinum fyrst í 2001 boðaði Almanna- og Heilsumálastýrið Almannastovuni frá, at Stýrið í næstum fór at taka neyðug stig til at broyta kontuskipanina á forsorgarøkinum. Almannastovan hevur ikki hildið tað verið ráðiligt at raðfesta arbeiðið við konteringarleiðbeining út frá verandi kontuskipan. Vit hava spurt landsstýrismannin, nær ein konteringarleiðbeining væntandi verður liðug, men vit hava einki svar fingið enn.

Kost- og lummapeningur – skúlagongd/endurútbúgvingartiltak

Fólk undir endurbúgving á ALV-skúlanum fáa innivist og kost. Almannastovan rindar teimum kost- og lummapening, tá ið tey í vikuskiftunum ikki eru á skúlanum. Upphæddirnar eru ásettar í vegleiðandi reglum, seinast 16. februar 1999. Sambært almannastjóranum er lummapeningur "í langa tíð" roknaður sum 1/3 av grundarupphæddini til støk. Eftir okkara tykki átti útrokningin av hesum upphæddum at verið heimilað í lóg.

Einstøk mál sambært § 18

Ein kommuna sendi ein 17 ára gamlan til Danmarkar til eitt privat sosialt/pedagogisk tiltak. Tá ið hann fylti 20 ár, fór hann úr barnaforsorgarskipanini. Almannastovan játtaði stuðul til framhaldandi uppihald í tiltakinum, fyrst til forrevalidering í 3 mánaðir, síðani til endurbúgving í 2-3 ár. Sambært almannastjóranum er hetta dømi um eina neyðloysn, tí einki tilboð var/er í Føroyum.

Á mánaðarligu rokningini frá tiltakinum stendur bert "pædagogisk bistand kr. 65.000,-". Upphæddin er ikki neyvari greinað út. Almannastovan hevur onga eftirmeting gjørt síðani september 2000. Almannastjórin ásannar, at tað ikki er nøktandi, og eftir ætlan skal neyvari umsjón vera við tiltakinum. Almannastovan hevur í oktober 2001 biðið viðgerðarstaðið um eina frágreiðing.

Í einum øðrum máli játtaði Almannastovan einum fólki 2 ára endurbúgving í Danmark, og játtaði síðani fleiri ferðir framhald av endurbúgvingini. Aftaná 3 ár bað Almannastovan donsku kommununa um at finna honum ein búfelagsskap. Hann flutti í búfelagsskapin, fekk vart arbeiði, og fekk játtað "mellemste førtidspension".

Almannastovan rindar donsku kommununi endurgjald fyri pensjón, uppihald í búfelagsskapi, vart arbeiði og "boligydelse", uml. kr. 300.000 um árið, og konterar peningin sum endurbúgvingarútreiðslur. Eftir okkara tykki er ikki heimild at rinda hesar útreiðslur sum endurbúgvingarútreiðslur, tí talan var ikki um endurbúgving, tá ið hann flutti í búfelagsskap og fekk játtað fyritíðarpensjón í Danmark. Talan er um uppihald á stovni í Danmark, sum kemur undir høvuðskontu 8.21.6.01. "Serforsorg".

7.6 Barnaforsorgarútreiðslur (GL 2000/ 2 07 3-3)

Barnaforsorgarútreiðslur verða hildnar við heimild í "Lov for Færøerne om børneforsorg jf. lovbekendtgørelse nr. 104/1988" við seinni broytingum. Eisini er talan um 5 kunngerðir.

Bruttoútreiðslurnar í 2000 kunnu verða greindar soleiðis:

Fríplass		5 mió.kr.
Tilmæli frá barnaverndarnevndum v.m.:		
Stuðulsfólk sambært § 22	12 mió.kr.	
Aðrar útreiðslur - pleyguløn o.a.	13 mió.kr.	25 mió.kr.
Tilsamans		30 mió.kr.

7.6.1 Útreiðslur hildnar av kommunum

Í kommunum við fleiri enn 2.000 íbúgvum tekur býráðið ella nevnd, sett av býráðnum, avgerðir um fyribyrgjandi tiltøk eftir § 22, stk. 2 og 3. Talan er um Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur. Allar útreiðslur í 2000 til "Fríplass" (5 mió.kr.), og meginparturin av útreiðslunum til „Tilmæli frá barnaverndarnevndum v.m" (uml. 19,5 mió.kr.), tilsamans uml. 24,5 mió.kr., eru útreiðslur, sum standast av avgerðum, sum barnaverndarnevndir/kommunur hava tikið.

Sostatt vóru uml. 80% av barnaforsorgarútreiðslunum í 2000 "endurgjald" til kommunur, harav meginparturin var "endurgjald" til Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur. Ein minni partur var "endurgjald" til aðrar kommunur fyri barnaverndarnevndarsamsýningar.

Tórshavnar kommuna

Tórshavnar kommuna fær "endurgjald" fyri barnaforsorgarútreiðslur hvønn ársfjórðing sambært fyribilsuppgerð. Útreiðslurnar eru sundurliðaðar í útreiðslur til fríplass, stuðulsfólkaskipanina, pleyguløn o.a. Í februar mánaði verður send endalig grannskoðað uppgerð.

Uppgerðin yvir pleyguløn o.a. er sundurliðað á hvønn persón, við upphædd og frágreiðing um, hvat útreiðslan fevnir um. Hesar útreiðslur eru: skattskyldug og skattafrí pleyguløn, skattafríur lummpeningur, stovnsuppihald í Danmark, skúlagongd í Danmark, ferðaútreiðslur, bráfeingishjálp o.a.

Roknskapargrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað eftir, um útreiðslurnar viðvíkja børnum, sum barnaverndarnevndin hevur játtað barnaforsorgarhjálp. Víst verður á, at grannskoðanin hevur bert fevnt um fíggjarliga grannskoðan.

Klaksvíkar kommuna

Klaksvíkar kommuna fær endurgjald hvønn ársfjórðing sambært fyribils uppgerð. Útreiðslurnar eru sundurliðaðar í útreiðslur til fríplass, stuðulsfólkaskipanina, pleyguløn o.a. Í februar mánaði verður sendur endaligur grannskoðaður roknskapur, sum er sundurliðaður í útreiðslur til fríplass, pleyguløn, stuðulsfólk, hjálp til foreldur og skúlabørn, serstovnar og skúlagongd í Danmark, nevndarsamsýning, sosialráðgevar, skrivstovuútreiðslur og aðrar útreiðslur til barnaverndarnevndina.

Roknskapargrannskoðanin hevur kannað eftir, um váttan er í teimum førum, fríplass verða játtað til dagrøkt ella barnagarð, og um skattskylduga inntøkan hjá foreldrum er váttað av Toll- og Skattstovu Føroya. Roknskapargrannskoðanin hevur kannað, um útgoldnu fosturlønirnar eru í tráð við ásetingarnar í K. nr. 50 frá 25. mars 1993 um barnaforsorg, og hevur við stakroyndum kannað samsýningina til limir í barnaverndarnevndini.

Óskipað kontering av veitingum

Kontuskipanin á Almannastovuni til barnaforsorgarútreiðslur er eftir okkara tykki ikki nøktandi. Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur hava ikki fingið nakra konteringarleiðbeining, og vandi er tí fyri, at konteringin ikki er einsháttað.

Sum dømi kann nevnast, at "endurgjald" til Tórshavnar kommunu fyri útreiðslur til pleyguløni, hjálp til foreldur og skúlabørn, serstovnar og skúlagongd í Danmark verður konterað á Almannastovuni sum pleyguløni. Sagt kann eisini verða frá, at endurgjald til Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur fyri lønarútreiðslur viðv. stuðulsfólkaskipanini verður konterað á standardkontu 52 "Tilskot til einstaklingar", meðan løn til stuðulsfólk, sum Almannastovan rindar, verður konterað á standardkontu 11 "Løni".

Vantandi reglur um roknskap, grannskoðan og kontering

Barnaforsorgarlógin ásetir, at í kommunum við fleiri enn 2000 íbúgvum, tekur býráðið, ella nevnd sett av býráðnum, vegna Landsstýrið avgerð um fyribyrgjandi tiltøk eftir § 22, stk. 2 og 3.

Sambært § 43 í barnaforsorgarlógini verða útreiðslur til fyriskipanir goldnar av landskassanum. Einki er ásett um, at kommunurnar skulu hava endurgjald, tilskot, acontogjøld, ella um uppseting ella grannskoðan av roknskapinum.

Viðmerkingar

Roknskapir og grannskoðan hjá Tórshavnar og Klaksvíkar kommunum tykjast ikki einsháttað, konteringarnar samsvara ikki við konteringarnar á Almannastovuni, og ongar reglur eru um umsiting, journalviðurskifti, roknskap, grannskoðan o.a.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur mótvegis Løgtinginum ábyrgdina av, at útreiðslurnar sambært barnaforsorgarlógini, eisini tær sum kommununar umsita, eru rættar, og at umsitingin fer fram á lógligan hátt. Almannastjórin hevur ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum av rættleikanum av útreiðslunum. Einki er ásett í barnaforsorgarlógini um, at Almannastovan skal hava eftirlit við umsitingini hjá kommununum.

Vit spurdu í desember 2001 landsstýrismannin, hvørjar ætlanir vóru um at áseta reglur á hesum økjum. Landsstýrismaðurin hevur í januar 2002 kunnað um, at hesin trupulleikin verður væntandi loystur í samband við gerð av nýggjari barnaverndarlóg. Ætlanin er, at ábyrgdarbýtið millum land og kommunu skal verða gjørt greitt, soleiðis at tað antin verður landið ella kommunurnar, sum umsita og rinda skipanina.

7.6.2 Aðrar útreiðslur

Í kommunum við færri enn 2.000 íbúgvum gera barnaverndarnevndirnar tilmæli til Almannastovuna um fyribyrgjandi tiltøk eftir § 22, stk. 2 og 3. Almannastovan ger síðani av, um tiltøk verða sett í verk. Við støði í einum lista yvir útgoldnar veitingar í 2000/01 eftir barnaforsorgarlógini, vórðu 30 mál, svarandi til uml. 40% av barnaforsorgarmálunum á Almannastovuni, tikin út at kanna neyvari. Talan er um tilvildarliga vald mál, sum Almannastovan hevur umsitið, og har samlaða veitingin er stór.

Tiltøk sambært § 22, stk. 2 og 3

Sambært § 22, stk. 2, *"kan der ydes hjælp til afholdelse af udgifter, der står i direkte sammenhæng med henstillinger eller pålæg, der meddeles af offentlige myndigheder med hensyn til et barns pleje eller behandling, opdragelse, uddannelse eller arbejde, når forsørgeren ikke selv har midler hertil."*

Sambært § 22, stk. 3, *"kan der under forbigående vanskeligheder til en familie med ét eller flere børn under 18 år ydes hjælp til foranstaltninger, der bevirker, at børnenes anbringelse uden for hjemmet kan undgås, eller at deres hjemgivelse kan fremskyndes, såfremt familien ikke selv har midler til at afholde udgifterne herved."*

Almannastovan hevur ongar reglur, ið lýsa neyvari, hvørji tiltøk talan kann verða um sambært § 22, stk. 2 og 3. Í januar 2002 hevur Almannastovan boðað frá, at ætlanin er at gera greiðar vegleiðingar til barnaverndirnar, eisini viðvíkjandi tiltøkum samb. § 22, og verða vegleiðingarnar væntandi lidnar medio 2002.

Tørvsmeting

§ 22, stk. 2 og 3, kom upprunaliga inn í barnaforsorgarlógina við "lov nr. 247 fra 8. juni 1983". Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið "*vil der efter forslaget således kunne ydes hjælp, når den udgift, sagen vedrører, vil bringe et i øvrigt rimeligt budget ud af balance*."

Eftir okkara tykki merkir hetta, at treytin fyri fíggjarligari hjálp samb. § 22, stk. 2 og 3, er, at forsyrgjarin verður hildin ikki at hava fíggjarliga orku at rinda útreiðsluna, t.v.s. at ein ítøkilig fíggjarlig tørvsmeting má verða gjørd í hvørjum einstøkum máli.

Í sambandi við gjøgnumgongd av málunum hava vit staðfest, at eingin fíggjarlig tørvsmeting verður gjørd, áðrenn tiltøk verða sett í verk eftir § 22, stk. 2 og 3, og einki skjalprógv finst fyri fíggjar- og ognarviðurskiftum.

Almannastovan ásannar í januar 2002, at tað í mong ár hevur verið siðvenja ikki at gera nakra tørvsmeting, og at henda siðvenja er í beinleiðis andsøgn til ásetingina í § 22. Almannastovan fer at gera innanhýsis reglur, so ein nøktandi tørvsmeting verður gjørd, áðrenn tiltøk verða sett í verk, og verða reglurnar væntandi lidnar í mars 2002.

Spælistovur

Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur hava sokallaðar spælistovur/stuðulsstovur. Talan er um brekað børn, sum um dagin verða ansað í einari spælistovu/stuðulstovu av stuðulsfólki í stuðulsfólkaskipanini í kommununi. Útreiðslur til leigu, telefon, leikur o.t. verða útreiðsluførdar undir § 22. Í Klaksvík er ein leiðari settur fyri stuðulsstovuna, og lønin hjá leiðaranum verður útreiðsluførd undir § 22.

Landsgrannskoðanin heldur, at talan er um skipanir, sum minna so nógv um stovnar, at tað er ivasamt, um heimild er fyri hesum útreiðslum eftir § 22 í barnaforsorgarlógini. Í 1991 umrøddu vit fyrstu ferð stovnslíknandi tiltøk eftir § 22. Eftir drúgt brævaskifti við Almannastovuna/Landsstýrið og Socialministeriet, var niðurstøðan, at § 22 ikki heimilar stovnsraksturi.

Almannastovan sigur seg í januar 2002 vera samda við okkum í, at tað er sera ivasamt, um heimild er fyri hesum útreiðslum samb. § 22, og fer at taka spurningin upp við Tórshavnar og Klaksvíkar kommunur.

Stovnsuppihald í Danmark

Í tíðarskeiðnum 1998 – 2000 hava útreiðslur til stovnsuppihald í Danmark ligið millum 2,1 og 2,5 mió.kr.

Sambært § 27, stk. 4, í barnaforsorgarlógini *"kræves ved anbringelse af færøske børn i døgninstitutioner i den øvrige del af riget samtykke af socialstyrelsen i samme omfang som ved anbringelse af børn fra den øvrige del af riget. Ved henvendelsen til styrelsen må sagens akter medfølge."*

”Socialstyrelsen” varð tikin av 1. januar 1991, men omanfyrinevnda grein varð ikki broytt samsvarandi, og helst er talan um vantandi konsekvensbroyting. Landsstýrismaðurin hevur í januar 2002 kunnað um, at trupulleikin verður loystur, tá ið nýggja lógin kemur í gildi.

Pleyguløn ir o.a.

Sambært § 5, stk. 5, í K. nr. 50 frá 25. mars 1993 *”fáa fosturforeldur løn, sum er eitt fast gjald um samdøgrið, fyri hvørt fosturbarnið. Eisini verður rindað eitt fast gjald um samdøgrið fyri vistarhald og klæði, umframt ein ávís upphædd til lummapening um vikuna.”*

Eftir okkara tykki er ivasamt, um nøkur heimild er í barnaforsorgarlógini at áseta gjald til fosturforeldur. Upphæddirnar í K. nr. 50/1993 eru helst ásettar við støði í táverandi donskum upphæddum, sum verða ásettar av ”Kommunernes Landsforening”, og javnførdar á hvørjum ári. Í Føroyum eru upphæddirnar ikki javnførdar, síðani kunngerðin kom í gildi 26. mars 1993.

Landsstýrismaðurin hevur í januar 2002 kunnað um, at hann í hesari tingsetuni ætlar at leggja fram uppskot um at broyta barnaforsorgarlógina, soleiðis at ein greið heimild fæst til at áseta umrøddu gjøld, og ætlanin er síðani at javna gjøldini. Landsstýrismaðurin legði 19. februar 2002 fram uppskot til løgtingslóg um broytingar.

Útgjald og útrokning av pleyguløn um o.a.

Vit hava á einum skjali greinað út fleiri mál, og víst Almannastovuna á nógvar villur í útrokningum og í útgjaldi av pleyguløn um o.a.:

- lummapeningur og gjald fyri vistarhald og klæði eru ikki broytt, tá ið børn fylla ár,
- ov lítið verður goldið út í fosturløn,
- ov lítið verður goldið út í lummapeningi,
- pleyguløn arsatsur er býttur um við vistarhaldssats,
- fosturforeldur fáa samsýning fyri vistarhald, klæðir og lummapening, men fáa ikki fosturløn,
- satsirnir til pleyguløn, kostpening og lummapening, eru teir donsku frá 1999.

Eftirlitsspor og málsviðgerð

Vanliga verður eitt mál stovnað fyri hvørja pleygufamilju, sum við stamdátum verður skrásett í VFS-skipanini, soleiðis at pleyguløn kann verða rindað. Eingin tilvísing er í VFS-skipanini, hvørji børn ella biologisk foreldur talan er um. Tí er ikki møguligt at fylgja pleyguløn um o.a. fyri eitt ávíst barn, og harvið fáa skjalprógv fyri rættleikan av skrásetingunum.

Eftir okkara tykki lúka skrásetingarnar av pleyguløn um ikki ásetingarnar í § 11 í roknskaparkunngerðini um eftirlitssporið.

Í januar 2002 sigur Almannastovan seg vera samda við okkum. Tað verður rættað beinanvegin í sambandi við, at øll barnaforsorgarmál skulu verða skrásett umaftur í journalskipanini.

Útreiðslur samsvarandi tørvi

Í einum máli gjørdi Almannastovan í apríl 2000 av at rinda eftirstøðu fyri ravmagn, olju og sjúkrakassa. Sambært játtanarskrivinum “*fáa tygum framyvir veiting, svarandi til tørv. Útreiðslurnar eru játtaðar eftir barnaforsorgarlógini, vísandi til tilmæli frá barnaverndarnevndini í (avvarðandi) kommunu.*”

Almannastovan roknaði veitingina út samsvarandi ásetingunum í § 9 í forsorgarlógini, og veitti eina ávísa upphædd í 4 mánaðir.

Líkt er til, at Almannastovan hevur blandað forsorgar- og barnaforsorgarlógina saman. Eftir okkara tykki heimilar hvørki § 22 ella onnur grein í barnaforsorgarlógini fíggjarliga hjálp eftir tørvi. Vit bóðu í desember 2001 landsstýrismannin um eina frágreiðing, men vit fingu einki svar.

Skeiðsútreiðslur

Vit eru komin fram á eina rokning til Almannastovuna frá sálarfrøðingi uppá kr. 60.000 fyri skeið fyri nývaldu barnaverndarnevndirnar í Føroyum. Almannastovan vísti á, at hon skipaði fyri skeiðnum eftir áheitan frá Kommunufelagnum, og helt talan vera um eina barnaverndarútreiðslu.

Eftir okkara tykki er ein tílík útreiðsla ikki lógarbundin barnaforsorgarútreiðsla, men ein umsitingarútreiðsla hjá Almannastovuni.

Virksemi/hagtøl

Einki virksemisyvirlit er í viðmerkingunum í løgtingsfíggjarlógini til játtanina til barnaforsorgarútreiðslur. Eftir øllum at døma er eingin skipað skráseting av hagtølum yvir virksemið eftir barnaforsorgarlógini. Í hinum norðurlondunum eru t.d. hesar upplýsingar tøkar:

- talið á familjum, ið hava fingið pedagogiska hjálp.
- talið á familjum, ið hava fingið fíggjarliga hjálp.
- talið á børnum, ið hava stuðulsfólk.
- talið á børnum, ið eru í familjupleygu.
- talið á børnum, ið hava umlættingarfamilju.
- talið á børnum, ið eru á samdøgursstovni.
- talið á børnum, ið eru á kost- ella eftirskúla.
- talið á børnum, ið uttan samtykt frá foreldrunum eru tikin úr heiminum.
- talið á børnum, ið hava fingið fíggjarligt fríplass.
- talið á børnum, ið hava fingið sosialt/pedagogiskt fríplass.

Sambært almannastjóranum fer Almannastovan í 2002 undir at útvega og savna inn dátur, soleiðis at neyðug hagtøl kunnu verða gjørd.

7.7 Dagpeningaútreiðslur (GL 2000/2 07 3-6)

Við støði í einum lista yvir útgoldnan dagpening fyri seinna hálvár 2001, vórðu 50 løntakaramál og 10 mál hjá sjálvbodnum tryggjaðum tilvildarliga vald út at kanna neyvari. Málini eru tó vald út soleiðis, at tey fevna um ymiskar málsviðgerar, og fevna um mál, har samlaða veitingin er stór.

Dagpeningalógin fevnir um hesar bólkar:

1. Lønmóttakarar, ið verða óarbeiðsførir av sjúku, skaðatilburði ella fráveru fyri føðing, vegna heilsuvanda hjá móðurini ella barninum.
2. Persónar, har børn ella hjúnafelagi verða álvarsliga sjúk, og læknin heldur tað vera alneyðugt, at viðkomandi er um tann sjúka.
3. Sjálvstøðugt vinnurekandi, ið hava tekna dagpeningatrygging viðvíkjandi sjúku.
4. Fólk, ið hava teknað dagpeningatrygging viðvíkjandi sjúku, sum gera húsligt arbeiði heima hjá sær sjálvum og fyri í minsta lagi einum fólki afturat sær sjálvum.

7.7.1 Lógargrundarlag

Sjúkradagpeningur verður rindaður við heimild í Ll. nr. 74 frá 8. mai 2001 ”um dagpening vegna sjúku v.m.”. Hóast tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur sambært § 2, stk. 2, § 15, stk. 2, og § 24, stk. 2, eru ongar reglur ásettar. Vit hava spurt landsstýrismannin, nær viðurskiftini væntandi koma í rættlag.

Í januar 2002 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almanna- og Heilsumálastýrið er í ferð við at broyta lógina, og ætlar í hesum sambandi at gera neyvari reglur og kunngerðir, sum ásett í lógini. Eftir ætlan verður arbeiðið liðugt á vári 2002.

Landsstýrismaðurin hevur eisini kunnað um, at ein fulltrúi burturav er settur til at greiða vantandi kunngerðir/vegleiðingar sambært nýggju dagpeningalógini.

Í § 8 er ásett, at dagpeningaveitingin er miðalinntøkan seinastu 5 vikurnar undan sjúkrafráveruni, tó við einum hægstamarki, ið er ásett í § 9. Sambært § 9, stk. 6, almannakunnger Almannastovan mest loyvdu dagpeningaveiting eftir stk. 2. Seinast Almannastovan hevur kunngjørt mest loyvdu dagpeningaveiting er 1. mai 2000. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at hann ætlar at geva Almannastovuni boð skjótast møguligt um at kunngera dagpeningaveitingina frá 1. mai 2001.

Til 1. juni 2001 veitti Almannastovan sjúkradagpening í sambandi við ættleiðing, við heimild í Ll. nr. 77 frá 17. mai 1995 ”um dagpening vegna ættleiðing”. Lógin vísir til ásetingarnar um ”særlige regler om dagpenge ved fødsel” í kapittul 6 í ”Lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom og fødsel”. Hendan lóg fór úr gildi 1. juni 2001, tá ið Ll. nr. 74 frá 8. mai 2001 ”um dagpening vegna sjúku v.m.” kom í gildi. Ll. nr. 48 frá 3. apríl 2001 ”um barsilsskipan”, ið kom í gildi 1. juni 2001, fevnir eisini um útgjald úr barsilsskipanini í sambandi við ættleiðing. Sostatt hevur Ll. nr. 77/1995 í roynd og veru ongan týdning longur.

Landsstýrismaðurin legði 5. februar 2002 fram uppskot til løgtingslóg um at taka av Ll. nr. 77/1995.

7.7.2 Málsviðgerð o.a.

Journalviðurskifti

Innkomin og útfarin postur verður ikki journaliseraður. Vit hava áður mælt leiðsluni á Almannastovuni til at áseta minstukrøv til málsviðgerð, herímillum eisini, hvørji skjøl, upprit o.a. skulu verða til skjals í einum máli, eisini fyri at tryggja, at málsviðgerðin lýkur krøvini um vegleiðing, partshoyring, skyldu at skriva upp o.a. í ávikavist Ll. nr. 132/1993 “um fyrisitingarlóg” og Ll. nr. 133/1993 “um innlit í fyrisitingina”. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at ein prosjektbólkur á Almannastovuni er farin til verka, og sambært almannastjóranum verður arbeiðið liðugt medio 2002.

Umsóknarbløð

Í grannskoðanarfrágreiðingum hava vit áður mælt til at broyta og dagføra umsóknarbløðini. Eftir okkara tykki er tað av stórum týdningi, tá ið arbeiðsgevarin váttar inntøkuna seinastu 5 vikurnar, at tað m.a. gongur greitt fram av teiginum, at talan er um inntøku uttan frítíðarløn.

Í skrivi 27. september 1999 frá landsstýrismanninum til Landsgrannskoðanina varð sagt frá, *”at arbeiðsbólkurin, ið er settur at endurskoða dagpeningaskipanina, kemur eisini at viðgera spurningin um dagpeningaumsóknir og at broyta orðaljóð o.a., har tað er neyðugt. Almanna- og Heilsumálastýrið loyvir sær tí at bíða við at umprenta umsóknarbløðini, til arbeiðsbólkurin hevur gjørt tilmæli um, hvussu samlaða dagpeningaskipanin – og harvið eisini umsóknarbløðini – kemur at síggja út í framtíðini.”*

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2001 kunnað um, *"at uppskot til nýggju umsóknarbløðini er gjørt, og skal endaliga góðkennast. Umsóknarbløðini verða send Landsgrannskoðaranum til kunningar innan 14 dagar."* Vit frættu ikki aftur, og í desember 2001 spurdu vit landsstýrismannin, hvat síðani var hent í málinum. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at nýggj umsóknarbløð eru send til prentingar.

Uppritarbløð og skjalprógv fyri útrokningum

Eftir okkara tykki eru upplýsingarnar í uppritarbløðunum ikki nøktandi. Vit hava áður víst á, at ongar innanhýsisreglur eru fyri málsviðgerð, herímillum hvat skal verða skrivað í uppritarblaðið. Vit hava aftur mælt til at bøta um viðurskiftini.

Uppritarbløðini geva ikki innlit í, hvussu málsviðgerin hevur roknað dagpeningaupphæddina. Váttað verður ikki altíð í uppritarbløðunum, um inntøkuviðurskiftini eru kannað. Í 7 málum, sum vit kannaðu, vóru serlig viðurskifti, ið høvdu ávirkan á útrokningina, t.d. verkfall o.a., men tað varð ikki lýst í uppritarbløðunum. Vit hava mælt til, at útrokningin av dagpeningaupphæddini verður skjalprógvað í málinum, so eitt eftirlitsspor finst, sum eisini kann vera við til at tryggja, at allar umsóknir verða viðgjørdar eins. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 boðað frá, at hann er samdur við okkum og fer at taka málið upp við Almannastovuna.

Innanhýsis eftirlit og leiðbeining

Vit hava áður í grannskoðanarfrágreiðingum mælt til eina meira skipaða nýtslu av dagslistunum, so tað t.d. sæst, hvør hevur kannað hvat og nær, at øll vita, hvussu listarnir skulu verða nýttir, og at nakrir listar verða gjørdir til ávís eftirlit. Nøkur fyribrigdi áttu altíð at verið kannað, t.d. broytt bankakontunummur, umframt nýggj mál, og at mál verða vald út við stakroyndum hjá teimum ymsu málsviðgerunum til tess at tryggja eina einsháttaða málsviðgerð.

Í januar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, *"at í sambandi við nýggju lógina verður farið undir at gera leiðbeiningar/vegleiðingar fyri dagpeningaøkið. Farið verður undir hetta arbeiði so skjótt, sum lógin er viðtikin, og í hesum sambandi verður spurningurin um eftirlit og innanhýsisreglur eisini tikin við."*

Í skrivi í oktober 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá *"at arbeitt hevur verið í fyrsta umfari við umsóknarbløðunum, og tí er enn onki gjørt við at gera reglur um innanhýsis eftirlit. Landsgrannskoðarin er vitandi um, at løgfrøðiliga orkan í Stýrinum hevur verið ógvuliga avmarkað, men frá 1. oktober 2001 koma 2 løgfrøðingar afturat. Hetta viðfører størri orku, og Almanna- og Heilsumálastýrið hevur sett sum mál, at reglur um innanhýsis eftirlit verða gjørdar áðrenn ársenda."*

Tær leiðbeiningar/vegleiðingar, sum landsstýrismaðurin í januar 2001 boðaði frá, eru ikki gjørdar. Tá ið tulkingarspurningar koma fyri, og spurningar annars um hvussu serlig viðurskifti skulu verða viðgjørd, er einki skrivligt at leita til. Kærunevndin í almannamálum hevur í ávísum førum broytt avgerðir hjá Almannastovuni. Tá ið ongar leiðbeiningar/vegleiðingar eru, og eingin skipað nýtsla av kærunevndaravgerðum er sett í verk, er vandi fyri, at allir borgarar ikki verða viðgjørdir eins. Landsstýrismaðurin vísir í februar 2002 á, at hesi viðurskifti verða tikin upp, í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skulu verða gjørdar á vári 2002.

Edv-skipanin

VFS-skipanin á Almannastovuni fevnir ikki um dagpening. Almannastovan nýtir eina gamla edv-skipan, ið er lagað til málsviðgerðina. Funktiónsskilnaður vantar í skipanini. Leiðarin tekur sær av at áseta dagpeningahámark o.a. í skipanini, og málsviðgerin skrásetir sjálvur stamdátur so sum p-tal, kontunummar o.a., og sami málsviðgeri tøppar inn

útgjaldingartíðarskeiðið og inntøkugrundarlagið. Eingin brúkaravegleiðing er, sum tryggjar, at tey, ið dagliga nýta skipanina, nýta hana rætt og eins. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at arbeitt verður við, at veitingarnar skulu fara um VFS-skipanina á Almannastovuni.

7.7.3 Løntakarar

Sambært § 8 er høvuðsreglan, at miðalinntøkan tær seinastu 5 vikurnar er inntøkugrundarlagið fyri dagpeningaveitingini.

Í frágreiðing 22. juli 1999 til landsstýrismannin umrøddu vit útrokningina av miðalinntøkuni. Vit vístu á, at Almannastovan dregur frídagar umframt halgidagar, sum liggja gerandisdagar, frá teimum 5 vikunum, áðrenn miðalinntøkan verður roknað út. T.v.s. at tá ið t.d. jól, nýggjár ella páskir eru í 5 vikutíðarskeiðnum, verða frídagarnir drignir frá tíðarskeiðnum, áðrenn miðalinntøkan verður roknað út. Vit hildu ikki hetta vera rættur útrokningarháttur, og vístu á, at dagpeningaveitingarnar í hesum førum verða ov høgar.

Í svarskrivi 27. september 1999 var landsstýrismaðurin samdur við okkum, og greiddi frá, at hann fór at boða dagpeningadeildini frá sínari støðu. Sambært Almannastovuni hevur Almanna- og Heilsumálastýrið ongantíð boðað dagpeningadeildini frá sínari støðu. Í skrivi í februar 2002 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann hevur ikki broytt støðu, og at Almannastovan fær boð um hetta í næstum.

Er inntøkan í 5 vikutíðarskeiðnum lækkað av lógligum forfalli, herímillum verkfalli, skal, sambært § 8, inntøkan seinastu 5 veruligu arbeiðsvikurnar verða nýtt sum grundarlag í staðin. Í nøkrum málum, vit hava kannað, hevur henda mannagongd ikki verið nýtt, men t.d. hava verkfalsdagarnir verið drignir frá teim 5 vikunum, eins og áður nevndu halgidagar. Vit halda hetta ikki vera í samsvari við ásetingarnar í § 8.

Útrokning av dagpeningi

Tá ið dagpeningur verður goldin út, verður støði tikið í, at arbeiðsvikan er 40 tímar, gongur frá mánadegi til fríggjadag, og at goldið verður fyri 5 dagar um vikuna. Hædd verður ikki tikin fyri halgidøgum, sum liggja gerandisdagar. Er onkur sjúkrameldaður t.d. í páskavikuni, fær hann/hon sjúkradagpening fyri skírhósdag, langafríggjadag og 2. páskadag.

Eftir okkara tykki er útrokningarhátturin ikki rættur, tí sambært § 1 í dagpeningalógini *"hevur lógin til endamáls at veita fíggjarligan stuðul í sambandi við mista inntøku og/ella sjálvbodna trygging vegna sjúku, skaðatilburð og fráveru áðrenn føðing vegna heilsuvanda fyri móður ella barn."*

Tímaløntir lønmóttakarar, ið eru sjúkir, missa ikki inntøku halgidagar. Ein tílíkur útrokningarháttur hevur við sær, at rindað verður fyri halgi- og frídagar í útgjaldingartíðarskeiðinum, samstundis sum frídagarnir verða drignir frá inntøkutíðarskeiðinum, áðrenn miðalinntøkan verður roknað út, og soleiðis verða útgjaldingarnar av dagpeningi ov høgar. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 boðað frá, at hann er samdur við okkum. Landsstýrismaðurin vísir á, at sambært kærunevndaravgerð er 7 daga vika galdandi fyri sjómenn.

Útrokning av dagpeningi í sambandi við útgjald úr arbeiðsloysisskipanini

Í einum máli, har viðkomandi arbeiddi á einum fiskavirki, varð søkt um sjúkradagpening 3 dagar um vikuna vegna sjúkraviðgerð. Almannastovan roknaði inntøkugrundarlagið við støði í inntøkuni seinastu 5 vikurnar, men tók ikki ALS-útgjaldið við. Tað hevði í fyrsta umfari ongan týdning fyri veitingina, tí arbeiðsinntøkan var nóg høg til, at hann fekk hægstu veiting.

Teir dagar, tá ið hann ikki var í sjúkraviðgerð, hevði hann arbeiði/fekk ALS útgjald frá fiskavirkinum. Inntøkan, saman við dagpeningaveitingini, var so mikið høg, at dagpeningaveitingin varð lækkað samb. § 9, stk. 5.

Í § 9, stk. 5, er ásett, at *"um dagpeningurin saman við øðrum regluligum útgjaldingum, tó undantikið almennari hjálp, verður hægri enn væntaða arbeiðsinntøkan sambært § 8, verður dagpeningurin lækkaður við einari samsvarandi upphædd."*

Tá ið dagpeningaveitingin varð lækkað, var útrokningarstøðið, sum greitt frá omanfyri, uttan ALS-útgjald. Tí varð veitingin ov nógv lækkað. Eftir okkara tykki er útrokningarhátturin ikki rættur. Vandi er fyri, at henda mannagongd er nýtt í øðrum málum eisini. Landsstýrismaðurin er samdur við okkum, men vísir á, at sambært Almannastovuni hevur bert verið talan um tað eina málið.

Inntøkuviðurskifti og aðrar inntøkur í dagpeningatíðarskeiðinum

dagpeningadeildin kannar inntøkuviðurskiftini við støði í fyribils skattaskránni. Eftirlitið er í tveimum pørtum. Fyrri parturin er at kanna, um fráboðaða inntøkan í 5 vikutíðarskeiðinum samsvarar við fyribils skattaskránna. Seinni parturin er smb. § 9, stk. 5, at kanna, um møgulig inntøka í dagpeningatíðarskeiðinum, saman við dagpeninginum, er hægri enn miðalinntøkan sambært § 8.

Sambært Almannastovuni verða inntøkuviðurskiftini bert kannað hjá uml. 1 út av 10 umsøkjarum. Tá ið inntøkuviðurskiftini eru kannað, verður ikki altíð váttað í uppritarbløðini, og sambært málsviðgerunum vátta teir einans av og á í uppritini. Váttar málsviðgeri í uppritarblaðið, sæst ikki, um tað er inntøkan í 5 vikutíðarskeiðinum ella aðrar inntøkur í veitingartíðarskeiðinum, ið eru kannaðar.

Í grannskoðanarfrágreiðingum hava vit fyrr mælt til at kanna, um umsøkjarar hava aðra inntøku, samstundis sum teir fáa dagpening. Sambært skrivi frá landsstýrismanninum frá oktober 2001 er ikki orka at kanna hesi viðurskifti. Landsstýrismaðurin vísir á, at sambært dagpeningalógini kunnu skeivar ella vantandi upplýsingar frá umsøkjarum føra til, at ov nógv goldin dagpeningur verður kravdur aftur.

Eftir okkara tykki er støðan framvegis ikki nøktandi, og vit hava mælt til at fáa hesi viðurskifti í eina trygga legu. Landsstýrismaðurin vísir í februar 2002 á, at viðurskiftini verða tikin upp, í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skulu verða gjørdar á vári 2002.

7.7.4 Sjálvboðin tryggjað

Málsviðgerð í sambandi við sjálvbodna trygging

Sambært §§ 14 og 15 kunnu sjálvboðin tryggja sær rætt til dagpening vegna sjúku. Sendir ein tryggjaður persónur inn umsóknarblað vegna sjúku, verður kannað, um hann hevur goldið fyri tryggingina, og um goldið er rættstundis.

Sambært § 12, stk. 2, verður dagpeningur í mesta lagi veittur í 40 vikur í einum 12 mánaða skeiði.

Hevur sjálvboðin tryggjaður brúkt dagpeningarættin sambært § 12, stk. 2, skal hann sambært § 13, stk. 2, prógva, at hann aftur hevur verið arbeiðsførur í minst 5 vikur, áðrenn hann aftur er vorðin sjúkrameldaður.

Almannastovan umsitur "prógv" sambært § 13, stk. 2, soleiðis, at tryggjaði skal skriva undir eina váttan um, at hann hevur verið arbeiðsførur aftur í 5 vikur, eftir seinastu sjúkramelding. Vit halda ikki hesa mannagongd vera nøktandi. Eftir okkara tykki átti ein ítøkilig meting at verið gjørd, við støði í læknaligum upplýsingum.

Harafturat verður viðkomandi biðin um at vátta, at upplýsingarnar eru givnar undir sektarábyrgd sambært § 32 í dagpeningalógini. Her verður sipað til gomlu dagpeningalógina, ið er farin úr gildi. Landsstýrismaðurin vísir í februar 2002 á, at hesi viðurskifti verða tikin upp, í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skulu verða gjørdar á vári 2002.

Gjald til sjálvbodnu tryggingina

Sambært § 21 "*verða gjøld til sjálvbodnu tryggingina eftir nærri reglum ásett av landsstýrismanninum fyri eitt ár í senn. Gjøldini verða ásett í mun til støddina av tryggjaða dagpeninginum soleiðis, at tey samlaðu inngjøldini verða mett at rinda $^{2}/_{5}$ (40%) av útreiðslunum av sjálvbodnu tryggingunum sambært kap. 7.*"

Gjaldið er seinast ásett í K. nr. 159 frá 6. desember 1995 "um gjald til sjálvbodnu dagpeningatryggingina" við heimild í "Lovbekendtgørelse nr. 102 af 2. marts 1988 om lov for Færøerne om dagpenge ved sygdom eller fødsel". Lógarkunngerðin er farin úr gildi 1. juni 2001 sambært § 30, stk. 2, í Ll. nr. 74/2001.

Útreiðslurnar í 2000 til sjálvbodnu tryggingina vóru uml. 3,2 mió.kr., og inngjaldingarnar uml. 1,2 mió.kr., svarandi til uml. 37% av útreiðslunum. Í 2001 vóru útreiðslurnar uml. 3 mió.kr. og inngjaldingarnar uml. 1 mió.kr., svarandi til uml. 32% av útgjaldingunum. Landsstýrismaðurin vísir í februar 2002 á, at hesi viðurskifti verða tikin upp, í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skulu verða gjørdar á vári 2002.

Upptøkutreytir

Sambært § 17, stk. 2, dettur tryggingin burtur, um framhaldandi gjald til sjálvbodnu tryggingina ikki er goldið inn í seinasta lagi ein mánað eftir gjaldkomudagin. Sambært § 18 dettur tryggingin burtur, um inntøku- og arbeiðsviðurskiftini verða munandi broytt, soleiðis at tryggjaði seinasta árið hevur ikki lokið treytirnar í § 15, stk. 1. Sambært § 15, stk. 2, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð neyvari reglur fyri sjálvbodnu tryggingina. Sum áður sagt, eru hesar reglur ikki ásettar.

Vit hava fleiri ferðir í skrivum og grannskoðanarfrágreiðingum víst á, at landsstýrismaðurin átti sum skjótast at ásett neyvari reglur um treytir/rættindi fyri sjálvboðin, bæði í sambandi við upptøku í og strikan úr skipanini. Hóast hesar áheitanir, er støðan óbroytt. Landsstýrismaðurin vísir í februar 2002 á, at viðurskiftini verða tikin upp, í sambandi við at kunngerðir og leiðbeiningar skulu verða gjørdar á vári 2002.

7.7.5 Onnur viðurskifti

Sjúkradagpeningur frá Almannastovuni og dagpeningur frá Føroya Vanlukkutrygging

Tá ið søkt verður um dagpening frá Vanlukkutryggingini, kunnar Tryggingin í skrivi dagpeningaskipanina um skaðafráboðanina. Dagpeningadeildin tekur tað sum eina kunning, og ikki sum eina áheitan um at fáa upplýsingar frá Almannastovuni. Biður Vanlukkutryggingin um upplýsingar frá dagpeningadeildini, verður tað gjørt munnliga, og einki verður noterað í uppritarbløðini.

Í sambandi við grannskoðan av sjúkradagpeningi í 2001 komu vit fram á 1 mál, har viðkomandi fyrst fekk sjúkradagpening frá Almannastovuni og síðani frá Vanlukkutryggingini.

Harafturat eru vit komin fram á 2 mál, har viðkomandi fyrst hevur fingið sjúkratrygd frá Lønjavningarstovuni í 2½ mánað, síðani dagpening frá Almannastovuni, og samstundis dagpening frá Vanlukkutryggingini. Verður dagpeningurin frá Vanlukkutryggingini og Almannastovuni hægri enn inntøkan seinastu 5 vikurnar, verður dagpeningurin frá Almannastovuni minkaður lutfalsliga.

Vit hava áður í grannskoðanarfrágreiðingum víst á, at tað átti als ikki at komið fyri, at Almannastovan og Vanlukkutryggingin rinda sjúkradagpening samstundis, tí sambært § 27 í vanlukkutryggingarlógini eigur Vanlukkutryggingin ikki at veita sjúkradagpening sama tíðarskeið, sum Almannastovan veitir sjúkradagpening.

Sambært skrivi frá landsstýrismanninum frá oktober 2001 merkir § 27, stk. 1, í vanlukkutryggingarlógini, at Føroya Vanlukkutrygging, við at biðja um upplýsingar frá Almannastovuni, skal forða fyri dupultútgjaldi. Landsstýrismaðurin heldur ikki Almannastovuna kunna gera meira, sum rættarstøðan er í dag.

Dagpeningadeildin hevur í november mánaði 2001 gjørt av, at tá ið talan er um umsókn um dagpening vegna skaða, verður dagpeningur í fyrstu syftu veittur við fyrivarni. Bræv verður sent umsøkjaranum, har hann verður biðin um at seta seg í samband við Vanlukkutryggingina fyri at kanna, um talan er um tryggingarskaða. Síðani skal hann kunna Almannastovuna um svarið. Er talan um ferðsluskaða, verður hann biðin um at venda sær til tryggingina hjá bilinum fyri at kanna, um hann hevur rætt til dagpening frá tryggingini, og síðani kunna Almannastovuna um svarið. Tá ið tað er gjørt, kann støða verða tikin til umsóknina.

7.8 Barnapeningur veittur í forskoti (GL 2000/ 2 07 2-5)

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 71 frá 20. mai 1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." seinast broytt við Ll. nr. 6 frá 25. januar 2001.

Í 2000 rindaði Almannastovan í forskoti barnapening uml. 9,1 mió.kr., og uml. 7,9 mió.kr. vórðu goldnar inn í árinum. Toll- og Skattstova Føroya hevur innheintanina um hendi.

Vit hava gjørt vart við, at útgreiningin í landsroknskapinum er í nettotølum og samsvarar sostatt ikki við sundurgreiningina á fíggjarlógini, sum vísir bruttotøl. Sundurgreiningin á standardkontu 62 í fíggjarlógini er eisini skeiv, tí talan er ikki um kravd gjøld, bøtur o.a.

Vit hava tilvildarliga valt út og kanna 30 mál.

Journalviðurskifti

Áðrenn hvørt forskotsútgjald letur tann, sum skal hava barnapening, Almannastovuni eina áheitan um at rinda peningin. Innkomin og útfarin postur, ið viðvíkur barnapeningi, verður ikki journaliseraður. Journaluppritarblað, har greitt verður frá gongdini í málinum, verður ikki nýtt. Áheitanin kann sammetast við eina umsókn. Tó verður hon ikki goymd á Almannastovuni, men verður send Toll- og Skattstovu Føroya saman við umbøn um innheintan. Eftir okkara tykki er hesi viðurskifti ikki nøktandi.

Toll- og Skattstova Føroya heldur tað ikki vera nøktandi, tí um peningur ikki kann verða kravdur inn, skal Almannastovan gera av, hvat so skal henda, og tá hevur Almannastovan brúk fyri upprunaskjølunum.

Málsgongd og útgjald

Resolutión frá Ríkisumboðnum skal fylgja við áheitanini um útgjald. Har stendur, hvør skal gjalda, hvør skal taka ímóti, og hvørji børn talan er um. Persónsupplýsingar verða skrásettir í edv-skipanini. Allir persónar, uttan tann sum skal gjalda, verða skrásettir við p-tali. Upplýsingar um tíðarskeiðið fyri útgjaldingini verður tøppað inn í edv-skipanina, sum roknar upphæddina út. Almannastovan nýtir eina gamla útgjaldingarskipan, sum er lagað til málsviðgerðina.

Vanligt barnagjald kann verða goldið út tvær ferðir um árið, eina ferð um mánaðin, ella okkurt annað tíðarbil. Áðrenn goldið verður út, verður ein fyribils útrokning skrivað út.

Málsviðgerin kannar sjálvur útrokningina, og rættar møguligar skeivleikar, men tað verður ikki váttað við átekning á útskriftina. Sum oftast verður útskriftin ikki goymd.

Í sambandi við nýtslu av dagslistunum hevur Landsgrannskoðanin áður í grannskoðarafrágreiðingum mælt til, at tað sæst, hvør hevur kannað hvat og nær. Í hesum føri er tað sama fólkið, sum ger alt arbeiðið. Almannastovan hevur í februar 2002 boðað frá, at arbeitt hevur verið í longri tíð við at broyta bygnaðin. Í nýggja bygnaðinum verður persónsskilnaður millum skráseting og gjalding.

Tá ið goldið verður út, fær móttakarin eitt skriv, sum er býtt í tveir partar. Fyrri parturin er uppgerð yvir útgoldnan barnapening, og seinni parturin er ein áheitan, sum móttakarin skal senda aftur til Almannastovuna. Umleið 1100 fólk fáa á hendan hátt goldið út forskot hvønn mánað, hvørt fjórðingsár ella hvørt hálvár. Hvørja ferð goldið verður út, skal málsviðgerin skráseta omanfyrinevndu áheitan við at tøppa eina upphædd inn í edv-skipanina.

Vit hava víst á, at mannagongdin krevur nógva arbeiðsorku, og kundi verið gjørd einfaldari, so at útgjøld kunnu halda fram, er eingin broyting annars í viðurskiftunum. Almannastovan vísir í februar 2002 á, at verandi skipan verður niðurløgd í 2002, og at viðurskiftini verða broytt í nýggju skipanini.

Innheintan av barnapeningi

Innheintan av barnapeningi fer fram sambært "Lov nr. 150 af 24. april 1963 om inddrivelse af underholdsbidrag som ændret ved lov nr. 280 af 8. juni 1977". Fyri at heinta inn pening uttan fyri Føroyar, eru hesar kunngerðir galdandi:

1. "Bekendtgørelse nr. 433 af 17. desember 1965 om inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til den af De Forenede Nationer vedtagne konvention af 20. juni 1956."
2. "Bekendtgørelse nr. 434 af 14. desember 1965 om anerkendelse og fuldbyrdelse af afgørelser om underholdsbidrag i henhold til Haagerkonventionen af 15. april 1958 om underholdspligt over for børn."
3. "Bekendtgørelse nr. 269 af 28. juni 1963 om inddrivelse af underholdsbidrag i henhold til konvention af 23. marts 1962 mellem Danmark, Finland, Island, Norge og Sverige."

Eftirstøður

Yvirlit yvir eftirstøðu í landsroknskapinum 1991 – 2000.

(1.000 kr.)	**2000**	**1999**	**1998**	**1997**	**1996**	**1995**	**1994**	**1993**	**1992**	**1991**
Roknskapur	38.091	36.025 [1) 2)]	[1)]	[1)]	36.649	38.298	37.104	35.072	32.595	31.363

1) Eftirstøðan fyri barnapening varð ikki víst á landsins fíggjarstøðu í landsroknskapinum fyri 1997-1999, men er hetta broytt í landsroknskapinum fyri 2000.
2) Sambært landsbókhaldinum

Við ársenda 1979 var eftirstøðan 8,3 mió.kr. Síðani eru eftirstøðurnar hækkaðar fram til 1996, tá ið tær lækkaðu, og hevur tað óivað samband við, at innkrevjingarskipanin DEMM varð tikin í nýtslu á Føroya Gjaldstovu.

Yvirlit yvir út- og inngjaldingar sambært bókhaldinum 1993–2000.

(1.000 kr.)	**2000**	**1999**	**1998**	**1997**	**1996**	**1995**	**1994**	**1993**
Afturrindan	-7.880	-8.106	-8.498	-8.562	-8.559	-5.583	-5.881	-5.389
Forskotsrindan	9.082	8.834	7.936	7.715	7.416	7.380	7.658	8.233
Tilsamans	**1.202**	**728**	**-562**	**-847**	**-1.143**	**1.797**	**1.777**	**2.844**

Sambært yvirlitinum varð meira goldið inn enn út í tíðarskeiðnum 1996–1998. Síðani er vend komin í aftur. Vit hava heft okkum við, at broytingar í eftirstøðunum ikki samsvara við munin ímillum afturrindan og forskotsrindan einstøku árini. Almannastovan hevur í februar 2002 boðað frá, at hon er farin undir at kanna hetta ósamsvar.

Innheintan í Føroyum og í Norðurlondum

Sambært § 9, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." røkir Toll- og Skattstova Føroya innheintanina av barnagjøldunum. Almannastovan sendir Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar øki, uppgerð fyri hvørt mál, har tað m.a. sæst, hvussu nógv er goldið út, og tí skal verða kravt innaftur. Krøvini verða tøppað inn í innkrevjingarskipanina (IK-skipanina), og uppgerðin verður síðani send til hvørt øki sær, sum tekur sær av innkrevjingini, alt eftir hvar tann gjaldsskyldugi býr.

Býr tann gjaldsskyldugi í einum av hinum Norðurlondunum, verða skjølini send "uttanlandsdeildini" í Vágum. Almannastovan sendir skriv til viðkomandi myndugleika, har biðið verður um, at upphæddin verður heintað inn, og sett inn á kontu hjá Føroya Gjaldstovu í B.G.-bank í Danmark. "Uttanlandsdeildin" hevur ábyrgdina av kontuni í B.G.-bank og skrásetir inngjaldingarnar í IK-skipanina, so hvørt tær koma inn á kontuna. Annars hevur deildin ongan aktivan leiklut í innheintanini. Um gjaldsskyldugi flytur bústað til aðra kommunu, boðar kommunan Almannastovuni frá, og Almannastovan sendir síðani skriv til nýggju kommununa.

Toll- og Skattstova Føroya heldur, at bert tey eiga at senda krøvini út. Í fleiri førum hava báðir stovnarnir sent krøv. Almannastovan er í februar 2002 samd í hesum sjónarmiði, og mannagongdin er broytt frá 1. januar 2002.

Innheintan í øðrum londum

Barnapeningur verður ikki heintaður inn uttanfyri Norðurlond, hóast tað er møguligt sambært fyrr nevndu konventiónum. Almannastovan vísir í februar 2002 á, at sambært § 7, stk. 3, í "B. 433/1965" er tað Almannastovan, sum kann biðja um, at krøv verða kravd inn í útlondum. Hinvegin er tað Toll- og Skattstova Føroya, sum skrásetir krøvini. Fundur hevur verið millum partarnar fyri at fáa eina greiða mannagongd fyri, hvussu krøvini kunnu verða kravd inn.

Eftirgeving og fyrning

Sambært § 13 í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." skulu *"forskotsvís útgoldin gjøld, sum ikki eru afturgoldin av tí gjaldsskylduga, eftirgevast av Almannastovuni,*

1. *tá einki gjald forskotsvíst er útgoldið tað síðsta árið, ella*
2. *tá tann gjaldsskyldugi hevur verið innsettur á stovni undir Kriminalforsorgini í útgjaldingartíðarskeiðnum.*

Stk. 2. Tað er ein fyritreyt fyri eftirgeving av forskotsvíst útgoldnum gjøldum eftir stk. 1, at tann gjaldsskyldugi ikki er førur fyri at rinda ta skyldugu upphæddina, uttan at honum kemur at vanta tað, sum má metast at vera neyðugt til egið ella familjunnar uppihald."

Sambært Almannastovuni er ongantíð eftirgivið. Í landsroknskapinum fyri 2000 eru uml. 25 mió.kr. settar av til virðisleys krøv. Føroya Gjaldstova metti miðskeiðis í nítiárunum, at 66% av salduni var virðisleys. Sambært Toll- og Skattstovu Føroya mugu øll mál, í samráð við Almannastovuna, verða kannað fyri at staðfesta, um tey kunnu verða kravd inn. Krøv uttanfyri Norðurlond hava serligan status, har serlig innheintingarmannagongd skal til.

Sambært § 10 í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." er fyrningartíðin 20 ár. Í IK-skipanini er ikki gjørligt at síggja aldurin á einstøku krøvunum, og tí er ikki gjørligt at síggja, um krøv eru fyrnað, ella nær krøv verða fyrnað.

Eftir okkara tykki er støðan ikki nøktandi. Vit hava mælt til, at neyðugar tekniskar broytingar verða framdar, so til ber at skráseta aldur og aðrar upplýsingar, sum skulu til, fyri at ein effektiv innheintan og mótrokning kann verða gjørd. Síðani er neyðugt at gjøgnumganga krøvini í skipanini, og í tí sambandinum m.a. finna fram til, hvørji krøv eru fyrnað. Almannastovan er samd við okkum, og hevur í februar 2002 boðað frá, at fundur hevur verið við Toll- og Skattstovu Føroya, har gjørt varð av at ganga ígjøgnum krøvini í skipanini.

Frágreiðing um ábøtur

Føroya Gjaldstova, ið hevði innheintan um hendi, bað í 1996 "Kommunedata" um eina frágreiðing um mannagongdirnar á Almannastovuni og á Føroya Gjaldstovu.

Í frágreiðingini varð m.a. mælt til, at útgjalding og innheintan av barnapeningi varð samlað á einum stað, og mælt varð til at samskipa dátumannagongdirnar í edv-skipanunum, fyri at forða fyri dupultarbeiði. Hildið varð eisini, at tað átti at verið gjørligt:

at skriva út fráboðan um útgjald av barnapeningi til móttakaran og gjaldsskylduga.

at skriva út saldulistar og kontuúrrit til móttakaran og gjaldsskylduga.

at aldursuppbýta krøvini.

at skriva út innheintingarskriv til onnur lond.

at skriva út kvittanir fyri goldin krøv.

at fáa hagtøl úr skipanin.

Sambært stjóranum á Føroya Gjaldstovu tóku bæði Gjaldstovan og Almannastovan undir við tilmælinum, og partarnir samdust um at miðja ímóti at samskipa innheintingararbeiðið, og at leggja edv-skipanina á Almannastovuna inn á Føroya Gjaldstovu. Av ymiskum orsøkum datt ætlanin niðurfyri, og Toll- og Skattstova Føroya, ið síðani hevur tikið yvir innheintanina, kunnaði í november 2001 um, at eingin roynd sæst vera gjørd at samskipa arbeiðið millum innheintingina og Almannastovuna, men at fundur varð avtalaður við Almannastovuna at viðgera spurningar.

7.9 Stuðul til uppihaldspening (GL 2001/2 07 5-2)

Stuðul til uppihaldspening verður rindaður við heimild í Ll. nr. 90 frá 6. juni 1997 "um stuðul til uppihaldspening" seinast broytt við Ll. nr. 69 frá 2. mai 2001.

Harafturat er K. nr. 143 frá 26. september 1997 "um stuðul til uppihaldspening", og rundskriv nr. 3 frá 13. juni 2000 frá Almanna- og Heilsumálastýrinum "Vegleiðing um viðgerð av umsóknum um stuðul sambært lóg um stuðul til uppihaldspening – serliga viðvíkjandi gjaldsavgerðum frá Ríkisumboðnum."

Í 2000 var stuðulin umleið 5,2 mió.kr. Við støði í størstu útgjaldingunum valdu vit út 20 mál at kanna neyvari. Vit komu fram á smáar útrokningarmunir í 4 málum.

Journalviðurskifti

Innkomin og útfarin postur, ið viðvíkur stuðli til uppihaldspening, verður ikki journaliseraður. Journaluppritarblað, har greitt verður frá gongdini í málinum, verður ikki nýtt.

Stuðulsupphæddir og tíðarskeið

Rætt til stuðul til uppihaldspening hava smb. § 1 í Ll. nr. 90/1997 persónar, sum frá tí almenna eru álagdir at gjalda uppihaldspening til hjúnafelaga, skildan ella sundurlisnan, og persónar, sum frá tí almenna eru álagdir at gjalda uppihaldspening til børn yngri enn 18 ár, og sum ikki búgva hjá uppihaldsskylduga.

Sambært § 2, stk. 1, verður árliga stuðulsupphæddin 50% av tí uppihaldspeningi, sum persóni er álagt at gjalda, og sum hann hevur goldið. Sambært § 2, stk. 3, verður stuðulin goldin út seinast í juni og seinast í desember mánaði.

Av tí at nógvar umsóknir koma inn í juli og januar mánaði, hevur Almannastovan, í samráð við Almanna- og Heilsumálastýrið, gjørt av eisini at rinda út stuðul í januar og juli mánaði. Útgjaldið í januar verður bókað í landsroknskapinum í januar mánaði sama ár, hóast útreiðslurnar viðvíkja farna árinum. Sostatt verða útreiðslurnar ikki rætt tíðaravmarkaðar. Almannastovan hevur í februar 2002 kunnað um, at frá 2002 verður mannagongdin broytt, so tíðaravmarkanin verður røtt.

Málsgongdin

Stuðul verður bert veittur eftir umsókn. Sambært § 3 skulu við umsóknini leggjast avrit av gjaldsavgerð frá Ríkisumboðnum um barnagjald/gjald, ella samsvarandi útlendsk resolutión, og gjaldsváttan/ir fyri tað tíðarskeið, søkt verður um.

Persónsupplýsingar, kontunummur í peningastovni ella postgiro, og útroknaðu upphæddirnar verða skrásettar í eina lønarskipan, ið eisini verður nýtt til lønaravgreiðslu til starvsfólk innan Serforsorgina og Heimarøktina. Áðrenn goldið verður út, verður ein fyribils útgjaldingarlisti skrivaður út. Málsviðgerin kannar sjálvur útrokningina, og rættar møguligar skeivleikar, men tað verður ikki váttað við átekning á útskriftina.

Í sambandi við nýtslu av dagslistunum hevur Landsgrannskoðanin áður í grannskoðarafrágreiðingum mælt til, at tað sæst, hvør hevur kannað hvat og nær. Í hesum føri er tað sama fólkið, sum ger alt arbeiðið. Almannastovan hevur í februar 2002 boðað frá, at arbeitt hevur verið í longri tíð við at broyta bygnaðin. Í nýggja bygnaðinum verður persónsskilnaður millum skráseting og gjalding.

Tvørrandi samskipan

Tríggjar fyrisitingar umsita forskotsrindan, innheintan av barnapeningi og stuðul til uppihaldspening. Tær somu upplýsingarnar verða skrásettar í trimum edv-skipanum, tveimum á Almannastovuni og einari á Toll- og Skattstovu Føroya. Í stóran mun er talan um samanhangandi málsviðgerð av somu persónum, sum byggir á somu upplýsingar. Vit hava víst á, at tað er óneyðuga arbeiðskrevjandi og førir við sær dupultinntøppingar, umframt feilmøguleikar í sambandi við skráseting av upphæddum o.a. Upplýsingarnar kundu verið samskipaðar, so tað slapst undan dupultinntøppingum og dupultarbeiði. Almannastovan hevur í februar 2002 kunnað um, at hon í 2002 fer at taka spurningin upp við Toll- og Skattstovu Føroya fyri at fáa arbeiði meira samskipað.

7.10 Hjálpartólamiðstøðin (GL 2000/2 07 4-8)

Viðvíkjandi lógarheimildini at veita stuðul við afturgjaldsskyldu til bústaðarbroytingar og avlamisbilar, vístu vit í frágreiðing frá mars 2001 m.a. á:

at ivasamt er, um heimild er at veita stuðul við afturgjaldsskyldu til avlamisbilar.

at ivasamt er, um bústaðarbroytingar koma undir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini.

at veitt eru rentufrí lán til bústaðarbroytingar til foreldur við brekaðum børnum, vísandi til § 18, stk. 5. Í fleiri førum hevur Almannastovan, tá ið barnið varð 15 ár, hvønn mánaða hildið aftur 20% av pensjónini hjá barninum, sum afturgjald fyri láninum, sum veitt varð foreldrunum. Ivasamt er, um henda mannagongd er lóglig.

at reglur sambært § 18, stk. 6, í forsorgarlógini ikki eru ásettar.

at vit ivast í um landsstýrismaðurin í § 7 í K. nr. 8/2000 "um persónliga viðbót" kann áseta, at tá ið persónlig viðbót verður veitt til útreiðslur til egnan bústað, verður hon treytað av, at ein afturgjaldsskipan verður gjørd.

Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Almanna- og Heilsumálastýrið, í samráð við Almannastovuna, fór at fáa greiði á heimildarspurningunum, og arbeiða víðari við at fáa vantandi reglugerðir gjørdar.

Í august 2001 spurdu vit, hvat var hent í málinum, og nær arbeiðið væntandi fór at verða liðugt. Landsstýrismaðurin svaraði í september 2001, "*at viljin er til staðar, men Almanna- og Heilsumálastýrið hevur enn ikki fingið fleiri starvsfólk, millum annað til at arbeiða við hesum máli*."

7.11 Heimarøktin (GL 1998/2 07 4 – 5)

Almennar viðmerkingar

Í frágreiðing í mars 2001 umrøddu vit grannskoðan av Heimarøktini og Eldrarøktini í Sandoynni, og á fleiri økjum mæltu vit til at fáa ávís viðurskifti í rættlag. Í november 2001 vitjaðu vit á skrivstovuni hjá Heimarøktini fyri at kunna okkum um, í hvønn mun viðurskiftini, ið umrødd eru í samskiftinum við landsstýrismannin, vóru komin í rættlag.

Vantandi reglur fyri mannagongdum á roknskaparøkinum

Eingin reglugerð finst fyri, hvussu roknskaparhaldið er fyriskipað. Reglugerðin skal vera samsvarandi rundskrivi frá Fíggjarmálastýrinum 6. februar 2001, og skal verða góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001. Vit eru kunnað um, at ein arbeiðsbólkur hevur arbeitt við uppskoti til roknskaparreglugerð, men arbeiðið er ikki liðugt. Vit hava í desember 2001 spurt landsstýrismannin, nær viðurskiftini væntandi koma í rættlag. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at Heimarøktin hevur sent uppskot til roknskaparreglugerð at góðkenna.

Roknskaparhald, -eftirlit og -góðkenning

Heimarøktin, Heilsusystratænastan og Eldrarøktin í Sandoynni eru skipað í serskildar roknskapareindir. Sambært roknskaparkunngerðini skal stovnsleiðarin hvønn mánað stemma av og góðkenna roknskapin. So at siga allir stovnar kanna, um bókingar, sum ávirka raksturin, samsvara við undirliggjandi skjøl, men fíggjarstøðan verður ikki stemmað av. Eingin stovnur váttar mánaðarroknskapin mótvegis stjóranum, og stjórin váttar ikki mánaðarroknskapin mótvegis hægri myndugleika, sum ásett er í roknskaparkunngerðini.

Í seinastu frágreiðing kunnaðu vit um, at sambært stjóranum var ætlanin, at ein skipað eftirlits- og góðkenningarmannagongd skuldi setast í verk fyrst í 2001. Í november 2001 helt stjórin, at eftirlits- og góðkenningarviðurskiftini framvegis ikki vóru nøktandi. Hann boðaði frá, at ein skipað eftirlits- og góðkenningarmannagongd á roknskaparøkinum verður sett í verk, tá ið roknskaparreglugerðin er endaliga góðkend í Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Fíggjarstøða

Í seinastu frágreiðing varð víst á, at fleiri fíggjarstøðukontur í AHS-roknskapardøminum samsvara ikki við somu kontur í landskassaroknskapardøminum, og eftir okkara tykki vóru ábyrgdarviðurskiftini viðvíkjandi avstemman av fíggjarstøðuni ikki nóg greið, serliga innan Heimarøktina, sum roknskaparliga er ein av størstu stovnunum í landinum. Mælt varð til at greiða viðurskiftini.

Í november 2001 kunnaði stjórin um, at Almanna- og Heilsumálastýrið stemmaði fíggjarstøðuna av. Hann er tó samdur við okkum í, at økisleiðararnir hava ábyrgdina sambært roknskaparrundskrivinum. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at ætlanin er at seta eitt fólk í starv í Heimarøktini at taka sær av fíggjarmálum, og roknað verður við, at trupulleikarnir, ið eftir eru, tá verða loystir.

Undir verkfallinum í mars 1999 fingu flestu starvsfólkini innan Heimarøktina og Serforsorgina løn við somu upphæddum, sum mánaðin frammanundan. Úrslitið varð m.a., at summi fingu løn, ið als ikki skuldu hava løn, onnur fingu ov nógv o.s.fr. Tað, sum var ógreitt, og ikki kundi verða kravt innaftur, varð standandi sum munur á serligari millumrokningarkontu. Sambært Almanna- og Heilsumálastýrinum varð nógv orka nýtt til at fáa greiðu á hesari kontu. Tað eydnaðist ikki til fulnar. Almanna- og Heilsumálastýrið gjørdi tí í mars 2001 av, í samráð við leiðsluna á Heimarøktini og Serforsorgini, at útreiðsluføra munin á 420 t.kr., sum kassamun. Raksturin hjá Heimarøktina er skuldskrivaður við 227 t.kr. fyri hetta tap.

Heimarøktin

Roknskapargóðkenning

Í starvslýsingini 15. apríl 1996 fyri økisleiðarar er m.a. ásett, at økisleiðarin skal:

- hava eftirlit við tímaroknskapinum hjá gjaldandi brúkarum og lønarseðlum hjá starvsfólkum
- hava eftirlit við goymslum
- gera yvirlit, roknskap og hagtøl til Meginskrivstovuna og Almannastovuna

Vit hava víst á, at roknskapirnir verða ikki góðkendir, og at ásetingarnar í starvslýsingini um roknskaparhaldið eru ikki nóg neyvar. Í seinastu frágreiðing mæltu vit til at seta greiðari reglur. Í november 2001 kunnaði stjórin um, at einki var gjørt, men hann vísti til ásetingarnar í komandi roknskaparreglugerð. Í februar 2002 heldur landsstýrismaðurin, at trupulleikarnir verða loystir, tá ið roknskaparreglugerðin er góðkend og sett í verk.

Brúkaragjald

Vit hava í grannskoðanarfrágreiðingum síðani 1994 víst á, at mannagongdin í sambandi við brúkaragjøld var óneyðuga tung og arbeiðskrevjandi. Hon førdi við sær dupultinntøppingar og nógvar feilmøguleikar av manuellum samanteljingum, útrokningum, yvirføringum av tølum o.ø. Leiðslan á Almannastovuni hevur áður boðað frá, at hon er greið yvir trupulleikan og skal skipa fyri, at arbeiðið verður edv-viðgjørt. Í frágreiðingini frá løgtingsgrannskoðarunum 16. mars 2000 varð átalað, at einki var gjørt fyri at bøta um hesi viðurskifti.

Í seinastu grannskoðanarfrágreiðing frá mars 2001 varð staðfest, at umsitingin var ikki batnað, og at arbeiðið við brúkaragjøldum framvegis ikki verður edv-viðgjørt. Stjórin hevur víst á, at í sambandi við nýggju lønarverkætlanina, har økini skulu hava beinleiðis samband við eina sentrala lønarskipan, verður møguligt at menna eina skipan, har økini kunnu luta heimahjálparatímar sundur á brúkarar. Leiðslan ætlar at bíða, til lønarskipanin er sett í verk, og síðani at fara undir at skipa eina edv-viðgerð av gjaldinum fyri heimahjálp.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 boðað frá, at hann heldur, at hesi viðurskifti mugu koma uppá pláss skjótast tilber. Hann ásannar tó, at slíkt arbeiði tekur tíð. Hann er samdur við stjóran á Heimarøktini um, at kannað má verða, um umsiting av brúkaragjøldum kann verða gjørd í nýggju skipanini, áðrenn endaliga avgerð verður tikin um, hvat skal verða gjørt við trupulleikan. Landsstýrismaðurin hevur fingið at vita, at skipanin verður tikin í nýtslu einaferð í 2002, og hann vil tá venda aftur til málið.

Ársfrágreiðing

Sambært § 5 í rundskrivinum um Heimarøktina frá 1. september 1997 skal leiðarin skriva eina ársfrágreiðing. Í november 2000 boðaði stjórin frá, at ársfrágreiðingin fyri fíggjarárið 2000 væntandi kom út eftir árslok 2000. Eingin frágreiðing er tó gjørd, og stjórin hevur í november 2001 kunnað um, at ætlanin er at gera eina ársfrágreiðing fyri 2001.

Arbeiðsreglugerð

Sambært § 4 í sama rundskrivi verður álagt leiðaranum at skipa fyri arbeiðsreglugerðum, ið lýsa, hvussu dagliga arbeiðið í Heimarøktini verður lagt til rættis og útint. Í november 2000 kunnaði stjórin um, at arbeiðið er tengt at, nær ein fakligur leiðari verður settur. Stjórin hevur í november 2001 boðað frá, at ein fakligur leiðari væntandi verður settur í 2002. Vit spurdu í desember 2001 landsstýrismannin, nær viðurskiftini væntandi koma í rættlag. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at ein fakligur leiðari verður settur á vári 2002, og verður spurningurin tá tikin upp.

Stevnumið fyri Heimarøktina

Sambært § 1, stk. 2, í rundskrivinum ”ásetir landsstýrismaðurin stevnumiðini fyri Heimarøktina”. Vit spurdu í seinastu frágreiðing, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevði. Í mai 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, “*at Almanna- og Heilsumálastýrið hevur ongar ætlanir í hesum sambandi í løtuni. Møguleiki hevur ikki verið hjá núverandi landsstýrismanni enn at seta seg inn í málið og tikið støðu til, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin skal hava.*” Vit spurdu í desember 2001 landsstýrismannin, hvørjar ætlanir hann hevði. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at ein fakligur leiðari verður settur á vári 2002, og verður spurningurin tá tikin upp.

7.12 Serforsorgin (GL 1998/2 07 4 – 6)

Í seinastu frágreiðing í mars 2001 umrøddu vit grannskoðan av Serforsorgini, og mæltu til ábøtur á fleiri økjum. Niðanfyri vísa vit á, í hvønn mun viðurskiftini eru komin í rættlag.

Bygnaðarbroytingar

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at við bygnaðarbroytingunum innan almannaverkið varð Serforsorgin fyrisitingarliga 1. juli 1998 flutt frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálastýrið. Í kunngerðum og rundskrivum varð tó framvegis víst til Almannastovuna, sum eftirlitsmyndugleika. Tað er ikki broytt, og sostatt eru fleiri kunngerðir/rundskriv at kalla meira villleiðandi enn vegleiðandi. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at kunngerðir og rundskriv í løtuni verða rættað.

Vantandi reglur fyri mannagongdum á roknskaparøkinum

Eingin reglugerð finst fyri, hvussu roknskaparhaldið er fyriskipað. Reglugerðin skal vera samsvarandi rundskrivi frá Fíggjarmálastýrinum 6. februar 2001, og roknskapareglugerðin skal vera góðkend í seinasta lagi 31. desember 2001. Stjórin hevur í november 2001 kunnað um, at

ein arbeiðsbólkur hevur arbeitt við uppskoti til roknskaparreglugerð, men arbeiðið er ikki liðugt. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at Serforsorgin hevur sent Almanna- og Heilsumálastýrinum uppskot til roknskaparreglugerð at góðkenna.

Roknskapargóðkenning og onnur viðurskifti

Fyrisitingarliga verður játtanin býtt millum verkstøðini, bústovnarnar og sambýlini. Tey eru skipað sum serstakar roknskapareindir, sum stovnsleiðarin hevur ábyrgdina av.

Sambært roknskaparkunngerðini skal stovnsleiðarin hvønn mánað stemma av og góðkenna roknskapin. So at siga allir stovnar kanna, um bókingar, sum ávirka raksturin, samsvara við undirliggjandi skjøl, men fíggjarstøðan verður ikki stemmað av. Eingin stovnur undir Serforsorgini váttar mánaðarroknskapin mótvegis stjóranum, og stjórin váttar ikki mánaðarroknskapin mótvegis hægri myndugleika, sum ásett er í roknskaparkunngerðini.

Í november 2001 helt stjórin framvegis, at eftirlits- og góðkenningarviðurskiftini vóru ikki nøktandi. Hann kunnaði um, at ein skipað eftirlits- og góðkenningarmannagongd á roknskaparøkinum verður sett í verk, tá ið roknskaparreglugerðin er endaliga góðkend í Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Fíggjarstøða

Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at bert á nøkrum fáum stovnum varð kassakontan stemmað av mótvegis fíggjarstøðuni í bókhaldinum. Nógvar villur vóru í skrásetingunum, og vit mæltu til at greiða fløkjuna. Almanna- og Heilsumálastýrið hevur síðani miðvíst stemmað flest allar kontur av.

Undir verkfallinum í mars 1999 fingu flestu starvsfólkini innan Heimarøktina og Serforsorgina løn við somu upphæddum, sum mánaðin frammanundan. Úrslitið varð, at onkur fekk løn, ið als ikki skuldi hava løn, onnur fingu ov nógv o.s.fr. Tað, sum var ógreitt, og ikki kundi verða kravt innaftur, varð standandi sum munur á serligari millumrokningarkontu. Sambært Almanna- og Heilsumálastýrinum varð nógv orka nýtt til at fáa greiðu á hesa kontu. Tað eydnaðist ikki til fulnar. Almanna- og Heilsumálastýrið gjørdi tí í mars 2001 av, í samráð við leiðsluna á Heimarøktini og Serforsorgini, at útreiðsluføra munin 420 t.kr., sum kassamun. Raksturin fyri Serforsorgina er skuldskrivaður 193 t.kr. fyri hetta tap.

Roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti hjá húsfólkum í sambýlum

Sambært umfarsskrivi 4. august 1997 frá Almannastovuni "um reglugerð fyri sambýli" hevur fyristøðufólkið ábyrgdina av, at roknskapur verður førdur fyri privatu nýtsluna og felagskontuna hjá húsfólkunum, og Almannastovan skal skipa fyri at grannskoða roknskapin við hóskandi millumbili. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at roknskapirnir vóru ikki settir upp og grannskoðaðir í nøkur ár. Avtala er síðani gjørd við annan grannskoðara, og sambært stjóranum í november 2001 eru viðurskiftini komin í rættlag.

Vit vístu eisini á, at í skrivi frá Almanna- og Heilsumálastýrinum 25. mai 1998 til Almannastovuna heldur Stýrið, at lógirnar, kunngerðirnar og reglugerðirnar á økinum eru ógreiðar, og ætlanin er at gera skipanina greiðari fyri allar partar, ikki minst fyri starvsfólkini, og áseta neyvari reglur um, hvussu peningurin hjá búfólkunum skal verða umsitin.

Í august 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at ætlanin var á heysti 2001 at gera kunngerðir fyri bústovnar og sambýlir. Í november 2001 kunnaði stjórin fyri Serforsorgina um, at hann á fundi við Almanna- og Heilsumálastýrið fyri uml. 3 mánaðum síðani hevði umrøtt málið, men síðani hevði hann ikki frætt aftur. Sambært landsstýrismanninum, í februar 2002, *"er Almanna- og Heilsumálastýrið í ferð við at leggja seinastu hond á kunngerðina um vard verkstød og aðrar fyriskipanir. Væntandi verður henda kunngerð liðug heilt skjótt."*

Stuðul frá Happadráttargrunninum

Vit hava fleiri ferðir í grannskoðanarfrágreiðingum vístá, at tørvur er á at seta greiðar og einsháttaðar reglur fyri stuðli úr Happadráttargrunninum. Vit hava mælt landsstýrismanninum til, saman við Føroya Gjaldstovu, at taka upp spurningin við Happadráttargrunnin um at fáa eina fasta útgjaldingar- og skrásetingarmannagongd, tá ið Happadráttargrunnurin letur studning til t.d. verkstøð. Einki er hent í málinum, og vit hava enn einaferð mælt til at viðgera henda spurning. Sambært landsstýrismanninum, í februar 2002, verður umhugsað at taka grunnin upp til viðgerðar í síni heild.

Javnan av upphæddum til persónligan tørv o.a.

Sambært § 13, í K. nr. 64 frá 1. apríl 1993 "um upphæddir til persónligan tørv og gjald fyri vaksin, sum búgva á stovnum", javnar Almannastovan hvørt ár upphæddirnar til persónligan tørv og gjald fyri uppihald á stovnum, á sama hátt, sum almannaveitingar annars verða javnførdar. Upphæddirnar eru seinast javnaðar við 3% 1. januar 2000, sambært rundskrivi 16. juni 2000 frá Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Sambært pensjónsásetingarlógini skulu almannaveitingar verða javnaðar við 4% á hvørjum ári frá 1. januar 2001. Sostatt áttu upphæddirnar at verið javnaðar við 4% 1. januar 2001. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at upphæddirnar fyri 2001 og 2002 eru javnaðar, og rundskriv verður sent Serforsorgini. Ætlanin er at gera eina nýggja og greiðari kunngerð.

Aðrar viðmerkingar

Vit hava fleiri ferðir vístá, at á serstovnaøkinum eru ikki allar peningastovnskontur skrásettar í bókhaldinum. Á summum verkstøðum eru peningastovnskontur og kassapeningurin blandaður saman, og tí vístu fleiri stovnsroknskapir ikki eina fullfíggjaða mynd av virkseminum. Á tveimum verkstøðum var í 2001 eingin bati hendur. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at viðurskiftini síðani eru komin í rættlag.

7.13 Serforsorgarstovnar og stuðlar, lønargrannskoðan (GL 1998/2 07 4-7)

Í seinastu frágreiðing frá mars 2001 umrøddu vit ymsar veikleikar/trupulleikar viðvíkjandi umsiting av lønum hjá stuðulspedagogum og starvsfólki innan Serforsorgina. Í september 2001 kunnaði landsstýrsmaðurin, um hvørji tiltøk vóru sett í verk.

Ógreið sáttmálaviðurskifti

Í sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag er ein seravtalu frá 1988, ið ásetir, at gamlar "reglur og siðir" framvegis eru í gildi. Grundarlagið fyri hesum "reglum og siðum", sum er ein leivd frá danskari umsiting, finst í gomlum donskum sáttmálum, rundskrivum o.ø., og tað er ofta torført hjá løntakarum og lønarumsitingini við vissu at siga, hvørjar reglur eru galdandi. Tað hevur við sær umsitingarligar skeivleikar og ivamál. Vit vístu á, at tað hevði verið ein fyrimunur, um reglurnar vóru at finna í galdandi sáttmálum.

Sambært landsstýrismanninum er tað ikki eitt mál, sum Almanna- og Heilsumálastýrið hevur nakra beinleiðis ávirkan á, annað enn seta ynski fram til samráðingarnar, tí sáttmálarætturin liggur hjá Fíggjarmálastýrinum. Í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag 6. desember 2001 er einki hent viðvíkjandi nevndu seravtalum, ið soleiðis framvegis er í gildi.

Serlig viðurskifti viðv. stuðulspedagogum:

Vit hava vist á, at roknskaparhald og lønarumsiting á stuðulsfólkaøkinum er ikki á einum nóg tryggum støði, og lýkur ikki grundleggjandi krøv í roknskaparkunngerðini. Hóast lønarútreiðslurnar frá 1995 til 2000 vórðu nærum trífaldaðar til uml. 20 mió.kr., var einki eftirlit við lønarútgjaldingunum. Eingin kannaði, um lønarseðlarnir vóru rættir og samsvaraðu við lønarútgjaldingarnar, fíggjarstøðan varð ikki stemmað av, mánaðarroknskapurin varð ikki váttaður mótvegis hægri myndugleika, og eisini var ógreitt, hvør hevði ábyrgdina av hesum viðurskiftum.

Í september 2001 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt varð við at bøta um roknskaparhald og lønarumsiting á stuðulsfólkaøkinum. Landsstýrismaðurin vísti eisini á, at álitið "Ein lýsing av stuðulsfólkaøkinum - og eitt tilmæli um eina aðra skipan", varð handað honum í juli 2001. Almanna- og Heilsumálastýrið arbeiðir víðari við hesum máli. 3 fólk eru sett at útgreina stuðulsfólkaøkið til tey vaksnu, samstundis sum Almanna- og Heilsumálastýrið er farið at orða eina nýggja grein í almannapensjónslógin0a, sum fyribils í eitt ár gevur heimild til verandi virksemi. Viðvíkjandi stuðlum til børn undir og í skúlaaldri, og til familjur, vísti landsstýrismaðurin á, at Almanna- og Heilsumálastýrið fer í gongd við hetta arbeiði, so skjótt orka verður til tess.

7.14 Ellis- og røktarheim, dagstovnar o.a. (GL 2001/2 07 4 - 10)

Ein stórur partur av útreiðslunum innan almannamál fer til rakstur av sjálvsognarstovnum, kommunalum stovnum og skipanum, sum hava sínar egnu roknskapir:

Játtanartøl og roknskapartøl (1.000 kr):

	Kontu nr. á fíggjarlóg	Stovnar	Játtanarslag	Játtan 2000	Roknskapur 2000
1	8.21.3.07./20	Føroya Barnaheim	*Rakstrarjáttan*	6.139	5.375
2	8.21.6.04./20	Ellis- og røktarheim	*Rakstrarjáttan*	84.760	83.724
3	8.21.6.04./21	Tórshavnar Privata Vistarheim	*Rakstrarjáttan*	4.743	3.999
4	8.21.6.01./20	Ymiskir serforsorgarstovnar	*Rakstrarjáttan*	9.420	9.301
5	8.21.9.01./01	Dagstovnar	*Onnur játtan*	38.422	38.473
	Tilsamans			**143.484**	**140.872**

Vit hava samanborið roknskapartølini í landsroknskapinum við eksternu roknskapirnar, ið verða grannskoðaðir av løggildum ella skrásettum grannskoðarum, og niðanfyri verður í stuttum tikið saman um viðmerkingar okkara.

Tórshavnar Ellis- og Umlættingarheim. Landskassastudningurin verður bókaður á kontu 7210 "Flyting til kommunur". Ein restupphædd 246 t.kr. viðvíkjandi 2000 er av misgáum bókað í landsbókhaldinum í 2001.

Sambýlið "Eysturstræti 4" heldur til í einum bygningi hjá felagnum Sinnisbata. Í seinastu frágreiðing vístu vit á, at eingin leigusáttmáli var gjørdur, og bygningurin og lán vóru tikin við í roknskapin hjá sambýlinum fyri 1999. Landsstýrismaðurin kunnaði í apríl 2001 um, at hann hevði góðtikið, at rentur og avdráttir vórðu goldnar av rakstrarjáttanini í 2000, vísandi til ætlanina hjá Sinnisbata og Íbúðagrunninum at seta á stovn sjálvsognarstovn, ið skal eiga og reka ognirnar á Sólteigi 11 og Eysturstræti 4.

Í januar 2001 varð avtala gjørd um at keypa ognirnar, og í juli 2001 varð avtalað at stovna ein sjálvsognarstovn, ”Sólstræti“, ið skal eiga og leiga út ognirnar í Eysturstræti og á Sólteigi. Í desember 2001 kunnaði Almanna- og Heilsumálastýrið um, at viðtøkur og leigusáttmálar eru gjørdar, men at enn vanta nakrir smálutir, áðrenn ognirnar kunnu verða tinglisnar.

7.15 Blákrossheimið (GL 1996/2 08 4 - 1)

Í frágreiðing okkara í mars 2000 settu við landsstýrismanninum nakrar spurningar, og niðanfyri hava vit greitt frá, í hvønn mun viðurskiftini eru komin í rættlag.

Vit hava m.a. spurt:

1. hvussu “tey av Landsstýrinum ásettu stevnumið” sambært § 1 í viðtøkunum fyri Blákrossheimið skulu skiljast, og hvørji stevnumið Landsstýrið hevur ásett,
2. nær og hvussu gjaldið fyri búgvandi gestir, sambært § 5 í viðtøkunum fyri Blákrossheimið, er ásett,
3. um heimildina at flyta 200 t.kr. umvegis eginognina hjá Blákrossheiminum til “Bláa Kross Føroya”,
4. um Almanna- og Heilsumálastýrið hevur góðkent leigusáttmálan fyri bygningar, sum Blákrossheimið leigar frá Bláa Krossi Føroya,
5. hví játtanarslagið “rakstrarjáttan” ikki verður nýtt, tá ið landið fíggjar allan raksturin,
6. hvørjar ætlanirnar eru um, at almennu roknskaparreglurnar sambært § 2, stk. 2, í Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.”, eisini skulu galda fyri stovnar sum Blákrossheimið.
7. nær neyvari reglur verða ásettar fyri, hvørjir serligir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið og teirra virki, sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 89 frá 4. juni 1996 “um Sjúkrahúsverk Føroya”.

Ad 1) Landsstýrismaðurin kunnaði í august 2001 um, at Landsstýrið hevur eingi stevnumið ásett, og at nýggj reglugerð fyri Blákrossheimið er ávegis, væntandi í august 2001, har orðingin um stevnumið er tikin burtur. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 sagt frá, at hann hevur góðkent nýggja reglugerð, ið kom í gildi 1. oktober 2001.

Ad 2) Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at gjaldið ongantíð er ásett. Í nýggju reglugerðini eru ásetingarnar um gjald strikaðar.

Ad 3) Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 víst á, at peningaupphæddin stavaði frá privatum gávum, sum ongantíð vóru nýttar, frá einstaklingum, fyritøkum, kommunum o.ø., heilt aftur frá 1983.

Ad 4) Sambært landsstýrismanninum, í februar 2002, hevur Almanna- og Heilsumálastýrið ikki góðkent leigusáttmálan.

Ad 5-6) Sambært landsstýrismanninum, í august 2001, verður arbeitt við at fáa broytt játtanarslagið til rakstrarjáttan í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2002.

Í viðmerkingunum til uppskotið um løgtingsfíggjarlóg fyri 2002 stendur viðvíkjandi høvuðskontu 8.20.4.01. “Viðgerðarstovnar”: *Almanna- og Heilsumálastýrið hevur gjørt av, at stovnarnir í framtíðini koma at standa á løgtingsfíggjarlógini við eini rakstrarjáttan og ikki stuðulsjáttan.* Hóast hesa viðmerking er játtanin ikki ein rakstrarjáttan. Vit bóðu í desember 2001 landsstýrismannin um eina frágreiðing. Landsstýrismaður hevur í februar 2002 kunnað um, at frá 2003 verður játtanarslagið broytt, og støða verður tá tikin til, um heimið skal koma undir almennu roknskaparreglurnar.

Ad 7) Landsstýrismaðurin svaraði í august 2001, *"at talan er um eitt mál, sum hevur verið ein politisk diskussión í nógv ár. Almanna- og Heilsumálastýrið arbeiðir ikki í løtuni við hesum máli."*

Vit hava síðani vístá, at í viðmerkingunum til § 2, stk. 3, í uppskoti til løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya (Lm. nr. 104/1995) stendur m.a.:

> *Teir stovnar, sum í framtíðini kunnu koma at hoyra undir sjúkrahúsverkið, eru t.d. stovnar fyri rúsevnismisnýtarar og stovnar til eftirbata (rekreatión). Landsstýrið fer at áseta nærri reglur fyri hesar stovnar.*

Tá ið tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur, spurdu vit aftur í desember 2001 landsstýrismannin, nær reglurnar verða gjørdar. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 svarað: "at hetta verður tikið upp, men er støða ikki tikin um Blákrossheimið verður ein av hesum stovnum".

7.16 Heilbrigdið (GL 1996/2 08 4-1)

Niðanfyri er í stuttum tikið samanum viðmerkingarnar í frágreiðing okkara frá mars 2000, og greitt verður frá, í hvønn mun viðurskiftini eru komin í rættlag.

Í frágreiðingin vístu vit á, at:

1. rentur og avdráttir av láni í bygninginum verða framvegis útreiðsluførd í roknskapinum hjá Viðgerðarheiminum. Sambært roknskapunum hevði Viðgerðarheimið/landið árini 1986-1998 rindað tilsamans 5,2 mió.kr. í rentum og avdráttum av láni í bygninginum á Velbastað,
2. fíggjarstøðan í roknskapunum fyri 1992-1998 er sett upp eins og árini frammanundan við hesari grannskoðaraátekning: *"Viðmerkjast skal, at ognin á Velbastað er ikki tinglisin sum ogn hjá "Heilbrigdið", og at avskrivað verður ikki uppá ognina.",*
3. sambært útskrift úr tingbókini 5. januar 1999 standa tveir privatpersónar sum eigarar av matr. nr. 4-b á Velbastað,
4. eftir okkara tykki talar nógv fyri, at landið eigur at ognina á Velbastað. Í eini frágreiðing til landsstýrismannin greiddu vit neyvari frá og grundgóvu fyri hesum sjónarmiði,
5. tað er ivasamt, um reglugerðin fyri Viðgerðarheimið "Heilbrigdið" hevur gildi, og um Viðgerðarheimið kann sigast at vera til sum sjálvsognarstovnur, og vit mæltu landsstýrismanninum til at greiða viðurskiftini,
6. tað er ivasamt, um felagið "Heilbrigdið" nakrantíð hevur verið ein sjálvsognarstovnur, og kanska eisini ivasamt, um felagið er til, og mæltu vit landsstýrismanninum til at útvega allar upplýsingar um felagið "Heilbrigdið", frá tí tað var stovnað, m.a. gerðabøkur og roknskapir,
7. sambært roknskapargrannskoðanini er ivasamt, um kassapeningurin kr. 2.830 er til,
8. sambært roknskapargrannskoðanini er ivasamt, um ymiskir ágóðar og lønarforskot 34.595 kr. hava fult virði,
9. goldnar eru uml. 70.000 kr. í koyripeningi fyri at koyra rusk, vaskiklæði, breyð og sjúklingar. Sambært grannskoðaraprotokollini verður *"verulig frásøgn eftir reglum Toll- og Skattstovunnar ikki førd, men er upplýst, at kilometurpeningurin verður goldin út sb. avlesing av kilometurteljara á bilinum".*

Harafturat spurdu vit:

10. hví játtanarslagið "rakstrarjáttan" ikki verður nýtt, tá ið landið fíggjar allan raksturin,

11. hvørjar ætlanirnar eru um, at almennu roknskaparreglurnar sambært § 2, stk. 2, í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m.", eisini skulu galda fyri stovnar sum "Heilbrigdið",
12. nær neyvari reglur verða ásettar um, hvørjir serligir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið og teirra virki, sambært § 2, stk. 3, í Ll. nr. 89 frá 4. juni 1996 "um Sjúkrahúsverk Føroya".

Ad 1-4) Viðvíkjandi ognarviðurskiftunum hava vit 11. desember 2001 fingið avrit av ognarbrævi, har tveir privatpersónar skeyta og endaliga avhenda ognina á Velbastað til "Sjálvsognarstovnin Heilbrigdið". Spurdur, svarar landsstýrismaðurin, at "Sjálvsognarstovnurin Heilbrigdið" og "Viðgerðarheimið Heilbrigdið" er sami stovnur. Gjøgnum árini hava tvey heiti verið nýtt fyri stovnin/heimið.

Ad 5) Landsstýrismaðurin kunnaði í august 2001 um, at nýggj reglugerð fyri Viðgerðarheimið "Heilbrigdið" er komin væl ávegis, og verður liðugt viðgjørd av landsstýrismanninum, tá ið ognarviðurskiftini eru komin uppá pláss. Landsstýrismaðurin hevur í desember 2001 sent endaligt uppskot til reglugerð til viðmerkingar, og roknað verður við, at reglugerðin verður endaliga góðkend í februar 2002.

Ad 6) Í apríl 2000 sendi landsstýrismaðurin okkum avrit av fundarbók frá felagnum "Heilbrigdið" frá stovningardegnum 14. apríl 1986 til 29. september 1999. Sum skilst av fundarbókini, er talan um eina nevnd, ið er nevnd fyri bæði felagið "Heilbrigdið" og Viðgerðarheimið "Heilbrigdið". Spurdur, svarar landsstýrismaðurin, at hann veit ikki um, at roknskapir finnast fyri felagið "Heilbrigdið".

Ad 7) Sambært grannskoðaraprotokollini fyri 1999 hevur grannskoðarin gjørt av at útreiðsluføra kassapeningin.

Ad 8-9) Landsstýrismaðurin kunnaði í august 2001 um, at hann hevði sent skriv til roknskapargrannskoðaran, har biðið varð um eina frágreiðing. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 boðað frá, at hann hevur ikki fingið svar frá roknskapargrannskoðarunum.

Ad 10-11) Landsstýrismaðurin svaraði í august 2001, at hann arbeiðir við at broyta játtanarslagið til rakstrarjáttan í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2002, men endalig støða um hesi viðurskifti verður ikki tikin, fyrr enn ognarviðurskiftini eru komin uppá pláss.

Í viðmerkingunum til uppskotið um løgtingsfíggjarlóg fyri 2002 stendur viðvíkjandi høvuðskontu 8.20.4. "Viðgerðarstovnar": *Almanna- og Heilsumálastýrið hevur gjørt av, at stovnarnir framyvir koma at standa á løgtingsfíggjarlógini við eini rakstrarjáttan og ikki stuðulsjáttan*. Hóast hesa viðmerking er játtanin ikki ein rakstrarjáttan. Vit bóðu í desember 2001 landsstýrismannin um eina frágreiðing. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at játtanarslagið verður broytt frá 2003, og støða tá verður tikin til, um Viðgerðarheimið "Heilbrigdið" skal koma undir almennu roknskaparreglurnar.

Ad 12) Landsstýrismaðurin svaraði, *"at talan er um eitt mál, sum hevur verið ein politisk diskussión í nógv ár. Almanna- og Heilsumálastýrið arbeiðir ikki í løtuni við hesum máli."*

Vit hava síðani vístá, at í viðmerkingunum til § 2, stk. 3, í uppskoti til løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya (Lm. nr. 104/1995) stendur m.a.:

> *Teir stovnar, sum í framtíðini kunnu koma at hoyra undir sjúkrahúsverkið, eru t.d. stovnar fyri rúsevnismisnýtarar og stovnar til eftirbata (rekreatión). Landsstýrið fer at áseta nærri reglur fyri hesar stovnar.*

Tá ið tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur, spurdu vit aftur í desember 2001 landsstýrismannin, nær reglurnar verða gjørdar. Landsstýrismaðurin hevur í februar

2002 svarað: "at hetta verður tikið upp, men er støða ikki tikin um Heilbrigdið verður ein av hesum stovnum".

7.17 Kommunulækna- og skúlalæknaskipanin (GL 2001/2 08 4-2)

Í 2000 hava vit grannskoðað roknskaparviðurskiftini viðvíkjandi kommunulækna- og skúlalæknaskipanini. Vit hava m.a. kunnað okkum um mannagongdir á roknskaparøkinum, og við stakroyndum gjøgnumgingið skjøl og lønarmál.

Kommunulæknaskipanin

Lógargrundarlagið undir kommunulæknaskipanini er Ll. nr. 28 frá 23. apríl 1999, ið kom í gildi 1. juli 1999. Hóast tað í lógini er álagt landsstýrismanninum at áseta reglur smb. § 6, stk. 2, § 7, stk. 2, og § 8, stk. 2, so eru ongar reglur gjørdar, og vit hava spurt landsstýrismannin, nær viðurskiftini fara at koma í rættlag. Landsstýrismaðurin hevur svarað, at eitt uppskot skal tilevnast og sendast til hoyringar, og samráðingar skulu verða partarnar millum um uppskotið. Hvussu langa tíð tað tekur, dugir landsstýrismaðurin ikki at siga.

Vit hava eisini grannskoðað endurrindan av ferðaútreiðslum, og hava víst á, at konteringin ikki var rætt. Tað verður rættað í 2001.

Skúlalæknaskipanin

Lógargrundarlagið undir skúlalæknaskipanini er "Anordning nr. 16 af 16. januar 1981 om ikrafttræden på Færøerne af lov om skolelægeordning" við seinni broytingum. Virksemið hjá skúlalæknaskipanini er ásett í §§ 2 og 3 í "Bekendtgørelse nr. 240 af 30. april 1986 om Skolelægeordning på Færøerne" við seinni broytingum.

Skúlalæknaskipanin var partur av rammuavtaluni við donsku stjórnina frá 1995, og heimastýrið hevði sambært hesi avtalu skyldu at gera føroyska lóg á økinum í seinasta lagi í 1999. Sambært frágreiðing frá Almanna- og Heilsumálastýrinum frá 1999: "Lýsing og niðurstøða av málsøkinum hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum" var ætlanin at gera eina lóg, sum líktist donsku lógini um "forebyggende foranstaltninger for børn og unge", og leggja uppskot til løgtingslóg fyri Løgtingið í tingsetuni 1999-2000. Sambært landsstýrismanninum er ætlanin, at lógaruppskot verður lagt fyri tingið skjótast tilber.

Í Føroyum eru 11 læknadømi. Ein skúlalækni eigur at vera í hvørjum læknadømi, og røkja kommunulæknarnir nøkur av hesum størvum. Lønar- og setanarviðurskifti hava verið ásett samsvarandi galdandi skúlalæknasáttmála millum "Kommunernes Landsforening" og "Den alm. Danske Lægeforening".

Skúlalækni verður løntur við mánaðarløn, ásett við einum gjaldi fyri hvønn næming í 1. til 9. flokk, sum hann í skúlalæknaøkinum hevur umsjón við. Gjøldini eru hækkað samsvarandi broytingum í Danmark. Í 2000 fingu 6 kommunulæknar, ið hava umsjón við uml. 2.300 næmingum, útgjald úr skipanini. Tað vóru 6.900 næmingar í 1.–9. flokki í skúlaárinum 2000/01. Sostatt er tað bert ein triðingur av næmingunum, sum í dag koma undir lógarásettu skúlalæknaskipanina.

Føroyskur sáttmáli er ikki gjørdur, og tí hevur Kommunulæknafelagið noktað limunum at taka á seg leys størv í skipanini. Teir fáu kommunulæknarnir, sum enn eru í skipanini, fáa tó loyvi at halda fram. Sambært landsstýrismanninum er ætlanin at samráðast um lønar- og sáttmálaviðurskiftini, tá ið nýggja lógin er samtykt.

7.18 Sjúkrakassar (GL 2001/2 08 3-1)

Í 2000 hava vit grannskoðað landskassastudningin til sjúkrakassar, og vit hava kunnað okkum um mannagongdir á roknskaparøkinum. Vit hava í hesum sambandi við stakroyndum gingið ígjøgnum roknskapartølini fyri 2000 og kannað, um studningurin er rætt roknaður út.

Lógargrundarlagið fyri sjúkrakassarnar og útreiðslur sjúkrakassanna er "Lovbekendtgørelse nr. 514 af 21. juli 1989 om Lov for Færøerne om den offentlige sygeforsikring" við seinni broytingum, og Ll. nr. 115 frá 21. mai 1993 "um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering landskassans" við seinni broytingum. Harafturat er talan um danskar og føroyskar kunngerðir.

Sambært § 22, stk. 2-4, í sjúkratryggingarlógini kann Landsstýrið áseta neyvari reglur um ávís viðurskifti, og sambært § 25 er álagt Landsstýrinum at áseta neyvari reglur viðvíkjandi eftirliti av rindan av limagjaldi. Vit spurdu í oktober 2001 landsstýrismannin, hvørjar ætlanir vóru um at áseta hesar reglur.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at arbeitt verður við at gera nýggja lóggávu, og væntandi verður støða tikin til, um líknandi reglur skulu verða ásettar í nýggju lógini. Eftir svarinum at døma, eru ongar ætlanir um at áseta reglur sambært verandi lóg.

Roknskapardeildin á Almannastovuni hevur um hendi grannskoðan og eftirlit við sjúkrakassunum, kallar inn fíggjarætlan og roknskap, roknar út landskassastudningin, góðkennir hækkan av limagjaldi, og ger uppskot til løgtingsfíggjarlógina.

Í sjúkratryggingarlógini verður víst til Almannastovuna sum eftirlitsmyndugleika, og Almannastovan er nevnd 36 ferðir í lógini í sambandi við eftirlit, góðkenning av høvuðsviðtøkunum, roknskapar- og grannskoðaraviðurskiftunum o.ø.

Vit sendu tí fyribilsfrágreiðing okkara til stjóran á Almannastovuni til viðmerkingar. Deildarleiðarin á roknskapardeildini vísti í svarskrivi á, at sjúkrakassaviðurskiftini vórðu flutt frá Almannastovuni til Almanna- og Heilsumálastýrið fyri nøkrum árum síðani.

Sum vit duga at síggja, hevur almannastjórin havt ræðisrættin fram til byrjan av 1999, tá ið hann varð latin fíggjarstjóranum í Almanna- og Heilsumálastýrinum. Vit spurdu landsstýrismannin, hvussu ábyrgdar- og arbeiðsbýtið er millum Almannastovuna og Almanna- og Heilsumálastýrið, og hvønn leiklut Almannastovan/almannastjórin hevur. Landsstýrismaðurin vísir í februar 2002 á, at Almannastovan hevur eftirlit við sjúkrakassunum og roknar út studningin, meðan Almanna- og Heilsumálastýrið hevur ræðisrættin.

Vit halda ikki, svarið vera nøktandi. Eftir okkara tykki er ábyrgdar- og arbeiðsbýtið ógreitt.

Eftirlit, grannskoðan o.a.

Sambært § 32 í sjúkratryggingarlógini hevur Almannastovan eftirlit við sjúkrakassunum, og sambært § 35, stk. 7, *"skal der med passende mellemrum ved Almannastovans foranstaltning foretages en indgående lokalrevision i enhver sygekasse, herunder undersøgelse af kassens regnskabsvæsen og øvrige virksomhed. Ved samme lejlighed skal der ydes kasserne regnskabsmæssig og anden vejledning. Den nærmere ordning af denne revision fastsættes af Almannastovan."*

Almannastovan grannskoðar regluliga sjúkrakassarnar, men hetta arbeiði verður ikki skjalprógvað, og eingin grannskoðanarfrágreiðing verður gjørd. Almannastovan hevur ikki ásett neyvari reglur fyri grannskoðanini smb. § 35, stk. 7.

Tá ið sjúkratryggingarlógin ásetir, at Almannastovan skal útinna eina grannskoðan og áseta neyvari reglur, er støðan eftir okkara tykki ikki nøktandi. Vit spurdu landsstýrismannin, hvørjar ætlanir vórðu um at fáa viðurskiftini í rættlag. Landsstýrismaðurin hevur í februar

2002 kunnað um, at *"byrjað varð at arbeiða við at gera nýggja lóg um sjúkrakassar í 2000. Arbeiðið steðgaði upp, men ætlanin er taka arbeiðið upp aftur í hesum árinum og gera lógaruppskotið liðugt. Í hesum sambandi verður tikið stig til hetta framyvir."*

Eftir svarinum at døma, eru ongar ætlanir um at fá viðurskiftini í rættlag sambært verandi lóggávu.

Játtan á fíggjarlógini og rindan av landskassastudningi

Almannastovan rindar sjúkrakassunum studning hvønn ársfjórðing. Sambært Almannastovuni hevur játtanin á løgtingsfíggjarlógini til sjúkrakassar í mong ár ikki samsvara øktu útreiðslunum. Almannastovan ásetir tí acontogjøldini og restgjaldið soleiðis, at samlaðu útgjaldingarnar í einum fíggjarári samsvara við játtanina á løgtingsfíggjarlógini.

Gjaldingar- og bókingarhátturin á Almannastovuni førir við sær, at tíðaravmarkanin í landsbókhaldinum verður ikki røtt, og játtanin á fíggjarlógini og landsroknskapurin geva ikki eina rætta mynd av útreiðslunum til sjúkrakassarnar.

Tá ið roknskapirnir smb. § 27, stk. 3, í sjúkratryggingarlógini eru latnir inn, í seinasta lagi 15. februar árið eftir, skal eftir okkara tykki endaliga verða gjørt upp, og munirnir ímillum acontogjøld og roknskapartøl verða bókað í ískoytistíðarskeiðinum.

Verður bókingarmannagongdin broytt, soleiðis at allar útreiðslur viðvíkjandi 2001 verða bókaðar í landsroknskapinum 2001, so verður talan um eitt munandi frávik ímillum játtan og nýtslu í 2001, tí uml. 14 mió.kr. í roknskapinum 2001 stava frá 2000. Í 2000 stavaðu uml. 12 mió.kr. frá 1999.

Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at hann veit, at tíðaravmarkanin ikki er røtt. Ætlanin er at søkja um eykajáttan í 2002 til tess at fáa viðurskiftini í rættlag.

Játtanarslag

Á fíggjarlógini ber játtanin til sjúkrakassar heitið "onnur játtan". Vísandi til ásetingarnar í § 27, stk. 2, í sjúkratryggingarlógini og § 2 í K. nr. 145/1993 um, at landskassin skal endurrinda sjúkrakassunum ávísar útreiðslur, er spurningurin, um tað í veruleikanum er talan um eina "lógarbundna játtan".

Í februar 2002 vísir landsstýrismaðurin á, at lógin veitir møguleika fyri, at sjúkrakassarnir smb. § 12 og § 14, stk. 1, sjálvir í sínum viðtøkum áseta ein part av útrokningargrundarlagnum, og heldur tað tí vera ivasamt, um talan er um eina lógarbundna játtan.

Leikluturin hjá Fíggjarnevndini

Í sjúkratryggingarlógini er í summum førum ásett, at Landsstýrið skal áseta neyvari reglur *"efter forudgående forhandling med Lagtingets Finansudvalg."* Vísandi til stýrisskipanarlógina og til viðmerkingarnar, kunnu útinnandi heimildir ikki verða lagdar til eina løgtingsnevnd, og tílíkar lógarásetingar mugu tí verða tiknar av. Landsstýrismaðurin hevur í februar 2002 kunnað um, at hesi viðurskifti verða broytt í nýggju lógini.

Jarðarferðarhjálpin

Sambært § 20 í sjúkratryggingarlógini skal sjúkrakassin veita jarðarferðarhjálp. Hjálpin er 1. juli 1996 sett til 3.500 kr., og sambært § 20, stk. 1, skal hon verða javnførd hvønn 1. juli, gevur prístalið 100 kr. meira, enn seinast javnført varð. Sambært Almannastovuni er hjálpin 1. juli 2000 broytt til kr. 3.600. Vit hava spurt landsstýrismannin, hvussu komið er fram til hesa upphædd.

Sambært landsstýrismanninum var í fleiri ár einki prístal, og tí varð upphæddin ikki javnað hesi árini.

7.19 Sjúkrahúsverk Føroya

Við Ll. nr. 89/1996 varð nýggj lóggáva fyri Sjúkrahúsverk Føroya sett í gildi 29. juli 1996. Sambært § 2 fevnir Sjúkrahúsverk Føroya um trý sjúkrahús (Landssjúkrahúsið í Tórshavn, Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús).

Sambært § 2, stk. 3, ásetir Landsstýrið neyvari reglur fyri, hvørjir serligir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið og virki tess. Hesar reglur eru ikki ásettar.

Við heimild í § 3, stk. 2, hevur Landsstýrið í K. nr. 124/1996 v.s.b. ásett neyvari reglur fyri Sjúkrahúsráðið. Við heimild í §§ 7-8 hevur Landsstýrið í K. nr. 123/1997 v.s.b. ásett neyvari reglur fyri flutnings- og ferðaendurgjaldi til sjúklingar uttanlands.

Fyri hvørt sjúkrahús velur landsstýrismaðurin í heilsumálum eitt sjúkrahúsráð, sum er ráðgevandi hjá landsstýrismanninum í málum viðvíkjandi sjúkrahúsinum. Høvuðsuppgávan er at viðgera mál av generellum og prinsipiellum týdningi fyri viðgerðina á sjúkrahúsinum. Fíggjarætlanin skal verða ummæld av sjúkrahúsráðunum, áðrenn hon verður send Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Í sjúkrahúslógini er ásett, at neyvari reglur fyri bygnaðinum og fyrisitingarligum viðurskiftum verða ásettar av Landsstýrinum. Hesar reglur eru ikki ásettar.

Yvirlit yvir rakstrarútreiðslur 1997-2000

Nettoútreiðslur: (mió.kr.)	2000	1999	1998	1997
Landssjúkrahúsið	227,1	232,4	228,0	220,9
Klaksvíkar Sjúkrahús	41,2	41,9	42,9	38,9
Suðuroyar Sjúkrahús	31,2	29,8	29,4	28,0
Tilsamans	299,5	304,1	300,3	287,8

Niðanfyri er eitt meira útgreinað yvirlit yvir útreiðslurnar hjá sjúkrahúsunum í tíðarskeiðunum 1996-1999, og eru tær bornar saman við tað, ið játtað varð á fíggjarlógini:

mió.kr.

	2000	1999	1998	1997
Landssjúkrahúsið				
Bruttoútreiðslur	247,7	255,9	244,0	237,2
Inntøkur	-20,6	-23,5	-16,0	-16,3
Nettoútreiðslur	227,1	232,4	228,0	220,9
Játtan á fíggjarlóg	224,7	232,3	228,0	220,7
Meir-/minninýtsla	**2,4**	**0,1**	**0,0**	**0,2**
Klaksvíkar Sjúkrahús				
Bruttoútreiðslur	55,0	55,6	57,1	52,2
Inntøkur	-0,9	-0,9	-0,8	-0,7
Játtan til Ellis- og røktarheimið	-12,9	-12,8	-13,4	-12,6
Nettoútreiðslur	41,2	41,9	42,9	38,9
Játtan á fíggjarlóg	41,2	41,9	42,6	38,9
Meir-/minninýtsla	**0,0**	**0,0**	**0,3**	**0,0**

Suðuroyar Sjúkrahús				
Bruttoútreiðslur	42,2	40,9	40,8	38,6
Inntøkur	-0,3	-0,6	-0,8	-0,4
Játtan til Ellis- og røktar-heimið	-10,7	-10,5	-10,6	-10,2
Nettoútreiðslur	31,2	29,8	29,4	28,0
Játtan á fíggjarlóg	31,2	29,6	29,0	28,0
Meir-/minninýtsla	**0,0**	**0,2**	**0,4**	**0,0**

Í bruttoútreiðslunum fyri Klaksvíkar- og Suðuroyar Sjúkrahús eru ávikavist Norðoya og Suðuroyar Ellis- og Røktarheim íroknað.

Íløgur

Umframt rakstrarútreiðslur er talan um íløgur/umbygging/viðlíkahald/medicoteknisk tól, sum ganga fram av landsroknskapinum:

(mió.kr.)	**2000**	**1999**	**1998**	**1997**
Landssjúkrahúsið	12,4	14,0	12,1	5,0
Suðuroyar Sjúkrahús	-	2,7	2,1	6,9
Medicoteknisk tól	3,9	5,1	-	-
Tilsamans	**16,3**	**21,8**	**14,2**	**11,9**

Viðmerkingar frá roknskapargrannskoðanini

Sjúkrahúsverkið verður grannskoðað av løggildum grannskoðara. Niðanfyri verður tikið samanum viðmerkingarnar frá grannskoðanini viðvíkjandi roknskapunum fyri 2000 fyri tey 3 sjúkrahúsini.

Landssjúkrahúsið

Avtalur eru gjørdar við teir yvirlæknar, sum hava privata viðtalu á Landssjúkrahúsinum. Í sambandi við lønarútgjaldingarnar til yvirlæknarnar verður sambært avtalunum mótroknað nýtsla av tólum og læknaskrivara, men nýtslan av starvsfólki og heilivági verður ikki gjørd upp. Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur í juli 2001 greitt frá, at arbeitt verður við at fáa skipanina at virka sambært avtalunum.

Eitt samlað ognaryvirlit er ikki gjørt enn. Medicotekniska deildin hevur tó eitt yvirlit yvir allar lutir, sum deildin hevur eftirlit við. Leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur í august 2001 greitt frá, at lýst er eftir fólki, sum skal taka sær av at fáa hesa skipan at virka sambært roknskaparkunngerðini.

Klaksvíkar Sjúkrahús

Vísandi til reglugerð 1. september 1992 um privata viðtalu hjá yvirlæknum innan sjúkrahúsverkið, verður mælt til, at spurningurin um gjald fyri at nýta høli, starvsfólk, kanningarstovu o.a. verður viðgjørdur av nýggjum.

Sjúkrahúsið hevur 2 leasingsáttmálar um kopimaskinur, góðar 11 t.kr. um ársfjórðingin, sum ganga út 1. juni 2003.

Suðuroyar Sjúkrahús

Vísandi til reglugerð frá 1. september 1992 um privata viðtalu hjá yvirlæknum innan sjúkrahúsverkið, verður mælt til, at spurningurin um gjald fyri at nýta høli, starvsfólk, kanningarstovu o.a. verður viðgjørdur av nýggjum.

Sjúkrahúsið hevur 2 leasingsáttmálar um kopimaskinur góðar 11 t.kr. um ársfjórðingin, sum ganga út 1. juni 2005.

7.20 Sjúklingahotellið Tórshavn

Sjúklingahotellið Tórshavn hevur til endamáls at hýsa sjúklingum, sum verða sendir til serviðgerð í Keypmannahavn. Á fíggjarlógini fyri 2000 er játtanin partur av høvuðskontu 8.20.3.20. "Serviðgerð uttanlands".

Útreiðslurnar vóru í 2000 sambært landsbókhaldinum 9.573 t.kr. Grannskoðaði roknskapurin vísir eina nýtslu upp á 9.046 t.kr., og harafturat er talan um uml. 0,5 mió.kr. til reetablering av gamla Hotel Tórshavn.

Bókhaldið, ið fyrr var á hotellinum, varð 1. januar 1999 flutt til fíggjardeildina í Almanna- og Heilsumálastýrinum. 1. januar 2000 varð bókhaldið flutt aftur til hotellið. Í hesum sambandi hava verið trupulleikar við at stemma av o.a., men tað er komið í rættlag. Hotellið verður grannskoðað av løggildum grannskoðara.

Sambært grannskoðaranum hava øll starvsfólk nú setanarskriv, og lønirnar eru samsvarandi galdandi sáttmálum. Eingin reglugerð finst fyri, hvussu roknskaparhaldið á hotellinum er fyriskipað, men sambært leiðaranum skuldi hetta koma í rættlag í 2001.

8. OLJUMÁL o.a.

8.1 Frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl

Sambært § 11, stk. 3, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." letur landsstýrismaðurin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl. Niðanfyri verður víst á stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og/ella har farið er upp um ásetta lønarkarmin. Vit hava tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá landsstýrismanninum.

9.30.1.01. Stuðul til umhvørvisverndartiltøk

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,2 mió.kr. Minninýtslan er 248 t.kr. Sambært landsstýrismanninum hava umsóknir ikki verið til alla játtanina.

9.30.1.07. Náttúrufriðingarnevndir

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 240 t.kr. Minninýtslan er 36 t.kr. Sambært náttúrufriðingarlógini hava nevndirnar skyldu at taka mál upp, ið verða løgd fyri tær. Virksemið hjá nevndunum veldst tí um talið og mongdina á málum, tær viðgera.

9.30.1.10. Spilloljureinsing

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2,8 mió.kr. Játtanin er hildin. Við heimild í Ll. nr. 75/1992 "um umhvørvisgjald á smyrjiolju" hevur Landsstýrið gjørt sáttmála við IRF, har IRF átekur sær at savna inn spillolju kring landið og viðgera hana, meðan Landsstýrið átekur sær at rinda roknskaparliga hallið. IRF hevur bert smávegis inntøkur frá ómaksgjøldum og frá sølu av reinsaðari olju.

9.30.1.15. Umhvørvisvernd

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 800 t.kr. Minninýtslan er 98 t.kr. Játtanin er til umsiting av havumhvørvislógini. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur dagligu umsitingina av havumhvørvislógini. Raksturin hevur verið nakað bíligari, enn mett varð.

9.32.1.01. Oljumálastýrið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 10,75 mió.kr. Minninýtslan er 264 t.kr. Játtanin er til fyrisitingarligar uppgávur í Stýrinum. Í 2000 hava tær í stóran mun fevnt um at viðgera umsóknir frá oljufeløgum til loyvi at leita eftir og framleiða kolvetni. Harafturat hava nakrar útreiðslur staðist av, at flutt er í nýggj høli.

9.32.20.1.20. Jarðfrøðisavnið (rakstrarjáttan)

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,9 mió.kr. Játtanin er hildin. Munandi partur av virkseminum fevnir um virksemi við tilknýti til oljuleiting. Játtanin varð við eykajáttanarlóg fyri september 2000 flutt frá § 7 til § 9 á fíggjarlógini.

9.32.20.1.21. Samarbeiði DGU/Jarðfrøðisavnið (rakstrarjáttan)

Játtanin hevur verið ætlað til at rinda løn til eitt vísindafólk og til part av útreiðslum, GEUS hevði av skrivstovu síni í Føroyum. Í 2000 legði GEUS skrivstovuna í Føroyum niður, og Jarðfrøðisavnið keypir nú tænastur frá GEUS í Danmark. Játtanin varð tí í eykajáttanarlógini fyri september 2000 løgd saman við játtanini til Jarðfrøðisavnið.

8.2 Oljumálastýrið (GL 1997/12 1-1)

Galdandi frá mars mánaði 2001 er álagt aðalstjórunum at góðkenna greinaroknskapin mótvegis Fíggjarmálastýrinum á serligum góðkenningarskjali. Oljumálastýrið hevur í 2001 mánaðarliga góðkent greinaroknskapirnar.

8.3 Jarðfrøðisavnið (GL 2000/12 3-1)

Jarðfrøðisavnið, ið áður var deild á Náttúrugripasavninum, varð í 2000 umskipað, og er nú sjálvstøðugur kanningarstovnur undir Oljumálastýrinum við ábyrgd fyri øllum almennum jarðfrøðiligum uppgávum í Føroyum.

Roknskaparhald o.a.

Burtursæð frá lønar- og ferðaútreiðslunum, verða rakstrarútreiðslurnar bókaðar á Jarðfrøðisavninum. Vit hava kannað, um roknskaparhaldið var "ajour", og um mánaðarroknskapir, skjøl o.a. vóru sett uppá pláss og goymd forsvarliga. Nøkur skjøl vórðu vald út at grannskoða neyvari, og kannað varð m.a., um kontering, upphædd, veitingarslag, ávísing og skráseting var í lagi. Kannað varð, um bókingar um ársskiftið 2000/2001 vóru farnar á rætt fíggjarár. Einki var at finnast at. Stovnurin hevur eitt dagført ognaryvirlit.

Vantandi roknskaparreglugerð

Oljumálastýrið hevur í februar 2002 kunnað um, at Stýrið hevur arbeitt við síni egnu reglugerð, og at reglugerðin fyri Jarðfrøðisavnið tekur støði í henni. Roknskaparreglugerðin fyri Jarðfrøðisavnið verður væntandi góðkend í februar 2002.

Roknskapargóðkenning

Sambært § 9, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skal stovnsleiðarin góðkenna roknskapin mótvegis hægri myndugleika. Vit vístu á, at mánaðarroknskapurin ikki var góðkendur. Viðurskiftini eru síðani komin í rættlag.

8.4 Umhvørvi (GL 1997/2 8 2-1)

Í 2000 fekk Heilsufrøðiliga Starvsstovan uml. 602 t.kr. av játtanini "Stuðul til umhvørvisverndartiltøk" og uml. 702 t.kr. av játtanini "Havumhvørvisvernd" til virksemi sítt á umhvørvisøkinum.

Sambært viðmerkingunum til høvuðskontu 9.30.1.15. "Umhvørvisvernd" á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001 umsitur umhvørvisdeildin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni havumhvørvisverndar- og umhvørvisverndarlógina vegna landsstýrismannin í orku- og umhvørvismálum. Harafturat ger umhvørvisdeildin ymsar umhvørvisskrásetingar og tekur lut í norðurlendskum umhvørvisverkætlanum.

Á fíggjarlógini 2001 er mannagongdin broytt, soleiðis at av játtanini "Umhvørvisvernd" 2,92 mió.kr. verða 600 t.kr. fluttar til verkætlanina "Umhvørvisansing", og 2,32 mió.kr. verða fluttar til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, har tær fíggja lønarútreiðslurnar.

8.4.1 Umhvørvisverndarlógin

Sambært Ll. nr. 134/1988 "um umhvørvisvernd" kann Landsstýrið fult ella lutvíst leggja sínar uppgávur til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, og kann áleggja stovninum at taka upp spurningar, herímillum ítøkilig mál viðvíkjandi umhvørvisvernd, at viðgera og taka avgerðir í.

Sambært § 14 skal Landsstýrið áseta neyvari reglur fyri at viðgera mál eftir §§ 12-13 (vernd av vatnveitingaráhugamálum). Reglurnar eru ikki ásettar. Stjórin hevur kunnað um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan javnan fær spurningar um virksemi, sum liggur í vatnveitingarlendi, og spurningarnir verða svaraðir í hvørjum einstøkum føri. Vit hava mælt landsstýrismanninum til at áseta fastar reglur.

Í fleiri greinum í kapittul 9 í umhvørvisverndarlógini er álagt Landsstýrinum at gera kortleggingar og ætlanir viðvíkjandi ymiskum sløgum av dálking. Við heimild í § 35, stk. 2, hevur Landsstýrið, í K. nr. 54/1994, lagt flestu eftirlits- og umsitingaruppgávurnar til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Í §§ 42, 46, 48, 49, 50, 53, 54, 56 og 57 er álagt Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at fremja kortleggingar og gera ætlanir á nógvum økjum. Stjórin hevur greitt neyvari frá hesum, og heldur at nógv framvegis vantar í hesum parti av umhvørvisverndarlógini.

Sambært landsstýrismanninum hevur hetta í stóran mun samband við fyrisitingarligu orkuna á økinum, og ásannandi støðuna, setti landsstýrismaðurin í juli 2000 ein arbeiðsbólk at lýsa umhvørvis- og náttúruverndarøki. Landsstýrismaðurin legði frágreiðingina frá arbeiðsbólkinum fyri tingið til aðalorðaskiftis í januar 2002. Tilmæli frá arbeiðsbólkinum um ábøtur er í 10 pørtum. Vegna vantandi umsitingarliga orku hevur landsstýrismaðurin valt at raðfesta teir 3 partarnar fyrst, sum snúgva seg um lóggávu, so hon kemur at samsvara við ta lóggávumenning, sum er farin fram í okkara grannalondum.:

- eina tíðarhóskandi náttúruverndarlóg
- dagføra umhvørvisverndarlógina
- serstaka produkt- og kemikaliulóg

Oljumálastýrið vísir á, at tá ið tað snýr seg um tann partin av umhvørvisverndarlógini, sum fevnir um kortleggingar og ætlanir av ymsum slagi, legði arbeiðsbólkurin stóran dent á, at skipað verður ein samlað náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting, ið skal hava beinleiðis tilvísing til landsstýrismannin í umhvørvismálum.

8.4.2 Havumhvørvisverndarlógin

Málsøkið umhvørvisvernd ("miljøbeskyttelse på land") er føroyskt sermál, men málsøkið havumhvørvisvernd ("beskyttelse af havmiljøet") varð av ríkismyndugleikunum mett at bera so nógvar altjóða relatiónir í sær, at økið ikki kann verða yvirtikið sum sermál.

Við *"Anordning nr. 646 af 12. august 1999 om ikrafttræden af lov om beskyttelse af havmiljøet"*, varð "Lov nr. 476 af 30. juni 1993 om beskyttelse af havmiljøet", við seinni broytingum, "Havumhvørvisverndarlógin", sum hevur ásetingar viðvíkjandi útláti í havið, sett í gildi í Føroyum.

Í "Anordning 646/1999" hevur Landsstýrið á fleiri økjum fingið heimild at útinna eftirlit vegna "miljø- og energiministeren", og Landsstýrið hevur í K. nr. 30 frá 8. mars 2001 "um at senda inn fráboðan" sambært havumhvørvisverndarlógini, K. nr. 31 frá 8. mars 2001 "um gjøld eftir havumhvørvisverndarlógini" og K. nr. 38 frá 8. mars 2001 "um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum" m.a. álagt Heilsufrøðiligu Starvsstovuni uppgávur. Sambært stjóranum hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki formelt fingið álagt hesar uppgávur.

Eitt uppkast til delegatiónsskriv er orðað, men Oljumálastýrið hevur valt at bíða við málinum, tí landsstýrismaðurin hevur biðið danska umhvørvismálaráðharran um samráðingar við atliti at yvirtøku av málsøkinum "havumhvørvisvernd".

Landsstýrismaðurin heldur, at uppgávubýtið kann verða betur skipað, tá ið málsøkið er yvirtikið, soleiðis at ávísar uppgávur eisini kunnu verða lagdar til onnur aðalstýri og/ella

stovnar at umsita. Tað eru uppgávur sambært havumhvørvisverndarlógini, ið helst meira hóskandi kundu verið lagdar til Fiskimálastýrið og stovnar tess. Nýggja lógin um skipatrygd setir eisini nakrar greinar í havumhvørvisverndarlógini úr gildi.

Sambært § 17, stk. 2, skal Landsstýrið áseta reglur um ”udpegning og bemyndigelse af de personer”, ið skulu hava eftirlit við ”losning og udtømning af tankskyllevand” í Føroyum. Sambært § 36, stk. 3, og sbr. § 36, stk. 1 og 2, skal Landsstýrið m.a. áseta neyvari reglur fyri ”indholdet af beredskabsplanerne” og býtinum av útreiðslum til ”beredskab og bekæmpelses- og saneringsforanstaltninger”. Vit hava spurt, nær reglurnar verða ásettar. Oljumálastýrið hevur í februar 2002 kunnað um, at spurningurin verður tikin upp við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna í næstum.